# EBS frágreiðingin

# Lesaraleiðbeining

**AFTA**
Stytting fyri ASEAN Free Trade Area, sum ASEAN-londini á fundi í 1992 samtyktu at fáa at virka fyri ár 2003. Óttin fyri at gerast eftirbátur í mun til ætlaninar um APEC, hevur kortini skundað undir ætlaninar um AFTA. Fyrimyndin hjá AFTA er innmarknaðurin í ES. AFTA hevur eina felags preferansuskipan, sum ásetir lægst møguligan toll millum londini (0-5%) á tilvirkaðum vørum, framleiðslutólum og summum tilvirkaðum landbúnaðarvørum. Londini hava eisini bundið seg til at beina burtur allar handilsforðing, sum ikki hava við toll at gera. Fríhandilin fevnir kortini ikki um allar landbúnaðarvørur.

**ALADI**
Stytting fyri Asociatión Latino-americana de Integratión, sum er latínamerikanskur felagsskapur, stovnaður í 1978 við tí endamálið at birta uppundir tvílandahandil millum limalondini og millum limalondini og triðjalond. Limalondini eru Argentina, Bolivia, Brasilia, Chile, Colombia, Ecuador, Mexico, Paraguay, Peru, Uruguay og Venuzuela.

**Amsterdam-sáttmálin**
er nýggi sáttmálin fyri Europa, sum ríkis- og stjórnarleiðarirnir í ES komu ásamt um í juni 1997.

**Anti-dumping**
Felagsheiti fyri tiltøk, sum verða sett í verk fyri at byrgja fyri negativari ávirkan av dumping (sí niðanfyri).

**APED**
(Asia-Pacific Economic Co-operation). Búskaparligur samstarvsfelagsskapur, sum fevnir um lond við Kyrrahavið (ASEAN-londini, Australia, Kanada, Chile, Kina, Hong Kong, Japan, Suður-Korea, Mexico, New Zealand, Papa-Ný Guinea, Taiwan og USA). Í hesum londum búgva eini 40% av heimsins fólki. Londini standa fyri 54% av BTÚ í heiminum og 42% av heimshandlinum. Endamálið hjá APEC er búskaparligt samstarv, íroknað ætlaninir um at beina burtur handilsforðingar. APEC er størsta regiónala verkætlan av sínum slag.

**Acquis communautaire**
Hugtak, sum serliga verður nýtt í sambandi við, at lond gerast limir í millumtjóða felagsskapum. Lond, sum gerast limir í t.d. ES, mugu í útgangsstøðu góðtaka *acquis communautaire*, tvs. galdandi meginreglur og ásetingar, sum verandi limalond eru komin ásamt um.

**ASEAN**
(Association of Souteast Asian Nations) er búskaparligur og politiskur felagsskapur av londum í landsynningspartinum av Asia, stovnaður í 1967. Limalondini eru Brunei, Indonesia, Malaysia, Filipsoyggjar, Singapore, Thailand, Vietnam, Burma og Laos.

**Assosierings-avtalur**
eru avtalur, sum ES ger við lond, sum ynskja limaskap í ES, men sum ikki lúka treytirnar, ið ES setir fyri búskapi, demokratii, mannarættindum o.a. Endamálið við avtalunum er at stuðla londunum, soleiðis at tey, sum frá líður, kunnu gerast limir í ES.

**Atland**
er land ella øki, sum er knýtt at einum øðrum landi við ávísum sjálvstýrisheimildum mótvegis heimlandinum (t.d. Føroyar - Danmark og Áland - Finnland)

**BTÚ**
bruttotjóðarúrtøka

**CARICOM**

(Caribbean Community and Common Market) varð stovnað í 1973. Limalondini eru Antiqua og Barbuda, Bahamas, Barbados, Belize, Dominica, Grenada, Guyana, Jamaica, Montserrat, St.Kitts og Nevis, St.Lucia, St.Vincent, Suriname, Grenadinurnar, og Trinidad og Tobago. Sáttmálin leggur upp til at samskipa búskaparpolitikkin og menningarætlanir, og at tey limalond, sum eru lítið á leið komin, fáa serviðgerð. Eitt av endamálinum er at røkka stórvirkisfyrimunum innan tænastuveitingar í økinum, eitt nú innan flutning, útbúgving og heilsuverk. Somuleiðis at skipa ein regiónalan menningarbanka fyri øki. Endamálið við sáttmálanum er at skipa eina tollsamgongu við felags tolli úteftir, men hetta hevur ikki gingið sum ætlað. Felag tollskipan úteftir er gjørd, men er ikki sett í verk í øllum londunum, fyrst og fremst vegna ósemjur um satsirnar á ymisku vørunum.

**COREPER**
(Comité des Representants Permanents) er heiti á føstu sendiharraumboðanini hjá limalondunum við ES-stovnar í Brússel.

**Dumping**
er vanliga ein avleiðing av, at ein útflytari heldur seg til útflutningsprísir, sum liggja undir prísunum á heimamarknaðinum. Hetta kann m.a broyta millumtjóða handilsmynstur.

**EBS**
(Europeiska Búskapar Samstarvið). EBS-sáttmálin fevnir um EFTA-londini og ES. (á donskum/norskum EØS: Europæisk Økonomisk Samarbejdsområde; á enskum EEA: European Economic Area).

**ECOSOC**
The Economic and Social Committee of the European Community, eisini stytt ESC, varð stovnað í 1957 við tí endamálið at fáa búskaparligar og samfelagsligar áhugabólkar at vera við í stovnanini av felagsmarknaðinum og fyri at fáa eina skipan, sum tryggjaði, at Nevndin og ES-ráðið vórðu kunnað. Teir 222 limirnir í ECOSOC verða skotnir upp av stjórnunum í limalondunum og valdir av ES-ráðnum fyri fýra ár í senn. Limaskarin er býttur í tríggjar bólkar: Arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar og annað. Høvuðsuppgávan hjá nevndini er at ráðgeva ES-nevndini og Ráðnum.

**ECOWAS**
(Economic Community of West African States) varð stovnað í 1975 við tí endamálið at birta upp undir handil, samstarv og sjálvbjargni í Vestur-Afrika. Limalondini eru Benin, Burkina Faso, Cape Verde, Fílabeinsstrondin, Gambia, Ghana, Guinea, Guinea-Bissau, Liberia, Mali, Mauritania, Niger, Nigeria, Senegal, Sierra Leone og Togo. ECOWAS hevur sum endamál, at virka fyri búskaparligum samstarvi og menning, at menna samfelagsligt og mentanarligt virksemi. Eitt av endamálunum er at fáa í lag eitt handils- og monetert samstarv, tvs. beina burtur allan toll og aðrar forðingar fyri handli millum londini og at seta felags toll móti umheiminum.

**EEC**
(European Economic Community). Felagsskapur stovnaður í 1957. (á donskum EØF). Onnur nøvn: Felagsmarknaðurin.

**EF**
(Europeisku Felagsskapirnir). Fevnir um tríggjar samstarvsfelagsskapir: Europeiska Kol- og Stálfelagsskapin, EKSF (stovnaður 1952), Europeiska Búskaparliga Felagskapin, EEC (stovnaður 1957) og Europeiska kjarnorkufelagsskapin EURATOM (stovnaður í 1958).

**EFTA**
(European Free Trade Association). Europeiskur fríhandilsfelagsskapur stovnaður í november 1959. Limirnir vóru Bretland, Noreg, Svøríki, Danmark, Portugal, Sveis og Eysturríki. Finnland hevur havt eina assosieringsavtalu og hevur í praksis verið roknað sum limur. Seinni er Ísland komið uppí. Danmark (og Føroyar) og Bretland fóru úr EFTA í 1973, tá Danmark og Bretland gjørdust limir í ES. Sama gjørdi Portugal í 1986, og Finnland, Svøríki og Eysturríki í 1994. Limalondini í EFTA eru Ísland, Liechtenstein, Noreg og Sveis. EFTA er eitt fríhandilsøki, tvs. at allur tollur millum limalondini er avtikin, og hvørt landið sær kann varðveita tann toll, tey høvdu mótvegis triðjalondum. EFTA-avtalan fevndi upprunaliga bert um fríhandil við ídnaðarvørum. Seinni er samstarvið víðkað til eisini at fevna um m.a. fisk og fiskavørur. EFTA og ES undirskrivaðu í 1992 EBS-sáttmálan, sum gjørdi, at Innmarknaðurin í ES varð víðkaður til eisini at fevna um EFTA. Undantiknar eru tó landbúnaðar- og fiskavørur. Føroyar gjørdust partur av EFTA í 1967, men fóru burtur úr aftur saman við restini av ríkinum, tá Danmark avgjørdi at fara upp í ES í 1973.

**Eindarskjalið**

varð samtykt í 1986 og bar í sær broytingar í Rómarsáttmálanum, sum komu í gildi 1. juli 1987. Broytingarnar miðaðu m.a. ímóti at knýta ES og EPS nærri saman. Virkisøkið hjá EPS varð víðkað til eisini at fevna um trygdarpolitikk. Við at geva ES-tinginum størri heimildir varð roynt at koma "demokratiska undirskotinum" til lívs. Eindarskjalið gjørdi harumframt, at umhvørvis- og granskingarpolitikkur gjørdist partur av samstarvinum. Tann mest týðandi broytingin var tó, at samstarvið í størri mun skuldi byggja á meginregluna um kvalifiseraðan meiriluta. (á donskum Fællesakten ella EF-pakken)

**EKSF**
Stytting fyri Europeiski Kol- og Stálfelagsskapurin, stovnaður í 1952.

**ES**
(Europeiska Samveldið) varð sett á stovn við Maastricht-sáttmálanum í 1993. Í hesi frágreiðing verður ES brúkt sum stytting fyri tað samstarv, sum hevur verið millum europeisk lond síðan 1952. (á donskum og enskum *EU*).

**ES-dómstólurin**
er settur saman av 13 dómarum úr limalondunum. Hann hevur ikki bert dømandi vald við støði í ES-lóggávuni (lógskipanir og direktivir), men hevur eisini lógartulkandi vald. Í teimum førum, har ES-lóggávan ikki hevur verið heilt greið, hevur dómstólurin við úrskurðum sínum í stóran mun verið lógarsmiður.

**ES-nevndin**
er ovasti umsitingarligi (útinnandi) stovnur í ES. Teir 20 limirnir í nevndini verða valdir av stjórnunum í limalondunum. Tey størstu londini velja tveir limir í part. Hini hava ein lim. Í arbeiði sínum eru limirnir í nevndini óheftir. Teir taka ikki avgerðir vegna heimlandið, men vegna ES. Limirnar býta uppgávur og ábyrgdarøki sínámillum, men taka avgerðir og leggja fram uppskot í felag. Umsitingin hjá nevndini er sett saman av deildum við hvør sínum málsøki (á donskum Kommissionen).

**ES-ráðið**
er lóggevandi vald í ES og er stovnur við umboðum fyri stjórnirnar í limalondunum. Ráðið er sett saman av ráðharrum úr limalondunum, alt eftir hvørji málsøki, tey mál, ið eru til viðgerðar, hoyra undir. Ráðið er evsta vald, tá nýggjar reglur skulu samtykkjast. Tað limalandið, sum hevur formansskapin, leiðir arbeiðið í ráðnum. Formansskapurin skiftir millum limalondini í tveimum raðfylgjum, soleiðis, at eitt limaland skiftivís hevur formanskapin fyrra og seinna hálvár. Tað landið, sum hevur formansskapin, røkir hesa uppgávu á øllum stigum í ráðnum: Í sjálvum ráðnum, í nevndini við føstum sendiharrum úr limalondunum (COREPER), í øllum arbeiðsbólkum undir ráðnum, umframt í uttanríkis- og trygdarpolitiska samstarvinum og samstarvinum í løgmálum.

**EU**
donsk stytting fyri Europeisk Union og ensk stytting fyri European Union.

**Europa-avtala**
er vanligt heiti á avtalum, ES hevur gjørt við londini í Eystureuropa, ið ynskja limaskap, men sum ikki lúka krøvini, sum ES setir til búskap, demokrati, mannarættindi osfr. Endamálið er at hjálpa eystureuropeisku londunum, so at tey kunnu gerast limir í ES. Dømi: Baltalond, Slovenia, Kekkia.

**Europa-ráðið**
er sett saman av stats- og stjórnarleiðarunum í limalondunum, umframt formanninum í ES-nevndini. Europa-ráðið heldur fund tvær ferðir um árið. Eisini rópt toppfundirnir í ES.

**Europta-tingið**
(ES-tingið) er samansett av 625 umboðum, sum eru vald við beinleiðis vali í limalondunum. Tinglimirnir eru býttir millum limalondini í mun til fólkatalið. Tinglimirnir skipa seg í politiskar bólkar tvørtur um landamørk. Teir størstu bólkarnir eru sosialistar og kristiligir demokratar. Europatingið skal takast við upp á ráð, tá formaðurin fyri ES-nevndini verður útnevndur, og skal síðani góðkenna samansetingina av allari ES-nevndini. Harumframt hevur ES-tingið útnevnt sítt egna umboð, sum skal taka ímóti og kanna kærur frá fólki ella fyritøkum í limalondunum, í sambandi við óreglusemi og vansketni hjá ES-stovnum. ES-tingið hevur eisini týðandi uppgávur í sambandi við at hava eftirlit við hinum stovnunum. ES-nevndini er álagt at geva Tinginum árligar frágreiðingar um virksemi sítt. Bæði nevndin og ráðið hava skyldu at møta í tinginum og svara spurningum frá tinglimum. ES-tingið kann við 2/3 av atkvøðunum og einum meiriluta av limunum samtykkja misálitisváttan á ES-nevndina. Europatingið skal góðkenna fíggjarætlanina hjá ES.

**Fríhandils-avtala/øki**
Avtala millum lond um at beina burtur allar sínámillum handilsforðingar, so sum toll o.a. Londini kunnu kortini varðveita tann toll, sum tey frammanundan høvdu mótvegis triðjalondum. Dømi: EFTA, NAFTA.

**FTAA**
(Free Trade Area of the Americas) er ein ætlan um at fáa londini í Norður-, Mið- og Suðuramerika at ganga saman í eitt fríhandilsøki. Ætlanin varð samtykt av 34 londum í 1994 og samráðingarnar um at skipa eitt fríhandilsøki, skulu eftir ætlan vera lidnar í ár 2005.

**Tey fýra frælsini**
Tey fýra frælsini snúgva seg um, at vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi skal hava frítt at fara í ES. Til tess at tryggja hetta er felags búskaparpolitikkurin grundaður á frían, t.e. minst møguliga alment stýrdan, kappingar- og marknaðarbúskap, prísstabilitet fyri at forða fyri prísbólgnan og øllum sløgum av tekniskum handilsforðingum og kappingaravlaging í samstarvinum millum limalondini.

**GATS**
(General Agreement on Trade in Services). GATS er ein av avtalunum undir WTO um handil við tænastum.

**GATT**
(General Agreement on Tariffs and Trade). Sáttmáli undirskrivaður í 1947. Endamálið er at menna millumtjóða handil við at minka um handilsforðingar millum londini, sum eru partar í sáttmálanum. Í kjalarvørrinum av Uruguay-umfarinum varð nýggjur GATT-sáttmáli undirskrivaður og altjóða handilsfelagsskapurin WTO settur á stovn.

**GATT 1994**
Verður brúkt um endurskoðaða GATT-sáttmálan frá 1994. GATT 1994-sáttmálin er ein grundleggjandi og týdningarmikil partur av WTO-skipanini.

**GDP**
Ensk stytting fyri Gross Domestic Product, ið er tað sama sum BTÚ.

**GRAN**
Eisini nevnt Andean Group. Suðuramerikanskur handilsfelagsskapur, stovnaður í 1969. Limalondini eru Bolivia, Colombia, Ecuador, Peru og Venuzuela. Endamálið er at beina burtur handilsforðingar, at skipa tollsamgongu, at samskipa búskaparpolitikkin og at seta í verk ein felags ætlan fyri íðnaðargerð.

**GTM**
Gransking og teknologisk menning.

**Inn-marknaðurin**
nnmarknaðurin í ES varð formliga settur í gildi 1. januar 1993. Hetta merkir, at ES er ein fríur marknaður fyri vørur og tænastur, arbeiðsmegi, kapital og vinnurekandi, tvs., at ongar forðingar eru við landamørk. Hetta verður gjørt við direktivum, t.d. viðvíkjandi tekniskum standardum, reglum um almenn innkeyp, partafelagslóggávu, um kapitalmarknað o.a.

**Komparativir fyrimunir**
Tjóðarbúskaparligt hugtak, sum sigur, at øll lond hava eina ávísa samanseting av tilfeingi (arbeiðsmegi, tøkni, rávørur og kapital), sum ger landi serliga egna til framleiðslu av ávísum vørum.

**Konvergens-krøvini**
Fyri at gerast fullur limur í Búskapar- og pengapolitisku samgonguni í ES skulu limalondini hava verið í gjøgnum ein konvergens, tvs., at tey skulu vera komin nærri hvørjum øðrum í búskaparpolitikkinum, eitt nú, tá talan er um hall á almennum fíggjarlógum, almennari skuld, inflasjón og rentustøði.

**Kvotuhoppan**
er framferðarháttur, sum fiskimenn í ES hava nýtt fyri at útvega sær fiskirættindi hjá øðrum ES-londum. Mannagongdin er í stuttum, at fiskimenn í einum ES-landi seta seg niður í øðrum ES-londum og fiska av kvotunum hjá viðkomandi landi. Hetta hevur annaðhvørt verið gjørt við at stovnseta feløg í viðkomandi landi og at skráseta fiskifør í landinum ella við at keypa fiskifør, sum longu standa í skipaskrásetingini.

**Maastricht-sáttmálin**
er heitið á Sáttmálanum um Europeiska Samstarvið (ES), sum kom í gildi 1. november 1993. Sáttmálin fevnir um Rómarsáttmálan við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar á fundinum í Maastricht í 1992. Onnur heiti eru Samveldis-sáttmálin ella ES-sáttmálin. Maastricht-sáttmálin varð víðkaður við Amsterdam-sáttmálanum í 1997.

**MERCOSUR**
(Mercado Comun del Sur) er eitt búskaparligt samstarvsætlan millum Argentina, Brasilia, Paraguay og Uruguay. Høvuðsendamálið er at bøta um búskapin í limalondunum við at gera teir virkis- og kappingarførari og at víðka marknaðin og at skumpa undir búskaparligu menningina, m.a. við at gagnnýta tøka tilfeingið skynsamari. Endamálið er eisini at samskipa makrobúskaparliga politikkin og samskipa krøvini til vinnugreinarnar í londunum. Handilssamstarvið í MERCOSUR byrjaði í smáum í 1970-árunum. Í 1970-árunum vórðu fleiri tvílandasáttmálar gjørdir millum londini. Í 1970 samdust tey fýra londini um at gera ein sáttmála, sum fevndi um øll fýra londini. Endamálið var at fáa í lag ein felagsmarknað. Hesin sáttmálin - ofta nevndur Asunición-sáttmálin - varð undirskrivaður í 1991. Sáttmálin er sum so ikki ein endaligur sáttmáli um at seta ein felagsmarknað á stovn, men heldur eitt amboð, sum ger tað møguligt at seta ein felagsmarknað í verk. Sáttmálin er ein semja um búskaparliga samansjóðing á regiónalum stigi. Onnur lond í ALADI-samstarvinum kunnu eisini gerast limir.

**Most-Favoured Nation-Principle**
(MFN-meginreglan) er ein týdningarmikil regla í allari WTO-skipanini. Í hugtakinum liggur, at allar sømdir, eitt WTO-land veitir einum øðrum, skulu galda fyri øll WTO-londini.

**NAFO**
(North West Atlantic Fisheries Organization). Felagsskapur stovnaður sambært millumtjóða avtalu í 1978. Endamálið er at tryggja optimala gagnnýtslu og skynsama røkt av fiskatilfeinginum í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Kom ístaðin fyri ICNAF.

**NAFTA**
(North American Free Trade Area). Fríhandilsøkið, sum fevnir um USA, Kanada og Mexico. Stovnað í 1992.

**NASCO**
(North Atlantic Salmon Conservation Organization). Felagsskapur stovnaður sambært millumtjóða avtalu í 1982. Endamálið er at útvega vísindaligt tilfar, sum hevur týdning fyri laksastovnarnar í Norðuratlantshavinum umframt at tryggja skynsama røkt av stovnunum við millumtjóða samstarvi.

**NEAFC**
(North East Atlantic Fisheries Commission). Stovnað í 1980 við tí endamáli at konsultera og geva upplýsingar um støðuna hjá fiskastovnunum í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum og um stýringstiltøk, sum tryggja vernd og skynsama troytan av hesum stovnum. Endamálið er eisini at koma við tilmælum um stovnsverndartiltøk fyri stovnar, sum eru í altjóða sjógvi í konvensjónsøkinum.

**OECD**
(Organization for Economic Cooperation and Developement), felagskapurin fyri búskaparligum samstarvi og menning.

**Protektiónisma**
er felagsheiti á handilspolitiskum tiltøkum ella hugsjónum, sum miða eftir av verja innlendis framleiðslu móti útlendskari kapping við handilsatgerðum.

**Relativur stabilitetur**
er meginreglan í felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES um, at limalondunum skal verða tryggjaður ein fastur prosentpartur av heildarkvotunum. Býtið, sum varð ásett í 1983, er í høvuðsheitum grundað á søgulig veiðutøl hjá limalondunum.

**Rómar-sáttmálin**
er sáttmálin sum samstarvsfelagsskapirnir Europeisku Kol- og Stálfelagsskapurin, Europeiska Búskaparliga Felagsskapurin (EEC) og europeiski kjarnorkufelagsskapurin (Euratom) undirskrivaðu í 1957. Sáttmálin varð broyttur í 1986 (Eindarskjalið) og í 1993 (Maastricht-sáttmálin) (sí EF, ES).

**SADC**

(Southern Africa Development Community). Upprunin til felagsskapin var SADCC (Southern African Development Coordination Conference), sum var skipað í 1980. Sáttmálin, sum setti SADC á stovn og kom í staðin fyri SADCC, varð undirskrivaður í 1992. Tey 14 limalondini eru Angola, Botswana, Demokratiska lýðveldi Congo, Lesotho, Malawi, Mauritius, Mozambique, Namibia, Seychellurnar, Suður-Afrika, Swaziland, Tanzania, Zambia og Zimbabwe. Endamálið hjá SADC á búskaparliga økinum eru menning og búskaparligum vøkstur. Hetta skal m.a. fáast í lag við at samskipa búskaparpolitikkin hjá limalondunum, at beina burtur allar forðing fyri at kapitalur, arbeiðsmegi, vørur og tænastur frítt kunnu ferðast millum limalondini. Uppá longri sikt er eitt av endamálunum at styrkja politisku og búskaparligu støðuna hjá londunum á heimsmarknaðinum.

**SMV**
Smá og meðalstór virki.

**Subsidaritets-prinsippið**
Subsidaritets-prinsippið, sum eisini verður rópt nærleikaprinsippið, merkir í ES-høpi, at politiskar avgerðir skulu takast á lægst møguliga umsitingarliga stigi, og at avgerðarrætturin bert skal liggja hjá ES, um ES megnar at loysa uppgávurnar betur enn limalondini ella regiónir í limalondunum.

**Tollsamgonga**
Samgonga millum tvey ella fleiri lond, sum taka av allan innanhýsis toll og samstundis seta felags toll mótvegis øllum londum uttan fyri tollsamgonguna (dømi ES).

**TRIMs**
Ensk stytting fyri Trade-Related Investment Measures. TRIMs er avtala undir WTO um handilslig tiltøk í sambands við íløgur.

**TRIPs**
(Trade-Related Aspects of Intellectual Property Rights). TRIPs er avtala undir WTO um handilslig viðurskifti í samband við upphavsrættindi/ognarrætt til andsverk.

**Uppruna-reglur**
Ásetingar í handilssáttmálum um handil við upprunavørum millum lond. Tær veita toll-lætta á vørum, um hesar hava sín uppruna í sáttmálaøkinum sambært nærri ásettum upprunareglum. Ein upprunavøra er ein vøra, sum lýkur upprunatreytirnar og tískil eigur at veitast serliga tollsømdir sambært sáttmálanum.

**Uruguay-umfarið**
Seinasta samráðingarumfarið í GATT um handilsliberaliseringar. Byrjaði í Punta del Este í Uruguay í 1986 og endaði í Marrakesh í Marokko í 1994. Førdi við sær týdningarmikil stig á leiðini móti frælsari heimshandli, og at WTO varð sett á stovn.

**WTO**
(World Trade Organization). Heimshandilsfelagsskapurin, sum avloysti GATT í 1994, fevnir ikki bert um handil við vørum, men eisini um handil við tænastum, íløgur og ognarrætt til andsverk.

# Arbeiði nevndarinnar

Á vári 1997 avgjørdi løgmaður at seta nevnd av serkønum at gera upplegg til samráðingar við ES um eina nýggja avtalu millum Europeiska Samveldið og Føroyar.

Uppleggið skuldi grundast á fyrra tilmælið í "Bláa álitinum" frá august 1995 um eina serskipan, ið er ein "EBS-líknandi avtala saman við eini tollsamgongu".

Í nevndina vórðu valdir Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, form., Jens Helgi Toftum, fiskivinnufrøðingur, Arne Poulsen, vinnumálastjóri, Óli Samró, ráðgevi, Jan Mortensen, skrivstovustjóri, Tommy Petersen, løgfrøðisligur ráðgevi, Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni og Torbjørn Mikkelsen, varastjóri á Toll- og Skattstovu Føroya. Jens Helgi Toftum varð samstundis settur sum skrivari hjá nevndini.

Um miðjan oktober 1997 varð nevndin umskipað til tess at lúka ásetingarnar í javnstøðulógini. Úr nevndini fóru Arne Poulsen, Torbjørn Mikkelsen, Jens Helgi Toftum og Óli Samró. Nýggir nevndarlimir vórðu Maria Róin, fulltrúi í Vinnumálastýrinum, Annsy Høghamar, fulltrúi á Toll- og Skattstovu Føroya, og Gloria Kalsø, handilsskúlalærari. Jens Helgi Toftum og Óli Samró hildu fram sum skrivarar hjá nevndini.

Á fyrstu fundunum í nevndini tann 27. mai og 17. juni 1997, varð arbeiðs-setningurin útgreinaður, og nevndararbeiðið lagt til rættis. Á fundi við løgmann 24. juni 1997 vórðu hesir spurningar umrøddir.

Í hesum sambandi varð upplýst, at politiskt varð undirtøka fyri at kanna uppskotið í Bláa álitinum um eina EBS-líknandi avtalu saman við tollsamgongu.

Arbeiðið hjá nevndini varð eisini umrøtt í uttanríkispolitiska orðaskiftinum í løgtinginum 23. mai 1997. Orðaskiftið vísti, at politiska semjan um at seta nevndina bygdi á, at nevndin skuldi gera eitt uppskot til samráðingar, og at ein breið politisk viðgerð skuldi fara fram, áðrenn endalig avgerð varð tikin um at biðja ES um samráðingar. Hetta hevur nevndin havt í huga í sínum arbeiði.

Á kunnandi fundinum við løgmann varð eisini avtalað, at fyrsta uppgávan hjá nevndini var at lýsa møguleikarnar og avleiðingarnar fyri Føroyar í eini EBS-líknandi skipan saman við tollsamgongu. Avtalað varð somuleiðis, at arbeiði nevndarinnar umframt frágreiðingar og útgreiningar, eisini skuldi fevna um ætlan og framferð í samráðingunum við ES.

Uppgáva nevndarinnar var somuleiðis at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at koma á mál við føroyskum ynskjum um eina nýggja avtalu við ES.

Undir nevndararbeiðinum er løgmaður kunnaður um gongdina. Í hesum sambandi hevur arbeiðssetningurin verið umrøddur, og hevur nevndin fingið heimild til at tulka arbeiðssetningin soleiðis, at hon m.a. kundi kanna og meta um fleiri bygnaðarmøguleikar fyri einum føroyskum tilknýti til EBS-skipanina. Annars kundi nevndin vísa á aðrar møguleikar, ið kanningar nevndarinnar møguliga kundu geva ábendingar um.

Nevndin hevur bygt sítt arbeiði á rúgvismikið skrivligt tilfar sum sáttmálar, frágreiðingar o.t. Í sambandi við nevndararbeiðið hava kunnandi óformligir fundir verið við embætismenn í norsku, íslendsku og donsku uttanríkistænastuni og við einstakar ES-embætismenn. Harumframt hevur nevndin sett í verk kanning av, í hvussu stóran mun føroysk lóggáva er tillagað lóggávuni í EBS.

Kanningarnar hjá nevndini vísa, at fleiri møguleikar eru fyri at royna at røkka teimum málum, sum liggja aftanfyri uppskotið um eina serskipan við eini "EBS-líknandi avtalu saman við eini tollsamgongu".

Teir ymsu møguleikarnir fyri skipanum reisa ymsar spurningar og seta ymisk krøv. Tí er talan um ymsar samráðingarleiðir, alt eftir hvørja loysn avgerð verður tikin um at royna.

Áðrenn ein samráðingartilgongd verður sett í verk, er neyðugt at taka politiska avgerð og velja

burtur úr ta loysn, sum verður mett at vera tann frægasta og mest sannlíka at koma á mál við í samráðingum.

Nevndin hevur í hesi frágreiðing útgreinað og kannað uppskotið í arbeiðssetninginum um eina "EBS-líknandi skipan saman við tollsamgongu". Til tess ikki at seinka eini samráðingartilgongd, heldur nevndin, at tað á núverandi stigi í arbeiðinum er rættast at leggja fram hesa frágreiðing til politiska viðgerð og støðutakan.

Tá politisk avgerð er tikin um eina samráðingarleið, kunnu tær endaligu fyrireikingarnar til samráðingarnar verða gjørdar, herundir uppskot til ætlan og framferð í eini samráðingartilgongd.

Frágreiðingin er skipað soleiðis, at í kapittul 2 er tikið saman um niðurstøður nevndarinnar. Í kapittul 3 er ein samandráttur av frágreiðingini saman við teimum niðurstøðum, sum nevndin hevur gjørt innan tey ymsu økini, ið eru kannað. Í kapittlunum 4-14 eru frágreiðingarnar um teir spurningar, sum nevndin hevur arbeitt við.

Nevndin hevur valt ikki at tilmæla nakra ávísa samráðingarleið til eina serskipan við eini "EBS-líknandi skipan saman við tollsamgongu".

Hetta er gjørt við tí í huga, at fyritreytirnar fyri nevndararbeiðinum vóru, at ein breið politisk viðgerð skuldi fara fram, áðrenn avgerð varð tikin um at seta eina samráðingartilgongd í verk.

Hinvegin vónar nevndin, at frágreiðingin nóg gjølla lýsir fyrimunir og vansar við uppskotinum til eina tílíka serskipan, og at hon kann verða grundarlag undir eini politiskari viðgerð og politiskari avgerð um, hvør loysn skal roynast í samráðingum.

Verandi ríkisrættarliga støðan hevur stóra ávirkan á, hvussu Føroyar kunnu skipa sítt handilsliga og búskaparliga samstarv við onnur lond. Nevndin hevur í sínum metingum gingið út frá verandi ríkisrættarligu støðu, og hevur sostatt ikki tikið við í sínum metingum, at danska stjórnin og landsstýrið í avtaluni frá juni 1998 eru komin ásamt um, at tingingar kunnu takast upp um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Tórshavn, 22. juni 1998.

Jógvan Jespersen    Tommy Petersen    Kjartan Kristiansen

Jan Mortensen    Annsy Høghamar    Maria Róin
Gloria Kalsø

Jens Helgi Toftum /skr.    Óli Samró
/skr.

# Niðurstøður nevndarinnar

### Inngangur

Arbeiðssetningur nevndarinnar er at gera upplegg til samráðingar við ES um eina nýggja avtalu, ið verður grundað á tilmælið í Bláa álitinum frá 1995 um eina serskipan, ið er ein "EBS-líknandi avtala saman við eini tollsamgongu".

Nevndin, ið skrivaði Bláa álitið, grundar sítt uppskot á, at ein EBS-líknandi skipan gevur okkum fyrimunir við tí víða samstarvinum í EBS innan eitt nú arbeiðsmarknað, heilsufrøðislig viðurskifti, útbúgving og gransking, samskifti og mangt annað. Samvinna á hesum øki hevur alstóran týdning fyri menningarmøguleikarnar og kappingarføri okkara.

Men viðvíkjandi fiski og fiskavørum gevur EBS-avtalan einsamøll á leið somu marknaðarsømdir í ES sum galdandi handilsavtala, og tí varð mælt til eina tollsamgongu við ES, fyri at fáa betri marknaðaratgongd fyri hesar vørur.

Nevndin, ið skrivaði Bláa álitið ásannar samstundis, at tað verður torført at koma á mál við einum slíkum ynski, tí ivasamt er, um ES er sinnað at gera eina slíka avtalu. Nevndin skrivar í álitinum, at tað finnast ongar lættar loysnir, sum tryggja okkum gagnligastu marknaðaratgongd til ES, og samstundis ganga ynskjum og áhugamálum føroyinga á møti í øllum lutum. Nevndin sigur, at talan verður um truplar samráðingar millum annað tí:

> at ríkisrættarliga støða okkara ger, at samráðingarnar lutvíst koma at snúgva seg um viðurskifti millum Føroyar/Danmark øðrumegin og ES hinumegin, og lutvíst um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.
>
> at ein fyritreyt er, at Danmark sum limur í ES vegna ríkisfelagsskapin nýtir alla orku til at ávirka ES at ganga ynskjum okkara á møti.
>
> at Føroyar hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Í ES høpi er fiskivinna politiskt ein sera viðkvom vinnugrein. Fiskivinnupolitiskar samráðingar eru truplar m.a. tí, at andsagnirnar millum ES-londini á hesum øki eru sera stórar. Tað er trupult hjá ES at fáa innanhýsis kabaluna at ganga upp.
>
> at ES hevur ongantíð gjørt tollsamgongu við triðjalond um fisk og fiskavørur.
>
> at ein skipan, har EBS og tollsamgonga er sett saman, er trupul at samráða seg fram til. Talan er ikki um fasta skipan, har onnur lond hava slóðað fyri, men um eina heilt nýggja serskipan. Harumframt er ivasamt, um ES yvirhøvur er sinnað at gera eina slíka serskipan fyri Føroyar.

Uppgávan hjá hesi nevndini hevur verið at taka við, har Bláa álitið slepti. Út frá teimum kanningum og niðurstøðum, sum nevndin hevur gjørt, er hon sum heild samd við viðmerkingunum hjá nevndini, ið skrivaði Bláa álitið.

### Samráðingarleiðir

Niðurstøðan hjá nevndini er, at fleiri samráðingarleiðir eru møguligar fyri at royna at røkka teimum málum, sum liggja aftanfyri eina serskipan við eini "EBS-líknandi avtalu saman við eini tollsamgongu". Tær ymsu loysnirnar og teir ymsu møguleikarnir reisa ymiskar spurningar, seta ymisk krøv, og hava ymsar avleiðingar.

Tí er neyðugt, at politisk avgerð verður tikin um, hvør samráðingarleiðin skal vera. Nevndin hevur tí á hesum stigi valt at leggja fram eina frágreiðing til politiska viðgerð. Tá ein samráðingarleið er vald, ber til at leggja endaliga ætlan fyri samráðingarnar.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um eina EBS-líknandi avtalu fyri seg og spurningin um tollsamgongu fyri seg.

### 2.2.1. Bygnaðurin í eini EBS-skipan

Viðvíkjandi eini EBS-líknandi skipan eru tveir høvuðsspurningar. Annar er, hvønn bygnað eitt tílíkt samstarv skal hava, og hin hvørjar avleiðingarnar verða, um Føroyar verða partur av innmarknaðinum.

Torføri spurningurin er, hvussu Føroyar stovnsliga og umsitingarliga kunnu vera partur av eini EBS-líknandi skipan. Í EBS-samstarvinum eru stovnar og skipanir, sum skulu tryggja, at skipanin virkar eftir ætlan.

Nevndin metir, at tveir møguleikar eru. Annar er, at vit í fullan mun gerast partur av EBS-skipanini. Hin er, at vit binda okkum at skipanini og taka við øllum ella pørtum av ásetingunum í EBS. Tann fyrri møguleikin krevur stóra umsitingarorku, meðan tann seinni ikki er so orkukrevjandi.

Nevndin metir, at tvær leiðir eru møguligar at ganga til tess at knýta Føroyar upp í verandi EBS-skipan. Onnur er, at Føroyar knýta seg til EBS-skipanina ES-megin, og hin at Føroyar gerast partur av EFTA-súluni í EBS-samstarvinum. Hesir báðir møguleikar seta heilt ymsar fyritreytir í samráðingunum.

Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu við ES, metir nevndin, at tríggir teoretiskir møguleikar eru:

Verandi handilssáttmáli verður víðkaður til eina EBS-líknandi skipan.

Serlig umsitingarskipan verður gjørd í eini EBS-líknandi avtalu.

Danskir myndugleikar umsita eina EBS-líknandi avtalu vegna Føroyar.

Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu gjøgnum EFTA-felagsskapin, metir nevndin, at tveir møguleikar eru:

Føroyar gerast partur av EFTA við danskari umboðan vegna Føroyar.

Føroyar gerast partur av EFTA við sjálvstøðugari umboðan.

Í kapittul 13 hevur nevndin mett um fyrimunir og vansar við hesum fimm møguleikum. Nevndin hevur valt ikki at tilmæla nakra ávísa av hesum loysnum, men leggur møguleikarnar fram til politiska støðutakan. Tó skal verða sagt, at nevndin metir, at fyrsti møguleikin at víðka verandi handilssáttmála til eina samstarvsavtalu er tann minst víðgongdi, og tann, sum mest sannlíkur er at koma á mál við í teimum tættum, sum vit hava størst áhuga fyri. Innan verandi sáttmála er ein tílík tilgongd byrjað.

### 2.2.2 Føroyar partur av innmarknaðinum.

Fara Føroyar upp í EBS-samstarvið, gerast vit partur av innmarknaðinum hjá ES, og mugu í útgangsstøðuni góðtaka meginreglurnar í teimum fýra frælsunum hjá ES.

Ein av grundreglunum í EBS-samstarvinum er, at lógarkarmurin í EBS-økinum skal vera tann sami, og fara Føroyar upp í EBS-samstarvið, er neyðugt, at Føroyar hava sama lógarkarm innan tey øki, sum samstarvs-avtalan fevnir um.

Í EBS-samstarvinum eru nú galdandi tilsamans 1239 direktiv, men Føroyar noyðast kortini ikki at seta øll hesi direktiv í verk.

Nevndin hevur kannað, hvussu tillagingarstigið er í føroyskari lóggávu sammett við EBS-lóggávuna. Innan karmarnar hjá nevndini hevur kortini bert verið møguligt at gjørt eina breiða kanning, sum kann geva eina ábending av støðuni, so metast kann um, hvussu umfatandi tillagingar krevjast í føroyskari lóggávu, um Føroyar gerast partur av innmarknaðinum.

Nevndin hevur sett seg í samband við teir stovnar og stýri, sum umsita øki av týdningi og heitt á tey, um at gera eina meting av, í hvønn mun føroyski lógarkarmurin samsvarar við EBS-lógarkarmin. Samstundis hevur nevndin veitt stovnunum ráðgeving og hjálp til at útvega lógartilfarið.

Við grundarlagi í teimum svarum, sum eru komin, metir nevndin, at føroyski lógarkarmurin sum heild samsvarar við galdandi reglur í EBS-samstarvinum. Innan fleiri øki er donsk lóggáva beinleiðis galdandi, og innan onnur øki er føroyski lógarkarmurin sum heild gjørdur við fyrimynd í

donskum lógum. Í øðrum førum metir nevndin, at føroyskar lógir innihaldsliga fevna um tað sama økið, sum samsvarandi lóg í EBS-samstarvinum.

Tó eru øki, har føroysk lóggáva ikki er tillagað. Nevndin metir, at lóggávan innan tættir í EBS, sum hava týdning fyri landbúnað, og innan kolvetnis-vinnu ikki samsvarar við EBS-karmarnar.

Harumframt vísir nevndin á, at í altjóða sáttmálum, sum vit eru partur av, og í sínamillum avtalum við onnur lond hava Føroyar í roynd og veru longu á nógvum økjum bundið seg til at fylgja teimum ásetingum, sum galda í EBS-samstarvinum.

Nevndin mælir til, at landsstýrið setir fólk at arbeiða víðari við hesi kanning. Líkamikið hvørja støðu Føroyar taka í framtíðini til viðurskiftini mótvegis ES, er neyðugt at gera eina gjølliga og djúptókna kanning av hesum viðurskiftum. Tí eigur umsitingarlig orka, herundir løgfrøðiligur kunnleiki, at verða settur av til at fullføra hesa kanning.

**2.2.3. EBS og tollsamgonga**

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um tollsamgongu fyri seg.

Kanningarnar hjá nevndini vísa, at tollur hevur fingið minni týdning sum handilsforðing og støðugt fer at fáa minni týdning, eisini tá tað snýr seg um fisk og fiskavørur. Roknað verður við, at hesin spurningurin verður loystur um nøkur ár.

Niðurstøðan hjá nevndini er, at skulu vit fáa betri tollsømdir á ES-marknaðinum fyri fisk og fiskavørur enn í verandi handilsavtalu við ES, og betri tollsømdir enn Noreg og Ísland hava fingið í EBS-sáttmálanum, noyðast Føroyar helst at lata ES veiðurættindi í føroyskum sjógvi afturfyri.

Vilja Føroyar hava fult tollfrælsi í eini tollsamgongu, so verður kravið, at vit í fullan mun taka lut í samlaða fiskvinnupolitikkinum hjá ES.

Velja Føroyar at biðja um samráðingar um eina tollsamgongu av tí slagnum, sum ES hevur gjørt við triðjalond, er torført at meta um útlitini fyri at røkka á mál, tí ES hevur ongantíð fyrr gjørt tollsamgongu um fisk og fiskavørur við triðjalond. Svarið fæst bert, um hetta verður roynt í samráðingum.

Velja Føroyar at biðja um samráðingar um at sleppa upp í tollsamgonguna í ES, noyðast Føroyar at taka við handilspolitikkinum hjá ES mótvegis triðjalondum. Tollsamgongan er bert ein partur av handilsliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í ES, og tí er torført at meta um, hvørjar aðrar politiskar bindingar fara at liggja í eini tílíkari avtalu við ES.

Niðurstøðan hjá nevndini er, at ein EBS-líknandi skipan sett saman við tollsamgongu í roynd er tað sama sum limaskapur í EF, t.v.s.limaskapur í tí samstarvi sum var, áðrenn Maastricht sáttmálin kom í gildi.

Tí er hetta eitt mál, sum metast má um, tá politisk støða verður tikin um, hvørja skipan miðað verður eftir, tá biðið verður um samráðingar við ES um eina nýggja avtalu.

**2.3 Almennar viðmerkingar**

Ongin ivi er um, at talan verður um torførar samráðingar. Í ES er áhugin í løtuni vendur móti eini víðkan eystureftir, og trupulleikarnir hjá Føroyum við marknaðaratgongd til ES-marknaðin hava helst lítlan áhuga hjá ES. Sæð við ES eygum er uttan iva lættasta loysnin, at Føroyar gerast limur í ES sum partur av danska limaskapinum ella gerast partur av innmarknaðinum gjøgnum EBS. Tí er ivasamt, hvussu nógva orku ES vil seta av til at viðgera ynski um eina skipan, sum er øðrvísi enn tær verandi skipanirnar.

Tað ger eisini samráðingarstøðuna truplari, at Føroyar einsamallar skulu fara undir tingingar við ES um eina serskipan. Lættari hevði verið, um vit kundu knýtt okkum upp í onkra tilgongd, har onnur lond eisini tingaðust við ES um broytt sáttmálaviðurskifti. Tá Ísland tingaðist um at fara upp í EBS-samstarvið varð tað ein stórur fyrimunur, at EFTA, sum tá var ein rímiliga stórur felagsskapur, stóð fyri hesum samráðingum.

Uttan iva verður eisini talan um drúgvar samráðingar. Tí er umráðandi, at málið verður gjølla umhugsað á núverandi stigi, og at breið politisk semja verður um ta loysn, sum verður mett at geva frægasta úrslitið, og sum mest sannlíkt er at koma á mál við. Enda samráðingar við ES um eina nýggja avtalu úrslitaleysar, fara helst at ganga fleiri ár, áðrenn vit aftur fáa eitt høvi til at taka málið upp aftur.

Nevndin vil samstundis vísa á, at verður avgjørt ongi stig at taka á hesum øki, er tað eisini ein avgerð, sum hevur avleiðingar. Føroyar hava higartil valt í stóran mun at standa uttanfyri samansjóðingina í Europa. Øll londini um okkara leiðir eru partur av innmarknaðinum hjá ES, og nøkur fyrrverandi EFTA-lond eru farin upp í ES. Fleiri lond í Mið- og Eystureuropa fyrireika seg av øllum alvi til limaskap í ES. Verða ongar broytingar gjørdar í samstarvinum við ES, verða Føroyar støðugt meira avbyrgdar, og føroyskt vinnulív fær støðugt truplari at kappast á marknaðinum.

ES-marknaðurin er høvuðsmarknaðurin hjá Føroyum eins og hjá Noregi og Íslandi. Hesin marknaðurin er tann mest áhugaverdi hjá okkum, tí hann er tann besti útflutningsmarknaðurin fyri flestu útflutningsvørurnar hjá okkum. Tí ber ikki til at loysa trupulleikarnar við at leita á aðrar marknaðir.

Sum nevndin, ið skrivaði Bláa álitið, vísir á, hevur ríkisrættarliga støða Føroya stóran týdning og ávirkan á, hvørjir møguleikar eru, nú viðurskiftini við ES skulu takast upp til nýggja viðgerð. Fyrsta stigið í samráðingunum um eina nýggja avtalu við ES er tí at fáa greiðu á, hvørjar loysnir eru møguligar innan ríkisfelagsskapin.

Nevndin hevur - í sínum metingum - gingið út frá verandi ríkisrættarligu støðuni, og hevur ikki tikið við í sínum metingum, at danska stjórnin og landsstýrið í avtaluni frá juni 1998 eru komin ásamt um, at tingingar kunnu takast upp um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Eftir galdandi umsitingarligu siðvenju má roknast við, at Danmark fer at standa á odda fyri hesum samráðingum. Tí er fyrsta stigið í fyrireikingunum til samráðingar um eina nýggja avtalu við ES at fáa greiðu á, hvørjar loysnir danska stjórnin kann taka undir við, tí tað er av stórum týdningi, at Danmark arbeiðir fyri at fremja ynskini hjá føroyingum.

Tá avgerð verður tikin um at royna eina samráðingarleið, er av stórum týdningi, at neyðug orka verður sett av til at fyrireika samráðingarnar út í allar smálutir, tí hetta er ein trupul samráðingarpartur, sum vit standa yvir fyri. Tí er samráðingarúrslitið eisini treytað av, hvussu væl samráðingarnar eru fyrireikaðar.

Líkamikið hvør avgerð verður tikin á hesum øki í framtíðini, so verða spurningarnir um handilsligt og búskaparligt samstarv við umheimin so avgerandi í framtíðini, at nevndin heldur, at fólk átti burtur av at verið sett til at arbeiða við hesum spurningum, og at samskipa tann kunnleika, sum er á stovnum og stovum innan hetta økið.

Nevndin mælir somuleiðis til, at tann kanning, sum nevndin hevur sett í verk av avleiðingunum fyri føroyska lóggávu, um Føroyar gerast partur av innmarknaðinum, eigur at halda fram og verða gjørd liðug.

# Samandráttur

**3.1. Inngangur**
Í hesum kapittlinum er gjørdur ein stuttur samandráttur av frágreiðingini við tí fyri eygað, at geva lesaranum møguleika fyri at fáa eitt yvirlit yvir innihaldið í frágreiðingini. Samstundis eru tiknar við tær niðurstøður, sum nevndin hevur gjørt innan tey ymsu økini.

Sum leiðbeining til lesaran skal verða gjørt vart við, at yvirhøvur verður brúkt heitið ES (Europeiska Samveldið) fyri europeiska samstarvið, hóast EF (Europeisku Felagsskapirnir) framvegis eru til og eru avtaluparturin í EBS-samstarvinum.

Somuleiðis verður gjørt vart við, at tá EFTA-londini verða umrødd sum annar avtaluparturin í EBS-samstarvinum, er talan um EFTA-londini uttan Sveits.

**3.2. Altjóða handilsligt og búskaparligt samstarv (kap. 4).**
Nú Føroyar ætla at taka stig til at royna at fáa eina nýggja avtalu við ES, hevur nevndin hildið, at tað hevur týdning at lýsa gongdina í altjóða handilsligum og búskaparligum samstarvi, har stórar broytingar eru hendar tey seinnu árini. Endamálið er at lýsa støðu Føroya í hesum samanhangi, so hetta kann vera ein partur av grundarlagnum, tá politisk støða skal takast til, hvør loysn og samráðingarleið er tann frægasta at royna.

Stórar broytingar eru hendar í altjóða búskaparligum og handilsligum samstarvi tey seinnu árini - eisini í tíðini eftir, at Bláa álitið varð skrivað. Við limaskapi okkara í World Trade Organization, WTO, eru Føroyar partur í hesi gongd, og vit hava bundið okkum til at fylgja ásetingunum í WTO-sáttmálunum. Tí er tað ikki bert gongdin í ES, sum hevur týdning, tá metast skal um fyritreytir og støðu Føroya í altjóða handli. Nógv av tí, ið fer fram innanhýsis í ES, er ein avleiðing av einum altjóða ráki.

Vert er at gera sær greitt, at hóast tað framvegis eru tey einstøku londini - natiónalstatirnir - sum taka tær týdningarmestu avgerðirnar í altjóða samfelagnum, so hevur gongdin tey seinastu árini verið, at alsamt fleiri og størri politiskar uppgávur ikki longur verða loystar av einstøku londunum einsamøllum ella á regiónalum stigi, men bert við heimsumfevnandi samstarvi. Talan er um eitt rák, sum hevur til endamáls at skapa fríari handil fyri at menna búskapirnar. Á sama hátt er gongdin í ES eitt rák, sum verður skapt av samstarvi millum londini.

Landamørk eru ikki longur sama forðingin fyri handilssamskifti. Samstundis er kappingin harðnað, og tær fyritøkur, ið virka í altjóða umhvørvi, noyðast støðugt at laga seg til broyttar umstøður. Hetta setir øðrvísi og størri krøv til leiðslurnar, eitt nú viðvíkjandi virkisføri, vitan og kunnleika, vágafýsni og fíggjarorku.

Í kapittul 4 verða teir ymsu samstarvsformarnir lýstir, sum eitt nú fríhandilsøki, tollsamgonga, innmarknaður, felagsmarknaður, peningapolitiskt samveldi og búskaparligt samveldi. Altjóða felagsskapurin GATT verður umrøddur, og nógv verður gjørt burtur úr World Trade Organization, WTO, sum tók við eftir GATT 1. januar 1995.

Umframt vørur fevnir WTO eisini um tænastur og upphavsrætt. Endamálið við WTO er at fáa ein so frælsan handil sum gjørligt, við framhaldandi samráðingum at fáa í lag stigvísa liberalisering av handlinum og at fáa eina óvilduga skipan til at loysa handilstrætur millum lond.

***Í hesum samandrátti skal ikki meira verða gjørt burtur úr hesum kapittlinum, men nevndin heldur, at tað er av stórum týdningi, at tað verður ásannað, at gongdin í ES lutvíst er ein partur av einum altjóða ráki, og at tað fyri eitt land sum Føroyar, ið hevur sera stóran uttanríkishandil, hevur týdning at laga seg eftir teimum treytum og tí ráki, sum er í altjóða handilsviðurskiftum og búskaparligum samstarvi.***

***Skulu føroyskar fyritøkur luttaka í altjóða høpi, er neyðugt, at tær góðtaka tær reglur, sum galda har, og støðugt laga seg eftir teimum broyttu umstøðunum, um tær skulu klára kappingina. Sum partur av danska limaskapinum í WTO hava Føroyar bundið seg til at fylgja ásetingunum hjá WTO og at liva upp til tær skyldur, sum sáttmálarnir áseta. Ein***

***nýggjur sáttmáli við ES skal eitt nú fráboðast WTO.***

***Føroyar eru sera lítlar í hesum høpi, og vit kunnu ikki rokna við, at umheimurin er til reiðar at gera serligar skipanir fyri okkum. Vit kunnu ikki rokna við at koma á mál við serligum skipanum, sum ganga ímóti tí ráki, ið annars er í altjóða handli og búskaparligum samstarvi. Vit mugu velja, hvørjum skipanum vit ynskja at vera partur av, og innan hesar karmar royna at fáa nøkur undantøk ella skiftisreglur á økjum, sum hava grundleggjandi týdning fyri samfelagið. Í tann mun vit ynskja at standa uttanfyri, mugu vit eisini gera upp, hvønn kostnað tað hevur við sær.***

**3.3. Høvuðsskipanir í handilssamstarvinum í Europa (kap. 5).**
Lunnarnir undir Europeiska Samveldinum vórðu lagdir við Rómarsáttmálanum, sum kom í gildi 1. januar í 1958. Endamálið var at skipa ein felags marknað við fullkomnum fríhandli. Í 1968 varð EEC skipað sum ein tollsamgonga. Allur innanhýsis tollur millum tey seks limalondini varð tá burturbeindur, og felags tollmúrur skipaður mótvegis umheiminum.

Seinni er innmarknaðurin settur á stovn, og við stjórnarráðstevnunum í Maastricht í 1992 og í Amsterdam í 1997 er samstarvið víðkað. Maastricht-sáttmálin er í løtuni grundarlagið undir ES-samstarvinum, men í fjør komu ríkis- og stjórnarleiðararnir ásamt um Amsterdam-sáttmálan, ið skal styrkja og víðka samstarvið enn meira, og sum eitt nú skal vera grundarlagið fyri eini víðkan eystureftir.

Europeiski fríhandilssfelagsskapurin EFTA varð settur á stovn í 1960. Í dag eru bert Noreg, Ísland, Lichtenstein og Sveits eftir í EFTA. Føroyar fóru úr EFTA saman við Danmark í 1972.

Endamálið við EFTA var at fáa í lag fríhandil við ídnaðarvørum. Hetta málið varð rokkið í 1966. Í 1990 varð EFTA-samstarvið víðkað við fríhandli fyri fisk og fiskavørur.

EFTA er ikki ein tollsamgonga, og londunum stendur frítt at reka sín egna handilspolitikk.

Í 1972 gjørdu EFTA-londini hvørt sær fríhandilsavtalur við ES. Hesar høvdu við sær, at allur tollur á ídnaðarvørum varð tikin av í 1977. Tá EBS-sáttmálin varð settur í verk 1. januar 1994, varð komið nærri málinum um ein europeiskan marknað.

EFTA hevur skipað samstarv við nógv ymisk lond. Talan er lutvíst um yvirlýsingar um samstarv og um fríhandilsavtalur.

Central European Free Trade Agreement, CEFTA, er ein fríhandilsavtala millum Tjekkia, Ungarn, Póland, Slovakia, Slovenia og Rumenia. Sáttmálin varð undirskrivaður í 1992. Málið er at fáa eitt fríhandilsøki fyri londini fyri ár 2001. Londini eru í stórari menning á nógvum økjum, og munandi útlendskar íløgur hava havt við sær stóran búskaparligan vøkstur. Eftir fýra árum er handilin millum CEFTA-londini tvífaldaður.

Hesi londini standa í fremstu bíðirøð at gerast limir í ES. Hjá nógvum av londunum er endamálið við CEFTA at fyrireika seg til limaskap í ES.

***Um støðu Føroya í gongdini í handilssamstarvinum í Vestureuropa má ásannast, at Føroyar hava ikki havt ynski um at luttaka í samansjóðingini á sama hátt sum hini londini. Fleiri EFTA-lond eru farin upp í ES, og Noreg og Ísland eru saman við hinum londunum, ið vóru eftir í EFTA, farin upp í EBS-samstarvið og eru partur av innmarknaðinum.***

***Fleiri lond í mið- og eystureuropa leggja í hesum árum stóran dent á at lúka treytirnar fyri at gerast limir í ES. ES leggur í løtuni karmarnar fyri samvinnuna við hesi lond og brúkar stóra umsitingarorku til at fyrireika eina víðkan av felagsskapinum eystureftir. Hetta fer at standa fremst á dagsskránni hjá ES tey næstu árini, og tann karmur, sum verður lagdur fyri samvinnuna við londini í Eystureuropa, verður karmurin um menningina av samstarvinum í ES. Føroyar eiga at fylgja væl við hesi gongd.***

***Ynski um eina serskipan fyri eitt so lítið øki sum Føroyar, ið eru í ríkisfelagsskapi við eitt limaland í ES, standa ikki frammarlaga hjá ES-myndugleikunum, og tað er helst avmarkað, hvussu nógva orku ES vil brúka til at viðgera ynski um eina skipan, ið er øðrvísi enn tær verandi skipanirnar.***

***Víst kann verða á, at eftir at Sveits avgjørdi ikki at fara upp í EBS-samstarvið, hevur landið tingast við ES um eina bilaterala samstarvsavtalu. Hesar samráðingar hava verið torførar. ES setti saman ein pakka, sum Sveits í síni heild kann velja at taka við ella at vraka. Í hesum samstarvi er ikki ætlanin at hava ein EBS-líknandi bygnað, men heldur eina vanliga***

***felagsnevnd. Vert er eisini at nevna, at Sveits er næststørsti handilspartnarin hjá ES eftir USA.***

**3.4. Handils- og búskaparfelagsskapir aðrastaðni í heiminum (kap. 6).**
Í hesum partinum er yvirlit yvir regiónalar felagsskapir aðrastaðni í heiminum. Hesir felagsskapir liggja fjart frá Føroyum, og vit hava avmarkaðan samhandil við henda partin av heiminum.

Nevndin hevur tó tikið hetta yvirlit við, fyri at vísa, at gongdin aðrastaðni í heiminum er tann sama sum í Vestureuropa. Londini taka seg saman í handilsfelagsskapir og aðrar samstarvsfelagsskapir fyri at menna handilin og at skapa búskaparligan vøkstur. Endamálið er yvirhøvur at taka burtur forðingar í handilssamvinnuni.

Í hesum partinum av heiminum eru eins og í Vestureuropa mong dømi um, at tá forðingar í handlinum verða tiknar burtur, økist samhandilin.

**3.5. Føroyar í millumtjóða handilssamstarvi (kap. 7)**
Í kap. 7 er greitt frá teimum sáttmálum og avtalum, sum Føroyar hava við onnur lond, og teimum millumlanda felagsskapum, sum Føroyar luttaka í. Hesum skal ikki verða gjørt meira burtur úr her.

Ríkisrættarliga støðan hevur stóran týdning, tá metast skal um, hvørjar møguleikar Føroyar hava, tá roynt verður at fáa eina nýggja avtalu við ES. Tí skal her verða tikið saman um fyritreytirnar viðvíkjandi samráðingarheimild-unum.

Sambært heimastýrislógini eru málsøkini "innflutningur og útflutningur" og "beinleiðis og óbeinleiðis skattir" føroysk sermál. Hetta ber í sær, at Føroyar eru eitt sjálvstøðugt tolløki við egnari lóggávu um toll og avgjøld á innflutningi. Føroyar kunnu áseta reglur á flestu búskaparligum málsøkjum, eitt nú innan vinnupolitikk, skatta- og avgjaldpolitikk og fyri innflutningi og útflutningi.

Í altjóða samanhangi eru Føroyar á flestu málsøkjum partur at teimum altjóða skyldum, sum Danmark hevur átikið sær. Hetta er tó ikki galdandi, har Danmark hevur tikið fyrivarni viðvíkjandi Føroyum.

Sambært heimastýrislógini er greitt ásett, at ríkismyndugleikarnir hava avgerðarrættin í spurningum, sum viðvíkja ríkisins viðurskiftum við útheimin. Hesi mál kunnu sostatt ikki yvirtakast. Tó veitir lógin ríkisstjórnini heimild at geva føroyingum heimild til at samráðast uttanlands um handils- og fiskivinnusemjur.

Eisini kann uttanríkisráðharrin heimila umboðum heimastýrisins ríkisins vegna at tingast beinleiðis við fremmand lond undir viðvirkan av uttanríkistænastuni, tá ið tað ikki verður hildið ósambærligt við ríkisins áhugamál. Undir hesi grein verður nú tingast undir leiðslu føroyinga um undirgrundarmarkið millum Bretland og Føroyar.

Tá Danmark gjørdist limur í EF og samstundis legði heimildir sínar í altjóða fiskivinnupolitikkinum til EF, varð neyðugt at skipa fyri einum nýggjum hugtaki. Eftir hetta varð heitið Danmark (vegna Føroyar) brúkt í nógvum millumlanda samráðingum, eitt nú innan millumtjóða fiskiveiðufelagskapir.

Útgangsstøðið er, at heimastýrið ikki hevur avgerðarrætt í uttanlandsmálum. Føroyskir myndugleikar hava, tó í ávísan mun, virkað sjálvstøðugt á altjóða stigi.

Umsitingarliga siðvenjan er, at Føroyar at kalla sjálvstøðugar kunnu gera sáttmálar, sum eru avmarkaðir í vavi og við lond, sum mentanarliga og landafrøðiliga liggja Føroyum nær. Høvuðsreglan hevur verið, at tess størri politiskan, búskaparligan og prinsipiellan týdning sáttmálin verður mettur at hava fyri ríkið í síni heild, tess størri leiklut hevur danska uttanríkisráðið havt í allari gongdini, frá tí farið verður undir samráðingarnar, til sáttmálin verður undirskrivaður.

***Sambært galdandi umsitingarligu siðvenju má roknast við, at Danmark formliga fer at standa á odda fyri samráðingum um ein so týðandi sáttmála sum eina nýggja avtalu við ES.***

***Tí verður neyðugt fyrst við samráðingum við Danmark, um hvørja loysn og samráðingarleið, danska stjórnin kann stuðla. Tað er av stórum týdningi, at Danmark til fulnar stuðlar ta loysn, sum avgjørt verður at royna.***

**3.6. Tollsamgongur (kap. 8).**

Nevndin, ið skrivaði Bláa álitið, mælti til at royna at fáa avtalu við ES um eina serskipan, ið varð sett saman av eini EBS-líknandi skipan og tollsamgongu. Fiskur og fiskavørur eru ikki við í EBS-samstarvinum, og tí gevur ein EBS-avtala ikki føroyskum fiskavørum stórvegis frægari tollsømdir enn verandi handilssáttmáli við ES. Ein tollsamgonga hevði í útgangsstøðu givið føroyskum virkjum somu marknaðartreytir fyri fisk, sum virkjum í ES.

Í einum fríhandilsøki taka londini burtur allan sínámillum toll, men tey kunnu framvegis reka sín egna toll- og handilspolitikk mótvegis triðjalondum. Ein tollsamgonga er meira víðfevnd, tí londini binda seg til at reka felags toll- og handilspolitikk mótvegis triðjalondum.

ES er ein tollsamgonga. Í 1958 avtalaðu táverandi ES-londini at skipa eina tollsamgongu fyri ídnaðarvørur eftir 12 árum, og komið var á mál við hesum í 1968.

Tollsamgongan var eitt fyrsta stig á vegnum í samansjóðingini í Europa. Hon var ætlað sum eitt stig á leiðini móti tættari handilsligum, búskaparligum og politiskum samstarvi. Tollsamgongan í ES er tí ein samansjóðaður partur av handilsliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í ES.

Fleiri av avtalunum, sum ES hevur við onnur lond, verða flokkaðar sum tollsamgongur. Nøkur atlond hjá ES-londum hava tollsamgongur. Eitt atland er eitt land, sum søguliga, ríkisrættarliga, mentanarliga og handilsliga er knýtt at einum ES-limalandi. Atlondini hava tollsamgongu við ES-limalandið, tey eru knýtt at. Føroyar hava ongantíð verið í tollsamgongu við Danmark, og verða roknaðar sum triðja land í ES høpi.

ES hevur gjørt tollsamgongur við triðjalondini Turkaland, Kypros, Malta, Andorra og San Marino. Felags fyri hesar tollsamgongur er, at tær bert fevna um ídnaðarvørur, og fyri nøkur av londunum eru tær ætlaðar sum fyrireiking til limaskap í ES.

Í altjóða handilsskipanini fær tollur støðugt minni týdning sum handilsforðing. Arbeiðið í WTO hevur við sær, at um fá ár fer lítil ella ongin tollur at vera á ídnaðarvørum. Eisini er líkt til, at innan eitt avmarkað áramál fer tollurin á landbúnaðarvørum og fiski at lækka. Tí fáa tollsamgongur, sum frá líður, minni og minni týdning, meðan heilsufrøðilig, djórafrøðilig og teknisk krøv verða forðingin í handlinum.

Endamálið við at fáa tollsamgongu við ES er at tryggja føroyskum fiskavørum gagnligastu atgongdina til ES-marknaðin. Hvørjar avleiðingarnar av eini tollsamgongu við ES verða, velst nógv um, hvat slag av tollsamgongu talan verður um.

Ein møguleiki er, at Føroyar gera eina tollsamgongu eftir tí leisti, sum ES hevur brúkt í tollsamgongum við triðjalond. Hesar tollsamgongur fevna tó ikki um fisk og fiskavørur. Um ES vil gera sína fyrstu tollsamgongu um fisk og fiskavørur við Føroyar, kann greiða bert fáast á, um hetta verður roynt í samráðingum.

Hin møguleikin er, at Føroyar fara upp í tollsamgonguna hjá ES. Hesin møguleiki ber í sær, at Føroyar í høvuðsheitum mugu góðtaka verandi meginreglur í tollskipanini og handilspolitikkinum hjá ES.

Henda skipanin ber í sær, at tollmarkið hjá ES verður víðkað til at fevna um Føroyar, og vit koma undir felags skipan av tollviðurskiftunum. Politiski avgerðarrætturin í handlinum við umheimin verður hjá ES. Nógvar av handilsavtalunum við lond uttan fyri ES mugu broytast, og ES prísir verða á landbúnaðarvørum. Hinvegin verða trupulleikarnir við triðjalandsvørum og upprunareglum beindir burtur, og vørur, sum Føroyar innflyta úr triðjalondum, kunnu frítt seljast á ES-marknaðinum.

***Niðurstøðan hjá nevndini er, at tollur hevur fingið minni týdning sum handilsforðing, og støðugt fer at fáa minni týdning, eisini tá tað snýr seg um fisk og fiskavørur. Hinvegin fara heilsufrøðilig og teknisk krøv at vera handilsforðingin í framtíðini.***

***Nevndin metir, at skulu vit fáa betri tollsømdir á ES-marknaðinum fyri fisk og fiskavørur enn í verandi handilsavtalu við ES, og betri tollsømdir enn Noreg og Ísland hava fingið í EBS-sáttmálanum, noyðast Føroyar at lata ES okkurt afturfyri, og vit hava neyvan annað at lata enn veiðurættindi í føroyskum sjógvi.***

***Velja Føroyar at biðja um samráðingar um eina tollsamgongu av tí slagnum, sum ES hevur gjørt við triðjalond, er torført at meta um útlitini fyri at røkka á mál, tí hesar tollsamgongur fevna ikki um fisk og fiskavørur. ES hevur ongantíð gjørt eina tollsamgongu um fisk og fiskavørur við triðjalond. Um ES er sinnað at gera eina tilíka tollsamgongu við Føroyar, kann greiða bert fáast á, um hetta verður roynt í samráðingum.***

***Velja Føroyar at biðja um samráðingar um at sleppa upp í tollsamgonguna í ES, taka Føroyar við handilspolitikkinum hjá ES mótvegis triðjalondum. Tollsamgongan er bert ein partur av handilsliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í ES, og tí er torført at meta um, hvørjar aðrar politiskar bindingar fara at liggja í eini tílíkari avtalu við ES. Sannlíkt er eisini, at Føroyar mugu taka við fiskivinnupolitikkinum hjá ES.***

***Niðurstøðan hjá nevndini er, at ein EBS-líknandi skipan sett saman við tollsamgongu, í roynd og veru er tað sama sum limaskapur í tí samstarvi, sum var, áðrenn Maastricht sáttmálin kom í gildi.***

**3.7. EBS - Europeiska Búskaparliga Samstarvið (kap. 9).**
Nógvar handilsforðingar vórðu tiknar burtur í samhandlinum millum ES og EFTA-londini í 80-árunum, men eftir at samansjóðingin av álvara tók dik á seg í ES við innmarknaðinum, varð greitt, at neyðugt varð at skipa samstarvið millum ES og EFTA øðrvísi.

Formaðurin í ES-nevndini Jacques Delors mælti í januar 1989 til at fáa í lag ein nýggjan samstarvsform við stovnum, sum skuldu taka avgerðir og umsita felags mál. Tingingarnar um EBS byrjaðu í juni í 1990 og endaðu við semju í 1991. EBS-sáttmálin kom í gildi 1. januar í 1994.

Endamálið er at skipa eitt europeiskt búskaparligt samstarvsøki. Samstarvið fevnir um, at vørur, tænastur, kapitalur og persónar hava frítt at fara um landamørk. Ásetingarnar skulu verða umsitnar eins í øllum londunum, og skipanin skal forða fyri, at kappingin verður avlagað. Endamálið er somuleiðis at fáa í lag tættari samstarv innan gransking og menning, umhvørvi, útbúgving og viðurskifti viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum.

Við EBS-sáttmálanum eru EFTA-londini Noreg, Ísland og Liechtenstein vorðin partur av innmarknaðinum hjá ES, men londini luttaka ikki í tí yvirskipaða politiska og búskaparliga samstarvinum. Tá EBS varð skipað, tóku EFTA-londini við lógarverkinum, sum innmarknaðurin hjá ES bygdi á.

Bygnaðurin í EBS-samstarvinum er skipaður í tvær súlur, har ES og EFTA eru tveir sjálvstøðugir partar. Millum hesar súlur eru skipaðir felags stovnar, sum umsita EBS-skipanina. Talan er um EBS-ráðið, EBS-nevndina, Tingmannanevndina fyri EBS og Ráðgevandi nevndina fyri EBS. Víst verður til kapittul 9, har bygnaðurin er útgreinaður.

Í EBS-samstarvinum er ein ávís avgerðartilgongd. Meginreglan er, at avgerðir verða tiknar við einmæli, men broytingar og nýggjar ásetingar í EBS fara fram í eini tilgongd, har báðir partar hava møguleika fyri ávirkan á ymiskum viðgerðarstigum.

***Nevndin metir, at torførasti spurningurin at loysa, í sambandi við eitt ynski hjá Føroyum um at fáa eina EBS-líknandi skipan er, hvønn bygnað eitt EBS-líknandi samstarv skal hava.***

***Kanningarnar hjá nevndini benda á, at tað í roynd og veru er ES-skipanin, ið tekur stig til broytingar og nýggjar ásetingar í samstarvinum. Noreg og Ísland leggja stóran dent á at verða við í avgerðartilgongdini frá byrjan. Hetta gevur møguleika fyri beinan vegin at fyrireika seg til broytingar og nýggjar ásetingar og gevur møguleika fyri at ansa eftir og gera vart við ásetingar, sum hava óhepnar avleiðingar fyri vinnulívið í londunum. Nevndin metir kortini, at Noreg og Ísland hava sera avmarkaða ávirkan á gongdina.***

***Nevndin hevur ta fatan, at ES-megin verður bygnaðurin í EBS-skipanini mettur at vera orkukrevjandi og kostnaðarmikil.***

Eftiransingin er annar táttur í bygnaðinum í EBS-samstarvinum. Tað er av týdningi, at ásetingarnar verða umsitnar eins í øllum londunum. Tá EBS-samstarvið varð sett í verk, hevði ES sína egnu eftiransingarskipan, men eisini á hesum øki varð tví-súlu skipanin sett í verk. EFTA skipaði sína egnu eftiransingarskipan.

Ein partur av eftiransingarskipanini eru dómstólarnir. ES hevði sín egna dómstól, tá EBS-samstarvið varð sett í verk, og eisini á hesum øki er tví-súlu skipanin galdandi. EFTA setti sín egna dómstól á stovn. Høvuðsuppgávan hjá dómstólunum er at gera bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum.

Áðrenn EBS-samstarvið varð sett í verk, høvdu tey einstøku EFTA-londini handilssáttmálar við ES. Innmarknaðurin hjá ES varð settur í verk 1. januar 1993, og á honum hava vørur, tænastur, kapitalur og persónar frítt at fara. Hetta verður nevnt tey fýra frælsini. EFTA-londini ásannaðu, at handilssáttmálarnir ikki nøktaðu tørvin, um londini skuldu fáa part í ágóðanum av

samansjóðingini í ES.

EBS-sáttmálin er ein tillaging til tey fýra frælsini í ES, og er í høvuðsheitum grundaður á lógarverkið hjá ES á hesum økjum. Í kapittul 9 verður greitt nærri frá karmunum fyri EBS-samstarvi á hesum øki.

***Vísandi til kapittul 14 hevur nevndin roynt at kanna, í hvønn mun føroysk lóggáva er tillagað lóggávuni, sum er galdandi í EBS-samstarvinum. Niðurstøðan er, at føroysk lóggáva, í stóran mun, longu er tillagað hesi lóggávu. Hetta hevur samband við, at donsk lóggáva er tillagað ES-lóggávuni, og at føroysk lóggáva í høvuðsheitum fylgir danskari lóggávu.***

***Hóast lóggávan í EBS-samstarvinum er sera umfevnandi, metir nevndin ikki, at Føroyar fara at hava stórvegis trupulleikar at taka við hesi skipan. Tað fer kortini at krevja umsitingarliga orku formliga at tillaga lóggávuna.***

**3.8. EBS-og fiskivinnan (kap. 10).**
Tá ES og EFTA samráddust um EBS, varð semja um, at samstarvið ikki skuldi fevna um felags landbúnaðar- og fiskivinnupolitikk. Samráðingarnar um fisk snúðu seg um marknaðaratgongd í ES, serliga um toll- og kappingartreytir.

Útgangsstøðið hjá EFTA-londunum var, at fiskur skuldi fáa fult tollfrælsi eins og ídnaðarvørur, men hesum vildi ES ikki ganga á møti. ES kravdi, at EFTA-londini bert kundu fáa betri tollsømdir fyri fisk og fiskavørur, um tey lótu ES veiðirættindi afturfyri.

Samráðingarnar um veiðirættindini fóru fram samstundis sum samráðingarnar um EBS, men veiðirættindini gjørdust ikki partur av EBS-samstarvinum. Úrslitið varð, at Ísland og Noreg lótu ávísar kvotur í sínamillum fiskiveiðusáttmálunum.

***Nevndin metir, at ES møguliga í samráðingum um eina EBS-skipan fer at krevja ávísar kvotur í føroyskum sjógvi. Av tí, at Føroyar og ES hava ein sínámillum fiskiveiðusáttmála, roknar nevndin ikki við, at hetta verður nakar stórur trupulleiki.***

***Biðja Føroyar hinvegin um at fáa betri tollsømdir fyri fisk og fiskavørur, enn EBS-skipanin gevur, fer ES helst at krevja kvotur í føroyskum sjógvi sum gjald. Allar kanningar hjá nevndini benda á, at tað bert ber til at fáa betri tollsømdir, enn EBS-sáttmálin gevur, um Føroyar lata okkurt afturfyri. Men endalig greiða á hesum spurningi kann bert fáast, um hetta verður roynt í sarmáðingum við ES.***

Við EBS-avtaluni yvirtóku Noreg og Ísland reglurnar um góðskueftirlit við fiski og fiskavørum. Í fyrsta umfari fevndi sáttmálin ikki um góðskueftirlitið við markið. 1. januar 1997 herdi og samskipaði ES heilsufrøðiliga eftirlitið við landamørkini. Í hesum sambandi varð EBS-sáttmálin endurskoðaður m.a. soleiðis, at góðskueftirlitið av innflutningi av fiski og fiskavørum varð tikið við í sáttmálan. Hetta gevur Noreg og Íslandi stórar fyrimunir.

***Nevndin ásannar, at tað er ein stórur trupulleiki hjá føroyskum fiskaútflytarum, at vit ikki hava eina heilsufrøðiliga avtalu við ES. Meðan føroyskur fiskur skal kannast, tá hann fer um markið, kann fiskur úr Noregi og Íslandi fara ótarnaður um markið. Vørurnar hjá teimum føroysku útflytarunum verða seinkaðar, og heilsufrøðiliga eftirlitið er kostnaðarmikið fyri føroysku virkini.***

***Tað er tí av stórum týdningi, at Føroyar gerast partur í heilsufrøðiligu skipanini hjá ES. Í 1996 bóðu Føroyar gjøgnum felagsnevndina um samráðingar um eina tílíka avtalu, og nú er klárt at fara undir samráðingarnar. Hetta vísir, at málsviðgerðin í verandi skipan við felagsnevndini tekur tíð.***

Í EBS er bert loyvt at veita stuðul, sum hevur til endamáls at lætta um menningina av ávísum vinnugreinum ella landspørtum. Hetta er tó treytað av, at studningurin ikki broytir fyritreytirnar fyri samhandlinum á ein hátt, sum er í stríð við felags áhugamál. Loyvt er at veita tann studning, sum er loyvdur sambært EF-skipanum.

***Gerast Føroyar partur í EBS-skipanini noyðast vit at góðtaka hesar reglur um almennan studning. Hetta kann bera í sær, at studningsskipanir mugu avtakast ella broytast, men hesi viðurskifti eru ofta ein spurningur um kappingarstøðu, tulkingar og samráðingar. Helst eru tær bindingar, sum vit hava í verandi sáttmálum, líka so strangar.***

EBS-sáttmálin fevnir ikki um fiskivinnu, men hinvegin eru fleiri ásetingar í sáttmálanum, sum

hava týdning fyri íløgur í fiskivinnuna. Millum annað ásetingarnar um, at arbeiðsmegi og kapitalur hava frítt at fara og møguleikarnir fyri at seta virki á stovn í EBS-londunum.

Noreg og Ísland óttaðust fyri, at fiskimenn og útgerðarfeløg úr ES fóru at flyta til hesi lond og harvið útvega sær part av norskum og íslendskum kvotum, og at samstarvið í EBS fór at hava aðrar óhepnar avleiðingar fyri fiskivinnuna. Tí kravdu londini fleiri týðandi undantøk í EBS-sáttmálanum viðvíkjandi fiskivinnuni.

Tað eydnaðist at fáa ásetingar í sáttmálan, sum í stuttum bera í sær, at Noreg og Ísland í høvuðsheitum kunnu varðveita tað lógarverk, ið tey frammanundan høvdu við tí endamáli at avmarka møguleikarnar hjá útlendingum at gera íløgur í fiskivinnuna. Noreg hevur avmarkingar fyri veiðuliðið, meðan Ísland hevur avmarkingar bæði fyri veiðuliðið og virkisliðið.

***Nevndin heldur, at Føroyar mugu taka støðu til, um vit framhaldandi og í hvussu stóran mun vit vilja skerja møguleikarnar hjá útlendingum at gera íløgur í føroysku fiskivinnuna.***

EBS-sáttmálin ásetir, at londini skulu hava javnbjóðis atgongd til havnir og landingarstøð hjá hvørjum øðrum. Talan er ikki um fría atgongd, men javnbjóðis atgongd. Tað ber í sær, at fiskifør úr øllum EBS-londum skulu hava somu atgongd til allar havnir.

**3.9. EBS og kolvetnisvinna (kap. 11).**

ES hevur ikki lagt stóran dent á felags politikk innan olju- og gassframleiðslu. Orsøkin er helst, at lutfalsliga fá ES lond hava stórvegis kolvetnisvirksemi, og í ES hevur felags politikkur innan framleiðslu av EL-orku staðið fremri.

Í sambandi við innmarknaðin varð kortini roynt at samansjóða orkupolitikkin. Loyvispolitikkurin hjá ES hevur síðan 1994 verðið skipaður sambært sonevnda loyvisdirektivinum, ið ásetir treytir fyri veiting og brúki av loyvum til forkanningar, leiting og framleiðslu av kolvetnum. Direktivið ásetir felags reglur á innmarknaðinum, og tað gjørdist partur av EBS-sáttmálanum 1. september 1995.

Harumframt hevur eitt ráðsdirektiv frá 1993 eisini týdning fyri kolvetnisvinnuna. Hetta direktivið er knýtt at loyvisdirektivinum, og hevur ásetingar um keyp, bygging og tænastuveitingar. Endamálið er at tryggja, at sáttmálar um keyp, bygging og tænastuveiting verða tillutaðir eftir grundreglunum um ikki at gera mismun ella geva forrættindi til útvegarar í landinum.

Loyvisdirektivið ásetir í høvuðsheitum, at londini varðveita yvirvaldsrættin yvir kolvetnistilfeinginum á sínum økjum, men londini kunnu ikki fara út um tær generellu avmarkingar, sum Rómarsáttmálin ásetir fyri virksemið hjá almennum myndugleikum. Tá myndugleikar tilluta feløgum loyvi og áseta treytir, skal hetta fara fram á ein hátt, sum tryggjar øllum feløgum somu viðferð, uttan mun til í hvørjum landi tey hava heimstað. Heldur ikki er loyvt at áseta treytir um, at natiónalar vørur og tænastur skulu hava framíhjárætt, ella at leitingar- og útvinningarvirksemi skal hava heimstað í ella verða stýrt úr viðkomandi landi.

Sum heild kann sigast, at oljudirektivið avmarkar leiklutin hjá tí almenna til tvey økir: Staturin skal framvegis hava fíggjarliga ágóðan av tilfeinginum, og staturin hevur í ein ávísan mun heimild til at regulera vinnuna á einum sakligum grundarlagi.

Loyvisdirektivið fekk týdning fyri Noreg, hóast tað ikki var neyðugt við stórvegis broytingum í lógarkarmunum og mannagongdum. Noreg kundi í høvuðsheitum halda fram við sínum kolvetnispolitikki. Sambært EBS-reglunum hevur Noreg framvegis rætt at gera av, hvussu stóran leiklut landið skal hava í teimum einstøku útvinningarloyvunum.

Kortini avmarkar direktivið møguleikarnar hjá norskum myndugleikum at stýra kolvetnisvirkseminum og at veita norskum áhugamálum forrættindi í sambandi við útvinning og veitingar. Hetta merkir, at norsku oljufeløgini Statoil, Hydro og Saga, sum áður hava fingið forrættindi, nú skulu kappast á jøvnum føti við onnur feløg um at fáa lut í leitingar- og útvinningarloyvum á norska landgrunninum.

***Nevndin hevur ikki gjørt neyvar kanningar av, hvørjar broytingar eru neyðugar at gera í føroysku oljulóggávuni, um Føroyar gerast partur av EBS-samstarvinum, og oljudirektivið harvið verður sett í verk í Føroyum.***

***Men staðfestast kann, at neyðugt er helst at gera broytingar í grein 10 í lógini, ið hevur til endamáls at geva føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum veitarum fyrimunir, og neyðugt er helst at avmarka skylduna at føra oljuna í land sambært grein 17 í lógini.***

***Loyvisdirektivið fer hinvegin ikki at forða fyri, at eitt landsoljufelag tekur lut í oljuvinnuni, men eitt sakligt endamál við hesi luttøku kann kortini ikki verða at tryggja føroyskum veitarum framíhjárættindi til skaða fyri útlendskar veitarar.***

**3.10. Heilsufrøðilig viðurskifti (kap. 12).**
Hjá Føroyum, har so at siga alt búskaparliga grundarlagið er útflutningur av fiski, er gagnligt, at millumtjóða handil við matvørum er grundaður á altjóða sáttmálar við ásetingum um dygdar- og reinføriskrøv.

Endamálið við slíkum sáttmálum er umframt at minka um smittuvandan, eisini at forða fyri, at handilin verður darvaður av tekniskum krøvum.

Í europeiskum handli við fiski og øðrum úrdráttum úr sjónum eru serliga tvær skipanir, sum hava týdning.

Á heilsufrøðiliga økinum hava londini í WTO bundið seg til at laga lóggávu sína til meginreglurnar í WTO-sáttmálunum. Føroyar eru partur av danska limaskapinum í WTO, og hava sostatt bundið seg til at halda meginreglurnar og minstukrøvini hjá WTO í okkara skipanum og reglum viðvíkjandi heilsufrøði og matvørutrygd.

Hin skipanin eru reglurnar hjá ES um, hvussu eftirlitið skal skipast, og hvørji krøv verða sett til matvørur og marknaðarføring. EFTA-londini hava gjøgnum EBS lagað sínar lógir og reglur eftir grundreglunum hjá ES. Hóast Føroyar ikki eru við í ES ella EBS, hevur gongdin í ES havt stóra ávirkan á lógarsmíðið á hesum øki, tí ES keypir størsta partin av okkara fiskaútflutningi.

Tveir sáttmálar hava týdning undir WTO. Annar er SPS-sáttmálin, sum skal tryggja, at handilslig tiltøk og krøv í einstøku londunum á heilsu- og reinførisøkinum eru grundað á fakligar metingar og ikki verða brúkt til at avmarka ella at forða handli millum lond, tá fyrilit eru tikin fyri at verja heilsuna hjá fólki, djórum og plantum í móttakaralondunum. Sáttmálin ásetir, at ikki ber til at seta bann fyri innflutningi, um ávís krøv eru lokin.

Hin sáttmálin undir WTO er TBT-sáttmálin, sum snýr seg um tekniskar handilsforðingar, sum ikki eru tiknar við í SPS-sáttmálan. Her er talan um eitt nú ásetingar um merking, góðskureglur og verju av brúkarum.

Samanumtikið avmarka hesir báðir sáttmálarnir rásarúmið hjá einstøkum londum at seta í verk tiltøk, sum víkja munandi frá tí verjustigi, ið er ásett í altjóða skipanum.

Reglurnar í EBS-sáttmálanum um matvørutrygd fevna fyrst og fremst um tekniskar ásetingar um heilsu, reinføri, vørudygd o.t. EFTA-londini hava at kalla somu reglur, sum ES á matvøruøkinum um heilsu og reinføri.

Í byrjanini fevndu ásetingarnar í EBS kortini ikki um reglurnar hjá ES um eftirlit við handlinum, eitt nú í sambandi við djóralæknaeftirlit við landamørkini. Hetta eftirlit snýr seg um skjala-, uppruna- og fysiskt eftirlit. ES kundi kanna fisk og fiskavørur úr EFTA-londunum eins og vørur úr øðrum triðjalondum.

ES samskipaði og herdi heilsufrøðiliga eftirlitið við landamørkini 1. januar 1997. Norðmenn og íslendingar ásannaðu, at hetta fór at verða tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið hjá útflutningsvinnuni. Tí var EBS-sáttmálin endurskoðaður, so hann nú eisini fevnir um reglurnar við góðskueftirliti við fiski og fiskavørum, tá útflutt verður til ES.

Hetta lætti munandi um hjá vinnuni í EFTA-londunum, sum nú sleppur undan teimum praktisku trupulleikunum við marknaðeftirlitinum.

Endurskoðaði EBS-sáttmálin bar eisini í sær, at EFTA-londini og ES fingu felags reglur mótvegis triðjalondum.

Seinnu árini eru brúkararnir í ES og í heiminum sum heild vorðnir meira atfinningarsamir í støðu síni í sambandi við hagreiðing og tilvirking av matvørum og brúkaratrygd, og tí má roknast við, at krøvini støðugt fara at verða herd.

Í frágreiðing síni í 1996 um uttanríkismál ásannaði landsstýrið, at týdningurin av tolli sum handilsforðing helst fer at minka, men at álvarsligar forðingar, mótvegis traditionellum triðja londum sum Føroyum, í framtíðini í størri mun fara at liggja í m.a. heilsufrøðiliga eftirlitinum. Hetta fer at verða hert mótvegis londum, har felags góðkendar skipanir og mannagongdir ikki eru

tryggjaðar í skipaðum samskifti við ES.

Hóast nógv hevur verið gjørt fyri at lúka heilsufrøðilig krøv frá myndugleikunum í londum, sum keypa fisk og fiskavørur úr Føroyum, eru fleiri viðurskifti á hesum øki, har ikki er komið fram til nøktandi loysnir. Hesi viðurskifti eru í stóran mun ein forðan fyri gagnligum handilssamskifti við keyparalondini í Europa.

Í 1996 bóðu Føroyar gjøgnum felagsnevndina um samráðingar um eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, og nú eru klárt at fara undir hesar samráðingar.

***Nevndin heldur, at tað hevur skund hjá Føroyum at fáa eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, ið keypir størsta partin av føroysku fiskavørunum. Víst verður til viðmerkingarnar undir kap. 3.8.***

**3.11. Føroyar í eini EBS-líknandi skipan og tollsamgongu (kap. 13)**
Arbeiðssetningurin hjá nevndini hevur verið at gera upplegg til samráðingar við ES um uppskotið í Bláa álitinum frá 1995 um eina serskipan. Sostatt hevur uppgávan hjá hesi nevndini verið at taka við, har Bláa álitið slepti.

Tá tosað verður um eina EBS-líknandi skipan, so er hetta fyrst og fremst grundað á, at ríkisrættarliga støða Føroya ger, at Føroyar bert hava møguleika fyri undir einum ella øðrum formi at fáa eina serskipan. Torføri spurningurin er, hvussu Føroyar stovnsliga og umsitingarliga kunnu vera partur av eini EBS-líknandi skipan.

Í EBS-samstarvinum eru stovnar og skipanir, sum skulu tryggja, at skipanin virkar eftir ætlan. Føroyar mugu á ein hvønn hátt fáa tilknýti til henda bygnað, og áðrenn ein samráðingarleið verður vald, er neyðugt, at politisk støða verður tikin til, hvat slag av tilknýti, vit ynskja.

***Nevndin metir, at tveir møguleikar eru. Annar er, at vit í fullan mun gerast partur av EBS-skipanini. Hin er, at vit binda okkum at skipanini og taka við øllum ella pørtum av ásetingunum í EBS. Tann fyrri møguleikin krevur stóra umsitingarliga orku, meðan tann seinni ikki er so orkukrevjandi.***

***Niðurstøðan hjá nevndini er, at tvær ymsar leiðir eru møguligar at ganga, til tess at knýta Føroyar upp í verandi EBS-skipan. Onnur er, at Føroyar knýta seg til EBS-skipanina ES-megin, og hin at Føroyar gerast partur av EFTA-súluni í EBS-samstarvinum. Hesir báðir møguleikar seta heilt ymsar fyritreytir í samráðingunum.***

***Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu við ES, metir nevndin, at tríggir teoretiskir møguleikar eru:***

- ***Verandi handilssáttmáli verður víðkaður til eina EBS-líknandi skipan.***
- ***Serlig umsitingarskipan verður gjørd í eini EBS-líknandi avtalu.***
- ***Danskir myndugleikar umsita eina EBS-líknandi avtalu vegna Føroyar.***

***Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu gjøgnum EFTA-felagsskapin, metir nevndin, at tveir møguleikar eru:***

- ***Føroyar gerast partur av EFTA við danskari umboðan vegna Føroyar.***
- ***Føroyar gerast partur av EFTA við sjálvstøðugari umboðan.***

Í kapittul 13 hevur nevndin mett um fyrimunir og vansar við hesum fimm møguleikum, og nevndin mælir til, at næsta stigið verður, at ein politisk avgerð verður tikin um, hvønn av hesum møguleikum valt verður at royna, um so er, at avgjørt verður at biðja um samráðingar um eina EBS-líknandi skipan.

Arbeiðssetningurin fyrisetir, at samráðingarnar skulu snúgva seg um eina EBS-líknandi skipan saman við tollsamgongu.

Kanningarnar hjá nevndini vísa, at tollur hevur fingið minni týdning sum handilsforðing og støðugt fer at fáa minni týdning, eisini tá tað snýr seg um fisk og fiskavørur.

***Niðurstøðan hjá nevndini er, at skulu vit fáa betri tollsømdir á ES-marknaðinum fyri fisk og fiskavørur enn í verandi handilsavtalu við ES, og betri tollsømdir enn Noreg og Ísland hava fingið í EBS-sáttmálanum, noyðast Føroyar at lata ES veiðurættindi í føroyskum sjógvi afturfyri.***

***Velja Føroyar at biðja um samráðingar um eina tollsamgongu av tí slagnum, sum ES hevur***

***gjørt við triðjalond, er torført at meta um útlitini fyri at røkka á mál, tí ES hevur ongantíð fyrr gjørt tollsamgongu um fisk og fiskavørur við triðjalond.***

***Vilja Føroyar hava fult tollfrælsi í eini tollsamgongu, so verður kravið, at vit í fullan mun taka lut í samlaða fiskivinnupolitikkinum hjá ES.***

***Gerast Føroyar partur av tollsamgonguni hjá ES, noyðast vit at taka við handilspolitikkinum hjá ES mótvegis triðjalondum. Tollsamgongan er bert ein partur av handilsliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í ES, og tí er torført at meta um, hvørjar aðrar politiskar bindingar fara at liggja í eini tílíkari avtalu við ES.***

***Niðurstøðan hjá nevndini er, at ein EBS-líknandi skipan sett saman við tollsamgongu í roynd og veru er tað sama sum limaskapur í tí samstarvinum, sum var áðrenn Maastricht sáttmálin varð settur í verk. Tí er hetta eitt mál, sum metast má um, tá politisk støða verður tikin til, hvørja skipan miðað verður eftir, tá biðið verður um samráðingar við ES um eina nýggja avtalu.***

**3.12. Tillagingarstigið í føroyskari lóggávu (kap. 14).**
Fara Føroyar upp í EBS-samstarvið, gerast vit partur av innmarknaðinum hjá ES, og mugu í útgangsstøðuni góðtaka meginreglurnar í teimum fýra frælsunum hjá ES.

Ein av grundreglunum í EBS-samstarvinum er, at lógarkarmurin í EBS-økinum skal vera tann sami, og fara Føroyar upp í EBS-samstarvið, er neyðugt, at Føroyar hava sama lógarkarm innan tey øki, sum samstarvs-avtalan fevnir um.

Í EBS-samstarvinum eru nú galdandi tilsamans 1239 direktiv, men Føroyar noyðast kortini ikki at seta øll hesi direktiv í verk.

Nevndin hevur roynt at kanna, hvussu støðan er í føroyskari lóggávu. Innan karmarnar hjá nevndini hevur kortini bert verið møguligt at gjørt eina breiða kanning, sum kann geva eina ábending av støðuni, so metast kann um, hvussu umfatandi tillagingar krevjast í føroyskari lóggávu, um Føroyar gerast partur av innmarknaðinum.

Nevndin hevur sett seg í samband við tær stovnar og stýri, sum umsita øki av týdningi og heitt á tey, um at gera eina meting av, í hvønn mun føroyski lógarkarmurin samsvarar við EBS-lógarkarmin.

***Við grundarlagi í teimum svarum, sum eru komin, metir nevndin, at føroyski lógarkarmurin sum heild samsvarar við galdandi reglur í EBS-samstarvinum. Innan fleiri øki er donsk lóggáva beinleiðis galdandi, og innan onnur øki er føroyski lógarkarmurin, sum heild, gjørdur við fyrimynd í donskum lógum. Í øðrum førum metir nevndin, at føroyskar lógir innihaldsliga fevna um tað sama økið, sum samsvarandi lóg í EBS-samstarvinum.***

***Tó eru øki, har føroysk lóggáva ikki er tillagað. Nevndin metir, at lóggávan innan landbúnað og kolvetnisvinnu ikki samsvarar við EBS-karmarnar.***

Harumframt vísir nevndin á, at í altjóða sáttmálum, sum vit eru partur av, og í sínamillum avtalum við onnur lond, hava Føroyar, í roynd og veru, á nógvum økjum longu bundið seg til at fylgja teimum ásetingum, sum galda í EBS-samstarvinum.

Nevndin leggur dent á, at arbeitt verður víðari við hesi kanning. Líkamikið hvørja støðu Føroyar taka í framtíðini til viðurskiftini mótvegis ES, er neyðugt at gera eina gjølliga og djúptókna kanning av hesum viðurskiftum, og nevndin mælir til, at neyðug umsitingarliga orka, herundir løgfrøðiligur kunnleiki, verður sett av til at fullføra hesa kanning.

# EBS frágreiðingin

## Altjóða handilsligt og búskaparligt samstarv

### 4.1. Inngangur

Fyri eitt land sum Føroyar við sera opnum búskapi og nógvum handilssamskifti við umheimin er gagnligt, at greiðar og frammanundan kendar reglur eru í altjóða handli.

Síðan 1945 - og serliga síðan fyrst í 1970-árunum - er millumtjóða handil vaksin nógv. Ein avleiðing av hesum er tað, sum ofta verður nevnd búskaparlig altjóðagerð. Ein partur av búskaparligu altjóðagerðini er handilsliberaliseringar.

Altjóða handil er vorðin meira opin. Hetta er eitt úrslit av samráðingunum í GATT og síðan 1995 í WTO. Hetta hevur havt við sær, at tollur er lækkaður, og at aðrar handilsforðingar eru beindar burtur. Á regiónalum stigi eru felagsskapir settir á stovn við tí endamálið at beina forðingar í sínámillum handlinum burtur.

Gongdin seinnu árini hevur verið, at handilsavtalur millum lond ikki bert snúgva seg um toll og kvotur, men eisini um fleiri onnur sløg av handilsforðingum. Tekniskar forðingar, standardisering, handil við tænastum og heilsufrøðilig viðurskifti eru týðandi partar av samstarvinum. Tollur hevur fingið alsamt minni týdning sum handilsforðing.

Nevndin heldur, at av tí, at altjóða búskapurin og institusjónellu karmarnir fyri altjóða handli eru broyttir so nógv seinnu árini, er neyðugt fyrst at lýsa høvuðstættirnar í hesum broytingum. Endamálið er millum annað at vísa, at tað ikki bert er gongdin í ES, ið hevur týdning, tá metast skal um fyritreytir og støðu Føroya í altjóða handli. Nógv av tí, ið fer fram innanhýsis í ES, er partur av einum altjóða ráki.

Hesin fyrsti parturin av útgreiningini snýr seg um altjóða handilsligt og búskaparligt samstarv. Fyrst verður komið inn á høvuðsrákið í altjóða viðurskiftum, sum hava týdning fyri handilin millum lond. Dentur verður lagdur á, at búskaparligu viðurskiftini í dag eru ein partur av undanfarnu søguligu gongdini. Eitt høvuðseyðkenni við hesi gongd er ein alsamt vaksandi samansjóðing av búskapunum í einstøku londunum.

Høvuðsskipaninar í handilsligum og búskaparligum samstarvi millum lond eitt nú fríhandilsøki, tollsamgonga og felagsmarknaður verða stutt lýstar. Altjóða handilsfelagsskapir og leiklutur teirra í millumtjóða handli og liberaliseringum verða eisini umrøddir. Rættuliga nógv verður gjørt burtur úr World Trade Organization, WTO, sum avloysti GATT í 1995. Orsøkin til hetta er m.a., at WTO er einasti altjóða felagskapur, ið hevur altjóða handil sum virkisøki, og sum umsitur reglur fyri handlinum millum lond. Tær meginreglur fyri altjóða handli, sum eru samtyktar í WTO, eru í stóran mun støðið undir handilsligum samstarvi í regiónalum felagsskapum, sum ES, EBS og NAFTA.

### 4.2. Búskaparlig altjóðagerð

Árini síðan seinna heimsbardaga hava verið merkt av stórum broytingum í handilsligu og búskaparligu viðurskiftunum í heiminum. Búskaparligi vøksturin í ídnaðarlondunum meginpartin av tíðarskeiðnum hevur verið drívmegin í broytingini í heimsbúskapinum, sum undir einum verður nevnd altjóðagerð.

Altjóðagerð er sum so ikki nýtt fyribrigdi. Skifti av vørum millum lond hevur verið í øldir. Rættilig gongd kom í búskaparligu samansjóðingina, tá við m.a. fingu bíligari og virkisførari flutningsskipanir síðst í 19. øld. Seinni kom so menningin av framleiðsluhættum, grundaðir á hópframleiðslu og stórvirkisfyrimunir. Bíligari og betri samskiftismiðlar birtu eisini uppundir samansjóðingina. Bøttir tekniskir møguleikar at tilvirka og selja vørur til ein størri marknað gjørdu, at eyguni eisini vórðu vend ímóti handilsforðingum í teimum einstøku londunum.

Í kjalarvørrinum av búskaparliga skrædlinum og arbeiðsloysinum í 1930-árunum tók eitt proteksjónistisk rák seg upp í millumtjóða handli. Nógv lond royndu at verja heimavinnuna við tolli og øðrum avmarkingum á innflutninginum.

Síðan 1945 - og serliga síðan fyrst í 1970-árunum - hevur altjóðagerðin og búskaparliga

samansjóðingin av álvara tikið dik á seg. Hon er víðfevndari og fevnir um alsamt fleiri málsøki. Hetta vísir seg á nógvum økjum. Til dømis er handilin við vørum og tænastum millum lond vaksin skjótt. Hjá flestu londum hevur parturin av bruttotjóðarúrtøkuni, sum verður útfluttur, verið vaksandi.

Vøksturin í heimshandlinum hevur millum annað havt við sær størri kapping, og hetta birtir uppundir altjóðagerð av framleiðslu og vinnulívi. Tær stóru fyritøkurnar leita sær til onnur lond fyri at koma inn á nýggjar marknaðir ella at spara lønarútreiðslur.

Øktur altjóða handil, vøkstur í útlendskum íløgum, deregulering av kapitalmarknaðunum og nýggj tøkni hava borið í sær sera stóran vøkstur í kapital- og valutastreymum um landamørk. Búskapirnir í einstøku londunum eru vorðnir meira opnir. Landamørkini eru ikki tann sama forðingin fyri handilssamskifti, sum áður.

Vaksandi samansjóðingin sæst eisini á talinum og virkseminum hjá millumtjóða búskaparligum samstarvsfelagsskapum, sum eru settir á stovn eftir kríggið, bæði á alheims- og regiónalum stigi. Heimsbankin, IMF og samstarvið í GATT eru dømi um altjóða samstarv. EFTA og ES eru dømi um regiónalar handilsfelagsskapir. Í summum førum hava regiónalir felagsskapir fingið yvirnatiónalan myndugleika. Londini hava latið stovnum í felagsskapunum avgerðarrættin í summum málum. Besta dømi um hetta er Europeiska Samveldið.

Hóast tað framvegis eru tey einstøku londini - natiónalstatirnir - sum taka tær týdningarmestu avgerðirnar í altjóða samfelagnum, so hevur gongdin seinnu árini gjørt, at alsamt fleiri og størri politiskar uppgávur ikki longur kunnu verða loystar av einstøku londunum einsamøllum ella á regiónalum stigi, men bert við heimsumfevnandi samstarvi.

Hugtøk sum tjóð, sjálvsavgerðarrættur, trygd og millumtjóða samstarv hava so við og við fingið nýtt innihald. Í handils- og búskaparviðurskiftum eru londini vorðin meira bundin hvørt at øðrum. Til tess at tryggja búskaparliga menning og javnbjóðis kappingartreytir, hava alsamt fleiri lond ásannað, at felags reglur eru ein fyritreyt fyri, at millumtjóða handil skal vera lættari og smidligari, og at vinningurin av altjóða arbeiðsbýtinum verður størst møguligur.

Eftir at heimshandilin í nøkur ár hevði verið merktur av protektiónistiskum atgerðum, vunnu sjónarmiðini um fríhandil aftur frama tey fyrstu árini eftir seinna heimsbardaga. Fleiri altjóða búskaparligir felagsskapir vórðu settir á stovn. Høvuðsendamálið var at beina burtur forðingar fyri frælsum heimshandli.

Í fyrsta umfari var talan um vørumarknaðin (GATT) og altjóða gjaldoyraskipanina (IMF). Samstarvið í GATT hevur serliga ført til handilslættar, sum eru ein avleiðing av, at tollforðingar eru tiknar burtur. Seinni eru so kapitalmarknaðirnir tiknir við, og kapitalflytingar um landamørk hava fingið størri týdning. Somuleiðis vóru 1980-árini merkt av stórum vøkstri í beinleiðis íløgum millum lond. Tænastur eru eisini vorðnar ein alsamt størri partur av millumtjóða handli.

Samanumtikið hevur altjóðagerðin havt við sær, at landamørk ikki eru sama forðing fyri handilssamskifti sum áður. Altjóðagerðin av búskapunum hevur broytt fortreytirnar hjá vinnulívinum, einstøkum fyritøkum og londum um allan heim. Kappingin er harðnað, og hetta krevur millum annað, at fyritøkurnar í størri mun enn áður mugu vera førar fyri at laga seg eftir støðugt skiftandi umstøðum. Hetta setir øðrvísi og størri krøv til leiðslurnar, eitt nú viðvíkjandi virkisføri, vitan og kunnleika, vágafýsni og fíggjarorku, skal ein gera sær vónir um at virka í altjóða høpi.

**4.3 Millumlanda samstarvshættir**

Samstarv millum lond fer fram bæði á altjóða og regiónalum stigi. Dømi um altjóða samstarv eru felagsskapirnir Sameindu Tjóðir og GATT-skipanin, sum hon virkaði fram til 1995. Luttøka í nevndu felagsskapum hevur vanliga ikki verið so bindandi og hevur vanliga ført við sær, at londini bert á summum samstarvsøkjum lata sjálvræðið frá sær og lata felags stovnar umsita málsøki.

Búskaparligt samstarv og samansjóðing á regiónalum stigi er avmarkað til ein bólk av londum, sum eitt nú samstarvið í Europeiska Samveldinum, ES, og fríhandilsøkini EFTA (European Free Trade Association) og NAFTA (North American Free Trade Agreement). Regiónalt samstarv innan handil og búskap er vanliga meira bindandi og hevur størri ávirkan á politikkin hjá limalondunum og skerjir ofta politiska rásarúmið hjá luttakaralondunum í stýringini av nógvum innlendis viðurskiftum.

Regiónalt samstarv innan búskap og handil er nógv økt seinnu árini. Í hesum sambandi kann

nevnast, at síðan fyrsti GATT-sáttmálin kom í gildi í 1947 eru 163 regiónalar handilsskipanir fráboðaðar GATT/WTO. Í tíðarskeiðnum 1986-1991 vórðu bert fimm skipanir skrásettar í GATT/WTO, meðan samsvarandi talið var 77 fyri tíðarskeiðið 1992-1996. Av nevndu 163 skipanum eru eini 60% í gildi í dag. Meira enn 75% av fráboðaðum skipanum, sum eru virknar, eru settar í verk eftir1992.

Umframt henda stóra vøksturin í talinum av regiónalum skipanum, er eisini áhugavert, at samstarvsformarnir eru øðrvísi í vavi og innihaldi. Samstarvið í ES fevnir støðugt um alsamt fleiri øki, og størri myndugleiki verður lagdur til felagsstovnar.

Hetta er kortini ikki gongdin bert í ES. Aðrastaðni í heiminum hevur regiónala samansjóðingarrákið eisini tikið dik á seg. Til dømis kann nevnast, at uppskotið um "Free Trade Agreement of the Americas" (FTAA) fevnir um 34 lond í Suður-, Mið- og Norður-Amerika. Í hesum marknaði búgva eini 500 mió. fólk. Størsta regiónala verkætlanin av øllum er "Asian Pacific Economic Cooperation" (APEC), sum fevnir um lond báðumegin Kyrrahavið herundir USA, Japan og Kina. APEC fevnir um 40% av heimsins íbúgvum, og stendur fyri umleið 54% av bruttotjóðarúrtøkuni í heiminum og 42% av millumtjóða handli.

Nevndu altjóða og regiónalu felagsskapir, sum hava týdning fyri millumtjóða handil, verða umrøddir seinni. Skilt verður millum ymisk sløg av samansjóðing millum lond, alt eftir hvussu umfevnandi og djúptøkt samstarvið er. Mynd 4.1 vísir vavið og innihaldið í teim ymsu regiónalu samstarvsformunum.

Mynd 4.1: Regiónalir samstarvsformar

| | Frí-handils-øki | Toll-samgonga | Felags marknaður | Innmarknaður | Pengapolitiskt samveldi | Búskaparligt samveldi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjónligar handilsforðingar burtur, egnan tollmúr úteftir | | | | | | |
| Sjónligar handils-forðingar burtur, felags tollmúr úteftir | | | | | | |
| Vørur og framleiðslufaktorar hava frítt at fara | | | | | | |
| Felags regluverk viðvíkjandi handli og framleiðslu-faktorum | | | | | | |
| Felags penga-politikkur og gjaldoyra | | | | | | |
| Felags búskapar- og fíggjarpolitikkur | | | | | | |

Ovasta røðin vísir bólkarnar, sum samstarvið vanliga verður flokkað í. Teigurin til vinstru vísir tey ymisku samstarvsøkini. Myndin er í stóran mun grundað á gongdina í tí, sum í dag er ES. Samstarvið har byrjaði í 1950-árunum. Í 1968 varð komið á mál við tollsamgonguni. Síðani er samstarvið støðugt ment, og í dag verður arbeitt við at skipa ES sum eitt pengapolitiskt og búskaparpolitiskt samveldi.

Tá lond ganga saman í **fríhandilsøki** beina tey burtur allan toll og kvotur í handlinum sínámillum, men varðveita hvør sær rættin til sjálvi at avgera, hvørjar handilsavmarkingar skulu setast mótvegis londum, sum ikki eru limir. Fríhandilsøki verða vanliga roknað sum eitt av fyrstu stigunum í bindandi búskaparligum samstarvi millum lond.

Í eini **tollsamgongu** hava limalondini harafturímóti bundið seg bæði til ikki at brúka sjónligar handilsforðingar í sínámillum handli og at hava felags tollgarðar og aðrar handilsligar avmarkingar mótvegis londum, sum eru uttanfyri tollsamgonguna. Tollsamgongur verða nærri umrøddar í kap.8.

Ein **felagsmarknaður** ber í sær, at allar beinleiðis forðingar fyri innanhýsis handli og flutningi av tænastum, kapitali og arbeiðsmegi millum londini í felagsmarknaðinum verða tiknar burtur. Ein felagsmarknaður er eins og ein tollsamgonga grundaður á felags handilspolitikk mótvegis umheiminum.

Við **innmarknaðinum** verða allar sjónligu og serliga tær minnu sjónligu avmarkingarnar í frælsinum fyri innanhýsis handli, tænastum, kapitali og arbeiðsmegi millum londini burturbeindar. Hesar seinnu eru m.a. fjaldar handilsforðingar, ið standast av, at limalondini nýta ymisk fyrisett mát á vørum, og at myndugleikarnir veita heimavinnuni sersømdir í sambandi við almenn keyp av vørum og tænastum. Í einum innmarknaði verða regluverkini, sum ávirka tey fýra frælsini í einstøku londunum, broytt til felags innmarknaðarregluverk.

Ein innmarknaður fevnir sostatt umframt um ein felagsmarknað fyri vørur, eisini um frælsi hjá framleiðslufaktorum og fíggjartænastum at fara um landamørk. Ríkisborgarar í einum felagsmarknaði kunnu uttan forðingar leita sær arbeiði í øllum londunum, sum eru við. Frælsi er eisini at gera íløgur og at seta virksemi á stovn í hinum londunum, sum eru við í felagsmarknaðinum. Sama er galdandi fyri eitt nú innskot í peningastovnar ella keyp av virðisbrøvum.

Ein innmarknaður nýtist ikki í øllum lutum at hava eina tollsamgongu sum fyritreyt. EBS er ein innmarknaður, sum fevnir um eitt fríhandilsøki (EFTA) og eina tollsamgongu (EF). Orsakað av serliga fiskivinnu- og landbúnaðarpolitikkinum hjá EF eru fiska- og landbúnaðarvørur ikki umfataðar av EBS-innmarknaðinum.

Í einum **pengapolitiskum samveldi** (moneterari unión) verður farið enn longur. Eitt slíkt samstarv fevnir um samstarv um peningaskipanina í limalondum, grundað á felags gjaldoyra. Hugsanin er, at av tí at alt fíggjarligt samskifti millum londini fer fram við sama gjaldoyra, verður ótryggleikin í gjaldoyraviðurskiftunum beindur burtur.

Eitt **búskaparligt samveldi** er eitt pengapolitiskt samveldi har búskaparpolitikkurin hjá limalondunum er samskipaður. Eitt pengapolitiskt samveldi ber í sær, at londini halda somu kós í pengapolitikkinum. Eitt búskaparlig samveldi ber í sær, at fíggjarpolitikkurin verður samskipaður.

Fyritreytin fyri, at eitt búskaparligt samveldi skal virka til fulnar, er sostatt, at somu reglur og mannagongdir eru á skatta- og avgjaldøkinum, og at ásetingarnar fyri ymsum sløgum av almennum veitingum eru tær somu. Somuleiðis skal fíggjarpolitiska konjunkturstýringin vera felagsmál fyri øll limalondini. Umframt penga- og fíggjarpolitikk snýr ein búskaparlig samgonga seg eisini um felags samskipan av vinnupolitikkinum. Fyritreytirnar hjá vinnulívinum skulu vera tær somu allastaðni.

### 4.4 Aðalsáttmálin um toll og uttanríkishandil, GATT

Aðalsáttmálin um toll og uttanríkishandil "General Agreement on Tariffs and Trade" GATT var eitt av trimum fleirtjóða tiltøkum, ið vóru sett í verk beint eftir seinna heimsbardaga. Hinir báðir stovnarnir vóru Heimsbankin og IMF. Endamálið var at hjálpa til við at stýra heimsbúskapinum og at forða fyri, at farið varð aftur til proteksjónistiska politikkin í 1930-árunum.

GATT var upprunaliga ein partur av ST-stovninum ITO, International Trade Organization, ið ikki bert fevndi um handil, men eisini um m.a. arbeiðsmarkn-aðarviðurskifti, altjóða íløgur og tænastur. Hesin felagsskapur fekst tó ongantíð at virka, fyrst og fremst tí USA ikki vildi viðurkenna hann. Ætlanin varð tí slept, so meginpartin av eftirkrígstíðini var GATT einasta fleirtjóða stýringsamboðið í millumtjóða handli. Í 1995 varð GATT avloyst av "World Trade Organization" - WTO.

GATT hevur verið tað grundleggjandi regluverkið fyri millumtjóða handli í eftirkrígsárunum. Endamálið hjá GATT hevur verið at birta upp undir eina fríari og greiðari skipan í altjóða handli. GATT hevur havt ein týðandi lut í tí búskaparliga vøkstri, sum serliga londini í Vesturheiminum høvdu frá síðst í 1940-árunum og fram til fyrst í 1970-árunum. GATT var bert galdandi fyri handilin við ídnaðarvørum og fevndi ikki um tænastuhandil og altjóða kapitalstreymar.

GATT hevur verið karmurin um fleirtjóða samráðingar um handils-liberaliseringar og reglur fyri heimshandilin. Hetta hevur ført til, at nógvar handilsforðingar eru tiknar burtur. Samráðingarnar í GATT eru farnar fram í fleiri umførum. (sí talvu 4.1).

| Talva 4.1: GATT-umfør | |
|---|---|

| | |
|---|---|
| 1. Geneve | 1947 |
| 2. Annecy | 1949 |
| 3. Torqueray | 1951 |
| 4. Geneve | 1956 |
| 5. Dillon- umfarið | 1960-62 |
| 6. Kennedy-umfarið | 1963-67 |
| 7. Tokyo-umfarið | 1971-79 |
| 8. Uruguay-umfarið | 1986-94 |

Úrslitið av fyrsta samráðingarumfarinum var, at nógv av verjutiltøkunum, sum vórðu sett í verk eftir skrædlið í 1930-árunum, vórðu tikin burtur. Tey 23 londini, sum stovnsettu GATT, luttóku í hesum umfarinum. Tey fylgjandi umførini gjørdust fløktari og tóku longri tíð, fyrst og fremst, tí at fleiri lond gjørdust limir, og fleiri nýggj mál komu á dagsskránna. Tey sjey fyrstu umførini førdu tó samanumtikið við sær, at meðaltollurin á ídnaðarvørum minkaði úr góðum 40%, tá sáttmálin varð gjørdur, niður í eini 5% í 1990.

Umframt burturtøku av handilsforðingum, virkaði GATT eftir nøkrum meginreglum:

- ***Most-favoured-nation-reglan***. Øll lond skulu hava somu treytir fyri marknaðaratgongd, sum tað landið, ið hevur bestu treytirnar. Undantøkini eru fríhandilsøki og tollsamgongur. Í slíkum førum kundu handilsforðingar millum luttakandi londini takast burtur, men varðveitast mótvegis restini av heiminum. Harumframt kundu menningarlond fáa serligar sømdir. Tey kundu eitt nú nýta handilsforðingar í størri mun enn ídnaðarlondini.
- ***Stabilar eftirgevingar***. Eftirgevingar ella sersømdir veittar einum landi, serliga sum ásettir tollsatsir, kundu ikki takast aftur, uttan at landið fekk samsvarandi sømdir afturfyri.
- ***Reglan um natiónala viðgerð***. Útlendskar vørur skulu, eftir at tær eru komnar inn í landið, viðgerast eins og natiónalar vørur í sambandi við avgjøld og aðrar handilsatgerðir.
- ***Forboð móti innflutningskvotum***. Høvuðsreglan var forboð móti kvantitativum innflutningsforðingum. Sáttmálin hevði tó týdningarmikil undantøk, sum hann ikki fevndi um, eitt nú fyri landbúnaðarvørur.

Harumframt hevði GATT eina skipan fyri tveyparta-tingingar og loysn av trætum í handilsmálum.

**4.5 Uruguay-umfarið - frá GATT til WTO**
Fyrst í 1980-árunum versnaði støðan í heimshandlinum. Hetta komst serliga av, at nógv lond høvdu búskaparliga afturgongd, og nógvar smogur gjørdust sjónligar í GATT-skipanini. Fleiri lond settu í verk handilspolitisk tiltøk, sum lógu uttanfyri og vóru í stríð við meginreglurnar í GATT-sáttmálanum. Nógvastaðni varð ásannað, at menningin og gongdin í heimsbúskapinum er nær tengd at samanspælinum millum búskaparligan politikk, fíggjarpolitikk og handilspolitikk.

Tað var m.a. hetta, sum gjørdi, at fleiri lond hildu, at neyðugt varð at styrkja og víðka multilateralu skipanina fyri handli. GATT hevði ikki amboðini at byrgja fyri tí protektiónistiska rákinum, sum tók seg upp fyrst í 1980-árunum. Á fundi í Punta del Este í Uruguay í 1986 varð samtykt at fara undir áttanda samráðingarumfarið í GATT, tað sonevnda Uruguay-umfarið.

Høvuðsevnini og stevnumiðini í samtykta samráðingarupplegginum , ið verður nevnt "Punta del Este-yvirlýsingin", vóru hesi:

- **Vøruhandil**: Tollurin skuldi skerjast við einum triðingi, og aðrar handilsforðingar, sum ikki eru í galdandi avtalum, skuldu takast burtur.
- **Aðrar handilsforðingar:** Skuldu minkast og takast burtur.
- **Landbúnaður:** Almennur studningur til framleiðslu skuldi minkast,

og innflutningsverja takast burtur.
- **Íløgur:** Forðingar fyri útlendskum íløgum skuldu takast burtur.
- **Ognarrættur til andsverk**: Skipast skuldu altjóða reglur um verju av patentum, vørumerkjum og copyrights.
- **Tænastur:** Skipast skulu somu avtalur, sum eru galdandi fyri vøruhandilin.
- **Klædnavørur o.a.**: Galdandi útflutningsavmarkingar skuldu takast burtur, og handilin skipast undir vanligum GATT-skipanum.
- **Loysn av trætumálum**: Skipanin skuldi fáast at virka betri og skjótari.

Á dagsskránni fyri Uruguay-umfarið, vóru sostatt ikki bert spurningar um handil við vørum. Samráðingarnar fevndu eisini um tað alsamt vaksandi tænastuøkið, sum lá uttanfyri virkisøkið hjá táverandi GATT. Tænastur vóru miðskeiðis í 1980-árunum eini 20% av heimshandlinum.

Somuleiðis varð roynt at finna nøktandi skipanir í sambandi við ognarrætt til andsverk ella upphavsrættindi (intellectual property rights) fyri at byrgja fyri ikki loyvdari nýtslu av telduforritum, tónleiki, sjónbondum, urum o.a. Harumframt varð miðað eftir at fáa greiðari karmar fyri sambandið millum handil og onnur øki, eitt nú búskaparligan vøkstur og menning, eins og áhugamálini og serliga støðan hjá menningarlondum varð tikin við.

Upprunaliga settu partarnir sær fyri at fáa samráðingarnar lidnar í desember 1990. Hetta eydnaðist ikki, og eitt skifti tóktist naggatódn at koma í. 117 lond við eini ørgrynnu av mótstríðandi sjónarmiðum og áhugamálum luttóku í samráðingunum, og longu frá byrjan varð roknað við, at landbúnaðarsam-ráðingarnar fóru at gerast tað stóra stríðsmálið. Semja á landbúnaðarøkinum var ein fyritreyt fyri avtalum á øðrum økjum.

Hóast samráðingarnar vóru truplar, varð roynt at halda lív í teimum. Í desember 1993 eydnaðist at koma fram til semju, ið varð fest á blað í 29 sjálvstøðugum lógartekstum, sum fevndu um allar tættir í samráðingunum, umframt 25 yvirlýsingar. "The Final Act Embodying the Results of the Uruguay Round of Multilateral Trade Negotiations", sum er almenna heitið á úrslitinum av Uruguay-umfarinum, varð undirskrivað í Marrakesh í Marokko 15. apríl 1994.

Semjan bar í sær, at World Trade Organization, WTO, varð stovnað og avloysti gomlu GATT-skipanina 1. januar 1995. Grundarlagið undir stovnanini og virkseminum hjá WTO er GATT-sáttmálin við teimum broytingum, sum avtalur og skipanir, ið komið varð ásamt um undir Uruguay-umfarinum, høvdu við sær. (sí mynd 4.3).

WTO er nógv meira víðfevnt enn GATT. Skipanin fevnir ikki bert um handil við vørum, men eisini tænastur og upphavsrætt. WTO hevur eisini rúmari heimildir og virkar á jøvnum føti við IMF og Heimsbankan. Sum stovnur var GATT sera lítil, og nógvar av ásetingunum og skipanunum vóru bert fyribils. GATT var í roynd og veru eingin stovnur, men bert karmurin um altjóða samráðingar um handilslættar.

GATT hevði eisini avmarkaðar heimildir. Í GATT-skipanini kundi eitt land t.d. fella eina avgerð, tikin av einum av sonevndu kanningarpanelunum í einum handilstrætumáli. Hetta kundi viðkomandi land eisini gera, um tað var partur í málinum.

Hetta er bøtt um í WTO, ið er at rokna sum ein veruligur fleirtjóða stovnur.

### 4.6 Høvuðstættirnir í WTO

WTO er einasti altjóða stovnur, sum hevur altjóða handil sum virkisøki og umsitur reglur fyri handlinum millum lond. Á mynd 4.2 er bygnaðurin í WTO vístur.

#### 4.6.1 Skipan og endamál

Evsti myndugleiki í WTO er "Ministerial Conference", ið kemur saman í minsta lagi annaðhvørt ár. "General Council" hevur regluligt eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálanum og samtyktirnar hjá ráðharrunum verða fylgdar. "General Council" virkar bæði sum "Dispute Settlement Body" og sum "Trade Policy Review Mechanism", ið taka sær av øllum handilsmálum undir GATT-skipanini. Undir sær hevur "General Council" sett á stovn "Goods Council", "Services Council" og "TRIPs Council."

WTO hevur høvuðssæti í Geneve, og árliga fíggjarætlanin er góðar 80 mió. dollarar.

Endamálini við WTO-sáttmálunum eru trý:

At fáa so frælsan handil sum gjørligt.

At fáa í lag stigvísa liberalisering við framhaldandi samráðingum.
At fáa eina óvilduga skipan til loysn av handilstrætum millum lond.

Eins og í gamla GATT-sáttmálanum ganga nakrar grundleggjandi meginreglur aftur í øllum WTO-sáttmálunum: Ikki-diskriminering - "most-favoured-nation" - viðgerð og "nation" - viðgerð, frælsari handil, greiðar og frammanundan kendar handilsreglur at birta upp undir kapping, og at serlig fyrilit skulu takast fyri menningarlondum.




Mynd 4.2.

WTO-sáttmálarnir fevna sum nevnt um vørur, tænastur og upphavsrættindi. Teir áseta meginreglurnar fyri liberalisering, og hvørji undantøk eru loyvd. Teir áleggja londunum skyldur um at lækka toll, at fáa burtur handils-forðingar og at lata upp og framhaldandi hava opnan marknað fyri tænastur.

Sáttmálarnir áseta reglur og mannagongdir tá handilstrætur skulu loysast, og geva menningarlondum serligar sømdir. Reglurnar áseta eisini, at stjórnirnar skulu gera sín handilspolitikk gjøgnumskygdan við at boða WTO frá galdandi reglum, og hvørji tiltøk verða sett í verk.

Innihaldsyvirlitið í "The Results of the Uruguay Round of Multilateral Trade Negotiations: The Legal Texts", vísir ein rúgvismiklan lista við 60 avtalum, ískoytum, avgerðum og yvirlýsingum. Í mynd 4.3 er yvirlit, ið lýsir bygnaðin í sáttmálunum, sum undir einum verða nevndir WTO-sáttmálin.

| Mynd 4.3: Yvirlit yvir bygnaðin í WTO-sáttmálunum | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | *Vørur* | *Tænastur* | *Upphavsrættindi* | *Trætumál* |
| *Grundreglur* | **GATT 1994**<br>General<br><br>Agreement on<br>Tariffs and Trade | **GATS**<br>General<br><br>Agreement on<br>Trade in Services | **TRIPS**<br>Agreement on<br>Trade-Related<br>Aspect of<br>Intellectual Property<br>Rights | **Skipan at loysa trætumál** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *Staklutir og eykasáttmálar* | Aðrar avtalur og ískoyti um vørur | Ískoyti viðvíkjandi tænastum | | |
| *Bindingar viðv. marknaðar-atgongd* | Yvirlit yvir bindingar hjá einstøkum londum | Yvirlit yvir bindingar hjá einstøkum londum | | |
| | | | | |

WTO-sáttmálin er settur saman av fleiri sáttmálum: Handil við vørum (GATT 1994), handil við tænastum (GATS) og ognarrætt í sambandi við handil við andsverkum (TRIPS). Undir hesum eru fleiri sáttmálar, sum snúgva seg um serlig evni og viðurskifti. Harumframt eru sonevndir plurilateralir sáttmálar, ið eru sáttmálar millum eitt avmarkað tal av londum, og sum bert eru galdandi fyri tey londini, sum hava undirskrivað sáttmálan. T.d. kunnu nevnast sáttmáli um reglur í sambandi við almenn keyp av vørum og tænastum og sáttmáli um sivila loftferðslu. Heitið WTO-sáttmálin er tí eitt felagsheiti fyri allar sáttmálarnar.

Avtalurnar um tey tvey størstu handilsøkini - vørur og tænastur - hava felags høvuðseyðkenni, hóast tær í summum smálutum eru rættuliga ólíkar:

- WTO-sáttmálarnir byrja við breiðum grundreglum fyri GATT-vørur og GATS-tænastur. TRIPS-sáttmálin verður eisini flokkaður her, hóast eingir partar eru lagdir afturat.
- Síðani koma eykasáttmálarnir og ískoyti, sum fevna um serligar treytir fyri ávísar sektorar ella málsøki.
- At enda koma drúgvir listar við bindingum hjá einstøkum londum um at loyva serligum útlendskum vørum ella tænastuveitarum atgongd til sínar marknaðir. Í GATT er vanliga talan um bindingar um toll á vørum yvirhøvur og samanseting av tolli og kvotum fyri ávísar landbúnaðarvørur. Í GATS snúgva bindingarnar seg vanliga um, í hvønn mun útlendskir tænastuveitarar hava atgongd til ávísar sektorar. Har eru eisini listar við ymiskum sløgum av tænastum, har meginreglan um "most-favoured-nation" ikki verður nýtt.

Meginparturin av samráðingunum í Uruguay-umfarinum snúði seg um teir báðar fyrstu partarnar: Grundreglur og meginreglur fyri ávísar sektorar. Samstundis vóru samráðingar um marknaðaratgongd fyri ídnaðarvørur. Tá meginreglurnar í hesum vóru greiddar, varð farið undir onnur øki, eitt nú landbúnað og tænastur.

Tær samráðingar, sum hava verið eftir Uruguay-umfarið, hava yvirhøvur snúð seg um bindingar í sambandi við marknaðaratgongd fyri fíggjartænastur, telesamskifti, sjóvegis flutning undir GATS og kunningartøkni undir GATT.

Tveir aðrir bólkar av sáttmálum, sum eisini eru týdningarmiklir, eru ikki tiknir við í yvirlitinum í mynd 4.3. Hetta eru sáttmálin um endurskoðan av handilspolitikki og teir fýra sonevndu "plurilateralu" sáttmálarnir, sum bert fá lond hava undirskrivað. Hesir snúgva seg um sivila flogferðsla, almenn keyp, mjólkaúrdráttir og kjøt.

Í hesum sambandi verður ikki farið í smálutir við úrslitinum av Uruguay-umfarinum og WTO, men niðanfyri verða lýst nøkur øki, sum nevndin heldur hava størsta handilsliga týdning fyri Føroyar. Nøkur øki í WTO verða eisini nærri umrødd í sambandi við lýsingina av EBS-skipanini í kapittul 9.

### 4.6.2 Tollur

Rúgvismesti parturin av úrslitinum av Uruguay-umfarinum eru tær umleið 22.500 síðurnar við listum yvir einstøk lond og tær skyldur, tey hava viðvíkjandi ávísum sløgum av vørum og tænastum. Hesar skyldur fevna í høvuðsheitum um at lækka og "læsa" tollsatsir á innfluttum vørum og tænastum.

Talan er ikki um nakra einstaka bindandi avtalu, sum ásetir karmarnar fyri tolllækkingunum ella ásetir prosentsatsir fyri, hvussu nógv tollurin skal lækka. Heldur er talan um bindingar og treytir fyri einstøk lond, sum eru festar á blað í serskiltum ískoytum til "Marrakesh Protocol to the General Agreement on Tariffs and Trade 1994". Hesi skjøl eru juridisk bindandi avtalur um

tolllækkingar.

Partarnir settu sær fyri at minka um allar tollforðingar við einum triðingi innan fimm ár frá 1. januar 1995 at rokna. Úrslitið gjørdist kortini, at tey størstu ídnaðarlondini í heiminum samdust um enn størri niðurskurð.

Tollur á øllum ídnaðarvørum verður lækkaður við 40%, úr í meðal 6,3% niður í 3,8%. Nøgdirnar av innfluttum ídnaðarvørum, sum ikki skulu tollavgreiðast í ídnaðarlondunum, fara úr 20% uppí 40%. Í ES lækkar tollurin úr 6,8 niður í 4,1%, og í USA úr 6,6 niður í 3,4%.

Somuleiðis verða færri vørur álagdar ein høgan toll. Parturin av innflutninginum hjá ídnaðarlondunum, sum hevur toll omanfyri 15%, minkar úr 7% niður í 5%. Parturin av útflutninginum hjá menningarlondum, sum verður álagdur toll omanfyri 15% í ídnaðarlondunum, minkar úr 9% niður í 5%.

Á summum økjum og fyri summar vørur hava tey stóru ídnaðarlondini lækkað toll niður í null, meðan menningarlond hava gjørt munandi niðurskurð fyri somu vørubólkar. Vørurnar, talan er um, eru bygging og landbúnaðarútgerð, stál, bjór, heilivágur, læknaútbúnaður, leikur, pappír, innbúgv og destillerað spritt. Hesar vørur hava stóran týdning fyri búskapin og útvega nógv arbeiðspláss.

Sum nevnt aðrastaðni hildu samráðingarnar um toll og marknaðaratgongd fram eftir Uruguay-umfarið. Sum dømi kann nevnast, at 26. mars 1997 samdust 40 lond at taka burtur allan innflutningstoll og onnur gjøld á útgerð til kunningartøkni fyri ár 2000. Fyri nøkur lond er freistin tó sett til 2005. Hesi lond standa fyri meira enn 92% av heimshandlinum av hesum vørum.

Eins og í øðrum tollspurningum eigur hvørt av teimum luttakandi londunum at geva útflutningi úr øllum WTO-londum somu viðgerð eftir "most-favoured-nation" regluni, eisini úr limalondum, sum ikki hava átikið sær somu skyldur.

#### 4.6.3 Tænastur

Aðalsáttmálin um handil við tænastum "The General Agreement on Trade in Services", sum er partur av WTO-sáttmálanum, er skipaður í tríggjar høvuðspartar. Tann fyrsti er rammuavtalan við ásetingum og skyldum fyri øll limalondini. Annar partur snýr seg um bindingar hjá einstøkum londum um framhaldandi liberaliseringar, og tann triði er ein hópur av ískoytum um serstøðu hjá einstøkum tænastusektorum og londum.

Tá sáttmálin varð undirskrivaður, vóru stevnumiðini eisini sett fyri tey øki, sum ikki var komið á mál við, tá Uruguay-umfarið endaði. Hetta er m.a. galdandi fyri fíggjartænastur, fjarskifti og farma- og ferðafólkaflutning.

Í sambandi við fjarskiftistænastur kann nevnast, at 15. februar 1997 komu limalondini ásamt um ein sáttmála, sum ber í sær fríari marknaðaratgongd fyri nógvar teletænastur.

Sáttmálin kom í gildi 1. januar 1998. Hetta er samstundis fyrstu ferð, at bindandi reglur eru gjørdar fyri marknaðaratgongd fyri teletænastur. 68 av teimum 127 limalondunum í WTO hava longu latið marknaðin upp fyri øðrum WTO-londum, samstundis sum tey hava bundið seg til ikki at seta nýggjar avmarkingar í verk. Hesi lond standa fyri meira enn 90% av umsetninginum í heimshandlinum við teletænastum.

GATS ásetir reglur fyri allar tænastusektorar. Á nógvum økjum er slóðað fyri, so komandi samráðingar um greiðari og rættvísari handil við tænastum gerast lættari. Møguleikar eru eisini at forða fyri, at lógarkarmarnir fyri tænastusektorinum í einum landi føra við sær órættvísa kapping. Serligan týdning hevur tað, at sáttmálin í høvuðsheitum er grundaður á "most-favoured-nation" regluna.

GATS lættir munandi um hjá útflytarum av tænastum, tá teir skulu kunna seg um, hvørji rættindi teir hava í øðrum limalondum.

#### 4.6.4 Almennur stuðul og útjavningartiltøk

Sáttmálin um almennan studning og útjavningartiltøk "Agreement on Subsidies and Countervailing Measures" hevur tvinnar uppgávur. Hann hevur ásetingar um nýtslu av almennum studningi og ásetingar um, hvørjar atgerðir lond kunnu seta í verk fyri at verja seg ímóti óhepnum avleiðingum av studningi.

Sáttmálin gevur londunum møguleika at nýta skipanina hjá WTO til at loysa trætumál, at fáa studningin burtur ella at fáa óhepnu avleiðingarnar av studninginum burtur. Eisini kann landið

seta í verk sínar egnu kanningar og síðani áleggja eykatoll ella útjavningartoll á innfluttar vørur, ið fáa studning, og sum eru innlendis framleiðarum til skaða.

Nýggi sáttmálin hevur eisini eina allýsing av almennum studningi. Studningur er allar fíggjarligar veitingar frá landinum, so sum ískoyti, lán, stuðul til rakstrarhall, skattafyrimunir og aðrar almennar veitingar.

Við nýggja sáttmálanum er eisini komið hugtakið "serligur" studningur. Hetta er góðkendur studningur, sum bert verður veittur einari fyritøku, vinnugrein, bólki av fyritøkum ella fleiri vinnugreinum. Reglurnar í sáttmálanum eru bert galdandi fyri "serligan" studning. Hann kann vera veittur innlendis ella sum útflutningsstudningur.

Sambært sáttmálanum um almennan studning og útjavningartiltøk verður studningur býttur í tríggjar høvuðsbólkar: Ikki loyvdur studningur, studningur, har móttiltøk kunnu setast í verk, og studningur, har móttiltøk ikki kunnu setast í verk. Hetta verður serliga brúkt í sambandi við landbúnaðarvørur og ídnaðarvørur. Tó er undantikin studningur, sum er í samsvari við landbúnaðarsáttmálan.

***Ikki loyvdur studningur*** ("prohibited subsidies").
Her er talan um studning fyri at røkka ávísum útflutningsmálum ella at fáa fólk at brúka innlendis framleiddar vørur ístaðin fyri innfluttar vørur. Hesin studningur er ikki loyvdur, tí hann avskeplar altjóða handil og kann hava skaðiligt árin á handilin hjá øðrum londum.

Mál um tílíkan studning kunnu leggjast fyri WTO-skipanina til støðutakan. Kemur WTO eftir, at studningurin er ikki loyvdur, eigur hann at takast av alt fyri eitt. Annars kann landið, ið sendur klagu til WTO, seta í verk móttiltøk. Um tað eitt nú vísir seg, at innflutningur av studningsvørum er innlendis vinnulívi og framleiðarum til skaða, kann útjavningartollur áleggjast.

***Studningur, har móttiltøk kunnu setast í verk*** ("actionable subsidies"):
Í hesum bólki áliggur tað tí landi, ið reisir eina kæru, at prógva, at studningurin hevur óhepnar avleiðingar og skaðar áhugamálini hjá viðkomandi landi. Annars er studningurin loyvdur.

Sáttmálin nevndir trý sløg av skaðum, sum studningurin kann hava við sær. Studningsveitingar hjá einum landi kunnu hava skaðilig árin á heimaídnaðin í landinum, sum innflytir vøruna. Studningurin kann skaða útflytarar úr øðrum londum, sum kappast á sama marknaði í einum triðja- landi. Studningur í einum landi kann somuleiðis skaða útflytarar, sum royna at kappast á heimamarknaðinum hjá landinum, sum veitir studning.

Nevnast kann í hesum sambandi, at sambært nýggja sáttmálanum verður roknað við, at skaði er elvdur vinnugrein í øðrum landi, um samlaði studningurin til eina vøru liggur omanfyri 5% av virðinum.

Um "Dispute Settlement Body" í WTO ger úrskurð um, at studningurin hevur óheppin og skaðilig árin, eigur studningurin at verða settur úr gildi, ella óhepnu avleiðingarnar av honum fyribyrgdar. Eisini kann útjavningar-tollur áleggjast, um innfluttar vørur við studningi hava skaðiligt árin á heimaídnaðin.

***Studningur, har móttiltøk ikki kunnu setast í verk*** ("non-actionable subsidies").
Hesin studningur kann annaðhvørt verða studningur, sum ikki er serligur, ella serligur studningur veittur til vinnugransking, menningarstuðul, stuðul til landspartar, sum eru illa fyri, ella studningur til at laga seg til nýggj umhvørviskrøv, treytað av, at stuðul bert verður veittur einaferð og er avmarkaður til 20% av kostnaðinum.

Mál í sambandi við henda bólkin av studningi kunnu ikki leggjast fyri WTO, og útjavningartollur kann ikki áleggjast innflutningi, sum fær studning í heimlandininum. Studningurin skal fylgja ávísum treytum, sum skulu vera góðkendar frammanundan av studningsnevndini í WTO.

Samstundis, sum roynt verður at fáa betur tamarhald á almennum studningi til vinnulívið, hevur sáttmálin um studning og útjavningartiltøk strangari reglur um útjavningartoll. Krøvini eru munandi herd samanborið við undanfarna sáttmála.

Útjavningartollur, sum hevur nógv til felags við anti-dumpingartoll, kann bert áleggjast, um

innflytandi landið hevur gjørt nágreiniligar kanningar í málinum, eins og tað verður kravt í sambandi við anti-dumpingar tiltøk. Nágreiniligar reglur eru fyri, hvussu tað skal staðfestast, at ein vøra fær almennan studning. Millum annað er ein rættiliga fløktur rokniháttur.

Somuleiðis eru nágreiniligar treytir fyri, hvussu tað skal avgerast, um innflutningur av vørum, sum fær studning, hevur skaðiligt árin á heimaídnaðin. Harumframt eru reglur um mannagongdir, tá farast skal undir at kanna viðurskiftini. Eisini eru reglur um, hvussu útjavningartiltøkini skulu setast í verk, og hvussu leingi tey kunnu vera í gildi. Vanliga eru tey avmarkað til fimm ár. Ein, sum útflytir vørur við studningi, kann eisini gera semju um at hækka útflutningsprísirnar, so tað slepst undan, at útjavningartollur verður álagdur.

Almennur studningur hevur mangan stóran týdning í menningarlondum og í sambandi við skifti frá planbúskapi til marknaðarbúskap. Sera lítið á leið komin lond og menningarlond, sum hava niðanfyri 1000$ í BTÚ fyri hvønn íbúgva, eru undantikin ásetingunum um útflutningsstuðul.

Onnur menningarlond skulu sleppa sær av við útflutningsstudningin fyri ár 2003. Sera á lítið leið komin lond, skulu sleppa sær av við øll sløg av útflutnings-stuðlandi studningi fyri ár 2003. Fyri onnur menningarlond er evstamarkið 2000. Menningarlond fáa eisini serviðgerð, um teirra útflutningur verður kannaður í sambandi við útjavningargjøld. Fyri lond, sum eru við at laga seg til marknaðarbúskap, skal allur ikki loyvdur studningur verða tikin burtur fyri ár 2002.

Sáttmálin um studning og javningargjøld er galdandi fyri øll londini í WTO.

**4.6.5 Anti-dumping**

Tá ein fyritøka útflytur eina vøru fyri ein prís, sum er niðanfyri prísin, ið vanliga fæst fyri vøruna á heimamarknaðinum, tosa vit um dumping av vøruni. Um hetta er óreiðilig kapping ella kappingaravlagandi, eru øll ikki á einum máli um, men tað er ikki ókent, at nógv lond seta tiltøk í verk ímóti dumping fyri at verja heimaídnaðin.

WTO-sáttmálin tekur ikki dagar ímillum, men hevur ásetingar um, hvørjar reglur galda, tá anti-dumpingaratgerðir verða settar í verk. Tí verður sáttmálin ofta nevndur "Anti-dumpingarsáttmálin". Formliga navnið er "Agreement on the implemention of Article VI of the General Agreement on Tariffs and Trade 1994"

Nýggi sáttmálin um anti-dumping hevur reglur um áseting av normalprísi og krøv um, at tað skal kunna ávísast greiður samanhangur millum dumping og tann skaða, hetta hevur fyri heimaídnaðin. Neyvar lýsingar av skaðanum skulu ikki verða grundaðar á gitingar, men nærri ásettar fíggjarligar fyritreytir.

Sáttmálin um anti-dumping hevur reglur um íverksetan av kanningum í sambandi við anti-dumping. Myndugleikarnir í einstøku londunum hava ábyrgdina av at ansa eftir, at áheitanir um nærri kanning fylgja ásettum krøvum. Allir partar í málinum skulu hava møguleika fyri at leggja síni sjónarmið fram. Hetta er eisini galdandi fyri brúkarafelagsskapir. Reglurnar um bráfeingis tiltøk, prískrøv, og hvussu leingi anti-dumpingar tiltøkini kunnu vera í gildi, eru somuleiðis herdar.

Sambært grein VI í GATT-sáttmálanum, kann eitt land seta anti-dumpingar tiltøk í verk móti eini vøru, sum verður innflutt fyri ein prís, sum liggur niðanfyri "normalan" prís fyri vøruna, um so er, at innflutningurin er innlendis vinnu til skaða.

Ein týdningarmikil táttur í nýggja sáttmálanum um anti-dumping er, at hann er galdandi fyri øll limalondini í WTO, samanborið við gamla sáttmálan, sum bert hevði undirtøku frá 25 londum.

**4.6.6 Landbúnaðarvørur**

Gamli GATT-sáttmálin var ikki galdandi fyri handil við landbúnaðarvørum. Hetta gjørdi sítt til, at millumtjóða handilin við landbúnaðarvørum var rættuliga avskeplaður. Ein høvuðsorsøkin til trupulleikarnar í heimshandlinum við landbúnaðarvørum, var tann stóra nýtslan av almennum stuðli, serliga útflutningsstuðli.

Stuðul til útflutning úr ídnaðarlondum troðkaði vørur úr menningar-londunum burtur av heimsmarknaðinum, og harvið mistu tey týdningarmiklar útflutningsinntøkur. Landbúnaðarsemjan á Uruguay-umfarinum er eitt týdningarmikið stig á leiðini at fáa greiðari reglur á hesum øki. Sum frá líður skuldi hetta birt upp undir javna kapping og ført til, at landbúnaðurin verður ein minni avskeplað vinna.

Landbúnaðarsamráðingarnar endaðu við eini semju, sum nam við nakrar partar av WTO-sáttmálunum: Sjálvan landbúnaðarsáttmálan, eftirgevingar og skyldur hjá londunum viðvíkjandi marknaðaratgongd fyri landbúnaðarvørur, innlendis studning og útflutningsstuðul, sáttmálan um

heilsufrøðilig viðurskifti og niðurstøðuna viðvíkjandi lítið á leið komnum londum og menningarlondum, ið eru nettoinnflytarar av matvørum.

Fyri landbúnaðarvørur førdi WTO-sáttmálin við sær, at skipanin fyri millumtjóða handil varð broytt soleiðis, at tann innflutningsverja, sum hevði verið við kvotu- og loyvisskipanum var skift út við verjuskipanir, ið vórðu grundaðar á tollsatsir.

Í sáttmálanum eru ásetingar um, hvørji tollgjøld londini kunnu nýta, og ásetingar um, at tollgjøld skulu minka stigvíst fram ímóti ár 2000. Hetta hevur við sær, at allir tollsatsir, bæði teir, sum vóru galdandi, og teir sum vóru settir, skulu lækka við 36% í miðal innan seks ár. Minstamark fyri lækking á einari vøru er 15%.

Í landbúnaðarpartinum verða hugtøkini *verandi marknaðaratgongd* og *minsta marknaðaratgongd* nýtt. Verandi marknaðaratgongd verður varðveitt á sama stigi sum í 3 ára basis tíðarskeiðnum frá 1986 til 1988. Minsta marknaðaratgongd verður nýtt í sambandi við vørur, har eingin innflutningur hevur verið ella innflutningur hevur verið niðanfyri 5% av innlendis nýtsluni í basistíðarskeiðnum. Í hesum førum skulu tollkvotur setast í verk, tvs. lægri tollsatsir.

Í WTO-sáttmálanum um landbúnað eru eisini reglur um almennan stuðul til landbúnaðin. Sáttmálin setir samlað mát fyri stuðli (AMS) fyri at kunna rokna niðurskurðin í almennum stuðli. Hesin skal lækkast við 20% innan seks ár og síðani frystast fastur á hesari leguni. Hetta verður nevnt "gulur" stuðul.

Einstøk sløg av stuðli kunnu kortini halda fram. Hesin verður nevndur "bláur" stuðul, og er talan vanliga um beinleiðis útgjaldingar innan ávísar avmarkaðar verkætlanir, sum eru grundaðar á ávís øki, aling, ella eitt ávíst tal av dýrum.

Stuðul, sum hevur lítla ella onga ávirkan á handil, verður nevndur "grønur" stuðul. Henda stuðul hava londini ikki skyldu til at skerja. Her er t.d. talan um stuðul til umhvørvi, útjaðarar, beinleiðis inntøkustuðul, stuðul til gransking, matvørugoymslur og kreppuhjálp.

WTO-sáttmálin hevur eisini ásetingar um, hvussu útflutningsstuðul kann brúkast. Tann nógvi útflutningsstuðulin er ein av høvuðsorsøkunum til trupulleikarnar í altjóða handli við landbúnaðarvørum. Sambært sáttmálanum skal útflutningstuðulin skerjast við 36% innan seks ár. Samstundis skulu nøgdirnar, sum vera útfluttar við stuðli, minkast við 21%. Serligar reglur eru eisini fyri matvøruhjálp. Endamálið er at forða fyri, at henda hjálp verður brúkt til at smoyggja sær uttanum reglurnar viðvíkjandi útflutningsstuðli.

Samanumtikið setir úrslitið av samráðingunum karmarnar fyri broytingum í handlinum við landbúnaðarvørur, og hvørjar reglur londini kunnu seta í verk í komandi árum. Samráðingarúrslitið er eitt stórt stig fram ímóti málinum um at skipa handilin við landbúnaðarvørum eftir marknaðartreytum. Reglurnar fyri handilin eru herdar. Hetta skuldi gjørt sítt til, at støðugari handilsumstøður fáast, og at handilin fer fram eftir reglum, sum eru kendar frammanundan.

### 4.6.7 Sáttmálin um heilsufrøðilig viðurskifti o.a. - SPS-sáttmálin

Heilsufrøðiligar ásetingar verða mangan nýttar at ávirka og stýra innflutningi av vørum. Hetta verður vanliga gjørt fyri at verja heilsuna hjá fólki, dýrum og plantum. Tvídráttur stingur seg ofta upp, tí slíkar ásetingar verða mettar sum handilsforðing. SPS-sáttmálin undir GATT í WTO snýr seg um at loysa trætur millum verndar- og handilsáhugamál.

Hetta málsøkið varð tikið upp í samráðingunum í Uruguay-umfarinum, tí heilsufrøðiligar ásetingar vóru vorðnar ein støðugt størri handilsforðing. Altjóða reglurnar, sum vóru galdandi á hesum øki, góvu londunum lítið at halda um.

SPS er stytting fyri "Agreement on Application of Sanitary and Phytosanitary Measures". Endamálið við sáttmálanum er at fáa skipaði viðurskifti viðvíkjandi handilstreytum, sum verða settar í sambandi við heilsuna hjá fólki, djórum og plantum. Í sambandi við matvørur er tað serliga fyrilitini fyri heilsuni hjá fólki, sum hava týdning.

SPS-sáttmálin eggjar londunum at fylgja altjóða fyrisettum mátum, reglum og tilmælum um heilsufrøðilig viðurskifti. Sáttmálin staðfestir kortini, at londini sjálvi kunnu avgera, hvussu stóran vanda tey góðtaka. Londini kunnu sostatt hava strangari reglur enn ásett er í altjóða felagsskapum. Tað trygdarstig, sum verður valt, eigur tó at nýtast eins mótvegis øllum pørtum. Eitt nú ber ikki til ógrundað at seta ólík krøv til innlendskar og innfluttar vørur.

Ein annar sáttmáli, sum eisini hevur týdning í hesum samanhangi, er "Agreement on Technical

Barriers to Trade" - TBF-sáttmálin, ið snýr seg um tekniskar handilsforðingar. Hesin sáttmáli er galdandi fyri viðurskifti, ið ikki eru tikin við í SPS-sáttmálanum. Viðvíkjandi matvørum og heilsufrøðiligum krøvum, snýr hesin sáttmálin seg um reglur sum merking, brúkaraverju og tílíkt.

Í báðum sáttmálunum gongur aftur, at eru altjóða fyrisett mát á viðkomandi øki, eiga hesi at vera støði undir natiónalum reglum á økinum.

Í hesum umfari verður ikki gjørt so nógv burtur úr ásetingum um heilsufrøðilig viðurskifti í WTO-skipanini. Nevndin heldur, at hesir spurningar hava og fara at hava so stóran týdning í sambandi við altjóða handil við matvørum, at teir verða umrøddir fyri seg í kapittul 12.

**4.6.8 Tekniskar handilsforðingar**

Tekniskar handilsforðingar eru vanliga eitt úrslit av, at lógir, forskriftir og fyrisett mát eru ymisk frá landi til land. Hetta førir við sær ólík vørukrøv og ólíkar góðkenningar- og eftirlitsskipanir í sambandi við vøruhandil. Hetta kann avmarka handilin landanna millum. Tekniskar handilsforðingar kunnu standast av, at londini seta ólík krøv til marknaðarføring, skjalaprógv og merking, vantandi góðkenning av heilsuroyndum umframt drúgva og kostnaðarmikla málsviðgerð.

Úrslitið av Uruguay-umfarinum var, at greiðari reglur og mannagongdir fingust fyri tekniskar handilsforðingar ella "non-tariff barriers" - NTB. Hesin sáttmálin er ein víðkað og greiðari útgáva av "Agreement on Technical Barriers to Trade", sum GATT-londini komu ásamt um í Tokyo-umfarinum (1971-1979).

Við sáttmálanum verður miðað eftir, at fyrisett teknisk mát, avgreiðsla við landamørk, og mannagongdir í sambandi við royndir og lóggilding, ikki føra við sær óneyðugar forðingar fyri millumtjóða handil.

Endamálið við hesum broytingum er at tryggja, at upplýsingar um krøv o.a. eru tøkar at minka um pappírsarbeiðið og at tryggja, at skjøl verða avgreidd skjótari. Sáttmálin góðkennir kortini, at londini kunnu seta í verk verjutiltøk, sum tey halda vera hóskandi, eitt nú fyri at verja fólka-, djóra- og plantulív. Sáttmálin leggur upp til, at londini skulu nýta altjóða fyrisett mát, har hesi eru hóskandi, men krevur ikki, at londini skulu broyta innihaldið í verjutiltøkunum sum avleiðing av altjóða standardiseringum.

**4.6.9 Upphavsrættindi**

Semjan um immateriell rættindi "Agreement on Trade-Related Aspects of Intellectual Property Rights" er eitt nýtt øki í GATT-høpi. TRIPS-sáttmálin gevur munandi betri verju av upphavsrættindum sum eitt nú vørumerkjum, geografiskum vøruheitum, patentum, copyrights og øðrum.

Nýggja WTO-skipanin, til at loysa handilstrætumál landanna millum, er eisini galdandi fyri TRIPS-sáttmálan.

Lagt var upp til, at ídnaðarlondini skuldu seta TRIPS-sáttmálan í verk innan 1996, meðan onnur lond hava fingið eina longri skiftistíð. Menningarlondini hava fingið fimm ár, og tey stytst á leið komnu londini fáa 11 ár til at gera neyðugu rættarligu og bygnaðarligu broytingarnar.

Í sáttmálanum eru kortini onkur undantøk, eitt nú um skráseting av patentrættindum. Spurningurin um patent var nógv tann torførasti parturin av samráðingunum, men úrslitið varð, at veitt verður í minsta lagi 20 ára patentvernd. Menningarlondini fáa longri skiftistíð.

TRIPS-sáttmálin er ein neyðug víðkan av GATT-skipanini. Semja er fingin um stevnumið, sum hava týdning fyri uttanríkishandilin hjá flestu londum. Fyrst og fremst tí nú eru ásettir standardir, reglur fyri ídnaðarlig mynstur o.a., sum hevur serligan týdning fyri vørur sum uttan loyvi verða kopieraðar á útflutningsmarknaðunum.

**4.6.10 Almenn keyp**

Samstundis, sum samráðingarnar í Uruguay-umfarinum fóru fram, vóru samráðingar um nýggjan, víðkaðan og bøttan GATT-sáttmála um almenn keyp. Í hesum samráðingunum luttóku Eysturríki, Finnland, Hong Kong, Ísrael, Japan, Kanada, Singapore, Sveis, Svøríki, Suður-Korea, USA og ES vegna limalondini. Sáttmálin, sum kom í gildi 1. januar 1996, er ein av teimum sonevndu plurilateralu sáttmálunum í GATT.

Samanborið við undanfarna GATT-sáttmála frá 1988 um almenn keyp, ber nýggi sáttmálin í sær, at skipanin er munandi víðkað. Sáttmálin hevur ásetingar um størri almenn keyp. Hetta er galdandi bæði sentralt, regiónalt og lokalt, og fevnir eisini um fyritøkur og stovnar hjá tí almenna,

sum ikki hava handilsligt og vinnuligt endamál. Nýggi sáttmálin fevnir samanborið við 1988-sáttmálan ikki bert um vørukeyp, men eisini um at útvega tænastur og sáttmálar um bygging o.a., sum eru omanfyri eina ávísa upphædd.

Sáttmálin hevur nágreiniligar reglur um mannagongdir í sambandi við útbjóðing, nýtslu av tekniskum spesifikatiónum í útbjóðingarlýsingum, treytir um førleika hjá veitarum, lýsing av útbjóðingum, tíðarfreistir fyri tilboðum og veiting, innihaldinum í útbjóðingarskjølum, framløgu, móttøku og upplating av tilboðum, umframt tilluting av sáttmálum og kunning um tilluting av sáttmálum.

Í sambandi við reglur um almenn keyp, kann nevnast, at í EBS-sáttmálanum eru reglur, sum eru víðfevndari, enn GATT-sáttmálin leggur upp til. Eitt nú áleggja EBS-reglurnar Noregi fleiri skyldur enn GATT-sáttmálin um almenn keyp. EBS fevnir eisini um alt orkuøkið og telesamskiftisøkið.

**4.6.11 Loysn av trætumálum**

Ein týðandi leiklutur hjá WTO verður at umsita nýggju skipanina at loysa handilstrætumál millum limalondini. GATT-umfarið førdi við sær munandi batar í hesi skipan, sum nú er greiðari og effektivari.

Í hesum umfari verður ikki farið í smálutir við mannagongdini, tá handilstrætumál skulu loysast millum limalondini í WTO. Kortini skal nevnast, at vanliga verður roknað við, at trý sløg av trætumálum kunnu stinga seg upp.

Í fyrsta lagi kunnu trætur taka seg upp um, hvussu sáttmálateksturin skal tulkast ella brúkast, eitt nú um, hvørjar avgerðir stovnar í WTO hava heimild at taka.

Í øðrum lagi kann talan vera um sonevndar "violent complaints". Hesi mál snúgva seg vanliga um, at eitt limaland heldur, at ein verandi ella ætlað skipan í einum øðrum limalandi ikki er í samsvari við tær skyldur, sum viðkomandi landi eru álagdar sambært WTO/GATT-sáttmálunum.

Í triðja lagi kann talan vera um trætumál, har einki krav er um, at tiltøk eru í stríð við sáttmálatekstin, men at eitt limaland kortini heldur, at fyrimunir, tað eigur at hava sambært sáttmálunum, verða settir til viks av tiltøkum hjá einum øðrum limalandi. Hetta slagið av trætumálum verða nevnd "non-violation complaints."

WTO-sáttmálin hevur í nógvum lutum styrkt um skipanina at loysa handilstrætumál millum lond. Ásettar eru ávísar tíðarfreistir fyri einstøku stigini í viðgerðini av kærumálum. Tað er torførari hjá tapandi partinum at steðga útgreiðing frá panelum ella at blokkera avgerðir, sum WTO-stovnar hava tikið. Konsensusreglan er so at siga endavend. Harafturat er ein kæruskipan komin. Hugsandi er, at serliga tær báðar fyrstu broytingarnar fara at gera sítt til, at brotini á reglurnar gerast færri, enn tey høvdu verið, um broytingarnar ikki komu.

Hinvegin kann ein effektivari semingsskipan eisini bera í sær, at londini gerast grammari at nýta skipanina. Tí er eisini hugsandi, at ein størri partur av samlaðu brotunum enda sum klagur í WTO-skipanini. Talið av klagumálum kann eisini vaksa av tí at handil við tænastum og landbúnaðarvørum gjørdist virkisøki hjá WTO eftir Uruguay-umfarið.

# EBS frágreiðingin

## Høvuðsskipanir í handilssamstarvinum í Vestureuropa

### 5.1 Inngangur

Síðani 1945 hevur hugmyndin um at sameina Europa verið ein týðandi táttur í uttanríkispolitikkinum hjá nógvum londum í Vestur-Europa. Hetta eru teir nógvu fleirtjóða búskaparfelagsskapir, ið eru settir á stovn, eitt tekin um.

Seinnu árini hava royndirnar at sameina og samansjóða serliga verið gjørdar innanfyri karmarnar av ES. Men hóast tað ber til at staðfesta samansjóðing á nógvum økjum, og at hetta sum frá líður, kann bera í sær eitt europeiskt sambandsríki, so ber eisini til at staðfesta, at verandi tjóðareindir eru farnar sundur í minni eindir.

Hetta er galdandi fyri Sovjetsamveldið, Jugoslavia og Tjekkoslovakia. Eisini í Vestur-Europa eru tekin um, at landspartar vilja hava størri sjálvsavgerðar-rætt. Dømi um hetta finna vit í Belgia (flamlendingar og wallonarar), Spania (katelonar), og í Stórabretlandi (skotar).

| Talva 5.1: Yvirlit yvir skipan av felagskapum í Europa eftir 1945 | | |
|---|---|---|
| | Vestureuropa | Eystureuropa |
| Búskaparligt samstarv | OEEC 1948<br>→ OECD 1960<br>EKSF 1952<br>EF 1957<br>→ ES 1993<br>EFTA 1959<br>CEFTA 1993<br>EBS (ES+EFTA) 1994 | COMECON 1949 |
| Politiskt samstarv | Europaráðið 1949<br>EPS 1970 | Cominfom 1947 |
| Hernaðarligt samstarv | Bruxellespaktin 1948<br>WEU 1954<br>Atlantssáttmálin 1949 | Warszawasáttmálin 1955 |

Í hesum umfari skulu vit halda okkum til *búskaparligt* samstarv í Vestureuropa og tey tiltøk, sum hava havt og hava týdning fyri handilin millum londini síðan seinna heimsbardaga.

### 5.2 Europeiska Samveldið, ES

Eftir seinna heimsbardaga hava nógvar royndir verið gjørdar at fáa tættari samstarv millum londini í Vestur-Europa. Europeiska Samveldið er tann týdningarmesti felagsskapur av hesum slagi, bæði tí at breiddin og dýpdin í samstarvinum í ES miðjar nógv longri enn hjá øðrum regiónalum felagsskapum í heiminum. ES-londini hava við limaskapi sínum bundið seg til at samstarva á at kalla øllum politiskum og búskaparligum málsøkjum og hava, í stóran mun, latið yvirvaldsrætt til felags myndugleikar.

Lunnarnir til samstarvið vórðu lagdir í 1957, tá Rómarsáttmálin varð undirskrivaður og EEC (European Economic Community) varð sett á stovn. Rómarsáttmálin kom í gildi 1. januar 1958.

Tey seks londini, sum stovnaðu EEC vóru Belgia, Frakland, Italia, Luxembourg, Holland og Vestur-Týskland. Londini høvdu longu frammanundan tikið stig á samansjóðingarleið. Í 1952 stovnaðu tey Europeiska Kol- og Stálfelagskapin. Hesin bar í sær, at allar forðingar fyri handli við koli og stáli landanna millum vórðu beindar burtur. Høvuðsendamálið var at røkka stórvirkisfyrimunum og at taka kappingina upp við USA og onnur lond.

Við EEC varð farið enn longur. Endamálið var at fáa í lag ein felags marknað, har fullkomin fríhandil var fyri allar vørur millum limalondini, og har arbeiðsmegi og kapitalur hevði frítt at fara um landamørk. Við at sameina londini í Vestur-Europa varð samstundis vóna, at stríðið í sambandi við teir báðar heimsbardagarnar ikki fór at endurtaka seg.

Hugsanin var somuleiðis, at samstarvið í EEC kundu gera londini til eitt politiskt og búskaparligt

heimsveldi. Um tað mundi var heimurin merktur av politisku risunum USA og Sovjettsamveldinum. Búskaparliga var USA eitt stórveldi, og seinni gjørdist Japan tað sama.

Miðað var eftir stigvíst at taka av allan toll limalandanna millum og samskipa felags toll mótvegis øðrum londum, og í 1968 var fyrsta stig við samstarvinum rokkið, tá komið var á mál við fullari tollsamgongu. Við hesum gjørdist EEC ein tollsamgonga. Nógvar forðingar vóru framvegis fyri innanhýsis handli, eitt nú lógar-, umsitingarligar-, fiskalar- o.a. forðingar. Endamálið við samstarvinum var tó framvegis at skipa ein fullkomnan felagsmarknað.

EEC ella Felagsmarkaðurin, sum tað seinni varð nevnt, var ein tollsamgonga á tann hátt, at felags tollur var við umheimin, meðan eingin tollur var innanhýsis. Felagsskapurin var kortini í lutum ein felagsmarknaður. Felags politikkur var t.d. fyri landbúnað, fiskivinnu, regiónalar skipanir og monopol og avlagandi tiltøk. Skattaskipanir, flutningspolitikkur og almannapolitikkur var eisini í ein ávísan mun samskipaður.

Eftir nøkur ár við stórum framstigum, kom fyrst í 1970-árunum stígur í royndirnar at samansjóða europeiska marknaðin. Millum annað elvdu oljukreppurnar til búskaparliga afturgongd nógvastaðni, og londini høvdu ovmikið av trupulleikum, ið skuldu loysast innanhýsis. Men miðskeiðis í 1980-árunum tóku royndirnar at samansjóða á búskapar- og handilsøkinum aftur dik á seg. Tá varð samtykt at seta á stovn innmarknaðin.

Hetta stigið var í stóran mun ein staðfesting av, at tollsamgongan frá 1968, ikki var nóg mikið til at tryggja einsháttaðar innanhýsis kappingartreytir. Nógvar minni sjónligar handilsforðingar vóru framvegis. Londini nýttu ólík fyrisett mát á ídnaðarvørum, mannagongdir í sambandi við almenn keyp vóru ymiskar o.t. Avgerðin um at seta innmarknaðin á stovn, var í ein ávísan mun, eisini ein roynd hjá EF at steðga protektiónistiska rákinum, sum eyðmerkti globalu handilsskipanina í kjalarvørrinum av oljukreppunum í 1970-árunum.

Síðani samtykt var at seta innmarknaðin á stovn og stjórnarráðstevnurnar í Maastricht í 1992 og í Amsterdam í 1997, er samstarvið víðkað og er samstundis vorðið djúptøknari, og tað er víðkað til at fevna um fleiri lond.

Talva 5.2. Limalond í ES, fólkatal, landøki, fólkatættleiki og politisk ávirkan

| Land | Gjørdist limur í ES (ár) | Fólkatal (í 1000) | Landa-øki 1000 km2 | Fólka-tættleiki fólk/km2 | Atkvøður í Ráðharra-ráðnum | Fólk fyri hvørja atkvøðu (í 1000) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 1972 | 5.216 | 43 | 121 | 3 | 1.739 |
| Belgia | 1957 | 10.131 | 31 | 332 | 5 | 2.026 |
| Finnland | 1995 | 5.099 | 338 | 15 | 3 | 1.700 |
| Frakland | 1957 | 58.027 | 552 | 105 | 10 | 5.803 |
| Grikkaland | 1982 | 10.442 | 132 | 79 | 5 | 2.088 |
| Írland | 1972 | 3.577 | 70 | 51 | 3 | 1.192 |
| Italia | 1957 | 57.248 | 301 | 190 | 10 | 5.725 |
| Luxemb. | 1957 | 407 | 3 | 157 | 2 | 204 |
| Niðurlond | 1957 | 15.423 | 42 | 371 | 5 | 3.085 |
| Portugál | 1986 | 9.912 | 92 | 107 | 5 | 1.982 |
| Spania | 1986 | 39.170 | 505 | 78 | 8 | 4.896 |
| Svøríki | 1995 | 8.816 | 450 | 20 | 4 | 2.204 |
| Týskland | 1957 | 81.539 | 357 | 228 | 10 | 8.154 |
| UK | 1972 | 58.476 | 244 | 240 | 10 | 5.848 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eysturríki | 1995 | 8.040 | 84 | 96 | 4 | 2.010 |
| Samantalt | | 371.523 | 3.244 | 146 | 87 | |

Somuleiðis fevnir samstarvið í ES um alsamt fleiri øki. Nærum øll tey vanligu búskapar-politisku stýringsamboðini sum fíggjarpolitikkur og pengapolitikkur eru ella verða samskipað, og uttanríkispolitikkurin er lutvíst komin undir felagsskapin. Heitið ES kom fram í 1993, eftir at Maastricht-sáttmálin varð góðtikin av teimum 12 limalondunum. Áðrenn tað varð felagsskapurin vanliga nevndur EF.

Sáttmálin um Europeiska Samveldið ella Maastricht-sáttmálin er tað støðið undir ES-samstarvinum, soleiðis sum tað er víðkað og broytt síðani í 1952 (sí søguligt yvirlit í skjali 5A í bláa álitinum). Maastricht-sáttmálin er settur saman av eini yvirtrom, ið eru *felags reglurnar*, og reglum fyri tey einstøku málsøkini, ið eisini verður nevnt *súlurnar*.

Felags reglur eru settar saman av innleiðandi og endaligum ásetingum. Tær innleiðandi snúgva seg m.a. um stovnsetingina av ES, stevnumiðini hjá ES, Europeiska Ráðið og subsidiaritetsprinsippið. Endaligu ásetingarnar eru m.a. ásetingar um broytingar í sáttmálanum og upptøku av nýggjum limalondum.

Súlurnar eru: Europeiski Felagsskapurin (EF), Europeiski kol- og stálfelagsskapurin (EKSF), europeiski kjarnorkufelagsskapurin (Euratom), ásetingar um felags uttanríkis- og trygdarpolitikk og ásetingar um samstarv í rættarligum viðurskiftum og innanríkismálum. Í mynd 5.1 eru EF, EKSF og Euratom lagdir saman.

EF er tað størsta einstaka samstarvsøkið. EF-sáttmálin ella Rómarsáttmálin hevur ásetingar um borgararætt í samveldinum, um at kapitalur, vørur, tænastur og arbeiðsmegi hava frítt at fara, tollsamgongu, felags handilspolitikk, felags landbúnaðar- og fiskivinnupolitikk, flutning, búskapar- og pengapolitiska samgongu, reglur um kapping og almennan stuðul, fiskalar ásetingar, sosialpolitikk, útbúgving og gransking, mentan, heilsumál, brúkaravernd, transevropeiska netið, ídnað, regiónalpolitikk, umhvørvi og menningarsamstarv.

EKSF fevnir um reglurnar fyri felags marknað fyri kol- og stálframleiðslu, meðan Euratom eru reglurnar um nýtslu av kjarnorku til sivil endamál.

Samstarvið um rættar- og innanríkismál snýr seg um løgreglu- og rættarsamstarv og samstarv um flóttafólka- og asylpolitikk.

Í juni 1997 komu ríkis- og stjórnarleiðarnir í ES ásamt um ein nýggjan sáttmála fyri Europa. Hetta er Amsterdam-sáttmálin, ið er ein roynd at styrkja samstarvið. Hetta hevur ES lagt stóra áherðslu á síðani Maastricht-sáttmálan í 1993.




Mynd 5. 1: Súlurnar í ES-samstarvinum

## 5.3 Europeiski fríhandilsfelagsskapurin, EFTA

Europeiski fríhandilsfelagsskapurin, EFTA (European Free Trade Association) varð settur á stovn í 1960. Sáttmálin varð undirskrivaður í Stockholm í januar 1960, og verður tí ofta nevndur Stockholm-konventiónin.

Londini, sum skrivaðu undir, vóru Danmark, Eysturríki, Noreg, Portugal, Svøríki, Sveis og Stórabretland. Endamálið var at fáa burtur innflutningstoll, kvotur og aðrar forðingar fyri handli í Vestur-Europa, umframt at tryggja frælsar, ikki-diskriminerandi reglur í heimshandlinum. Finnland gjørdist assosieraður limur í 1961 og fullur limir í 1986. Í 1972 fóru Danmark og Stórabretland upp í ES. Føroyar, sum fór uppí EFTA í 1967, fóru tá saman við Danmark burtur úr EFTA. Í 1985 gjørdist Portugal limur í ES. Ísland gjørdist limur í EFTA í 1970 og Liechtenstein í 1991. Við árslok í 1994 minkaði felagskapurin munandi, tá Eysturríki, Finnland og Svøríki valdu at fara upp í ES. Í dag eru sostatt bert Ísland, Liechtenstein, Noreg og Sveits eftir í EFTA.

Talva 5.3: Limalond, fólkatal, landaøki, fólkatættleiki í EFTA

| Land | Fólkatal (í 1000) | Landaøki (1000 km2) | Fólkatættleiki fólk pr km2 |
|---|---|---|---|
| Ísland | 267 | 103 | 3 |
| Liechtenstein | 30 | 0,2 | 188 |
| Noreg | 4.348 | 324 | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sveis | 7.021 | 41 | 170 |
| EFTA | 11.666 | 468,2 | 93,5 |

Fremsta málið hjá londunum, sum settu EFTA á stovn, var at fáa í lag sínámillum fríhandil við ídnaðarvørum. Hetta mál varð rokkið í 1966. Tollur og innflutningsgjøld á øllum ídnaðarvørum, landbúnaðarvørur og fiskur undantikin, vórðu beind burtur. Í juli 1990 varð fríhandilin víðkaður til eisini at fevna um fisk og fiskavørur.

Samstundis sum handilsforðingar eru tiknar burtur í handlinum millum EFTA-londini, hava londini ikki sett í verk nýggjar forðingar í sínamillum handli, og heldur ikki í samhandlinum við onnur lond. EFTA er ikki ein tollsamgonga, og limalondunum stendur frítt at reka sín egna handilspolitikk mótvegis londum, sum ikki eru limir.

ES er og hevur verið týdningarmesti handilspartnarin hjá EFTA-londunum. EFTA hevur eisini víðkað fríhandilsøkið við at gera fríhandilsavtalur við lond í Eystur- og Mið-Europa.

Tøttu handilsligu bondini millum londini, sum mynda EFTA og ES, var ein av orsøkunum til, at tað longu í 1950 vórðu gjørdar royndir at fáa í lag eitt fríhandilsøki, sum fevndi um tey seks EEC-londini og onnur vestur-europeisk lond. Hesar royndir miseydnaðust. Sjey av hesum londum valdu síðan at ganga saman í EFTA og ætlaðu at brúka henda felagsskapin til at røkka málum sínum um ein felags europeiskan marknað.

Eitt týdningarmikið stig varð tikið í 1972, tá EFTA-londini gjørdu fríhandilsavtalur við ES. Hesar høvdu við sær, at allur tollur á ídnaðarvørum varð tikin av í 1977. Ætlanin um ein felag europeiskan marknað kom enn nærri málinum við EBS-sáttmálanum, sum verður lýstur nærri í næsta parti.

Stjórnin í EFTA er EFTA-ráðið, sum vanliga kemur saman tvær ferðir um mánaðin á embætismannastigi (Heads of Permanent Delegations to EFTA) og tvær ferðir árliga á ráðharrastigi. Hvørt land er umboðað og hevur eina atkvøðu. Ráðið umsitur viðurskiftini millum EFTA-londini eftir Stockholm-konventiónini.

Ráðið viðger og tekur avgerðir í málum viðvíkjandi sambandinum hjá EFTA við triðjalond og umsitur fríhandilsavtalurnar við hesi lond og sambandið við ES. Umsitingarlig og fíggjarlig viðurskifti í EFTA eru eisini ábyrgdarøkið hjá Ráðnum. Undir sær hevur EFTA-ráðið fleiri nevndir, sum taka sær av sermálum (sí mynd 5.2).

Umframt fakligu nevndirnar, vísir myndin Ráðgevandi Nevnd, har vinnulívið og arbeiðstakarar í EFTA-londunum eru umboðað og kunnu leggja síni sjónarmið fyri EFTA-ráðið. Í Tjóðartingsnevndini skifta tjóðartingslimir úr EFTA-londunum orð um ymisk mál.

EFTA hevur høvuðssæti í Geneve, har regluligu embætismannafundirnir verða hildnir. Umframt skrivstovuna í Geneve, sum í høvuðsheitum tekur sær av triðjalands málum, er ein partur av EFTA umsitingini í Brússel. Hesin parturin tekur sær av EBS, og ein annar partur er í Luxembourg, ið samskipar hagtalssamstarvið í Eurostat.

EFTA hevur skipað samstarv við nógv lond. Yvirlýsingar um samstarv eru undirskrivaðar við Ungarn, Tjekkoslovakia og Póland í juni 1990, við Bulgaria, Estland, Latvia, Letland og Rumenia í desember 1991, Slovenia í mai 1992, Albania í desember 1992, Egyptaland, Marokko, og Tunesia í desember 1995, Makedonia í mars 1996, PLO í desember 1996, Jordan og við Libanon í juni 1997.

Fríhandilsavtalur eru gjørdar við Tjekkoslovakia í mars 1992, (frá apríl 1993 við Tjekkia og Slovakia), Póland og Rumenia í desember 1992, Bulgaria og Ungarn í mars 1993, og við Slovenia í juli 1995. Somuleiðis hevur EFTA gjørt fríhandilsavtalur við Turkaland í desember 1991, Ísrael í september 1992, Estland, Latvia og Letland í desember 1995, og við Marokko í juni 1997.




Mynd 5.2: EFTA-ráðið og bygnaðurin í EFTA.

### 5.4 Central European Free Trade Agreement, CEFTA

CEFTA er ein fríhandilsavtala millum Tjekkia, Ungarn, Póland, Slovakia, Slovenia og Rumenia. Sáttmálin fevnir um eitt øki við umleið 90 mió. fólkum. Limirnir í CEFTA eru lond, sum eru í eini skiftistíð. Felags málið hjá øllum CEFTA-londunum er at fáa í lag marknaðarbúskap og tryggja framhaldandi menning, betri livikor fyri fólki, mannarættindi, fólkaræði og felags skipanir við onnur lond.

CEFTA-sáttmálin varð undirskrivaður í Krakow í desember 1992 og kom í gildi í mars árið eftir. Londini, sum vóru við frá byrjanini, vóru Póland, gamla Tjekkoslovakia og Ungarn. Í 1996 kom Slovenia upp í samstarvið og í 1997 eisini Rumenia.

Við sáttmálanum verður miðað ímóti at fáa fríhandilsøki fyri limalondini fyri ár 2001 (sambært CEFTA-skyldum í GATT (grein 24)). Endamálið við sáttmálanum er at samskipa menningina av búskaparligu viðurskiftunum millum londini við at vaksa um handilin, at fáa gongd á handilsligu menningina, at hækka livifótin og at tryggja vinnumøguleikarnar, og at fáa betri kappingarføri og fíggjarligt støðufesti.

Eitt annað endamál er at tryggja rættvísan handil millum limalondini og at fáa burtur handilsforðingar, sum kunnu birta upp undir javna menning og vøkstur í heimshandlinum.

Sáttmálin fevnir um ídnaðar- og landbúnaðarvørur og hevur generellar reglur um uppruna, samskipan av tollviðurskiftum, innanhýsis skatt, kapping, statsmonopol, almenn keyp, intellektuellan ognarrætt, dumping, trygd, bygnaðarligar tillagingar, og trupulleikar við gjaldjavna. Harumframt eru ásetingar um generell undantøk, menningarklausulur og reglur um umsiting av skipanini.

Sáttmálin er grundaður á meginreglurnar í GATT og WTO. Tó kann nevnast, at sáttmálin er settur saman av einum multilateralum parti, ið er grundteksturin, og einum bilateralum sáttmálum um liberaliseringar av handlinum millum limalondini.

Samstarvið verður ment stigvíst. Eitt nú hava Tjekkia og Slovakia skipað tollsamgongu sínámillum. Síðani 1. januar í ár hevur fríhandil verið á ídnaðarvørum millum Tjekkia, Slovakia og Slovenia, meðan Ungarn og Póland í fyrsta umfari ikki eru við í hesum fríhandli. Póland hevur tollverju móti innflutningi av bilum, men hesin verur stigvíst tikin burtur fram til ár 2002. Ungarn hevur toll á nøkrum vørum.

Eins og í øðrum felagsskapum og í millumtjóða handli yvirhøvur hevur liberaliseringin av handlinum við landbúnaðarvørum verið eitt av teimum torførastu málunum í CEFTA. Tó hevur tað, í ein ávísan mun. eydnast at fáa burtur tollforðingar á landbúnaðarvørum. Luttøkan hjá

londunum í WTO førir í sær sjálvum eisini við sær lægri tollverju, avmarkaðar møguleikar fyri almennum studningi til landbúnaðarvørur og útflutning av landbúnaðarvørum, og gevur framleiðarum aðrastaðni betri møguleikar á heimamarknaðinum.

Frá 1992 og til árslok í fjør nærum tvífaldaðist handilin millum CEFTA-londini. CEFTA-londini hava tikið forðingar burtur, og kappingin uttanífrá er vaksandi. Stórar fremmandar íløgur hava havt við sær skjóta búskaparliga framgongd.

Hetta ger eisini sítt til, at tað serliga eru CEFTA-londini, sum standa frammarliga í bíðirøðini at sleppa upp í ES. Londini, sum undirskrivaðu sáttmálan í 1992, høvdu longu frammanundan gjørt assosieringsavtalur við ES. Hjá nógvum av londunum er endamálið við CEFTA at fyrireika seg til fullan limaskap í ES.

# EBS frágreiðingin

## Handils- og búskaparfelagsskapir aðrastaðni í heiminum

### 6.1 Inngangur

Eisini aðrastaðni í heiminum hava lond eisini tikið seg saman í regiónalar samstarvsfelagsskapir. Hesir hava verið við til at økt handilsliga samskiftið og hava stuðlað upp undir búskaparligu samansjóðingina í økjunum.

Á norðuramerikanska meginlandinum eru Kanada, Mexico og USA gingin saman í "North American Free Trade Agreement" - NAFTA, sum ger tey trý londini til eitt stórt fríhandilsøki.

Í Suðuramerika verður eisini miðað eftir at fáa í lag tættari búskaparligt og handilsligt samstarv millum annað í "The Latin America Integration Association" - ALADI. Hesin felagsskapur hevur í stóran mun verið karmurin um tvílanda samráðingar og sáttmálar millum lond í økinum, og fleirtjóða felagsskapir eru sprotnir úr samráðingum í felagsskapinum.

Fyrireikingarnar til "Free Trade Area of the Americas" - FTAA eru eisini komnar væl áleiðis. FTAA skal eftir ætlan fevna um 34 lond í Suður-, Mið- og Norðuramerika, og miðað verður eftir, at samstarvið skal vera komið at virka í ár 2005.

Londini í landssynningspartinum av Asia hava havt sera stóra búskaparliga framgongd síðani fyrst í sekstiárunum. Eisini har hava londini skipað seg í búskaparligar samstarvsfelagsskapir, sum eitt nú ASEAN.

Ein annar rættuliga nýggjur fleirtjóða felagsskapur er "Asia-Pacific Economic Cooperation" - APEC. Felagsskapurin kom í lag síðst í áttatiárunum, og fevnir um lond báðu megin Kyrrahavið. Hetta er samstundis ein av størstu regiónalu felagsskapum av sínum slagi í heiminum.

Í syðra parti av Afrika miðar samstarvið í SADC eftir at fáa í lag tættari handilsligt og búskaparligt samstarv. Í Vestur-Afrika er ECOWAS felagskapurin, sum skal birta uppundir øktan handil og samstarv millum londini í økinum.

Nevnast kann eisini, at røddir hava verið frammi um at skipa eitt fríhandilsøki tvørtur um hav millum Europa og Norðuramerika í " Trans-Atlantic Free Trade Area" - TAFTA.

Á næstu síðunum verður komið nærri inn á skipaða handils- og búskaparliga samstarvið uttan fyri Europa. Endamálið er bæði at vísa, at búskaparlig samansjóðing ikki bert fer fram í ES og Europa, og at geva eitt yvirlit yvir handils- og búskaparfelagsskapir uttanfyri Europa. Gjørt verður vart við, at yvirlitið ikki er fullfíggjað. Fyrst verður komið inn á samstarv á amerikansku meginlondunum. Síðani verða eyguni vend ímóti Afrika og at enda verður handilssamstarv í Eystur- og Landsynningsasia lýst.

### 6.2 Norður-, Mið- og Suðuramerika

"North American Free Trade Agreement"- NAFTA er ein handilsavtala millum Kanada, Mexico og USA, sum kom í gildi 1. januar í 1994.

Frammanundan var ein avtala frá 1988 millum USA og Kanada - "The Canada-US Free Trade Agreement" - sum í stóran mun var grundarlagið undir NAFTA.

Stovnsetingin av NAFTA bar í sær, at Kanada, Mexico og USA gjørdust eitt fríhandilsøki. Við einum fólkatali upp á 360 mió. er hetta næststørsta fríhandilsøkið í heiminum, eftir EBS-londini.

Høvuðsendamálið hjá NAFTA er:

- At beina burtur allar forðingar fyri handli við vørum og tænastum.
- At skipa so fyri, at kappingin í fríhandilsøkinum er rættvís.
- At vaksa um íløgumøguleikarnar í fríhandilsøkinum.
- At verja og handhevja ognarrætt til andsverk (intellectual property).
- At slóða fyri rúmari samstarvi á øðrum økjum.

NAFTA er eitt fríhandilsøki, og tí varðveita londini í høvuðsheitum rættin at áseta toll í handlinum við triðjalond innan karmarnar av GATT/WTO.

NAFTA fevnir at kalla um øll øki. Serligar reglur er gjørdar fyri serliga viðbrekin øki, sum eitt nú landbúnað, bilídnaðin, fíggjartænastur og klæðnaídnaðin. Serstakar avtalur eru gjørdar um samstarv innan arbeiðsmarknaðarviðurskifti og umhvørvisvernd.

Í Latín-Amerika eru eisini stig tikin fyri at fáa fríari handil millum londini, sum í flestu førum verða bólkað sum menningarlond. Skipaðar eru tollsamgongur, fríhandilsøki og tvílandasáttmálar um handil. Her skulu nakrar av hesum umrøðast.

Montevideo-sáttmálin frá 1960 legði lunnar undir latínamerikanska fríhandilsfelagsskapin LAFTA, ið hevði sum endamál at beina burtur handilsforðingar millum limalondini innan 12 ár. Eftir, at tað í nøkur ár hevði gingið striltið at fáa samstarvið at virka eftir ætlan, samdust londini um at endurskipa felagsskapin í nýggjum og broyttum líki.

Ein nýggjur Montevideo-sáttmáli varð undirskrivaður í 1978, og ALADI "Asociatión Latino-americana de Integratión" ella á enskum "The Latin America Integration Association" avloysti LAFTA.

Endamálið hjá ALADI er at birta upp undir tvílanda handil millum limalondini og millum limalond og triðjalond.

Limalondini í ALADI eru Argentina, Bolivia, Brasilia, Chile, Colombia, Ecuador, Mexico, Paraguay, Peru, Uruguay og Venezuela.

ALADI virkar í stóran mun sum supranatiónalur stovnur, ið hevur verið karmurin fyri at fáa í lag tvílanda samstarv um handil við ymiskum vørum og samstarv innan ávís øki. Í løtuni er 32 slíkir sáttmálar gjørdir, og helvtin av teimum eru undirskrivaðir í 1990-árunum.

Limalondini í GRAN - "Andean Group" eru Bolivia, Colombia, Ecuador, Peru og Venezuela. GRAN varð skipað í 1969, tá Bolivia, Colombia, Chile, Ecuador og Peru undirskrivaðu Cartagena-sáttmálan. Í 1973 kom Venezuela uppí, meðan Chile fór burtur úr í 1976. Høvuðsendamálið hjá GRAN er at beina burtur handilsforðingar millum londini í bólkinum, at skipa eina tollsamgongu, at samskipa búskaparpolitikkin og at seta í verk eina felags ætlan fyri ídnaðargerð.

Tey fyrstu árini eftir, at liberaliseringin varð sett í verk, vaks handilin millum londini í samstarvinum. Vert er tó at hava í huga, at frammanundan hevði lítil samhandil verið millum marknaðirnar.

Men síðani kom stígur í. Í 1987 varð Cartagena-sáttmálin broyttur, og í 1989 vórðu greiðari reglur gjørdar fyri, hvussu skuldi farast fram fyri at fáa eitt fríhandilsøki at virka og at fáa í lag felags toll mótvegis umheiminum. Síðan 1992 hava Colombia, Venezuela, Ecuador og Bolivia stigvíst sett fríhandil í verk sínámillum. Tollur er framvegis ein handilsforðing, og londini hava fingið ymiskar tillagingarskipanir.

Byrjanin til felagsskapin CARICOM - "Caribbean Community and Common Market" varð stovnanin av CARIFTA - "Caribbean Free Trade Agreement" í 1968. Tá settu limalondini sær fyri at bøta um arbeiðsmøguleikarnar í økinum við búskaparligari samansjóðing.

Búskapirnir vóru í høvuðsheitum grundaðir á landbúnað. Limalondini skipaðu eitt fríhandilsøki, fyrst og fremst fyri landbúnaðarvørur. CARICOM varð stovnað í 1973. Sáttmálin leggur upp til at samskipa av búskaparpolitikkin og menningarætlanir í økinum. Tey limalondini, sum eru lítið á leið komin, fáa serviðgerð.

Eitt av endamálinum er at røkka stórvirkisfyrimunum innan tænastuveitingar, eitt nú innan flutning, útbúgving og heilsuverk og at skipa ein regiónalan menningarbanka fyri økið. Endamálið við sáttmálanum er at skipa eina tollsamgongu við felags tollmúri móti triðjalondum, men hetta mál er ikki rokkið enn, fyrst og fremst tí ósemjur eru millum londini um tollgjøldini fyri tær ymsu vørurnar.

Limalondini í CARICOM eru Antiqua og Barbuda, Bahamas, Barbados, Belize, Dominica, Grenada, Guyana, Jamaica, Montserrat, St.Kitts og Nevis, St.Lucia, St.Vincent, Suriname, Grenadinurnar og Trinidad og Tobago.

Sáttmálin fyri miðamerikanska felagsmarknaðin CACM - "Central American Common Market", varð undirskrivaður í 1960 og kom í gildi í 1961. Luttakandi londini vóru Costa Rica, El Salvador, Guatemala, Honduras og Nicaragua.

Sáttmálin fevndi um fríhandil fyri 95% av øllum vørum. Felagsskapurin blómaði og var tann mest væleydnaða regiónala samansjóðingin í Latín Amerika í 1960-árunum. Men 1970- og 1980-árini vóru merkt av politiskum ófriði og búskaparligum trupulleikum bæði í og ímillum londini í felagsskapinum. Hetta gjørdi, at CACM hesi árini, so at siga, bert var eitt eiti.

Sáttmálin var endurstovnaður fyrst í 1990-árunum, og síðani tá hevur framgongd verið í handilsliga og búskaparliga samstarvinum, bæði í CACM og í øðrum handilssáttmálunum, sum eru gjørdir millum londini. Tollur er lækkaður, og slóðað er fyri búskaparligari samansjóðing á nógvum økjum.

Felagsmarknaðurin MERCOSUR - "Mercado Comun del Sur" er ein búskaparlig samstarvsætlan millum Argentina, Brasilia, Paraguay og Uruguay. Høvuðsendamálið er at bøta um búskapirnar í limalondunum við at gera teir virkis- og kappingarførari, og at víðka marknaðin.

Endamálið er eisini at seta ferð á búskaparligu menningina, m.a. við at gagnnýta tøka tilfeingið skynsamari. Somuleiðis er endamálið at samstarva um umhvørvisvernd, at bøta um samskiftiskervið, at samskipa makrobúskaparliga politikkin og at harmonisera krøvini til vinnugreinarnar í londunum.

Handilssamstarvið í MERCOSUR byrjaði í smáum í 1970-árunum, tá fleiri tvílandasáttmálar vórðu gjørdir millum londini. Í 1970 samdust tey fýra londini um at gera ein sáttmála, sum fevndi um øll fýra londini. Endamálið var at seta ein felagsmarknað á stovn, men sáttmálin, ið varð undirskrivaður í 1991, er heldur at rokna sum eitt amboð, sum ger tað møguligt at seta ein felagssmarknað í verk. Sáttmálin er ein semja um búskaparliga samansjóðing á regiónalum stigi. Onnur lond í ALADI-samstarvinum kunnu eisini gerast limir.

Samstarvið í FTAA - "Free Trade Area of the America" er ein ætlan at fáa londini í Norður-, Mið- og Suðuramerika at ganga saman í eitt stórt fríhandilsøki. Á toppfundi í 1994 samtyktu 34 lond í økinum at skipa eitt fríhandilsøki, og samráðingarnar um hetta skulu verða lidnar í ár 2005.

### 6.3 Afrikanska meginlandið

Samstarvið í ECOWAS - "Economic Community of West African States", varð stovnað í 1975 við tí endamáli at birta upp undir handil, samstarv og sjálvbjargni í Vestur-Afrika.

Limalondini eru Benin, Burkina Faso, Cape Verde, Fílabeinsstrondin, Gambia, Ghana, Guinea, Guinea-Bissau, Liberia, Mali, Mauritania, Niger, Nigeria, Senegal, Sierra Leone og Togo. ECOWAS hevur sum endamál at virka fyri búskaparligum samstarvi og menning og at menna samfelagsligt og mentanarligt virksemi.

Eitt av endamálunum er at fáa í lag handilsligt og peningaligt samstarv, og soleiðis at beina burtur allan toll og aðrar forðingar fyri handli millum londini, samstundis sum felags tollgarður verður settur móti umheiminum.

Ein annar afrikanskur felagsskapur er SADC - "Southern Africa Development Community". Upprunin til felagsskapin var SADCC "Southern African Development Coordination Conference", sum var skipaður í 1980.

Sáttmálin um SADC varð undirskrivaður í 1992. Tey 14 limalondini eru Angola, Botswana, Demokratiska lýðveldi Congo, Lesotho, Malawi, Mauritius, Mozambique, Namibia, Seychellurnar, Suður-Afrika, Swaziland, Tanzania, Zambia og Zimbabwe.

Endamálið hjá SADC á búskaparliga økinum er at fremja menning og búskaparligan vøkstur. Hetta skal m.a. røkkast við at samskipa búskaparpolitikkin hjá limalondunum og at beina burtur allar forðingar fyri at kapitalur, arbeiðsmegi, vørur og tænastur frítt kunnu ferðast millum limalondini. Framtíðar endamálið er at styrkja politisku og búskaparligu støðuna hjá londunum á heimsmarknaðinum.

### 6.4. Eystur- og Landssynningsasia

Síðani 1960 hava londini í Eystur- og Landssynnings-Asia havt stóran búskaparligan vøkstur, og handilin við útheimin er munandi øktur. Her er fyrst og fremst talan um Japan, Suður-Korea, Taiwan, Singapore, Hongkong, Malaysia, Thailand, Kina og Indonesia. Men onnur lond sum Vietnam og Filipsoyggjar eru eisini komin við. Samanlagt vaks parturin hjá hesum londum í heimshandlinum úr góðum 10% í 1970 upp í 22% í 1992.

Eins og nógva aðrastaðni í heiminum hava londini har um leiðir gjørt avtalur og sett á stovn búskaparligar samstarvsfelagsskapir. Her skulu tríggir teirra verða umrøddir.

Í august 1967 stovnaðu Indonesia, Malaysia, Filipsoyggjarnar, Singapore og Thailand felagsskapin ASEAN - "Association of Southeast Asian Nations". Brunei Darussalam, eitt fyrrverandi bretsk protektorat, gjørdist limur í 1984, stutt eftir at tað hevði fingið fult sjálvstýri. Laos og Myanmar gjørdist limur í 1997.

Endamálið hjá ASEAN er at styrkja regiónala samstarvið og menningina á búskaparliga, samfelagsliga og mentanarliga økinum. Í byrjanini gekk striltið, serliga tí áhugamálini vóru ymisk, søguliga fyritreytirnar ólíkar, og politiska sambandið millum fleiri av londunum var vánaligt.

Í 1980-árunum tók handilsliga og búskaparliga samstarvið av álvara dik á seg. Hetta komst m.a. av, at fallið á vøruprísunum á heimsmarknaðinum hevði við sær afturgongd í búskapunum í fleiri av ASEAN-londunum, og fleiri av londunum vóru noydd at seta í verk búskaparligar broytingar og handilsliberaliseringar. Um sama mundið fóru londini eisini at tosa um at fáa innanhýsis handilsforðingar burtur og at samstarva um vinnuætlanir í altjóða tingingum.

Stovnsetingin av APEC "Asian-Pacific Economic Cooperation" hevur givið londunum enn eitt stað at hittast og skifta orð um mál av felags áhuga. Í 1991 samdust búskaparmálaráðharrarnir í ASEAN-londunum um at arbeiða fyri ASEAN Free Trade Area - AFTA.

Eitt hitt týdningarmesta stigið í royndunum at birta upp undir øktan handil í ASEAN varð tikið í 1992, tá samtykt varð at seta AFTA - "ASEAN Free Trade Area" á stovn. Í 1994 samdust londini um at framskunda stovnsetingina av AFTA. Tíðarætlanin varð stytt úr 15 niður í 10 ár.

Fremsta endamálið hjá AFTA er at styrkja støðuna og kappingarførið hjá ASEAN-londunum á heimsmarknaðinum. Hetta skal fáast í lag við at økja um sínámillum handilin í ASEAN og at fáa størri spesialisering, umframt at troyta stórvirkisfyrimunirnar. Somuleiðis er ætlanin at røkka málinum við at eggja útlendingum at gera íløgur í ASEAN-londunum.

Í tíðarskeiðnum 1993-95 vaks handilin millum ASEAN-londini við 30% í miðal um árið. Hetta er munandi hægri enn samlaði vøksturin í útflutninginum hjá ASEAN-londunum, sum í miðal var 20% um árið í sama tíðarskeiði. Í 1995 vóru eini 60% av útflutninginum millum ASEAN-londini maskinur og ravmagnstól. Hetta vísir, at talan í stóran mun er um handil millum vinnugreinar.

Sum regiónalur felagsskapur hevur AFTA miðað eftir at fáa tættari samband við líknandi regiónalar felagskapir aðrastaðni, eitt nú NAFTA, MERCOSUR, EFTA og SADC . Endamálið er at fáa í lag samstarv um toll, fyrisett mát, íløgur o.t.

Tað tykist sum drívmegin í búskaparligu samansjóðingini í Eystur- og Landssynningsasia í fyrstu atløgu verður búskaparligi vøksturin og økta handilssamskiftið millum londini og ikki felagsskapirnir ASEAN og AFTA, sum kortini styrkja samstarvið í økinum.

Í 1989 setti australski forsetismálaráðharrin Bob Hawke fram uppskot um at halda ein fund millum ráðharrar úr londunum í Asia og Kyrrahavsøkinum. Hetta var byrjanin til APEC - "Asia-Pacific Economic Co-operation", og endamálið var at styrkja búskaparliga samstarvið í økinum.

Síðani fyrsta fundin í november 1989 hava fleiri ráðharrafundir verið. At byrja við var APEC meira at rokna sum ein óformligur bólkur við avmarkaðari luttøku, men sum frá er liðið, er APEC vorðið høvuðsamboðið í royndunum at fáa fríari handil og búskaparligt samstarv millum lond í økinum.

APEC fevnir um tey týdningarmestu londini í økinum, sum eisini eru tey lond í heiminum, sum hava størsta búskaparliga vøksturin. Tey 18 limalondini eru ASEAN-londini Brunei Darussalam, Indonesia, Malaysia, Filipsoyggjarnar, Singapore og Thailand, Australia, Kanada, Chile, Kina, Hong Kong, Japan, Korea, Mexico, New Zealand, Papa-Ný Guinea, Taiwan, USA.

Endamálini hjá APEC eru:

- At tryggja framhaldandi vøkstur og menning í økinum, og á tann hátt bøta um livikorini í økinum og yvirhøvur at birta upp undir vøkstur í heimsbúskapinum.
- At fáa øktan vinning av búskaparligari samvinnu og at birta uppundir handil við vørum, tænastum og flyting av kapitali og tøkni millum lond.
- At menna og styrkja fleirtjóða handilsskipanina á ein hátt, sum røkir áhugamálini hjá APEC-londunum og øðrum londum.
- At minka um forðingar fyri handli við vørum og tænastum millum limalondini á ein hátt, sum er í samsvari við meginreglurnar í GATT og ikki øðrum londum at skaða.

APEC er største regiónala verkætlanin av sínum slag. Hon fevnir um lond báðumegin Kyrrahavið, teirra millum tríggjar av teimum fýra risunum í heimsbúskapinum - USA, Japan og Kina. Í APEC-londunum búgva um 40% av heimsins íbúgvum. Tey standa fyri umleið 54% av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni í heiminum og 42% av millumtjóða handli.

# EBS frágreiðingin

## Føroyar í millumtjóða handilssamstarvi

### 7.1 Inngangur

Føroyski búskapurin er sera opin og bundin av handli við umheimin. Meginparturin av framleiðslukapitalinum og nýtsluvørunum verður innfluttur. Hesin innflutningur verður fíggjaður við útflutningi av fiski og fiskavørum og blokkstuðlinum. Í 1988 var útflutningurin av vørum og tænastum 43% av mettu bruttotjóðarúrtøkuni. Hetta eru tey nýggjastu tølini.

Sambært heimastýrislógini eru málsøkini "innflutningur og útflutningur" og "beinleiðis og óbeinleiðis skattir" føroysk sermál. Hetta ber í sær, at Føroyar eru eitt sjálvstøðugt tolløki við egnari lóggávu um toll og avgjøld á innflutningi. Føroyar kunnu áseta reglur á flestu búskaparligum málsøkjum, eitt nú innan vinnupolitikk, skatta- og avgjaldpolitikk og fyri innflutningi og útflutningi.

Í altjóða samanhangi eru Føroyar á flestu málsøkjum partur at teimum altjóða skyldum, sum Danmark hevur átikið sær. Hetta er tó ikki galdandi, har Danmark hevur tikið fyrivarni viðvíkjandi Føroyum.

Sambært heimastýrislógini skulu altjóða sáttmálar, sum Danmark er vorðin partur av, leggjast fyri heimastýrið og vera samtyktir har fyri at fáa gildi í Føroyum. Føroyar eru m.a. partur av danska limaskapinum í ST og OECD. Síðani 1954 hava Føroyar verið partur av teimum skyldum, Danmark hevur átikið sær sambært GATT, í tann mun ítøkilig fyrivarni ikki eru tikin. Frá

1. januar 1995 eru Føroyar partur av WTO-sáttmálanum.

Í sáttmálanum, sum legði støðið undir EFTA, varð ásett, at limaskapur Danmarkar ikki fevndi um Føroyar, men at sáttmálin seinni kundi víðkast til at fevna um Føroyar. Hetta varð gjørt í 1967. Tá Danmark fór upp í EF í 1973, fóru Føroyar saman við restini av kongaríkinum úr EFTA.

Niðanfyri verða karmarnir um handilssamstarv Føroya við útheimin lýstir. Fyrst verður komið inn á uttanríkismál í heimastýrisskipanini og ta umsitingarligu siðvenju, sum hevur ment seg undir skipanini. Síðani verða lýstir handilssáttmálarnir, sum Føroyar hava við onnur lond.

### 7.2 Uttanlandsmál í heimastýrisskipanini

Sambært heimastýrislógini er greitt ásett, at ríkismyndugleikarnir hava avgerðarrættin í spurningum, sum viðvíkja ríkisins viðurskiftum við útheimin. Hesi mál kunnu sostatt ikki yvirtakast. Tó veitir lógin ríkisstjórnini heimild at geva føroyingum heimild at samráðast uttanlands um handils- og fiskivinnusemjur.

Eisini kann uttanríkismálaráðharrin heimila umboðum heimastýrisins ríkisins vegna at tingast beinleiðis við fremmand lond undir viðvirkan av uttanríkistænastuni, tá ið tað ikki verður hildið ósambærligt við ríkisins áhugamál. Eftir hesi grein (§8,stk.3) verður nú tingast undir leiðslu føroyinga um undirgrundarmarkið millum Bretland og Føroyar.

Síðani millumlanda samstarvið fekk størri týdning fyri Føroyar fyrst í 70-árunum, hevur ávís umsitingarlig siðvenja ment seg. Hetta er serliga hent í sambandi við kvotusamráðingarnar í millumlanda fiskiveiðunevndum sum NEAFC og ICNAF og samráðingar um støðu Føroya í sambandi við upptøkusamráðingar hjá Danmark við EF í 1972.

Eftir at Danmark gjørdist limur í EF og samstundis legði heimildir sínar í altjóða fiskivinnupolitikkinum til EF, varð neyðugt at skipa fyri einum nýggjum hugtaki. Danmark (vegna Føroyar) kom at vera heitið í nógvum millumlanda samráðingum.

Danmark hevur t.d. verið limur í NEAFC, NAFO og NASCO vegna Føroyar. Sjálvt Danmark hevur verið umfatað av limaskapinum hjá EF í nevndu felagsskapum. Í øðrum førum hava ríkismyndugleikarnir ikki góðtikið tílíka loysnir, t.d. í sambandi við limaskap Føroya í IWC. Tá hevur støðan hjá ríkismyndugleikunum sambært Stýrisskipanarálitinum verið, at heimastýrið hevur havt tillagingartrupulleikar.

Síðani 1977 hevur høvuðsreglan verið, at í rammusáttmálunum um fiskiskap, sum eru gjørdir við hini norðurlondini, hava Føroyar einsamallar verið við sum sáttmálapartur. Tá rammusáttmálar um fiskiskap eru gjørdir við lond uttan fyri norðurlond, hevur danska stjórnin luttikið saman við

heimastýrinum. Hetta er galdandi fyri EF, USA og Baltisku londini.

Seinast eru handilssáttmálar gjørdir við EF og EFTA-lond. Fríhandilssáttmáli er undirskrivaður við Estland og roynt verður at fáa sáttmálar við onnur lond í Eystur- og Miðeuropa.

Avtalan um hval og kóp, NAMMCO, ið føroyska heimastýrið hevur gjørt beinleiðis við fiskimálaráðini í Noreg, Íslandi og Grønlandi, er eitt annað slag av sáttmálum. Í hesum føri tók uttanríkistænastan ikki lut í samráðingunum, men uttanríkisráðið varð kunnað um innhaldið og kundi vissa seg um, at sáttmálin ikki gekk móti almennum donskum ríkispolitikki í hvalaveiðumálum.

Vanligt hevur verið, at danska uttanríkismálaráðið stendur fyri samráðingunum um rammusáttmálarnar við onnur lond um handil og fiskiskap. Eitt nú stóð uttanríkismálaráðið fyri handilssamráðingunum frá 1990 til 1993 og fiskiveiðusáttmálunum við Baltisku londini. Uttanríkismálaráðið hevði samráðingarleiðaran, og umboð fyri heimastýrið høvdu ábyrgdina av innihaldinum í samráðingarheimildunum og av at útvega neyðugt tilfar og støðutakan frá føroyskum myndugleikum.

Útgangsstøðið er sostatt, at heimastýrið ikki hevur avgerðarrættin í uttanlandsmálum. Hetta merkir sambært Frederik Harhoff, at "..... hjemmestyremyndighederne ikke kan indgå internationale aftaler med fremmede folkeretssubjekter i eget navn; at de ikke på egen hånd kan etablere diplomatiske forbindelser med andre land eller internationale organisationer; samt at de ikke kan indtale krav eller gøre fordringer gældende i eget navn ved mellemfolkelige retsinstanser" (s.228).

Føroyskir myndugleikar hava tó, í ávísan mun, virkað sjálvstøðugt á altjóða stigi. Hetta vísa dømini, ið eru nevnd og teir handilssáttmálar, sum verða umrøddir niðanfyri.

Umsitingarliga siðvenjan er, at Føroyar at kalla sjálvstøðugar kunnu gera sáttmálar, sum eru avmarkaðir í vavi og við lond, sum mentanarliga og landafrøðiliga liggja Føroyum nær. Frederik Harhoff vísir á, at høvuðsreglan hevur verið, at tess størri politiskan, búskaparligan og prinsipiellan týdning sáttmálin verður mettur at hava fyri ríkið í síni heild, tess størri leiklut hevur danska uttanríkisráðið havt í allari gongdini, frá tí farið verður undir samráðingarnar, til sáttmálin verður undirskrivaður.

### 7.3 Handilsskipanin við EF frá 1974

Upptøkusáttmáli Danmarkar í EF, fevndi sum nevnt ikki um Føroyar. Í sáttmálanum varð tó sagt, at Danmark áðrenn árslok 1975 kundi boða frá, at Føroyar vórðu partur av danska limaskapinum. Eftir eina einmælta samtykt í løgtinginum, boðaði landsstýrið á vári 1974 frá, at Føroyar ikki skuldu gerast partur av EF. Síðani tá hava viðurskifti okkara við EF verið skipað við handilsskipanini frá 1974 og handilsavtalunum frá 1992 og 1997, og einum rammusáttmála um sínámillum veiðurættindi frá 1977.

Eftir at løgtingið hevði samtykt, at Føroyar skuldu standa uttanfyri EEC, fekk landsstýrið samstundis heimild at fara undir samráðingar við EEC um eina skipan fyri handilin millum partarnar. Úrslitið gjørdist ein handilssáttmáli, sum kom í gildi 1. september 1974.

Sambært skipanini bant EEC seg til stigvíst at lækka tollin á føroyskum ídnaðarvørum við 80%, og ein líknandi skipan var gjørd fyri ávísar fiskavørur. Tollfrælsið í Stórabretlandi fyri tær vørur, sum høvdu frælsi sambært EFTA, helt tó fram. Í 1979 lækkaði EF tollin á ídnaðarvørum til 0. Skipanin fevndi ikki um innflutning úr Føroyum til Danmarkar. Har var eins og frammanundan eingin tollur, men føroyskar vørur kundu ikki frítt fara víðari í ES.

Í hesum umfari skal ikki gerast so nógv burtur úr handilsskipanini frá 1974, men nevnast kann, at samanborið við teir handilssáttmálar, sum Ísland og Noreg gjørdu við ES um sama mundið, gav føroyski sáttmálin gagnligari marknaðaratgongd enn tann norski, meðan íslendingar høvdu ein heldur frægari sáttmála enn føroyingar.

Í sambandi við handilssamráðingarnar í 1970-árunum, er eisini vert at hava í huga, at tá høvdu handilspolitisk viðurskifti Føroya nógv minni týdning, enn í dag. Stóra stríðsmálið tá vóru fiskimørk og veiðurættindi. Hetta vigaði eisini tyngst, tá løgtingið gjørdi av, at Føroyar skuldu standa uttanfyri EEC. Men sum fráleið broyttist framleiðslumynstrið og samansetingin av útflutninginum. Tá komið var út í 1980-árini, gjørdist greitt, at handilsskipanin var ótíðarhóskandi.

### 7.4 Handilssáttmálin við ES frá 1991/1996

Í 1988 tók ES-nevndin stig til at finna ein nýggja skipan fyri handilsligu samvinnuna millum Føroyar og ES. Á vári í 1988 boðaði ES-nevndin donsku stjórnini frá, at hon var ónøgd við partar

av skipanini frá 1974 og ta tollviðgerð, sum føroyskar vørur fingu í ES. Eitt nú í sambandi við komandi innmarknaðin bar ikki til, at vørur úr Føroyum fingu ymiska tollviðgerð í ymiskum pørtum av ES, og fyrst og fremst at tær fingu tollfrælsi í Danmark.

Danska stjórnin og landsstýrið søgdu seg vera sinnað at samráðast um eina nýggja skipan við tí í hyggju at fáa einsháttaða tollviðgerð í øllum ES, men hildið varð kortini, at henda skipan átti at taka útgangsstøði í verandi tollfrælsi í Danmark, og at fyrilit áttu at takast fyri, at føroyski búskapurin var so bundin at fiskivinnu og sølu av fiski.

Semja fekst á fundi í Havn í juni 1991, og nýggi sáttmálin varð undir-skrivaður í Brússel í desember 1991.

Sáttmálin er í prinsippinum ein fríhandilssáttmáli, og ES og Danmark hava boðað GATT frá, at sáttmálin er ein fríhandilssáttmáli. Sáttmálin gevur ídnaðarvørum frítt at fara millum Føroyar og ES, tó eru fiskur og landbúnaðarvørur undantiknar. Av tí, at føroyski útflutningurin til ES, at kalla bert er fiskur, er týdningurin av handilsavtaluni eitt sindur avmarkaður.

Sambært sáttmálanum hevur ES øðrumegin og Føroyar hinumegin tikið av

allar toll- og avgjaldskipanir, sum gera mun á vørum hjá pørtunum. Hetta hevði við sær, at føroyska toll- og avgjaldskipanin varð munandi broytt. Frammanundan bygdi skipanin á fiskal innflutningsgjøld, sum á ávísum økjum vardu føroyska framleiðslu.

1. februar í 1992 kom nýggj tolllóg í gildi, sum í høvuðsheitum svaraði til ta donsku. Tollgjøldini mótvegis umheiminum tóku hædd fyri GATT-skyldunum hjá Danmark. Limaskapur Danmarkar í GATT ger, at hesar eru líkar teimum hjá ES. Síðan 1. januar 1993 hevur MVG skipanin verið í gildi saman við punktavgjøldum, ið skulu vera tey somu á føroyskt framleiddum vørum sum á innfluttum vørum.

Sambært avtaluni fær ES tollfrælsi fyri allar vørur, mjólkaúrdráttir og seyðakjøt undantikið. ES veitir føroyskum ídnaðarvørum tollfrælsi á sínum marknaði. Hinvegin veitir avtalan okkum ikki fult tollfrælsi á øllum fiskavørum. Sum yvirlitið niðanfyri vísir, eru tær fiskavørur av føroyskum uppruna, ið fingu tollfrælsi í 1992, í høvuðsheitum vørur, sum føroyingar kundu vísa á, hava verið útfluttar.

Fyri teir mest týðandi vørubólkarnar er tollfrælsi hinvegin avmarkað við tollloftum og -kvotum. Hesi eru ásett við støði í teimum nøgdum, sum Føroyar útfluttu til ES í einum referansutíðarskeiðið millum 1985 og1988. Í ávísum førum vórðu fyrilit tikin fyri verandi ella væntaðum útflutningsvøkstri.

Tær vørur, sum eru reguleraðar við kvotum, verða álagdar triðjalandstoll, tá kvotan er uppi. Skipanin við toll-loftum virkar soleiðis, at tollur kann leggjast á tær, tá loftið er rokkið. Harumframt verður fylgt við útflutningstølunum fyri ávísar vørubólkar, soleiðis ES-nevndin kann biðja um fund, um tað vísir seg, at útflutningurin úr Føroyum veksur óvanliga nógv.

Fyritreytin fyri tollfrælsinum er harumframt, at føroyskir útflytarar halda seg til referansuprísirnar hjá ES. Talva 7.1 vísir eitt yvirlit yvir tollkvotur og -loft fyri føroyskar fiskavørur á ES-marknaðinum.

| Talva 7.1: Kvotur og loft | |
|---|---|
| **Kvotur:**<br>3. landstollur verður álagdur, tá kvotan er uppi. | Tons |
| Síl - *livandi, fesk, fryst, flak íroknað*<br>Laksur - *livandi, feskur, frystur, flak íroknað*<br>Síl/laksur - *tilvirkað og haldevnað*<br>Aðrar fiskavørur - *tilvirkaðar og haldevnaðar*1<br>Rækjur - *pilkaðar* | 700<br>4.925<br>2.000<br>2.000<br>2.000 |
| **Loft:**<br>3. landstollur kann áleggjast, tá loftið er rokkið | Tons |
| Sild - *fesk, fryst, fryst flak íroknað*<br>Makrelur - *feskur*<br>Fryst upsaflak og upsafars<br>Saltfiskur - *onnur fiskasløg enn toskur*<br>Roykturfiskur<br>Kongafiskur - *køldur, frystur, fløk íroknað* | 2.000<br>3.000<br>25.000<br>5.000<br>1.000<br>12.600 |

| | |
|---|---|
| Fesk fløk - *toskur og kongafiskur undantikin* | 3.000 |
| Fryst longufløk | 550 |
| Svartkjaftaflak og -fars - *fryst* | 1.800 |
| Saltfiskur av øðrum enn toski - *flak undantikið* | 1.400 |
| Rækjur - *pilkaðar undantiknar* | 11.000 |
| Sild - *saltað, í saltlaka, hálvliðug vøra* | 500 |
| 1) Frá 1. januar 1995 varð henda kvotan tikin burtur | |

Fyri ávísar fiskavørur, sum í sáttmálanum verða bólkaðar sum landbúnaðarvørur, er eisini tollfrælsi. Hetta er m.a. galdandi fyri fiskamjøl og djóra- og fiskafóður, har ein tollfræls kvota er upp á 5.000 tons. Umframt fyri eitt sindur av seyðakjøti, hava Føroyar ikki fingið tollfrælsi á landbúnaðarvørum.

Handilssáttmálin hevur eisini allar tær vanligu ásetingarnar um upprunareglur, trygdarklausular og kappingarreglur. Eisini er ein felagsnevnd sett at ansa eftir, at sáttmálin verður fylgdur.

Í sáttmálanum er ein generellur menningarklausulur, ein serligur menningarklausulur viðvíkjandi tollfrælsi fyri føroyskar fiskavørur í ES og ein sonevndur EFTA-klausulur. Um annar parturin veitir EFTA fyrimunir, sum eru gagnligari, kann umhugsast at veita mótpartinum somu sømdir.

Síðani avtalan kom í gildi í 1992, hava onkrar broytingar verið gjørdar. Fyrst í 1995 fekst semja við ES um at broyta avtaluna soleiðis, at kvotan á "øðrum virkaðum og haldevnaðum fiskavørum" varð tikin burtur. Hendan broyting hevur serliga týdning fyri útflutningin av paneraðum fiskavørum.

Í 1995 fingu Føroyar gjøgnum handilsavtaluna støðu sum triðjaland í granskingarhøpi. Hetta merkir, at Føroyar kunnu vera við í felags europeiskum granskingar verkætlanum, um Føroyar gjalda sín part. Í 1998 hevur ES-nevndin góðkent, at samráðst verður við Føroyar um at tær koma við í víðkaða veterinera samstarvið.

**7.5 Handilssáttmálar við EFTA-londini og onnur lond**

Í 1993 vórðu fríhandilssáttmálar gjørdir við EFTA-londini Ísland, Noreg, Svøríki og Finnland. Eftir at Svøríki og Finnland fóru upp í ES í 1995, er handilssáttmálin við ES broyttur, og er eisini galdandi fyri tey bæði londini.

Um ársskiftið 1993/1994 vórðu handilssáttmálar gjørdir við Sveis og Eysturríki. Sáttmálin við Eysturríki kom ongantíð í gildi. Handilssáttmáli er eisini síðan gjørdur við Estland, og samráðingar um handilssáttmála eru tiknar upp við Póland og Litavia.

**7.6 Samanumtikið**

Handilsviðurskifti Føroya við onnur lond eru regulerað við sínámillum sáttmálum. Hetta er í høvuðsheitum sáttmálar, sum geva føroyskum vøruútflutningi sømdir á marknaðinum hjá mótpartinunum. Harumframt eru ásetingar, sum hava við handilin av gera, eitt nú upprunareglur, trygdarklausular og kappingarreglur.

Sáttmálin millum Danmark/Føroyar og EF gevur ídnaðarvørum frítt at ferðast millum Føroyar og ES, tó er fiskur undantikin. Av tí, at føroyski útflutningurin til ES, at kalla bert er fiskur, er handilsavtalan ikki so áhugaverd, sum um hon veitti fullan fríhandil fyri fisk.

Sáttmálarnir við Ísland, Noreg og Estland geva vørum frítt at fara millum londini.

Sáttmálarnir snúgva seg í høvuðsheitum um handil við vørum og ásetingar, sum hava týdning fyri vøruhandilin. Samstarvið fevnir ikki um onnur øki, men sáttmálarnir kunnu víðkast.

# EBS frágreiðingin

## Tollsamgongur

### 8.1 Inngangur

Arbeiðssetningur nevndarinnar er at gera upplegg til samráðingar við ES um EBS-líknandi avtalu saman við eini tollsamgongu. Setningurin er grundaður á tilmælið í Bláa álitinum um eina serskipan. Í álitinum verður mælt til, at stevnumiðið í samráðingum við ES um eina serskipan eigur at vera ein skipan, har partar av EBS-leistinum og tollsamgonga eru settir saman.

EBS er ikki ein tollsamgonga. EBS - Europeiska Búskaparliga Samstarvs-økið - fevnir um eina tollsamgongu (EF) og eitt fríhandilsøki (EFTA) og er sostatt eitt víttfevnandi fríhandilsøki fyri ídnaðarvørur, tænastur, kapital og arbeiðsmegi við samansjóðaðum reglum á teimum økjum, sum hava týdning fyri frælsum samskifti av hesum.

Meðan EF hevur felags handilspolitikk og tollmúr úteftir, hava EFTA-londini hvør sær sín egna handilspolitikk og toll mótvegis øðrum triðjalondum. Serligi landbúnaðarpolitikkurin og serligi fiskivinnupolitikkurin í EF gera, at EBS-reglurnar, um at vørur hava frítt at fara, ikki galda fyri landbúnaðarvørur og fisk. Hóast ein EBS-líknandi avtala ber í sær lættar í samhandlinum við ES, so veitir hon ikki føroyskum fiskavørum stórvegis frægari tollsømdir enn verandi handilssáttmáli millum Føroyar og ES.

Í Bláa álitinum verður víst á, at ein tollsamgonga gevur í útgangsstøðu føroyskum virkjum somu marknaðartreytir fyri fisk sum virkjum í ES. Samstundis loysir ein tollsamgonga trupulleikarnar við triðjalandsfiski á ES-marknaðinum. Bláa álitið ger tó vart við, at samráðingar um tollsamgongu verða truplar. Í fyrsta lagi hevur ES ongantíð gjørt tollsamgongu við triðjalond um fisk og fiskavørur, og í øðrum lagi mugu Føroyar helst lata ES okkurt afturfyri størri tollsømdir - eitt nú veiðurættindi.

Evnið í hesum partinum er tollsamgongur. Fyrst verður hugt at, hvat ein tollsamgonga er. Síðani verður komið inn á tollsamgonguna í ES og tollsamgongur, ið ES hevur gjørt við triðjalond, og spurningurin um tollsamgongur í altjóða handilsskipanini verður umrøddur.

At enda verður viðgjørdur spurningurin um Føroyar í tollsamgongu við ES, og hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri Føroyar. Hvørjar avleiðingarnar verða, veldst nógv um annaðhvørt vit fara upp í tollsamgonguna hjá ES, ella um vit sum triðjaland í ES-samanhangi gera serliga avtalu við ES um tollsamgongu. Ein triði møguleiki, sum tó ikki verður viðgjørdur í hesum umfari, er, at Føroyar sum atland fara í tollsamgongu við Danmark. Fyrimyndin í hesum føri er skipanin millum Bretland øðrumegin og Isle of Man og Ermasundsoyggjar hinumegin.

### 8.2 Tollsamgongur yvirhøvur

Í kap. 4.3 vórðu høvuðsformarnir í handilsliga og búskaparliga samstarvinum millum vestureuropeisku londini lýstir. Sum yvirlitið vísir, er endamálið við fríhandilsøkjum og tollsamgongum, at vørur skulu hava frítt at fara millum londini.

Í einum fríhandilsøki ganga lond saman um at beina burtur sínámillum toll og kvotur, meðan tey varðveita rættin at hava egnan handils- og tollpolitikk.

Í eini tollsamgongu ganga tvey ella fleiri lond saman um at skipa eitt felags tolløki, har tollur og aðrar handilsforðingar millum londini verða tikin burtur, og tollur mótvegis londum uttanfyri verður felag og samskipaður. Endamálið við eini tollsamgongu er at skipa ein felags víðari marknað, enn londini frammanundan høvdu við felags verju mótvegis útlendskari kapping.

Sjálvbjargnið innan tollsamgonguna gerst størri, enn tað var frammanundan fyri hvørt land sær. Tollsamgongan gevur einstøku fyritøkuni innan tollsamgonguna ein størri marknað, enn fyritøkan frammanundan hevði, og harvið betri møguleikar at vaksa og troyta stórvirkisfyrimunir. Við hesum gerast møguleikarnir at byggja upp størri altjóða kappingarføri betri.

Fríhandilsøki og tollsamgongur eru sostatt diskriminerandi handilsskipanir, tí handilslættarnir bert galda fyri ein bólk av londum. Ein tollsamgonga fer kortini eitt stig longur, tí londini í felag orða og umsita felags politikk fyri uttanríkishandilin viðvíkjandi tolli og øðrum handilsavmarkingum mótvegis triðjalondum.

Tollsamgongur kunnu hava fyrimunir og vansar við sær fyri limalondini.

*Fyrimunir:*

- Av tí, at marknaðurin gerst størri, er landið betri ført fyri at troyta stórvirkisfyrimunir. Hetta verður serliga mett at vera týdningarmikið fyri smá lond, sum vinna meira, tá marknaðurin gerst størri.
- Øktur handil kann hava við sær batar í infrastrukturinum í tollsamgonguni (flutningur, fígging osfr.) Hetta kann, sum frá líður bera í sær, at fyrimunirnir gerast enn størri, tí flutningur og avgreiðsla av innflutningi og útflutningi gerst ódýrari og smidligari.
- Ein stór tollsamgonga styrkir um støðuna í altjóða samráðingum. Hetta kann gera, at býtislutfallið í uttanlandshandlinum batnar. Hetta er tó treytað av, at eitt ávíst politiskt samstarv er millum limalondini.
- Tá tollur verður beindur burtur, herðist kappingin millum fyritøkurnar í limalondunum. Hetta kann, sum frá líður, birta uppundir virkisføri, stimbra íløguhugin og minka um monopolvald.
- Samansjóðingin millum londini kann gera sítt til skjótari útbreiðslu av nýggjari tøkni.
- Upprunareglur fyri vørur fella burtur.

*Vansar:*

- Førir økta samansjóðingin við sær tættari samstarv millum fyritøkur í limalondunum, kann hetta samstundis birta uppundir oligopolistiskt samstarv og avlaga kappingina. Ein avleiðing av hesum kann vera hækkandi brúkaraprísir. Økta samansjóðingin av marknaðunum kann eisini hava við sær samanlegging av fyritøkum, sum síðani kunnu fáa monopolstøðu.
- Er avleiðingin av tollsamgonguni, at stórar fyritøkur stinga seg upp, kunnu stórvirkisfyrimunirnir við tíðini kámast burtur, tí at vandi er fyri, at fyritøkurnar gerast stirvnar og minni virknar.
- Kostnaðurin av at umsita tollsamgonguna kann gerast høgur og kann vaksa, um londini ikki hava nøktandi eftirlit við hesum. Hetta kann gera seg galdandi, tess meira samstarvið ávirkar viðurskiftini hjá einstøku londunum. Tá øll londini gjalda gildið, kann hetta freista summi limalond at hækka útreiðslurnar, tá hetta gagnar teimum sjálvum.
- Handilsforðingar mótvegis triðjalondum kunnu gera, at gagnlig handilssamvinna við lond uttanfyri fellur niðurfyri, tí meginparturin av handlinum verður við lond í tollsamgonguni.
- Hóast londini í eini tollsamgongu standa sterkari í altjóða handilssamráðingum, er eingin trygd fyri, at myndugleikarnir í tollsamgonguni røkja áhugamálini hjá einstaka landinum.

Trupult er at meta um hesar fyrimunir og vansar. Hvørjir fyrimunir og vansar eru fyri einstøku londini, sum fara upp í eina tollsamgongu, veldst nógv um búskaparligu og politisku støðuna í londunum og støðuna í heimsbúskapinum sum heild.

Síðan seinna heimsbardaga hevur gongdin vanliga verið, at stígur er komin í handilsligt og búskaparligt samstarv millum lond, tá búskaparlig afturgongd er í pørtum av heiminum ella í heimsbúskapinum sum heild. Hetta gjørdi seg m.a. galdandi, tá oljukreppurnar vóru í 1970-árunum. Londini brúktu meginpartin av síni politisku orku til at loysa innanhýsis búskaparligar trupulleikar.

### 8.3 Tollsamgongan í EF í søguligum baksýni

EF er ein tollsamgonga á tann hátt, at allur tollur millum limalondini er beindur burtur, og felags tollur er móti umheiminum.Vanliga verður sagt, at EF-samstarvið byrjaði í 1950. Tá varð uppskot lagt fram um at skipa allan kol- og stálídnaðin í Týsklandi og Frakland í ein felagskap við egnum og óheftum stovnum. Sáttmálin um Europeiska Kol- og Stálfelagsskapin (EKSF) varð undirskrivaður í 1950 millum Týskland, Frakland, Italia, Belgia, Holland og Luxembourg.

Hóast uppskot longu tá vóru frammi um at fáa í lag tættari politiskt samstarv og felags verjufelagsskap í Europa, spurdist onki burtur úr hesum. Ídnaðstu talsmenninir fyri europeiskari samansjóðing løgdu tey næstu árini størsta dentin á at fáa í lag tættari búskaparligt samstarv millum londini.

Ein ætlan varð løgd fram, og londini fóru undir samráðingar. Í 1956 komu londini ásamt um Rómarsáttmálan um Europeiska Búskapar Felagsskapin EEC og sáttmálan um Euratom. Hesir sáttmálar komu í gildi árið eftir. Saman við EKSF vóru teir grundarlagið undir stovnsetingini av Europeisku Felagsskapunum EF. Meðan EKSF- og Euratom-sáttmálarnir reguleraðu serøki, varð Rómarsáttmálin ein nógv rúmari og víðfevndari búskaparlig rammuavtala, sum legði lunnar undir víðari menning av samstarvinum.

Eftir Rómarsáttmálanum var grundarlagið undir EF ein tollsamgonga "som omfatter al vareudveksling, og som indebærer forbud mod told ved indførelse fra og udførsel til andre medlemsstater, såvel som mod alle afgifter med tilsvarende virkning, samt indførelse af en fælles toldtarif over for tredjeland" (grein 9).

Sáttmálin ásetti, hvussu innanhýsis tollurin stigvíst skuldi beinast burtur. Upprunaliga var ætlanin, at hetta skuldi gerast eftir 12 árum frá 1. januar 1958 at rokna, men longu í juli í 1968 varð komið á mál við tollsamgonguni fyri ídnaðarvørur. Tey seks upprunaligu limalondini vóru við í hesi tollsamgongu, og lond, sum seinni eru komin uppí, hava í flestu førum fingið eina tillagingartíð.

Nevndu ásetingar, saman við øðrum ásetingum í Rómarsáttmálanum um avtøku av kvantitativum avmarkingum millum limalondini, vísa greitt, at tollsamgongan longu tá var ætlað sum eitt stig á leiðini til at fáa í lag ein innmarknað í EF.

Í 1970-árunum og byrjanini av 1980-árunum kom stígur í samansjóðingina í ES. Hóast komið var á mál við upprunaligu stevnumiðunum um at beina burtur allar tollforðingar og aðrar beinleiðis handilsforðingar millum limalondini, so vísti tað seg, at hetta ikki var nóg mikið, til at fáa marknaðin at virka eftir ætlan. Fjaldar handilsforðingar, serstakliga sum ólík fyrisett mát í limalondunum, forðaðu framvegis handlinum.

Á sumri 1985 legði ES-nevndin fram uppskot um eina ætlan at seta innmarknaðin á stovn í 1992. Í ætlanini vórðu nevnd eini 300 øki, har felags reglur skuldu setast í verk fyri at lætta um samhandilin.

Tollsamgongan í EF hevur síðani umleið 1970 havt tættir av einum fullum felagsmarknaði í sær, serstakliga felags landbúnaðar-, fiskivinnu- og regiónalpolitikk, og í ein ávísan mun eisini innan skatt, flutning og sosialpolitikk. Serliga er landbúnaðar-, fiskivinnu- og regiónalpolitikkurin ein neyðug samansjóðing og treyt fyri at fáa felagsmarknaðin í tollsamgonguni annars at virka.

Hvørt land sær hevði sín egna landbúnaðarpolitikk bæði fyri at tryggja sær sjálvbjargni í eini krígsstøðu, men eisini fyri at tryggja bóndum í egnum landi útflutningsmøguleikar. Vanliga kenda burturflytingin frá landbúnaðarøkjum var kend í øllum londunum og fyri at tryggja, at hesir partar av tollsamgonguni ikki forðaðu fyri víðari samansjóðing, var neyðugt at seta í verk felags landbúnaðar- og regiónalpolitikk við felags landbúnaðar-prísskipan og stuðulsskipan, ið tryggjaði, at bøndur sluppu av við sína landbúnaðarframleiðslu til frammanundan kendar prísir.

Ovurframleiðslan, ið skipanin hevði við sær, varð burturbeind ella seld á heimsmarknaðinum til sera lágar prísir. Somuleiðis varð høgur landbúnaðartollur ásettur mótvegis triðjalondum, so útlendskar landbúnaðarvørur ikki kundu verða seldar í EF fyri lægri prísir enn høgu landbúnaðarprísirnir, ið skipanin hevði við sær. Loyvt var bóndum í einum landi at keypa sær jørð og gerast bøndur í øðrum EF-landi undir somu treytum, bøndurnir í heimlandinum høvdu.

Fiskivinnupolitikkurin hjá EF varð skipaður eftir nakað sama leisti og nakað somu skipan. Serlig marknaðarskipan varð sett í verk, sum tryggjaði fiski-monnum at sleppa av við sína veiðu til kendar og høgar prísir. Tað, sum marknaðurin ikki kundi taka ímóti uttan til lægri prísir, var tikið út av marknaðinum fyri rímuligan prís og latið til ídnaðarframleiðslu. Felags høgur tollur varð settur mótvegis triðjalondum fyri at tryggja høgu prísirnar á fiskavørum, sum marknaðarskipanin fyri fisk og fiskavørum tryggjaði.

Meðan landbúnaðarpolitikkurin hjá EF hevur tryggjað felagsskapinum munandi størri landbúnaðarframleiðslu, enn felagskapurin sjálvur hevur tørv á, og EF sostatt er stórur nettoútflytari av landbúnaðarvørum, so er EF stórur nettoinnflytari av fiskavørum.

Tað hevur sostatt verið munandi truplari hjá EF at linka um landbúnaðarpolitikkin og verju ímóti útlendskum landbúnaðarvørum, enn tá tað snýr seg um fiskivinnupolitikkin og verjuna móti útlendskum fiskavørum. Júst hesi viðurskifti gjørdu tað so trupult at koma til úrslit á landbúnaðarøkinum í Uruguay-umfarinum. Á landbúnaðarøkinum eru tað bert brúkararnir, ið hava áhuga í bíligari matvørum, og skattgjaldararnir, ið rinda nógv til felags landbúnaðarpolitikkin, sum hava ein áhuga í linkaðum landbúnaðarpolitikki.

Á fiskivinnuøkinum er harafturímóti neyðugt at flyta inn stórar nøgdir av fiski fyri at nøkta tørvin hjá ES-marknaðinum. Tískil hava fiskaframleiðarar og fiskaseljarar í EF áhuga í at fáa rávøru og fiskavørur til keyps frá triðjalondum. Bert á teimum økjum, har fiskimenn í EF hava møguleikar sjálvir at útvega rávøruna, t.d. laksavøru, makrel og sild, verður verjutollur og aðrar handilsavmarkandi skipanir fasthildnar við teirri umbering, at tað snýr seg um *viðkvæmar vørur.* Hetta er eisini galdandi, har møguleikar eru fyri at framleiða viðgjørdar vørur úr innfluttari rávøru. Fyri eitt nú royktar laksavørur tykist vera ræ ttiliga trupult at fáa læ ttar í tollverjuni.

Handilsliga og búskaparliga samansjóðingin í ES hevur hildið fram við felagsmarknaði, innmarknaði, og seinnu árini við pengapolitiskum og búskarligum samveldi og tæ ttari samstarvi í politiskum og løgræ ttumálum.

Hóast innmarknaðurin fyri ídnaðarvørur, tænastur, kapital og arbeiðsmegi er víðkaður til eisini at umfata EFTA-londini í EBS, er eyðsæð, at tað skal serligt hepni til at fáa frælsa atgongd fyri allar føroyskar fiskavørur í EF, uttan at vit noyðast at taka við teimum skipanum, sum eru bygdar upp í tollsamgonguna.

Tað tykist eisini greitt, at sjálvt um tað gongur sera skjótt við at taka burtur allar forðingar í altjóða handli, fer tað at taka drúgva tíð, áðrenn seinastu tollforðingar og nøgdaravmarkingar á fiskavørum, sum EF metir viðkvæmar, verða beindar burtur.

Tá metast skal um tollsamgonguna í ES, er neyðugt at hugsa um handilspolitisku støðuna, sum var tá, og um gongdina síðan í samstarvinum í ES og altjóða handli annars. Tollsamgongan í ES var í síni tíð ætlað sum eitt amboð, ið skuldi styrkja støðuna hjá europeiska ídnaðinum í kappingini við amerikanska og japanska ídnaðin. Heldur ikki var ætlanin, at tollsamgongan í ES skuldi vera ein statisk skipan. Hon var ætlað sum eitt stig á leiðini móti tæ ttari handilsligum, búskaparligum og politiskum samstarvi í Europa.

**8.4 Tollsamgongur millum ES og triðjalond**

Fleiri av teimum avtalum, sum veita innflutningi úr øðrum londum handilslæ ttar á ES-marknaðinum, verða flokkaðar sum tollsamgongur. Í summum førum er talan um tollsamgongur hjá atlondum. Atlond eru lond, sum søguliga, ríkisræ ttarliga, mentanarliga og handilsliga eru knýtt at einum størri limalandi.

Í nøkrum førum hava atlond gjørt tollsamgongu við landið, sum tey hava tilknýti til. Í hesum bólki eru t.d. Ermasundsoyggjarnar og Isle of Man, ið hava tollsamgongu við Bretland. Hesar skipanir eru ikki fráboðaðar GATT/WTO. Hesar avtalur eru ikki so áhugaverdar hjá okkum, tí vit í ES høpi vanliga verða roknað sum triðjaland, og søguligu og ríkisræ ttarligu fyritreytirnar hjá okkum ikki eru tær somu, sum hjá nevndu londum.

Tí eru avtalurnar, sum ES hevur við triðjalond um tollsamgongur, meira áhugaverdar hjá okkum. Í talvuni á næstu síðu er yvirlit yvir handilsavtalur hjá ES við triðjalond, sum eru skrásettar í GATT/WTO sum tollsamgongur.

Tollsamgongurnar millum ES og triðjalond eru í nógvum førum ein liður í eini tillaging ella fyrireiking hjá londum til limaskap í ES. Ofta eru tað ávís viðurskifti, sum forða fyri, at londini kunnu gerast limur. Hetta er t.d. galdandi fyri Turkaland, ið ES ikki vil tingast við um limaskap, so leingi landið brýtur mannaræ ttindini.

Felags fyri tollsamgongurnar í talvuni á næstu síðu er, at tær í flestu førum bert fevna um ídnaðarvørur. Serligar skipanir eru fyri handilin við landbúnaðarvørum og fiski, ella eru hesar vørur als ikki tiknar við.

ES hevur ikki skipað tollsamgongu fyri landbúnaðar- og fiskavørur ella á annan hátt liberaliserað handilin við hesum vørum í avtalunum við triðjalond, tí eitt slíkt stig kann koma í stríð við felags landbúnaðarpolitikkin og felags fiskivinnupolitikkin hjá ES.

At veita fríhandil fyri eitt nú landbúnaðarvørur í avtalum við triðjalond, er ósambærligt við felags landbúnaðarpolitikkin, tí hesum politikkurin regulerar handilin við landbúnaðarvørum við framleiðslukvotum, handilsverju mótvegis umheiminum (tollur, referansuprísir o.l.) og prísstuðli.

ES-nevndin hevur tó í stevnu síni (COM(95)607) gjørt greitt, at størri orka eigur at vera løgd í at laga felags landbúnaðarpolitikkin eftir aðalmálunum frá endurskoðanini í 1992. Har verður m.a. sagt, at prísstuðul skal burtur, og størri dentur leggjast á nýtslu av beinleiðis stuðli. Verður hetta gongdin, verður kanska læ ttari í framtíðini at gera fríhandilsavtalur og tollsamgongur, sum eisini fevna um landbúnaðarvørur og fisk.

| Talva 8.1: Tollsamgongur millum ES og triðjalond | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *Land* | *Heiti á avtalu* | *Gildistíð* | *Slag av avtalu* | *Fráboðað til GATT/WTO* |
| TURKA-<br>LAND | Agreement establishing an Association between the European Economic Community and Turkey | Undirskrivað<br>12. september 1963. Kom í gildi 1. Desember 1963 í óavmarkaða tíð | Leggur upp til at seta á stovn tollsamgongu í trimum stigum.<br>Avtalan nevnir møguleikan fyri, at Turkaland kann gerast limur í EF | Working Party report adopted 25/3/65 |
| | Decision Relating to Common Position by the EC-Turkey Association Council on the final phase of the Custom Union | Kom í gildi<br>31. desember 1995 | Setir í verk síðsta stigið í tollsamgonguni eftir eina 22 ára skiftistíð, sum avtalan frá 1963 legði støði undir | Skrásett í des. 1995, áðrenn hon kom í gildi.<br>Verður kannað av Committee on Regional Agreements í WTO |
| KYPROS | | Undirskrivað<br>19. desember 1972. Kom í gildi 1. juni 1973. Er ikki tíðaravmarkað | Ásetir, at miðast skal eftir at seta á stovn tollsamgongu í tveimum stigum | Working Party report adopted 21/6/74 |
| MALTA | Agreement establishing an Association between the European Economic Community and Malta | Undirskrivað í des. 1970. Kom í gildi 1. apríl 1971. Er ikki tíðar-avmarkað | Ásetir, at miðast skal eftir at seta á stovn tollsamgongu í tveimum stigum | Working Party report adopted 29/5/72 |
| ANDORRA | Agreement between the EEC and the Principality of Andorra | Kom í gildi<br>1. januar 1991. Er ikki tíðaravmarkað | Ásetir, at miðast skal eftir at seta á stovn tollsamgongu fyri ídnarvørur í tveimum stigum | Ikki fráboðað WTO |
| SAN MARINO | Interim Agree-ment on Trade and Customs Union between the EEC and the Republic of San Marino | Undirskrivað 27.11. 1992. Kom í gildi 1.12.92. Er galdandi, til *Co-operation and Custom Union Agreement,* undir-skrivað 16.12.91 kemur í gildi | Ásetir, at tollsamgonga skal setast á stovn | Ikki fráboðað WTO |

**8.5 Tollsamgongur í altjóða handilskipanini**

Ein tollsamgonga ber í sær, at tollur og aðrar handilsforðingar verða beindar burtur, og felags tollmúrur er ímóti londum uttanfyri. Ein tollsamgonga er sostatt ein diskriminerandi handilsskipan millum lond, tí handilsligur mismunur verður gjørdur á londum uttan fyri og innan fyri tollsamgonguna.

Hetta er ikki heilt í samsvari við meginregluna í GATT-skipanini um ikki-diskriminering. Sambært GATT 95 eru limalondini bundin at tí sonevndu "most-favoured-nation"-regluni. Hendan meginreglan ber í sær, at limalondini í WTO skulu veita hvørjum øðrum somu sømdir, sum tey geva øllum øðrum limalondum. Tollsamgongur millum ein avmarkaðan bólk av londum eru tí ikki sambæriligar við hesa meginreglu.

WTO-reglurnar hava kortini eitt undantak, sum loyvir londum at skipa seg í fríhandilsfelagsskapir og tollsamgongur, tá ávísar treytir verða loknar. Hendan undantaksregla er fyrst og fremst ein avleiðing av, at endamálið við stovnsetingini av GATT í síni tíð var at birta upp undir millumtjóða fríhandil.

Tey fyrstu árini hjá GATT var hugsanin framvegis, at tollsamgongur vóru eitt stig móti altjóða fríhandli. Seinni varð kortini ásannað, at tollsamgongur eisini kundu roknast sum eitt stig móti protektiónismu.

Ásetingarnar um fríhandilsøki og tollsamgongur í WTO-skipanini siga annars í stuttum, at fríhandilsfelagskapir og tollsamgongur skulu vera í samsvari við altjóða handilsskipanina og

mugu ikki máa støði undan henni. Eisini verður sagt, at tá lond skipa seg í fríhandilsøki ella tollsamgongur, skulu tollur og aðrar handilsforðingar minkast ella beinast burtur. Lond uttan fyri skulu í handlinum við londini í fríhandilsøkinum ella tollsamgonguni ikki gerast verri fyri, enn frammanundan.

Nevndu ásetingar eru ógreiðar, og í løtuni arbeiðir ein nevnd í WTO - "Committee on Regional Trade Agreements - við at fáa greiðari reglur á hesum øki.

Viðvíkjandi tollsamgongum í altjóða handilsskipanini er eisini vert at hava í huga, at tollsamgongur sum amboð at fáa fríari heimshandil, kom fram í eini tíð, tá størsti dentur varð lagdur á beina burtur tollforðingar í handlinum við ídnaðarvørum.

Lond skipaðu seg í tollsamgongur fyri at verja egnan ídnað móti kapping uttanífrá. Gongdin síðani seinna heimsbardaga hevur verið, at tollur er vorðin ein alsamt minni forðing fyri millumtjóða handil. Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri handilin við ídnaðarvørum, sum um fá ár fer at hava lítlan ella ongan toll.

Eftir Uruguay-umfarið, er eisini líkt til, at sum frá líður, fer tollurin eisini at lække á landbúnaðarvørum og fiski. Tí er nógv sum bendir á, at um ikki so langa tíð verða tollsamgongur neyvan amboðið, sum fer at verða nýtt til at fáa fríari heimshandil og at beina burtur handilsforðingar.

Tollur einsamallur fer ikki at vera sama forðingin fyri handli millum lond. Hinvegin er hugsandi, at aðrar forðingar fáa størri týdning, eitt nú heilsufrøðilig, djórafrøðilig og teknisk krøv. Til tess at sleppa undan, at tílík krøv verða ein forðing fyri handlinum, krevst helst øðrvísi og rúmari politiskt samstarv, enn ein tollsamgonga leggur upp til.

**8.6 Føroyar í tollsamgongu við ES**
Endamálið við at royna at fáa tollsamgongu við ES er at tryggja føroyskum fiskavørum gagnligastu marknaðaratgongd til ES-marknaðin.

Hvørjar avleiðingar ein tollsamgonga hevði fingið, veldst nógv um, hvat slag av tollsamgongu, talan verður um. Ein møguleiki er, at serlig avtala verður gjørd við ES um eina tollsamgongu eins og triðjalond hava gjørt. Hin møguleikin er at fara uppí tollsamgonguna hjá ES.

Fyrri møguleikin er ein samráðingarloysn, og spurningurin um, hvørjir møguleikar eru á hesum øki, kann bert svarast við at royna hetta í samráðingum við ES.

Tann seinna loysnin - at fara upp í tollsamgonguna í ES - ber í sær, at vit í høvuðsheitum mugu góðtaka meginreglurnar í verandi skipan hjá ES og í handilspolitikkinum hjá ES. Hetta ger m.a., at:

Tollmarkið hjá ES verður víðkað til at fevna um Føroyar, og vit koma undir felags skipan av tollviðurskiftum.

Føroyskar fiskavørur fáa frítt at fara inn í ES

Vit mugu góðtaka felags marknaðarskipanina fyri fisk og fiskavørur í ES (sí Bláa álitið bls. 80-85).

Trupulleikarnir við triðjalandsvørum og upprunareglum verða beindir burtur, tvs., at vørur, sum verða innfluttar til Føroya úr triðjalondum, kunnu umsetast frítt í ES.

Vit lata politiskan avgerðarrætt í handlinum við umheimin til ES. Nógvar av handilsavtalunum vit hava við lond uttanfyri ES mugu sigast upp ella broytast.

Vit mugu góðtaka, at mannamunur verður gjørdur í handlinum við lond uttanfyri tollsamgonguna, m.a. ymiskar bólkar av menningarlondum, ið serligar skipanir eru galdandi fyri. Hesar avtalur hava samband við fortíðina hjá hesum londum sum hjálond.

Vit mugu góðtaka, at eitt nú landbúnaðarvørur verða innfluttar til ES-prísir, sum vanliga liggja omanfyri heimsmarknaðarprísirnar.

Herumframt er lítið at ivast í, at ES sum treyt fyri at gera eina avtalu, sum veitir fiskaútflutningi okkara betri tollsømdir í ES-londunum, enn verandi handilsavtala ella tær skipanir, sum Noreg og Ísland hava, fer at seta mótkrøv, sum sannlík verða veiðurættindi í føroyskum sjógvi.

# EBS frágreiðingin

## EBS - Europeiska Búskaparliga Samstarvið

### 9.1 Inngangur

Síðani seinna heimsbardaga eru fleiri stig tikin fyri at fáa fríari og einsháttaðar reglur í millumtjóða handli. Á altjóða stigi hevur GATT, sum frá 1. januar 1995 varð avloyst av WTO, havt ein týdningarmiklan leiklut. Somuleiðis eru regiónalir handilsfelagsskapir settir á stovn eitt nú ES, EFTA og norðuramerikanska fríhandilssamgongan NAFTA. Í hesum felagskapum hevur tað mangan gingið skjótari at koma fram til úrslit, enn í GATT/WTO.

Síðani seinna heimsbardaga eru tveir handilsfelagsskapir settir á stovn í Vestureuropa. Europeiski fríhandilsfelagsskapurin EFTA, sum varð stovnaður í 1960, er ein rein fríhandilsskipan, og arbeiðið hjá felagsskapinum hevur í høvuðsheitum snúð seg um at fáa fríhandil fyri vørur. Europeiska Samveldið, sum lunnar vórðu lagdir undir í 1957, hevur rúmari politisk stevnumið. Hjá ES er fríhandil eitt av nógvum amboðum í royndunum at fáa tættari politisk samstarv, sum kann birta upp undir búskaparligan og sosialan javna og tryggleika.

Miðvísa arbeiðið við at taka burtur handilsforðingar og formliga stovnanin av innmarknaðinum í ES gjørdi, at vinnulívið í og uttanfyri ES kom at virka undir øðrvísi og liberalari treytum enn frammanundan. EFTA-londunum gjørdist skjótt greitt, at skuldu tey ikki gerast eftirbátur, var neyðugt við eini skipan, sum tryggjaði teirra fyritøkum somu kor, sum kappingarneytarnir í ES.

Eftir at allur tollur á ídnaðarvørum varð avtikin í samhandlinum millum ES og EFTA við árslok í 1983, vóru partarnir samdir um at arbeiða fyri at taka aðrar handilsforðingar burtur og at víðka samstarvið til at fevna um onnur øki enn fríhandil. Í tíðarskeiðnum 1984-1989 vórðu nógvar handilsforðingar linkaðar ella tiknar burtur. Men hildið varð kortini, at tað bar illa til at sameina hesa "stig fyri stig" gongd við samansjóðingina í ES, serliga við tey ES-direktiv, sum komu í sambandi við innmarknaðin. Neyðugt var at skipa samstarvið millum EFTA-londini og ES øðrvísi.

Formaðurin í Europanevndini, Jacques Delors, skjeyt í januar 1989 upp, at fáa í lag ein nýggjan samsstarvsform við stovnum, sum skuldu taka avgerðir og umsita felags mál. Stjórnarleiðararnir í EFTA-londunum tóku í høvuðsheitunum undir við hugsanum Delors, og farið varð undir formligar samráðingar um EBS í juni 1990. Hesar tingingar endaðu við eini semju millum ES og EFTA ráðharrar í Luxembourg tann 21. oktober 1991. Sjálvur sáttmálin varð undirskrivaður í Oporto 2. mai 1992 og kom í gildi 1. januar 1994.

Í dag eru 18 lond við í EBS. Fyri 1. januar 1995 fevndi samstarvið um tey 12 ES-londini og EFTA-londini Eysturríki, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki. Frá 1. januar 1995 gjørdust Eysturríki, Finnland og Svøríki limir í ES. Sostatt fevnir sáttmálin nú um tey 15 ES-londini og tey trý EFTA londini Ísland, Liechtenstein og Noreg.

Sveis undirskrivaði EBS-sáttmálan, men á eini fólkaatkvøðu í desember 1992 havnaði ein meiriluti av fólkinum, at landið skuldi fara upp í EBS. Liechtenstein samráddi seg fram til tollsamgongu við Sveis, og landið gjørdist fullur limur í EBS í mai 1995.

Endamálið við EBS-sáttmálanum er at skipa eitt europeiskt búskaparligt samstarvsøki, og at fáa EFTA-londini upp í innmarknaðin. Hetta skal fáast í lag við at birta upp undir handilsliga og búskaparliga samvinnu millum sáttmálapartarnar at virka undir somu kappingartreytum og at halda seg til felags regluverk.

Samstarvið fevnir um hesi øki:

- At vørur, tænastur, kapitalur og persónar hava frítt at fara um landamørk.
- At fáa í lag eina skipan, sum forðar fyri, at kappingin verður avlagað, og at ásetingarnar verða umsitnar eins í øllum samstarvsøkinum.
- At fáa í lag eitt tættari samstarv á øðrum økjum, eitt nú gransking og menning, umhvørvi, útbúgving og viðurskifti viðvíkjandi arbeiðslívinum.

EBS-sáttmálin hevur harumframt stevnumið um breiðari samfelagspolitiskt og búskaparligt samstarv. Politiskir karmar eru settir fyri búskaparligari menning og umsiting av umhvørvi og tilfeingi. Á hesum økjum skal menningin vera burðardygg. Somuleiðis er stevnumiðið arbeiði til

allar hendur, og stórur dentur verður lagdur á ta sonevndu sosialu dimensiónina.

EBS fevnir ikki um:

- Luttøku í felagsstovnum í ES (Europeiska Ráðið, ES-ráðið, ES-nevndin, ES-tingið og EF-dómstólinum).
- Felags handilspolitikkin hjá ES mótvegis londum, sum ikki eru limir, og samstarvið um menningarhjálp.
- Felags landbúnaðarpolitikkin hjá ES.
- Felags fiskivinnupolitikkin hjá ES.
- Regiónalpolitiska samstarvið.
- Samstarvið um skatt og avgjøld.
- Tættari samskipan av búskapar- og pengapolitikkinum.
- Samstarvið um uttanríkis- og trygdarpolitikk.
- Samstarvið um løgreglu- og innanríkismál.

Á næstu síðunum verður EBS-skipanin lýst. Endamálið er at geva eitt yvirlit yvir EBS og høvuðstættirnar í samstarvinum. Mest verður gjørt burtur úr teimum samstarvsøkjum, sum verða mett at hava týdning fyri Føroyar. Fyrst verður ein stutt lýsing givin av londunum í samstarvinum. Síðani verður komið inn á institutiónellu karmarnar fyri EBS og felags stovnar, og avgerðartilgongdin verður lýst. Síðan verða tey fýra frælsini lýst. Komið verður inn á høvuðstættirnar í reglunum fyri frælsari flutningi av vørum, tænastum, kapitali og persónum.

### 9.2 Lyklatøl um EBS

EBS fevnir um ES og øll EFTA-londini uttan Sveis. Í hesum 18 londunum búgva tilsamans eini 375 mió. fólk. Økið fevnir um meira enn 40% av heimshandlinum og er heimsins største og mest víðfevnda fleirtjóða handilssamstarv í heiminum.

Talva 9.1: Fólkatal og landaøki í ES og EFTA londum í 1995

| Land | Fólkatal (í 1000) | Landaøkið 1000 km2 | Fólkatættleiki fólk/km2 |
|---|---|---|---|
| Danmark | 5.216 | 43 | 121 |
| Belgia | 10.131 | 31 | 332 |
| Finnland | 5.099 | 338 | 15 |
| Frakland | 58.027 | 552 | 105 |
| Grikkaland | 10.442 | 132 | 79 |
| Írland | 3.577 | 70 | 51 |
| Italia | 57.248 | 301 | 190 |
| Luxembourg | 407 | 3 | 157 |
| Niðurlond | 15.423 | 42 | 371 |
| Portugál | 9.912 | 92 | 107 |
| Spania | 39.170 | 505 | 78 |
| Svøríki | 8.816 | 450 | 20 |
| Týskland | 81.539 | 357 | 228 |
| UK | 58.476 | 244 | 240 |
| Eysturríki | 8.040 | 84 | 96 |
| ES samantalt | 371.523 | 3244 | 146 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ísland | 267 | 103 | 3 |
| Liechtenstein | 30 | 0,2 | 188 |
| Noreg | 4348 | 324 | 13 |
| Sveis | 7021 | 41 | 170 |
| EFTA samantalt | 11666 | 468,2 | 93,5 |
| ES + EFTA | 383189 | 3712,2 | 103,2 |




Mynd 9.1: Londini í EBS-samstarvinum

**9.3 Institutiónell og umsitingarlig viðurskifti**

EFTA og ES eru ikki skipað á sama hátt og virka ikki eftir somu meginreglum. EFTA-londini hava síðani 1960 samstarvað um fríhandil, har avgerðir verða tiknar við einmæli. ES-londini hava rúmari politisk og búskaparlig stevnumið í sínum samstarvi, og á nógvum økjum verða mál samtykt við vanligum meiriluta. Ein týðandi grundregla í EBS-skipanini er, at EFTA og ES eru tvær súlur í samstarvinum, og hvør súla er ein sjálvstøðugur partur (sí mynd 9.2.).

EFTA-londini samstarva á fólkarættarligum grundarlagi. Tað vil siga, at EFTA-sáttmálin frá 1960 og tær avgerðir, sum eru tiknar av stovnum, ið sáttmálin hevur skipað, binda bert myndugleikarnar í einstøku londunum og ikki borgarar og fyritøkur í somu londum. Borgarar og fyritøkur eru ikki bundin av fólkarættarligum avgerðum, fyrr enn tær eru samtyktar í tjóðartingunum og eru vorðnar ein partur av lógarverkinum í viðkomandi landi.

Samstarvið í EF er grundað á yvirnatiónalar grundreglur. Lóggevandi vald á nógvum økjum er innan karmarnar av EF samstarvinum flutt úr limalondunum til EF-ráðið. Summar EF avgerðir (lógskipaninar) fáa beinleiðis gildi í lógarverkinum í limalondunum. Eisini aðrar avgerðir í EF-ráðnum (direktivini) kunnu í einstøkum førum hava beinleiðis ávirkan á borgarar og fyritøkur í limalondunum.

**9.3.1 Felags stovnar í EBS**

Tá EBS-sáttmálin kom í gildi, vórðu samstundis fýra nýggir stovnar skipaðir. Teir hava bæði ráðgevandi uppgávur og taka avgerðir. Teir fýra stovnarnir eru:

- EBS-ráðið
- EBS-nevndin
- Parlamentarikaranevndin fyri EBS
- Ráðgevandi nevndin fyri EBS

*EBS-ráðið* er evsti felags stovnur í EBS-samstarvinum. Ráðið hevur ábyrgdina av, at sáttmálin verður settur í verk, og setir stevnumiðini fyri arbeiðnum hjá EBS-nevndini. Ráðið tekur politisk stig um møguligar broytingar í sáttmálanum. Ráðið er samansett av stjórnarlimum úr hvørjum EFTA-landi, limum í EF-ráðnum og limum í EF-nevndini. Á fundum í Ráðnum hava umboðini fyri hvørt EFTA-land sær møguleika at føra síni egnu sjónarmið fram. Ráðið tekur tó avgerðir við einmæltari samtykt. Formanskapurin í EBS-ráðnum skiftir fyri hvørjar seks mánaðir millum stjórnarlimir úr EFTA-landi og limir úr EF-ráðnum. Ráðið kemur regluliga saman tvær ferðir um árið, ella tá tað verður mett at vera neyðugt.

*EBS-nevndin* hevur dagligu umsitingina av EBS-samstarvinum um hendi. Hon skal tryggja, at EBS-sáttmálin virkar í samsvari við endamálið.

Nevndin samtykkir nýggjar EBS-ásetingar við einmæli. Allir partar í EBS-samstarvinum eru umboðaðir í nevndini. Vanliga møta embætisfólk úr EFTA-londunum á fundi. Embætisfólk úr EF-nevndini umboða EF, uttan so at talan er um viðgerð av málum, sum ikki hoyra undir myndugleikaøkið hjá EF. Tá møta umboð úr limalondunum í EF og luttaka við rættindum sum sáttmálapartur.

*Tingmannanevndin fyri EBS* er samansett av limum úr Europatinginum og úr tjóðartingunum í einstøku EFTA-londunum. Hvørt EFTA-land sær avger, hvussu umboðanin í parlamentarikaranevndini er samansett. Nevndin, sum kemur saman tríggjar ferðir um árið, er ráðgevandi.

*Ráðgevandi nevndin fyri EBS* er sett saman av sama tali av umboðum úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í EF. Endamálið við nevndini er at geva pørtunum í arbeiðslívinum betri møguleikar at ávirka gongdina í EBS.




Mynd 9.2: Tvísúlubygnaðurin í EBS

### 9.3.2 Avgerðartilgongdin

EBS-sáttmálin hevur eitt rættiliga stórt virkisøki. Sáttmálin fevnir um so at siga allar tættir, sum hava týdning fyri millumtjóða búskaparligt samskifti og kappingarkorini hjá vinnulívinum. Endamálið við ásetingunum um, hvussu avgerðir skulu takast í EBS, er at tryggja, at felags ásetingarnar í sáttmálanum, sum frá líður, eisini kunnu mennast og samansjóðast. Fyri at forða

fyri at EFTA-londini og EF ganga hvør sína leið í lógarsmíði, er umráðandi, at samstarvið um nýggjar ásetingar byrjar tíðliga (sí mynd 4.3).

EBS-nevndin virkar eftir meginregluni um einmæli. Undir samráðingunum um sáttmálan løgdu EFTA londini stóran dent á at varðveita sjálvsavgerðarrættin og at forða fyri, at lóggávuvald verður flutt frá tjóðartingunum í EFTA-londunum til EBS-nevndina. Í hesum liggur eisini, at fyrivarni er tikið um, at innanhýsis mannagongdir í sambandi við at taka avgerðir ikki verða broyttar av EBS-sáttmálanum.

Tær skyldur, sum sáttmálin og undirskjøl leggja á EBS-londini, svara í høvuðsheitum til lógarverkið í EF, sum er sett í verk fyri at fáa innmarknaðin at virka. EF hevði longu umsitingarligu amboðini til hetta. Avgerðartilgongdin í EBS er tí, í stóran mun skipað eftir stigunum í avgerðarskipanini í EF. Sum tað sæst á mynd 4.3, er tað EF-nevndin, sum tekur stig til tiltøk og broytingar.

Vanliga mannagongdin er, at um EF-nevndin ætlar at skjóta upp nýggjar ásetingar ella at broyta ásetingar fyri eitt øki, sum liggur undir EBS-sáttmálanum, skal hon longu frá byrjan kunna seg um sjónarmiðini og spyrja seg fyri hjá sakkunnleikanum í EFTA-londunum, eins og hjá sakkunnleikanum í EF. Hesin sakkunnleikin er óheftur og umboðar ikki almennu sjónarmiðini hjá einstøku londunum. Endamálið er at bera so í bandi, at fyrilit verða tikin fyri serligum umstøðum í EFTA-londunum, tá uppskotini verða evnaði til, og at bøta um líkindini fyri, at uppskotini verða samtykt sum EBS-ásetingar.

Síðani koma partarnir í tvísúlu-skipanini við upplýsingum og føra fram síni sjónarmið í málinum, samstundis sum málið gongur sína gongd innanhýsis í EF. Endamálið er at koma fram til semju um nýggjar felags ásetingar í EBS-nevndini.

Fæst semja, samtykkir EBS-nevndin ásetingar við sama innihaldi, sum stovnarnir í EF samtykkja. Samtyktir í EBS-nevndini skulu vera einmæltar, tvs., at bæði EFTA londini og EF skulu taka undir við uppskotunum. Hetta ber t.d. í sær, at er eitt av EFTA-londunum ímóti einum uppskoti í EBS-nevndini, verður uppskotið ikki gjørt til EBS-reglur.




Mynd 9.3: Avgerðartilgongdin í EBS

### 9.3.3 Eftiransingarskipanin í EBS

EBS-sáttmálin áleggur teimum 18 londunum í samstarvsøkinum skyldur. Tí er tað týdningarmikið, at ásetingarnar í sáttmálanum verða umsitnar eins í øllum EBS. Longu tá sáttmálin kom í gildi, hevði EF-nevndin til uppgáva at ansa eftir, at EF-limalondini hildu seg til tær skyldur, tey høvdu átikið sær sambært EF ásetingum. Tá EBS-sáttmálin varð settur í verk, gjørdist hann ein partur av innanhýsis EF-rætti. EF-nevndin skal ansa eftir, at limalondini halda skyldurnar, tey hava átikið sær sambært EBS-sáttmálanum.

EFTA-londini settu sína egnu eftiransingarskipan í verk fyri at tryggja, at skyldurnar í EBS-sáttmálanum verða fylgdar í EFTA-økinum. Tí er tví-súlu-skipanin eisini galdandi fyri eftiransing. EFTA-stovnurin er óheftur av hvørjum einstøkum EFTA-landi, eins og EF-nevndin er óheft av hvørjum einstøkum EF-landi.

Eftiransingarstovnurin í EFTA skal ansa eftir, at partarnir halda treytirnar í sáttmálanum yvirhøvur, herundir skyldurnar við almennum stuðli, og at vinnulívið heldur seg til felags kappingarreglurnar. Eftiransingarstovnurin í EFTA hevur í høvuðsheitum somu uppgávur sum EF-nevndin.

### 9.3.4 Dómstólurin

Dómstólurin er liður í eftiransingskipanini í EBS. Eisini her er talan um ein tví-súlu-skipan. EBS sáttmálin sigur, at EFTA-londini skulu hava sín egna EFTA-dómstól. Ásetingarnar um dómstólin eru í EFTA-sáttmálanum. Mótvegis EFTA-londunum hevur EFTA-dómstólurin at kalla somu uppgávur, sum EF-dómstólurin hevur í EF. Báðir dómstólarnir hava einsamallir myndugleika at tulka EBS-sáttmálan á ein hátt, sum bindir partarnar á viðkomandi virkisøki.

EFTA-dómstólurin tekur sær sostatt av málum í EFTA-londunum, meðan EF-dómstólurin tekur sær av málum, sum hava við EF og EF-londini at gera. Hvørki EFTA- ella EF-dómstólurin hava myndugleika at avgera stríðsmál millum eitt EFTA-land og EF. Avgerðir hjá dómstólunum kunnu ikki kærast.

Sambært grein 108 í EBS-sáttmálanum hevur EFTA-dómstólurin myndugleika til at:

- Viðgera sakarmál, sum eftiransingarskipanin í EFTA leggur móti EFTA-londunum.
- Loysa trætur millum tvey ella fleiri EFTA-lond.
- Viðgera klagur um úrskurð í eftiransingarskipanini í EFTA í kappingarmálum.

Borgarar og fyritøkur kunnu ikki stevna einum landi fyri EFTA-dómstólin fyri brot á EBS-sáttmálan. Tað kunnu EF-lond ella EF-nevndin heldur ikki gera tað. Um eftiransingarstovnurin í EFTA avger ikki at leggja sak ímóti einum EFTA-landi, kann eitt annað EFTA-land tó gera tað.

Um hvørki eftiransingarstovnurin í EBS ella eitt annað EFTA-land vilja halda fast um eitt mál í EFTA-dómstólinum, kann úrskurður kortini í nógvum førum gerast innan fyri karmarnar av dómstólskipanini. Málið kann verða lagt fyri ein nasjónalan dómstól, men úrskurður verður ikki gjørdur, fyrr enn málið hevur verið fyri EFTA-dómstólin til tulkingar. Tulkingin hjá EFTA-dómstólinum er formliga ikki bindandi fyri dómstólin í landinum. EFTA-dómstólurin ger bert úrskurð um, hvussu EBS-sáttmálin skal skiljast.

### 9.3.5 Loysn av trætumálum

Ósemjur millum partarnar kunnu altíð viðgerast í EBS-nevndini. Ásetingar eru um mannagongd o.a., tá ið ósemjur taka seg upp millum partarnar um tulking og nýtslu av EBS-sáttmálanum.

Verður EBS-nevndin ikki samd um loysn á tulkingarósemjum innan seks mánaðir frá tí, málið er lagt fram, kunnu partarnir annaðhvørt seta einsíðug verjutiltøk í verk ella seta ávísar sáttmálaásetingar úr gildi. Avleiðingarnar av hesum báðum valmøguleikunum gerast á leið tær somu.

Í ávísum førum kann nýtslan av klausulinum um verjutiltøk í viðurskiftunum millum eitt ella fleiri EFTA-lond og EF takast upp í gerðarrætti. Slíkar ósemjur kunnu ikki leggjast fyri gerðarrætt fyrrenn tríggjar mánaðir eftir, at málið fyrstu ferð varð lagt fyri EBS-nevndina.

Spurningurin um vav og gildistíð á verjutiltøkum kann leggjast fyri gerðarrætt. Hetta er galdandi, bæði tá verjutiltøkini verða sett í verk vegna ósemjur um EBS-sáttmálan, ella tá álvarsligir trupulleikar, sum eru nevndir í almenna verjuklausulinum í sáttmálanum, taka seg upp.

Almenni verjuklausulurin ber í sær, at ein sáttmálapartur einsíðugt kann gera av at seta treytirnar í sáttmálanum til viks, um so er, at álvarsligir búskaparligir, samfelagsligir ella umhvørvisligir trupulleikar eru við at taka seg upp á einum øki ella í einum landsparti. Harumframt kann

spurningurin, um tey móttiltøk, sum hinir partarnir seta í verk, eru rímilig og samsvarandi, eisini roynast í gerðarrætti.

## 9.4. Tey fýra frælsini

### 9.4.1. Inngangur

Síðani EF varð sett á stovn í 1957 og EFTA í 1960, hevur verið arbeitt fyri at fáa í lag tættari handils- og búskaparliga samvinnu millum londini í felagsskapunum. Sáttmálin um Europeiska Búskaparliga Samstarvið, er ein týdningarmikil liður í hesum.

Handilin hjá EFTA-londunum við EF hevur vanliga verið skipaður innan karmarnar av sínámillum sáttmálum millum EF øðrumegin og einstøku EFTA-londini hinumegin. Hesir sáttmálar hava verið handilssáttmálar, og hava bert fevnt um einstakar partar av búskaparligu samvinnuni millum londini. Í høvuðsheitum hevur talan verið um tolllækkingar á ídnaðarvørum.

Í 1985 samdust EF-londini um at seta á stovn innmarknaðin, og at hesin skuldi fara at virka frá 1. januar 1993. Á innmarknaðinum hava vørur, tænastur, kapitalur og persónar frítt av fara um landamørk. Hetta verður undir einum nevnt tey fýra frælsini. Londini samstarva harumframt um umhvørvis-, granskingar-, útbúgvingar-, og arbeiðsumhvørvismál.

EFTA-londini ásannaðu, at tær gomlu fríhandilsavtalurnar bert í avmarkaðan mun megnaðu at nøkta tørvin hjá londunum í samstarvinum við EF-londini og at taka ímóti teimum avbjóðingum, ið komu við handilsligu og búskaparligu samansjóðingini í EF. EBS-sáttmálin er ein tillaging til tey fýra frælsini í EF og er í høvuðsheitum grundaður á lógarverkið á hesum øki í EF. Tey fýra frælsini eru við fáum undantøkum galdandi fyri alt EBS-økið.

### 9.4.2 Vørur

Eins og hjá okkum eru búskapirnir í EFTA-londunum sera opnir og nógv tengdir at handli við umheimin. Meginparturin av hesum handli hevur verið og er við hini londini í EBS-økinum. Eitt nú eru góðir tríggir fjórðingar av norska vøruútflutninginum farnir til EFTA- og EF-økið, og umleið 70% av norska vøruinnflutninginum stavar frá EFTA- og EF-londum.

**Somu kappingartreytir**

Endamálið við felags kappingarreglunum í EBS-sáttmálanum er at tryggja javnbjóðis kapping millum vinnulívið í EF og EFTA-londunum. Kappingarreglurnar skulu forða fyri, at fyritøkur misnýta sína marknaðarstøðu ella ganga saman um marknaðarsamstarv, sum skaðar aðrar fyritøkur ella brúkararnar.

Hugsanin er, at uttan felags kappingarreglur og munadygga umsiting av teimum, er vandi fyri, at eingin kapping verður, ella at kappingin verður avlagað á ein hátt, sum skaðar týdningarmikil samfelagsfyrilit. Vantandi kapping kann ávirka bæði príslegu og framleiðslukostnað og ger ofta, at tilfeingið í samfelagnum ikki verður brúkt til fulnar.

Kappingarreglurnar í EFTA og EF eru grundaðar á somu meginreglur, tó fara tær í EF meira í smálutir. Felags kappingarreglurnar í EBS byggja á EF-ásetingar og líknandi ásetingar í EFTA-sáttmálanum.

Felags reglurnar verða brúktar, tá kappingaravmarkandi tiltøk ávirka handilin millum londini í EBS-økinum. Um kappingaravmarkingin bert hevur ávirkan á innlendis marknaðin í einum landi, eru tað ásetingarnar í tí landinum, sum verða brúktar. EF brúkar eisini sínar kappingarreglur móti londum uttan fyri EF, um kappingaravmarkandi samstarv hevur ávirkan á EF-marknaðin.

EBS-sáttmálin setur forboð ímóti kappingaravmarkandi avtalum, viðtøkum ella marknaðarsamskipan millum tvær ella fleiri fyritøkur. Hetta kann t.d. vera avtalur millum kappingarneytar um prísáseting og býti av marknaðum ella framleiðslukvotur.

EBS-ásetingar raka eisini fyritøkur, sum á óhóskandi hátt gera sær dælt av sterku støðu síni á EBS-marknaðinum ella týðandi pørtum av honum. Ein fyritøka kann misnýta støðu sína við t.d. ikki at geva veitarum somu sømdir, at nokta at veita vørur ella við at veita loyalitetavsláttur. Forboðið vendir sær bæði móti fyritøkum, sum sjálvar hava dominerandi støðu á marknaðinum, og ímóti fyritøkum, sum í samstarvi við aðrar fyritøkur taka ræði á marknaðinum.

Kappingarreglurnar í EBS-sáttmálanum skulu brúkast, eftiransast og tulkast eins í øllum EBS. Teir stovnar, sum taka sær av eftiransing, hava skyldu at kunna fyritøkurnar um tey mál, tær eru partur í, og fyritøkurnar hava rætt at koma til orðanna á øllum stigum í viðgerðini av málinum. Tær kunnu somuleiðis krevja at fáa kærur sínar viðgjørdar í eftiransingarstovninum, og at málini verða løgd fyri ávikavist EFTA-dómstólin og EF-dómstólin.

Stovnarnir, sum hava við eftiransing av gera, hava heimild at krevja upplýsingar frá fyritøkum, at gera kanningar í fyritøkum, at seta bann fyri ítøkiligum kappingaravmarkandi tiltøkum og geva bót og sekt, tá fyritøkur ikki halda seg til ásetingarnar.

Mál, sum bert hava týdning fyri handilin millum tvey ella fleiri EFTA-lond, verða viðgjørd í eftiransingarstovninum hjá EFTA. Samsvarandi skulu mál, sum bert hava týdning fyri handilin millum EF-lond, viðgerast í EF-nevndini.

Tey flestu málini um kapping, hava tó týdning fyri bæði EFTA og EF-økið. Tá er mannagongdin, at EFTA og EF býta málini sínámillum sambært nærri ásettum treytum (sí EBS art.56).

**Anti-dumpingartiltøk**
Tá talan er um dumping, verður vanliga hugsað um, at útflutningsvørur verða seldar fyri ein prís, sum liggur niðanfyri vanliga prísin á vørum, tvs. heimamarknaðarprísin ella annan prís, sum kann samanberast við. Dumping verður vanliga roknað sum illoyal kapping, við tað at prísirnir á útflutningsmarknaðum verða hildnir á einum óveruligum stigi.

Endamálið er sum oftast at koma inn á nýggjar marknaðir ella at fáa størri part av verandi marknaðum. Dumping kann eisini brúkast sum eitt amboð til at reka kappingarneytar, sum fíggjarliga eru verri fyri, burtur av marknaðinum.

Í GATT/WTO skipanini ber til at seta í verk móttiltøk ímóti slíkum handli. Við at vísa til GATT/WTO hevur EF ásett reglur, sum skulu byrgja fyri dumping av vørum úr londum uttanfyri EF-økið. Av tí, at EF er ein tollsamgonga við egnum felags tollgjøldum úteftir og felags kappingarreglum, ber ikki til at nýta anti-dumpingartiltøk ímóti vørum úr øðrum EF-londum.

Mótvegis triðjalondum hevur EF ferð eftir ferð ætlað at sett í verk anti-dumpingar tiltøk, men tað er sjáldan at hesi eru vorðin veruleiki. Viðvíkjandi fiski og fiskavørum hevur EF tó sett í verk minstaprísir á innfluttum fiski sambært marknaðarskipanini í EF, eitt nú fyri innfluttan fisk úr Noregi.

Um eitt EBS-land ella fyritøka í einum EBS-landið heldur, at innfluttar vørur úr triðjalondum verða seldar fyri dumpingprísir, kann ES-nevndin ella eftiransingarstovnurin hjá EFTA áseta minstaprísir ella áleggja revsitoll. Í EBS-sáttmálanum binda partarnir seg til ikki at brúka anti-dumpingar tiltøk móti hvørjum øðrum.

Anti-dumping í sambandi við fisk og fiskavørur var ein av teimum torføru samráðingarspurningunum. Hetta kemst av, at EF og EFTA-londini hava ikki somu marknaðarskipan fyri fiskavørur. Semja fekst ikki um spurningin. EBS-sáttmálin veitir heldur ikki trygd fyri, at EF ikki fer at brúka anti-dumpingartiltøk móti fiskaútflytandi londum í EFTA. Men um so er, at støðan verður tann, at slík tiltøk kunnu brúkast, hava partarnir bundið seg til at tala saman í eini roynd at sleppa undan, at anti-dumpingartiltøk verða sett í verk.

Norskar royndir vísa annars, at sjálvt um ætlanir um anti-dumping ikki gerast veruleiki, eru tær ein byrða fyri tær vinnugreinar og fyritøkur, ið verða hóttar. Óttin fyri dumpingarákærum og tann ótryggleiki, sum stendst av slíkum ákærum, serliga tá tær eru ógrundaðar, eru mangan ein forðing hjá vinnulívinum fyri at kappast á jøvnum føti við vinnulívið í EF, og tær føra við sær kostnaðir fyri tær fyritøkur, sum tær raka. Trupulleikin gerst ikki minni av, at anti-dumpingarvápnið ofta verður drigið fram, tá støðan á marknaðinum er trupul, og tá fyritøkurnar longu eru sperdar.

**Toll- og upprunareglur**
Ein tollsamgonga er ein semja um at seta á stovn eitt felags tolløki. Tey lond, sum eru við í eini tollsamgongu, taka av allan toll og aðrar beinleiðis forðingar í handlinum sínámillum. Tey hava felags toll og reka felags handilspolitikk mótvegis triðjalondum.

Vørur, sum verða innfluttar til eitt land í tollsamgonguni úr einum triðjalandi, sum ikki hevur serliga preferansuavtalu, verða vanliga álagdar ein felags toll. Vøran kann síðani vera í fríum umfari innan fyri tollsamgonguna. Sostatt er tørvur ikki á serligum upprunareglum í handilssamvinnuni millum londini í tollsamgonguni.

Eitt fríhandilsøki er ein semja um at seta á stovn fríhandil við vørum, sum eru framleiddar í økinum. Tollur og aðrar beinleiðis handilsforðingar millum tey londini, sum eru við í fríhandilsøkinum, verða tiknar burtur, men londini kunnu hvør sær hava ymsar tollásetingar og handilsreglur mótvegis triðjalondum. Tá londini hava ymiskan handilspolitikk mótvegis umheiminum, er neyðugt at hava upprunareglur í einum fríhandilsøki sum EBS.

EBS-sáttmálin ásetir treytir, sum skulu lúkast, fyri at ein vøra skal fáa serliga viðgerð, tvs. fáa tollætta ella sleppa undan tolli og kunna ferðast frítt í EBS-økinum. Hesar ásetingar byggja á reglurnar í bilateralu handilssáttmálunum, ið EFTA-londini hava við EF.

Sambært upprunareglunum í EBS-sáttmálanum ber m.a. til at virka somu vøru í fleiri sáttmálalondum og sostatt røkka sonevndari fullari kumulatión. Upprunareglurnar staðfesta, hvar ein vøra er framleidd. Skal vøran kunna umsetast frítt í EBS, eigur vøran annaðhvørt at vera framleidd úr tilfarið úr einum EBS-landi ella vera tilvirkað sambært upprunareglunum, soleiðis at tann lidna vøran er ein EBS-framleiðsla.

Her skal ikki farast út í æsir við upprunareglunum, men víst verður til protokoll 4 í EBS sáttmálanum. Tó skal nevnast, at fyri EBS-londini ber sáttmálin samanumtikið í sær, at krøvini til skjalaprógvan av upprunanum hjá eini vøru er munandi einfaldari, og at formligu krøvini til toll og eftirlit, tá vørur fara um landamørk, eru einfaldari enn frammanundan.

**Tekniskar handilsforðingar**
Tekniskar handilsforðingar eru vanliga eitt úrslit av at lógir, forskriftir og standardir eru ymisk frá landi til land. Hetta hevur við sær ólík vørukrøv og góðkenningar- og eftirlitsskipanir í sambandi við vøruhandil. Hetta avmarkar handilin landanna millum.

Tekniskar handilsforðingar kunnu standast av, at londini seta ólík krøv til marknaðarføring, skjalprógvan og merking og vantandi góðkenning av heilsuroyndum. Tær kunnu føra til drúgva og kostnaðarmikla málsviðgerð.

Skulu vørur hava frítt at fara um landamørk, er neyðugt, at krøvini til vørurnar eru so einsháttað sum gjørligt. Krøvini til vørur í einstøku londunum hava ofta til endamáls at taka serlig fyrilit fyri t.d. umhvørvi, heilsu, trygd, brúkaraáhugamál o.ø.

Í millumtjóða handilssamvinnu seinnu árini hevur tí verið miðað eftir at fáa einsháttað vørukrøv. Tey einsháttaðu vørukrøvini mugu tó vera av slíkum slag, at tey megna at fremja tey endamál, tey skulu røkka. Umráðandi er, at krøv, sum verða sett í verk viðvíkjandi tilevning, dygd og trygd, tæna sínum ætlaða endamáli og ikki hava sum endamál at verja egnar marknaðir.

Arbeiðið við at taka burtur tekniskar handilsforðingar fer fram bæði í GATT/WTO og á europeiskum og norðurlendskum stigi. Felags lógarverk hevur verið ein týdningarmikil partur í sambandi við at fáa innmarknaðin í EF at virka. Síðani 1984 hava EFTA-londini og EF samstarvað um at fáa tekniskar handilsforðingar burtur.

EF hevur eitt rúgvismikið lógarverk um vørukrøv. Í EBS-sáttmálanum eru ásetingar, ið svara til EF-reglurnar, og sum eru ein grundleggjandi fyritreyt fyri, at vørurnar kunnu hava frítt at fara í EBS-økinum. Fylgisskjal II í EBS-sáttmálanum hevur ásetingar um matvørur, kemisk evni, akfør og traktorar.

Lógarsmíðið í EFTA-londunum og EF byggir á millumtjóða semjur um at beina tekniskar handilsforðingar burtur. Eitt nú undirskrivaðu EFTA og EF í 1989 avtalu um at kunna hvønn annan um uppskot um tekniskar forskriftir.

Longu tá EBS-sáttmálin varð undirskrivaður, høvdu flestu EFTA-londini tí lagað seg til nýggju ásetingarnar, sum eru komnar seinastu árini, eitt nú í sambandi við WTO-sáttmálarnar. Í høvuðsheitum hevði bert Noreg tørv á eini serligari tillagingarskipan.

**Almenn keyp av vørum og tænastum**
Almenn keyp eru í hesum samanhangi tær vørur, byggingar og tænastur, sum almenni sektorurin útvegar sær til nýtslu og íløgur. Tað almenna eru land og kommunur, lands- og kommunalt handilsvirksemi. El-veiting, telekommunikatión o.t. koma eisini undir reglurnar um alment keyp, men almenn partafeløg verða ikki roknað uppí.

Tá innmarknaðurin í EF var settur á stovn, var samstundis latin upp ein marknaður fyri almennum keypi. Í europeisku londunum hava hesir marknaðir vanliga verið merktir av lítlari altjóða kapping. Tað almenna hevur aloftast útvegað sær vørur og tænastur frá innlendis veitarum og hevur í nógvum førum givið teimum framíhjárættindi.

EBS-sátttmálin førdi við sær, at settur varð á stovn ein felags marknaður fyri almennum keypi við felags lógarreglum. Hetta ber í sær, at frí kapping er um keyp av vørum og sáttmálar um byggi- og anleggsarbeiðir, sum í virði liggja omanfyri eitt nærri ásett minstamark.

Almenn keyp av vørum og tænastum, sum liggur omanfyri hesi minstumørk, skulu bjóðast út í

altjóða kapping. Tað er eisini galdandi fyri privatar fyritøkur, sum grunda sítt virksemi á serlig rættindi, ið tað almenna hevur veitt teimum.

**Almennur stuðul**
Royndirnar at fáa fríari heimshandil hava í flestu førum snúð seg um at koma tolli, kvotum og øðrum forðingum í handlinum landanna millum til lívs.

Seinastu 10-15 árini eru tollgjøld og kvotuavmarkingar í millumtjóða handli stigvíst minkað ella tikin burtur. Men eyguni hava eisini verið vend ímóti øðrum skipanum, sum hava handilsavlagandi ávirkan.

Almennur stuðul er ein av hesum skipanum. Í altjóða samfelagnum tykist semja verða um, at almennur studningur avskeplar handil landanna millum, og minni vinningur fæst burtur úr øktum altjóða handilssamskifti. Tí er neyðugt at hava altjóða reglur um, hvussu almennur stuðul skal nýtast.

Í EBS høpi er almennur stuðul allur stuðul, sum hevur við sær nettoflytingar frá tí almenna. Felags ásetingar á hesum øki avmarka møguleikarnar hjá londunum at veita vinnulívinum kappingaravlagandi almennan stuðul.

EBS-samráðingarnar snúðu seg mest um grundreglurnar fyri almennum stuðli. Farið varð sostatt ikki í smálutir, og einstakar skipanir vórðu ikki umrøddar í fyrsta umfari. Høvuðsreglan í EBS er kortini, at kappingaravlagandi almennur stuðul, sum ávirkar handilin landanna millum, ikki skal brúkast. Ásetingarnar loyva tó almennum stuðli til landspartar við tillagingartrupulleikum og økjum við serliga stórum arbeiðsloysi.

Eftiransingarstovnurin í EFTA og EF-nevndin hava eftirlit við, at reglurnar verða fylgdar, og at ymisku sløgini av almennum studningi eru í samsvari við ásetingarnar í EBS-sáttmálanum.

EBS-sáttmálin veitir londunum møguleika fyri at fáa upplýsingar um allar skipanir við almennum stuðli í EFTA og EF. Ásetingarnar um almennan stuðul geva myndugleikunum í t.d. EFTA-londunum møguleikar fyri at kanna stuðulskipanir í øðrum londum nærri. Fyrr læt hetta seg næstan ikki gera.

Harumframt hevur EBS-sáttmálin ásetingar um, hvussu mál um brot á stuðulsreglurnar skulu fremjast. Hetta ger, at kærur um handilsavlagandi almennan stuðul í øðrum londum kunnu geva úrslit. Í EBS-sáttmálanum hevur EF eisini bundið seg til ikki at brúka síni egnu anti-dumpingartiltøk á økjum, har EF-reglur eru tær somu sum í EBS-sáttmálanum.

### 9.4.3 Kapitalur og tænastur

**Inngangur**
Vaksandi handil við tænastum og alheimsgerðingin av kapitalmarknaðunum hevur knýtt búskapirnar í londunum nærri hvør at øðrum. Ólíkar reglur í einstøku londunum á hesum øki, eru tó enn ein forðing fyri, at tænastur og kapitalur frítt kunnu fara um landamørk.

Hesar forðingar hava nógvar av teimum somu avleiðingum sum forðingarnar fyri millumtjóða vøruhandli. Forðingarnar gera, at fyrimunirnir av altjóða arbeiðsbýtinum, spesialisering og kapping ikki verða troyttir til fulnar. Í EBS-sáttmálanum eru felags reglur, so fyrimunirnir við millumtjóða búskaparligari samvinnu eisini kunnu troytast í sambandi við tænastur og kapital.

Ein grundregla í sáttmálanum viðvíkjandi kapitalflytingum og handli við tænastum er, at slík samvinna skal fara fram, uttan at mismunir verða gjørdir við støði í tjóðskapi. Hvørki fríhandilsavtalurnar millum EFTA-londini og EF ella EFTA-sáttmálin frá 1960 fevndu um frían kapitalflutning ella tænastur. Sostatt komu tveir nýggir og týdningarmiklir tættir aftur at í búskaparligu samvinnuni millum londini í Vestureuropa.

Høvuðsendamálið við felags ásetingum um tænastuhandil og kapitalflytingar er:

- At fáa í lag einsháttaðar kappingarumstøður fyri tænastuveitingar og einsháttaðar treytir fyri flyting av kapitali.
- At bøta um virkisførið og minka kostnaðin hjá brúkarum av tænastum innan flutning, fígging o.a.
- At gagnnýta kapitaltilfeingið betri
- At røkja almenn fyrilit viðvíkjandi m.a. umhvørvi, trygd og brúkaravernd.

Sáttmálin hevur eisini ásetingar um samstarv innan búskapar- og pengapolitikk. Hetta samstarv fevnir m.a. um at veita hvørjum øðrum búskaparligar upplýsingar um útinning av sáttmálanum og búskaparligu avleiðingarnar av sáttmálanum. Hetta samstarv er kortini ikki bindandi.

**Kapitalur**
Fríur kapitalflutningur ber í sær, at ongar forðingar eru fyri at flyta kapital í EBS-økinum. Sáttmálin staðfestir sostatt grundregluna um, at mismunur ikki skal gerast við støði í tjóðskapi. Londini skulu heldur ikki hava reglur, sum gera mismun, tá talan er um keyp av fastari ogn, stovnseting av vinnuvirksemi ella keyp av pørtum av verandi fyritøkum.

Frælsi at seta á stovn vinnuvirksemi merkir, at hetta skal fara fram eftir teimum treytum sum eru galdandi í landinum, har virksemið verður stovnað. Sama er galdandi fyri plasering av kapitali, har borgarar úr einum øðrum EBS-landi skulu hava javnbjóðis rættindi sum borgarar í landinum, har kapitalurin verður plaseraður. Tí er útgangsstøðið, at allar skipanir og ásetingar um eitt nú serrættindi, loyvisskipanir o.a., sum gera mun á útlendingum og borgarunum í landinum, skulu takast burtur.

**Tænastur**
Tær tænastuvinnur, sum EBS-sáttmálin hevur serligar ásetingar um, eru fíggjartænastur (trygging, bankar og virðisbrævahandil), flutningsvinna (vegir, jarnbreytir, flogferðsla, millumlanda sigling og innlendis sigling), telesamskifti og sjónvarp.

Tá tænasturnar skulu hava frítt at fara um landamørk, skulu ongar forðingar vera hjá tænastuveitarum at sleppa at selja sínar tænastur í øðrum londum.

Heldur ikki skulu avmarkingar vera hjá einstaklingum og fyritøkum at keypa tænastur aðrastaðni. Samsvarandi frælsinum at seta vinnuvirksemi á stovn ber eisini til at veita tænastur við at stovna felag í landinum, har tænasturnar skulu veitast.

Tá EBS-sáttmálin nevnir tænastur, er talan um tænastur av ídnaðarligum ella handilsligum slagi ella tænastur, sum verða veittar í sambandi við handverkarayrki ella útinning av fríum yrki. Sambært sáttmálanum er talan um tænastur, sum vanliga verða veittar móti samsýning. Tí fevnir sáttmálin ikki um flestu almennu tænasturnar.

**Fíggjartænastur**
Ásetingarnar í EBS-sáttmálanum um fíggjartænastur fevna um trý høvuðsøki:

- Trygging
- Bankar og aðrar fíggjarstovnar
- Børs og virðisbrævahandil

Reglurnar um fíggjartænastur eru nær tengdar at reglunum um kapitalflutning og frælsi at seta vinnuvirksemi á stovn. Uttan frían kapitalflutning ber illa til hjá fíggjartænastum at fara ótarnaðar um landamørk. Tá frælsi er at seta á stovn vinnuvirksemi, kunnu fíggjarstovnar í einum landi t.d seta á stovn dótturfeløg í einum øðrum landi sum eitt ískoyti til at veita tænastur í heimlandinum.

EBS-reglurnar um fíggjartænastur svara í høvuðsheitum til lógarverkið hjá EF. Ein týðandi grundregla viðvíkjandi fíggjartænastum er, at ein fíggjarstovnur, sum hevur loyvi at reka vinnuvirksemi heima, eisini kann veita tænastur ella seta seg niður í øðrum EBS-londum. Neyðugt er bert við *einum* loyvi fyri at kunna veita tænastur í øllum EBS-økinum.

Tað áliggur myndugleikunum í landinum, har fíggjarstovnurin hevur fingið vinnuloyvi at hava eftirlit við fíggjarstovnunum. Hetta treytar so aftur, at ásetingarnar um eftirlit eru einsháttaðar, og at londini góðkenna ásetingar og eftirlitsskipanir hjá hvørjum øðrum í teimum førum, hesar eru ymiskar.

Umframt at seta karmar fyri felags eftirlitsásetingum og javnbjóðis kapping, miða EBS-reglurnar ímóti at tryggja soliditet í fíggjarstovnunum og at røkja áhugamálini hjá brúkarum og íleggjarum.

**Trygging**
Innmarknaðurin fyri tryggingar ber í sær, at í EBS-økinum kunnu tryggingartakarar frítt velja millum innlendsk og útlendsk tryggingarfeløg. Somuleiðis kunnu tryggingarfeløg í EBS frítt bjóða fram sínar tænastur í øllum EBS-økinum. Endamálið er at geva feløgunum rúmari ræsir at kappast og á tann hátt fáa fram betri og bíligari tryggingartænastur.

Frælsi at tekna tryggingar er tó avmarkað. EBS-sáttmálin veitir t.d. ikki fult frælsi í sambandi við skaðatryggingar fyri smá og meðalstór virki og húski. Fyri at kunna bjóða hetta slagið av

tryggingum, kann krevjast loyvi frá myndugleikunum í tí landinum, tænastan verður bjóðað fram.

Viðvíkjandi lívstryggingum kunnu feløgini ikki beinleiðis marknaðarføra sínar tænastur í einum øðrum landi uttan loyvi frá myndugleikunum har. Borgarar og fyritøkur kunnu tó tekna øll sløg av tryggingum í einum øðrum EBS-landi, um so er, at tey sjálvi taka stig til tað. Høvuðsreglan er annars, at lóggávan í landinum, har tryggingartakarin býr, er galdandi, um partarnir ikki hava avtalað okkurt annað.

**Bankar og aðrir fíggingarstovnar**
Í EBS verður eins og í EF nýtt hugtakið fíggjarstovnar (kreditinstitutiónir). Talan er fyrst og fremst um bankar, men eisini fíggingarfeløg og kredittfeløg.

Við loyvi frá og undir eftirlitið av myndugleikunum í heimlandinum, kunnu bankar reka virksemi í øllum EBS-økinum. Frælsi er at veita tænastur um landamørk ella gjøgnum undirdeildir.

**Børsur og virðisbrævahandil**
Reglurnar fyri børs- og virðisbrævavirksemi fevna um viðurskiftini millum børsin og tær fyritøkur, sum vilja vera skrásettar á børsinum og um virðisbrævahandil og tænastuveitingar í tí sambandi.

Endamálið er at fáa í lag ein eindarmarknað fyri virðisbrøv í EBS-økinum. Við lógarásetingunum verður miðað ímóti at tryggja atgongd til marknaðin og at geva teimum, sum útskriva virðisbrøv, møguleika fyri at skráseta tey á børsinum, eisini tvørtur um landamørk. Somuleiðis verður miðað ímóti at røkja áhugamálini um trygd og marknaðarupplýsingar mótvegis íleggjarum.

**Flutningur**
Ásetingarnar í EBS-sáttmálanum um flutning fevna um sigling, flogferðslu og flutning á vegum og jarnbreytum. Endamálið við felags flutningsmarknað er m.a., at gagnnýta flutningstólini og at minka kostnaðin bæði hjá brúkarunum og flutningsvinnuni.

Vanliga hevur flutningsmarknaðurin, tá uttanlandssigling er undantikin, verið millum teir mest lógaravmarkaðu í EF-londunum eins og í nógvum øðrum londum. Kvotur, loyvi og nógvar natiónalar og altjóða reglur hava borið í sær, at flutningsmarknaðurin hevur verið sera uppbýttur og í nógvum førum vardur móti kapping.

Seinnu árini hevur EF lagt seg eftir at fáa ein innmarknað fyri flutning at virka. Hetta hevur verið gjørt við at taka av allar millumtjóða og innlendis skipanir, sum forða fyri, at flutningstænastur hava frítt at fara um landamørk. Arbeitt hevur verið við at fáa felags lógarverk til tess at røkja almenn áhugamál viðvíkjandi trygd, umhvørvi o.a., og til tess at fáa einsháttaðar kappingartreytir í limalondunum.

Enn er EF tó ikki komið á mál við ætlanum sínum, men hendan gongdin hevur alstóran týdning fyri alt EBS-økið og rakar stórar partar av flutningsvinnuni í EFTA-londunum.

Eitt nú hevur EBS-sáttmálin ásetingar um flogferðslu í øllum EBS-økinum. Sáttmálin fevnir tó ikki um flúgving til lond uttan fyri sáttmálaøkið. Flogfeløg í einum EBS-landi kunnu flúgva millum øll EBS-londini. Einki forðar einum flogfelag at flúgva innlendis í einum øðrum EBS-landi.

EBS-sáttmálin hevur felags reglur um góðkenning av flogfeløgum. Somuleiðis hevur sáttmálin reglur um t.d. endurgjald fyri yvirbooking, sínámillum góðkenning av loyvisbrøvum fyri flogfólk og felags teknisk/operativ krøv fyri flogfólk og flogfeløg.

Viðvíkjandi millumlanda farma- og ferðafólkasigling fáa sáttmálalondini atgongd til alt EBS-økið. Strandfarasigling er tó undantikin. Kappingartreytirnar verða samskipaðar, og EFTA-londini eru ikki í vanda fyri at vera fyri anti-dumpingar tiltøkum frá EF á hesum øki.

**Telesamskifti**
EBS-sáttmálin ber í sær felags reglur um kapping og einkarrætt innan teleøkið. Reglurnar eru ein avleiðing av gongdini og menningini á hesum øki seinnu árini. Serliga hevur samanrenningin av tele- og datatøkni havt ávirkan á útboðið av teletænastum. Samanrenning á tekniska økinum hevur gjørt, at tað er torført at seta mørk millum tær ymisku teletænasturnar.

Tá talan er um kapping og einkarrætt, hevur gongdin í flestu londum verið alsamt meira kapping og minni einkarrættur. EBS-sáttmálin áleggur EBS-londunum at fáa í lag kapping innan teletænastur.

Ásetingarnar um teleútgerð eru partar av reglunum fyri handli við vørum. Hesar fevna um teknisk krøv til telenetið og miða eftir at fáa samskipað skipanirnar fyri góðkenning av útgerð. Endamálið

er at fáa tekniskar handilsforðingar burtur. Útgerð, sum er góðkend í einum EBS-landi, kann seljast í øðrum EBS-landi uttan nýggja góðkenning.

Í sambandi við teletænastur kann eisini nevnast, at limalondini í WTO á vári 1997 samtyktu ein sáttmála, sum ber í sær, at nógv sløg av teletænastum fáa fríari marknaðaratgongd. Hesin sáttmálin kom í gildi 1. januar í 1998. Hetta er fyrstu ferð bindandi altjóða reglur verða gjørdar fyri marknaðaratgongd fyri teletænastur. 68 av teimum 127 limalondunum í WTO hava longu latið sínar marknaðir upp fyri øðrum WTO-londum, samstundis sum tey hava bundið seg til ikki at seta nýggjar avmarkingar í verk. Hesi lond standa fyri meira enn 90% av umsetningum í heimshandlinum við teletænastum.

**Sjónvarp**
Reglurnar í EBS-sáttmálanum byggja á EF-direktivið um sjónvarp, sum í høvuðsheitum hevur útgangsstøði í konventiónini hjá Europaráðnum um sjónvarping um landamørk.

Direktivið ásetir kvotur fyri at tryggja framleiðslu og útbreiðslu av europeiskum sendingum. Fyri ávís sløg av sendingum skulu í minsta lagi 50% av senditíðini vera av europeiskum uppruna. Somuleiðis verður eggjað til, at sjónvarpsstøðir skulu seta í minsta lagi 10% av síni fíggjarorku til at keypa sendingar frá framleiðarum, sum eru óheftir av sjónvarpsstøðini.

Direktivið hevur eisini ásetingar, sum banna lýsingum fyri eitt nú tubbaksvørum og heilivági. Somuleiðis eru reglur um vernd av børnum og ungum. Bannað er at varpa út sendingar við pornografi ella harðskapi og aðrar sendingar, sum kunnu vera til ampa fyri likamligu, sálarligu ella moralsku menningina hjá børnum og ungum.

Við skjótu tøkniligu menningini, sum hevur verið á hesum øki, er kortini ringt hjá EBS-londunum at verja seg móti fylgisveinasjónvarpi frá umheiminum.

**9.4.4. Persónar**
Meginreglan um, at persónar hava frítt at fara um landamørk, ber í sær, at ríkisborgarar úr einum EBS-landi uttan serligar forðingar kunnu fara í annað EBS-land at leita sær arbeiði. Fær viðkomandi arbeiði, kann hann ella hon vera búgvandi. Ein borgari úr øðrum EBS-landi kann eisini fara undir sjálvstøðugt vinnuvirksemi í øllum EBS-økinum.

Lesandi, pensjónistar og onnur, ið ikki eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, kunnu eisini fáa uppihaldsloyvi í einum øðrum EBS-landi. Treytin er, at tey sjálvi hava til lívsins uppihald og hava egna sjúkratrygging. Sáttmálin tryggjar eisini, at møguliga strangari ásetingar fyri uppihald í einum landi, ikki skulu galda fyri ríkisborgarar úr øðrum EBS-londum

**Rættindi hjá EBS-borgarum í EBS-londunum**
Frælsið hjá persónum at flyta millum EBS-lond hevur fyrst og fremst týdning fyri tey, ið leita sær arbeiði. Hesi kunnu frítt fara til eitt annað EBS-land, at leita sær arbeiði. Um so er, at tey hava rætt til arbeiðsloysisstuðul heima, hava tey í tríggjar mánaðar rætt til at fáa útgoldið arbeiðsloysisstuðulin í tí landinum, tey flyta til. Flyta tey ikki heimaftur, tá hesir tríggir mánaðirnir eru farnir, missa tey vunnin rættindini í heimlandinum.

Fáa tey arbeiði, hava tey samstundis rætt at búseta seg í landinum. Familjan hevur rætt til at flyta við. Familjan fevnir í hesum føri um hjún og børn undir 21 ár ella tey, sum viðkomandi familja forsyrgir. Arbeiðstreytirnar eru tær somu sum fyri landsins egnu borgarar. Børnini hava rætt til skúlagongd í viðkomandi landi, og familjan hevur rætt til at fáa sær arbeiði.

Frælsið at flyta millum EBS-lond fevnir eisini um rættin at seta seg niður sum sjálvstøðugt vinnurekandi og at seta feløg á stovn í einum øðrum EBS-landi. Somu reglur eru galdandi fyri tilflytarar sum fyri landsins egnu borgarar.

Frælsi á arbeiðsmarknaðinum er ikki galdandi fyri størv hjá tí almenna, sum eru knýtt at útinning av almennum myndugleika. Sama er galdandi fyri stovnseting av sjálvstøðugum vinnuvirksemi, sum hevur samband við útinning av almennum myndugleika.

Uppihaldsrættindini eru eisini galdandi fyri lesandi, pensjónistar og onnur, sum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum og familjur teirra. Hesir persónar hava eingi rættindi í sambandi við trygdar- og sosialskipanir, men mugu sjálvi hava tað, sum krevst til lívsins uppihald.

**Sínámillum góðkenning av yrkisførleika og útbúgvingum**
Í EBS-sáttmálanum eru ásetingar um sínámillum góðkenning av prógvum fyri yrkisførleika. Hesar fevna í høvuðsheitum um yrki, sum krevja almenna góðkenning, løggilding ella loyvi, og sum verða givin persónum, ið hava útbúgvingar longri enn trý ár. Arbeitt verður við at fáa líknandi

skipanir fyri styttri útbúgvingar, sum krevja almenna góðkenning, men enn er ikki komið á mál við hesum.

Meginreglan í EBS-sáttmálanum er, at um ein hevur loyvi, góðkenning ella annað prógv fyri at reka yrki í heimlandinum, kann ein uttan krøv um skjalprógv fáa samsvarandi prógv í hinum EBS-londunum. Fyritreytin er, at tann upprunaliga góðkenningin er givin við støði í eini nærri lýstari útbúgving, sum varir í eitt ávíst tíðarskeið.

Í flestu førum kunnu myndugleikarnir í vertslandinum ikki seta krøv um, at tey sum søkja um góðkenning, skulu hava kunnleika til mál ella reglur í vertslandinum innan tað økið, tey virka. Hinvegin kunnu arbeiðsgevarar seta slík krøv. Fólk úr øðrum EBS-londum eru undir somu lógum og reglum, sum fólkið í landinum.

Tey, sum lúka krøvini um góðkenning ella loyvi, hava rætt at nýta yrkisheitið í vertslandinum. Viðkomandi hevur rætt at nýta sítt akademiska heiti frá tí stovni, har útbúgvingin stavar og á málinum hjá landinum. Vertslandið kann tó krevja, at tilskilað verður, hvar útbúgvingin er tikin.

**Sosial rættindi o.a.**
Eftir ásetingunum í EBS-sáttmálanum hevur ríkisborgari úr einum EBS-landi, sum arbeiðir í einum øðrum EBS-landi, somu sosialu rættindi sum borgararnir í avvarðandi landi. Høvuðsreglan er, at hesi rættindi mugu verða vunnin sambært ásetingum í vertslandinum á jøvnum føti við borgarar har.

Fyritreytin fyri at vinna sosial rættindi í einum øðrum EBS-landi er, at viðkomandi hevur arbeiði, ella at forsyrgjarin hjá viðkomandi hevur arbeiði.

Pensiónistar, lesandi og onnur, sum ikki eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, mugu sjálvi borga fyri útreiðslum til uppihald, heilsutænastur o.t..

EBS-sáttmálin fevnir um alla almannalóggávu við hesum veitingum: Læknaviðgerð í sambandi við sjúku og barnsburð, sjúkrapengar, veitingar til brekað, veitingar í sambandi við endurútbúgving, barnastuðul o.a., veitingar til eftirsitandi, veitingar í sambandi við yrkisskaða ella -sjúku og arbeiðsloysisstuðul.

### 9.5 Onnur samstarvsøki í EBS

**Inngangur**
EBS-sáttmálin fevnir eisini um samstarv á økjum, sum ikki beinleiðis eru knýtt at teimum fýra frælsunum. EF-samstarvið fevnir um umhvørvisvernd, spurningar í sambandi við arbeiðsumhvørvi, gransking og menning, útbúgving, brúkaravernd, vinnufelagsrætt, hagtøl, smáar og meðalstór virkir, fjølmiðlar, ferðavinnu og tilbúgvingar í sambandi við vanlukkur. EBS-sáttmálin skapar karmar og áleggur pørtunum at menna samstarvið innan nevndu samfelagsøki.

**Umhvørvismál**
Seinnu árini hevur semja verið um, at størstu vandamálini í umhvørvisspurningum bert kunnu loysast við bindandi samstarvi um landamørk. Í EBS-sáttmálanum eru londini samd um at fáa í lag bindandi samstarv um reglur og framferðarhátt í umhvørvismálum. Samstarvið millum EFTA og EF innan umhvørvi miðar eftir, at fyrilit skal takast til umhvørvið á øllum økjum, sum sáttmálin fevnir um.

Samstarvið um umhvørvið í EBS er býtt í tvey. Í fyrsta lagi fevnir tað um umhvørviskrøv til vørur og framleiðslu. Í øðrum lagi fevnir tað um øki, har politikkurin hjá einum landi ávirkar umstøðurnar í einum øðrum landið, annaðhvørt talan er um umhvørvistrupulleikar ella ávirkan á kappingarviðurskifti.

Tá talan er um dálking, hevur EBS-sáttmálin beinleiðis týdning fyri bæði reglur, tiltøk og umsiting. Sáttmálin hevur eisini ásetingar um avgerðartilgongd og sáttargerð í umhvørvismálum. Sáttmálin ásetur stevnumið og meginreglur viðvíkjandi umhvørvi, sum skulu vera leiðbeinandi fyri øll samstarvsøki, sáttmálin fevnir um. Felags umhvørvispolitikkurin skal birta upp undir at varðveita, verja og bøta um umhvørvi, verja heilsustøðuna hjá fólki og tryggja skynsama troyting av náttúrutilfeingi.

Sáttmálin ásetur somuleiðis meginreglur fyri, hvussu farast skal fram í sambandi við umhvørvistrupulleikar. Serligur dentur verður lagdur á fyribyrgjandi umhvørvisarbeiði, og ein meginregla er, at tann, ið elvir til dálking, skal gjalda fyri uppruddingina.

Sáttmálin ásetir minstukrøv fyri tiltøk, sum skulu setast í verk fyri at verja umhvørvið. Her er talan

um ásetingar um m.a. vatn- og luftdálking, um viðgerð av burturkasti og um at byrgja fyri størri ídnaðarvanlukkum.

Eisini eru ásetingar um samstarv fyri at menna felags krøv fyri tilevning av vørum, dygd, trygd og aðrar eginleikar, sum kunnu hava ávirkan á umhvørvið.

**Arbeiðsumhvørvið og arbeiðaramál. Sosiala dimensiónin**
Sosiala dimensiónin er felags heiti á ymiskum tiltøkum innan nógv samfelagsøki, sum fyrst og fremst snúgva seg um arbeiðs- og livikorini hjá fólki. Hon fevnir m.a. um stevnumiðið um arbeiði til allar hendur, um at bøta um arbeiðsumhvørvið, arbeiðsrættarmál, medavgerðarrætt í arbeiðslívinum, brúkaravernd, javnstøðu, yrkisupplæring og býti og javna millum bólkar og landspartar.

Sáttmálin leggur lunnar undir eitt rúmari og bindandi samstarv um menning av tí sosialu dimensiónini, soleiðis at búskaparliga samansjóðingin eisini tænir rúmari samfelagspolitiskum endamálum. Sáttmálin ásetir grundarlagið fyri samstarvi um arbeiðsumhvørvi, arbeiðsrættarmál, javnstøðu og samstarv við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Til tess at tryggja heilsu og trygd á arbeiðsplássinum skulu minstukrøvini til arbeiðsumhvørvi setast í verk. Hesi krøv forða kortini ikki pørtunum at varðveita ella seta í verk strangari lóggávu á økinum.

Sáttmálapartarnir skulu halda seg til meginregluna um, at kvinnur og menn skulu hava somu løn fyri sama arbeiði, og at menn og kvinnur skulu hava javnbjóðis viðferð.

Sáttmálapartarnir skulu eisini royna at stimbra samskiftið millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hetta er m.a. gjørt við at seta á stovn eina ráðgevandi nevnd fyri EBS, ið er mannað við limum úr Ráðgevandi nevndini hjá EFTA og Búskaparligu og sosialu nevndini hjá EF (ECOSOC). Sambært EBS- sáttmálanum hava EFTA-londini harumframt rætt til at taka lut í praktiskum samstarvstiltøkum, sum m.a. fevna um at bøta um umstøðurnar hjá arbeiðsleysum, eldri (Helios II), brekaðum børnum og ungum.

**Brúkaravernd**
EBS-sáttmálin legði lunnar undir ein innmarknað við 370 milliónum fólkum, har vørur og tænastur hava frítt at fara um landamørk. Fyri vanliga brúkaran hevði hetta við sær, at útboðið av vørum og tænastum verður størri og valmøguleikarnir fleiri.

Skal innmarknaðurin í EBS virka, er ein fyritreyt, at brúkarin hevur álit á teimum vørum, sum eru á marknaðinum. Hetta krevur høg og einsháttað krøv til vøruna. Tá vørur verða keyptar um landamørk, krevjast somuleiðis upplýsingar um vøruúrval og trygd fyri at verja áhugamál og rættindi hjá brúkarunum.

Sáttmálin hevur eisini reglur um m.a. brúkarakreditt, villleiðandi lýsingar, prísmerking av nýtsluvørum, elektroniskar gjaldhættir og brúkararættindi í sambandi við pakkaferðir. Talan er um minsturkrøv, og londini kunnu varðveita sínar reglur, um tær eru strangari ella víðfevndari.

**Gransking, teknologisk menning og kunningartænastur**
Millumtjóða samstarv er av stórum týdningi fyri at loysa granskingar-uppgávur og trupulleikar, sum eru teir somu í øllum londum. Summar uppgávur eru ov kostnaðarmiklar, til at londini kunnu loysa tær einsamøll.

Í øðrum førum er tað sjálvsagt og neyðugt, at londini samstarva fyri at røkka hægri málum. Hetta er t.d. galdandi fyri gransking innan umhvørvi, læknavísindi, náttúruvísindi og troytan av tilfeinginum í sjónum. Somuleiðis gevur samstarv innan vinnugransking møguleikar fyri at bøta um teknologiska grundarlagið og altjóða kappingarførið hjá fyritøkunum.

Gransking er fyrst og fremst ábyrgdin hjá einstaka landinum, men innan EF eru fleiri samstarvstiltøk sett í verk sum eitt ískoyti til møguleikarnar í einstøku londunum.

EBS-sáttmálin ber í sær, at EFTA-londini eru partur av rammuætlanum hjá EF um gransking og menning. Hesar ætlanir ganga vanliga yvir eitt ávíst áramál og fevna um at kalla allar tættir innan gransking, granskaraútbúgving og skifti av granskarum millum lond.

Í fjórðu rammuætlanini, sum gongur frá 1994-1998, verður dentur lagdur á gransking innan øki, sum hava týdning fyri kappingarevni og arbeiðspláss. Eitt nú hevur styrkur verið veittur til gransking innan umhvørvisvernd, landbúnaðar- og fiskivinnugransking og tiltøk fyri at økja mobilitetin hjá granskarum.

Sáttmálin ásetir reglur um útreiðslur í sambandi við luttøku í rammuætlanunum hjá EF. Skipanin virkar soleiðis, at parturin hjá EFTA-londunum verður ásettur eftir einum býti, sum hevur útgangsstøði í bruttotjóðarúrtøkuni hjá londunum.

**Útbúgving**
Við EBS-sáttmálanum eru EFTA-londini partur av ES-samstarvinum á útbúgvingarøkinum. Samstarvið er skipað í tveimum rammuætlanum: SOCRATES (fyri almennu útbúgvingarnar) og LEONARDO da Vinci (fyri yrkisútbúgvingarnar).

Endamálið er at birta upp undir dygdarútbúgvingar og -upplæring við at fáa í lag samstarv og skifti av næmingum. Sama er galdandi fyri yrkisútbúgvingarnar. Miðað verður eisini eftir øktum skifti av bæði lesandi og lærarum og av kunnleika og royndum. Endamálið er ikki at fáa í lag ein felags europeiskan útbúgvingarpolitikk, men at útbúgvingarætlaninar skulu vera eitt ískoyti til egna politikkin hjá londunum á útbúgvingarøkinum.

**Annað**
EBS-sáttmálin fevnir eisini um samstarv millum EFTA-londini og EF innan hagtøl, felagsrætt, smá og meðalstór virki, ferðavinnu, mentan og fjølmiðlar og tilbúgving í sambandi við vanlukkur.

Endamálið við samstarvinum um hagtalsskipanir í EBS er at kunna lýsa gongdina á teimum økjum, sum EBS-sáttmálin fevnir um, við eins hagtølum. Samstarvið skal eisini kunna lýsa, hvørjar avleiðingar samansjóðingin hevur á búskaparlig, sosial og umhvørvislig viðurskifti í EBS-londunum.

Eitt av høvuðsendamálunum við EBS-ásetinginum um vinnufelagsrætt er at veita partaeigarum, sáttmálapørtum og kreditorum ávís vernd, líkamikið í hvørjum EBS-landi felagið hevur heimstað. Tey, sum seta virkir á stovn í einum øðrum EBS-landi, kunnu somuleiðis rokna við, at lóggávan har er á leið tann sama sum í heimlandinum.

Tiltøkini, sum EF hevur sett í verk fyri smá og meðalstór virki, eru serliga ætlað at gera hesi virki betri før fyri at laga seg til tær nýggju umstøðurnar, sum verða skaptar av innmarknaðinum. Sambært EBS-sáttmálanum kunnu EFTA-londini vera við í tiltøkum og ætlanum, sum EF hevur sett í verk á hesum øki.

# EBS frágreiðingin

## EBS og fiskivinna

**10.1 Inngangur**
Tá farið varð undir EBS-samráðingarnar, vóru EFTA og ES samd um, at felags landbúnaðar- og fiskivinnupolikkur ikki skuldi setast í verk í EBS. Samráðingarnar á fiskivinnuøkinum snúðu seg um marknaðaratgongd í ES, serliga um toll og kappingartreytir.

Útgangsstøðið hjá EFTA-londunum var, at fiskur skuldi fáa somu viðferð sum ídnaðarvørur, tvs. fult tollfrælsi. Hesum vildi ES ikki eftirlíka.

Umframt samráðingar um marknaðaratgongd vóru eisini tvílanda samráðingar millum tey einstøku EFTA-londini øðrumegin og ES hinumegin um at víðka um sínámillum fiskiveiðusamstarvið. Flestu EFTA-londini høvdu longu frammanundan fiskiveiðuavtalur við ES. Samráðst varð tí um at víðka samstarvið innan karmarnar av hesum avtalum.

Niðanfyri verða umrøddar ásetingar í EBS-sáttmálanum, sum bæði beinleiðis og óbeinleiðis hava týdning fyri fiskivinnu. Fiskivinnan er - í stóran mun - undantikin teimum fýra frælsunum og øðrum meginreglum í EBS. Her er fyrst og fremst talan um marknaðaratgongd fyri fisk og møguleikar hjá útlendingum at gera íløgur í íslendska og norska fiskivinnu. Av øðrum ásetingum, sum hava týdning fyri fiskivinnuna, kunnu nevnast reglur um almennan studning og kappingartreytir, atgongd til havnir og transitt. Veiðurættindi eru - sum so - ikki partur av samstarvinum.

**10.2 Marknaðaratgongd**
ES-londini hava í nógv ár havt sínámillum fríhandil við fiski og fiskavørum. Millum EFTA-londini hevur fríhandil verið fyri fisk og fiskavørur síðani 1. juli 1990. Millum EFTA og ES hevur hinvegin verið og eru framvegis forðingar í handlinum fyri fisk. Her er serliga talan um høgan toll á tilvirkaðum vørum úr EFTA-londum til ES-marknaðin. Hóast EBS-sáttmálin førdi við sær fríari og smidligari handilstreytir, so broyttist støðan hjá fiski og fiskivørum lítið. Tollur á fiski og fiskavørum forðar framvegis fyri handli úr EFTA-londunum til ES-marknaðin.

ES hevur, síðan felags fiskivinnupolitikkurin kom seint í 1960-árunum, havt skipanir, sum hava vart ES-marknaðin móti innfluttum fiski- og fiskavørum úr triðjalondum. Her hevur serliga verið talan um toll á fiskavørum. Fyri frystar og feskar fiskavørur er triðjalandstollurin millum 8 og 15%, fyri fløk millum 12 og 18% og fyri viðgjørdar fiskavørur millum 20 og 30%. Høvuðsreglan hevur verið og er, at tess meira fiskurin er tilvirkaður, tess hægri eru tollsatsirnir.

Hóast útgangsstøðið í EBS-sáttmálanum er, at allar vørur skulu hava frítt at fara millum ES og EFTA-londini, so er hetta frælsi ikki galdandi fyri landbúnaðarvørur og fisk.

Longu tíðliga í EBS-samráðingunum gjørdist greitt, at hesin spurningur var trupul at loysa, serliga tí at ES helt fast uppá, at fiskivinnupolitikkurin var ein heild, ið ikki kundi liðast sundur. ES gjørdi púra greitt, at betri tollsømdir fyri fisk bert kundu veitast ímóti, at ES fekk veiðurættindi í EFTA-sjógvi. Tí kundi ES ikki góðtaka kravið um fría marknaðaratgongd og fult tollfrælsi fyri fisk úr EFTA-londunum á ES-marknaðinum.

Undir samráðingum førdu fleiri limalond í ES eisini fram, at tey als ikki kundu góðtaka at veita tolllætta fyri laks, sild og makrel. Hesar vørur vóru mettar at vera viðbreknar. Seinni komu so rækjur, jákupsskel og hummari á listan yvir viðbreknar fiskavørur.

Úrslitið av samráðingunum varð samanumtikið, at EFTA-londini ikki fingu síni krøv um handilslættar fyri fisk eftirlíkaði. Ístaðin fyri fult tollfrælsi var fiskur og fiskavørur flokkaðar í tríggjar høvuðsbólkar (sí talvu 10.1).

| Talva 10.1: Tollur á fiski og fiskavørum í EBS-sáttmálanum. | |
|---|---|
| Bólkur | Fiskaslag/-vørur |
| 1. Fult tollfrælsi frá 1. januar 1993 | Toskur, hýsa, upsi, kalvi, svartkalvi (feskt og fryst).<br>Fryst og fesk fløk av toski, hýsu, upsa, svartkalva og kalva.<br>Saltaður og turrur toskur |

| | |
|---|---|
| | Fiskapinnar og kaviarlíki. |
| 2. Ongar tolllækkingar<br><br>("viðbrekin fiskasløg") | Sild, makrelur, laksur, rækjur, jákupsskel, hummari. Fiskamjøl og lýsi. |
| 3.Tollurin lækkaður við 70%<br><br>innan 1.1. 1997 | Annað, sum ikki er nevnt í bólki 1 og 2. |
| Kelda: Grein 2 í protokoll 9 í EBS-sáttmálanum. | |

ES er nettoinnflytari av fiski og fiskavørum. Hetta ger saman við tí, at Noreg og Ísland hava lágan ella ongan toll á innflutningi av fiskavørum, at tær tollsømdir, sum EFTA hevur veitt ES, hava lítlan praktiskan týdning. Hinvegin hava tollsømdirnar, sum ES hevur givið EFTA, alstóran týdning fyri Noreg og Ísland.

Noreg útflytir eini 90% av sínum fiski og fiskavørum, og fara eini 60% á ES-marknaðin. Hjá Íslandi eru 78% av útflutninginum fiskur, og eini 70% fara á ES-marknaðin.

Hóast Ísland og Noreg fingu frægari tollsømdir við teimum fríhandilsskipanum, sum vórðu undirskrivaðar fyrst í 1970-árunum, so vóru tollgjøldini mett sum ein forðing fyri handlinum við fiski úr EFTA-londunum til ES, serliga við tilvirkaðum fiskavørum. Tolleftirgevingarnar frá ES í EBS-sáttmálanum á flestu hvítfiskavørum gagna sum heild Noregi og Íslandi. Fyri flestu fiskavørur fór tollurin niður á null, meðan hann á øðrum vørum - teimum viðbreknu - liggur millum 0,9 og 4%.

Nevnast skal í hesum sambandi, at tolllættarnir í EBS-samráðingunum byggja á fríhandilsavtalurnar frá 1972.

Samanumtikið kann sigast, at hóast talan er um munandi frægari tollsømdir fyri EFTA-fisk á ES-marknaðinum, so er ikki farið so langt, sum EFTA-londini upprunaliga kravdu í samráðingunum. Sum nevnt fingu tey "viðbreknu" fiskasløgini t.d. sild, makrelur, rækjur og ikki minst laksur ongan tolllætta. Hóast ES-tollur ikki er so høgur fyri feskan og frystan laks, so fekst eingin tollniðurskurður á royktum laksi. Sum er, gjalda norðmenn 13% í tolli, tá ið teir útflyta tilvirkaðar laksavørur til ES.

Í sambandi við EBS og marknaðaratgongd fyri fisk og fiskavørur til marknaðin í ES, skal eisini nevnast, at saman við tolli mettu EFTA-londini heilsufrøðiliga marknaðareftirlitið hjá ES sum eina forðing fyri handlinum við fiski. EBS-sáttmálin bar í sær, at EFTA-londini yvirtóku reglurnar hjá ES um góðskueftirlit við fiski og fiskavørum. Men í fyrsta umfari fevndi sáttmálin ikki um heilsufrøðiligt eftirlit við ES-markið. Hetta hevði við sær, at sama ES-eftirlit var við norskum og íslendskum fiskaútflutningi, sum við fiski úr øðrum triðjalondum.

ES samskipaði og herdi heilsufrøðiliga eftirlitið við landamørkini 1. januar 1997. Norðmenn og íslendingar hildu, at henda skipanin fór at vera enn meira tíðarkrevjandi og kostnaðarmikil, og at hon fór at hava við sær stórar trupulleikar, serliga fyri fiskaútflutningin.

Farið varð tí undir samráðingar um at endurskoða EBS-sáttmálan, og tær endaðu við, at reglurnar um góðskueftirlit við fiski- og fiskavørum í sambandi við innflutning til ES, eru komnar við í sáttmálan.

Hesar broytingar góvu fiskivinnuni í EFTA-londunum fyrimunir og rúmari møguleikar at vaksa um útflutningin til høvuðsmarknaðin í ES. Fiskaútflytarar sluppu undan teimum praktisku trupulleikunum á marknaðarliðunum. Somuleiðis spardu teir kostnaðin, ið hevði staðist av víðkaðum eftirliti við ES-markið. Vanliga vóru millum 3 og 5% av fiski og fiskavørum kannað. Um EBS-sáttmálin ikki varð endurskoðaður, hevði hetta havt við sær, at eftirlitið við sendingum av fiski og fiskavørur úr EFTA-londunum, hevði hækkað upp í 20%, og fyri summar fiskarvørur - eitt nú roytan laks - upp í heili 50%.

**10.3 Almennur studningur og kappingarreglur**

EBS-sáttmálin hevur eisini ásetingar um kappingaravlaging í sambandi við almennan studning og onnur almenn marknaðarinntriv. Høvuðsreglan í EBS-sáttmálanum er, at almennur studningur til fiskivinnuna, sum avlagar kappingina, skal takast av.

Tá metast skal um, hvat er kappingaravlagandi, skulu reglurnar í Rómarsáttmálanum og aðrar

ásetingar í fiskivinnulóggávuni hjá ES leggjast til grund. Rómarsáttmálin ásetir, at við ávísum undantøkum er ikki loyvt at lata almennan stuðul, ið avlagar ella hóttir við at avlaga kappingina, ella sum ávirkar handilin millum limalondini. Rómarsáttmálin heimilar ES-nevndini at áseta nærri reglur um hetta. Loyvt er hinvegin at veita studning, sum hevur til endamáls at lætta um menningina av ávísum vinnugreinum ella landspørtum. Hetta er tó treytað av, at studningurin ikki broytir fyritreytirnar fyri samhandlinum á ein hátt, sum er í stríð við felags áhugamál.

Ásetingarnar um kappingaravlagandi studning høvdu ikki kollveltandi ávirkan á fiskivinnuna í EFTA-londunum, tí longu í 1989 samtyktu EFTA-londini, at innan árslok 1993 skuldi allur kappingaravlagandi almennur studningur til fiskivinnuna avtakast. Sambært løgfrøðiligum metingum av fiskivinnuásetingunum í EBS-sáttmálanum er ikki talan um, at EFTA-londini skulu yvirtaka ES-reglur um fiskamarknað og fiskaumsetning. Lóggávan í EFTA-londunum skal bert halda seg innan karmarnar av EF-reglunum, og tað gjørdi hon, í stóran mun, longu tá EBS-sáttmálin varð undirskrivaður. EFTA-londini kunnu veita tey sløg av studningi, sum eru loyvd sambært ES-skipanum.

EFTA-londini mugu broyta ella avtaka allar lógir og reglur innan keyp og sølu av fiski, sum avlaga kappingina millum partarnar í EBS-samstarvinum. Tá metast skal um, hvat er kappingaravlaging, skulu ES-reglurnar í marknaðarskipanini fyri fisk og fiskavørur leggjast til grund. Partar av marknaðarskipanini eru undantøk frá høvuðsreglunum í Rómarsáttmálanum um kapping o.a. Produsentfeløg og prísskipanin fyri fisk- og fiskavørur verða t.d. ikki roknað sum kappingaravlagandi.

Eitt mál, sum EFTA-londini løgdu stóran dent á í samráðingunum, var spurningurin um anti-dumpingar-tiltøk móti útflutninginum av fiski úr EFTA-londum til ES-marknaðin. Sambært grein 26 í EBS-sáttmálanum skulu anti-dumping og líknandi tiltøk ikki nýtast fyri ídnaðarvørur. Í grein 13 er tó ásett, at hendan áseting bert er galdandi á samstarvsøkjum, har reglurnar hjá ES til fulnar eru tiknar við í sáttmálan.

Av tí, at fiskivinnulóggávan hjá ES ikki er partur av EBS, er grein 26 um anti-dumping ikki galdandi fyri fisk og fiskavørur. Ístaðin er grein 4, nr. 3 í protokoll 9 galdandi. Har verður sagt, at sáttmálalondini skulu tryggja kappingartreytir, so hini sáttmálalondini ikki brúka anti-dumpingar atgerðir ella verjutoll. EFTA-londini høvdu upprunaliga vónað, at møguleikin fyri at nýta anti-dumpingar atgerðir fyri fiskavørur als ikki skuldi takast við í EBS-sáttmálanum, men ES kravdi, at hesin møguleikin skuldi vera til staðar.

### 10.4 Atgongd til havnir

EBS-sáttmálin ásetir, at fiskifør úr sáttmálalondunum skulu hava javnbjóðis atgongd til havnirnar hjá hvørjum øðrum. ES-londini høvdu longu javnbjóðis atgongd til havnirnar hjá hvørjum øðrum, og EFTA-londini høvdu sett líknandi skipan í verk um tað mundið, farið varð undir samráðingarnar.

Endamálið við hesi áseting er tí at tryggja fiskiførum úr sáttmálalondunum javnbjóðis atgongd til havnir og landingarstøð hjá hvørjum øðrum. Talan er um *javnbjóðis* atgongd og ikki *fría* atgongd. Hetta merkir, at eitt land, sum er partur av EBS, skal veita fiskiførum úr øðrum sáttmálalondum somu atgongd til havnir, sum tað veitir sínum egnu fiskiførum. Eitt land kann ikki skerja atgongdina til havnir við støði í tjóðskapi. Hinvegin ber til at avmarka atgongdina við støði í objektivum faktorum, sum eitt nú skipastødd, ella hvat slag av fiski skipini hava í lastini.

Hesar ásetingar hava í fyrsta lagi við sær, at møguleikin verður skerdur hjá EFTA-londunum at áleggja egnum fiskiførum at avreiða heima, eitt nú fyri at tryggja arbeiðspláss í fiskiídnaðinum.

Sáttmálalondini kunnu seta landingarbann fyri veiðu úr fiskastovnum av felags áhuga, og sum álvarslig umsitingarlig ósemja er um. Hóast tað ikki verður nærri tilskilað í sáttmálanum, so er helst talan um felagsstovnar, tvs. stovnar sum eru í ella ferðast millum sjóøkini hjá tveimum ella fleiri londum. Ella stovnar, ið bert eru í økinum hjá einum sáttmálaparti, men sum ein annar partur heldur seg hava rætt til at fiska.

Talan kann eisini vera um stovnar, sum eru í ella ferðast út í altjóða sjógv. Tað er ikki óvanligt, at trætur taka seg upp um slíkar stovnar. Sum dømir kunnu nevnast tvídrátturin millum Noreg og ES um fiskastovnar í Norðsjónum og Skagerrak, fiskiskapurin í Smoguni í Barentshavinum og leiðirnar í altjóða sjógvi við New Foundland. Norðmenn styðjaðu seg til EBS-sáttmálan, tá teir eitt skifti settu nótabátum úr ES forboð at landa norðhavssild í Noreg.

### 10.5 Transitt

ES ynskti frían rætt til at flyta fisk og fiskavørur gjøgnum londini. Tað vil siga, at ES-fiskifør skuldu

kunna leggja veiðuna upp í einum EFTA-landi, og at veiðan síðan kundi flytast yvir land gjøgnum eitt nú Noreg til virkini í ES, uttan at neyðugt varð at tollavgreiða fiskin í Noregi.

Men vegna fyrivarni frá EFTA fekst eingin semja um hendan spurning undir samráðingum um EBS-sáttmálan. Norðmenn vildu sínumegin hava, at ES-veiðan, sum varð løgd upp í Noreg, skuldi fara um norsku *salgslags*-skipanina. Í EBS-sáttmálanum er bert ein einsíðug yvirlýsing frá ES um transitt.

**10.6 Útlendskar íløgur í fiskivinnuni**
EBS-sáttmálin umrøður ikki beinleiðis spurningin um atgongd til at gera íløgur í fiskivinnuna. Hinvegin eru fleiri aðrar ásetingar í sáttmálanum, sum hava týdning fyri hesi viðurskifti. Hesar ásetingar snúgva seg um frítt at fara hjá arbeiðsmegi og kapitali, og møguleikarnar fyri at seta á stovn virkir.

Sum nevnt aðrastaðni er høvuðsreglan í EBS-sáttmálanum, at arbeiðsmegin hevur frítt at fara millum ES-lond og EFTA-lond. Hetta frælsið í ES var víðkað til eisini at fevna um EFTA-londini. Av tí, at ES-dómstólurin hevur gjørt úrskurð um, at fiski- og útróðrarmenn eru "arbeiðsmegi", hava hesir eisini frítt at fara úr einum EBS-landi í annað at arbeiða sum fiskimenn.

Meginreglan í EBS-sáttmálanum er eisini fult frælsi at seta á stovn virki. Hetta merkir, at ein vinnurekandi í einum EBS-landi kann flyta til eitt annað EBS-land og fara undir vinnu undir somu treytum og reglum, sum fólkið har. Fyritøkur kunnu eisini seta á stovn nýggjar fyritøkur ella dótturfeløg í einum øðrum sáttmálalandi.

Eitt mál, sum var frammi í sambandi við fiskivinnu og EBS, var tann sonevnda kvotuhoppanin í ES og úrskurðurin hjá ES-dómstólinum í hesum málum. Hesi mál snúðu seg um, at fiskimenn úr einum ES-landi búsettu seg í øðrum ES-londum og fiskaðu av kvotunum hjá viðkomandi landi. Hetta varð annaðhvørt gjørt við at stovna feløg í viðkomandi landi og at skráseta fiskifør har ella við at keypa fiskifør, sum longu stóðu í skipaskrásetingini har. Bretar royndu at steðga hesi mannagongd við at herða reglurnar um manning, rakstur og ognarviðurskifti, men spaniumenn hildu bretska stigið vera í andsøgn við meginreglurnar í ES-samstarvinum og løgdu málið fyri ES-dómstólin.

Niðurstøðan hjá Dómstólinum var, at vinnurekandi í einum ES-landi kunnu skráseta skip síni í einum øðrum ES-landi og fiska av kvotum, sum viðkomandi land hevur fingið tillutað sambært býtislyklinum í felags fiskiveiðupolitikkinum. Hendan mannagongd, sum verður rópt kvotuhoppan, hevur serliga verið brúkt av spaniumonnum, ið hava skrásett skip síni í Írlandi og Bretlandi og fiska av kvotum hjá hesum londum.

Íslendingar og norðmenn stúrdu fyri, at meginreglan í EBS-sáttmálanum um frítt at seta virki á stovn og úrskurðurin í málinum um kvotuhoppan fóru at hava við sær, at fiskimenn og útgerðarfeløg úr ES fóru at seta seg niður í Íslandi og Noreg og skráseta skip síni har. Á henda hátt kundu tey útvega sær veiðurættindi í norskum og íslendskum sjógvi, har tey frammanundan høvdu avmarkað rættindi. Hesin óttin var orsøkin til, at fleiri týðandi undantøk eru tikin við í EBS-sáttmálan viðvíkjandi fiskivinnuni.

Í grein 9 í fylgiskjali VIII í EBS-sáttmálanum, sum snýr seg um rættin at seta virki á stovn, at gera íløgur o.a., verður sagt, at Ísland kann varðveita tær avmarkingar, sum eru fyri útlendingar at fara undir virksemi í fiskiveiðu og fiskavirking.

Fyri Noreg fevnir undantakið bert um veiðuliðið. Tá EBS-sáttmálin varð undirskrivaður, høvdu bæði Ísland og Noreg lógarverk, sum avmarkaðu rættin hjá útlendingum at eiga í fiskiførum, og alt bendir á, at eingin beinleiðis kvotuhoppan fer at verða sum avleiðing av EBS-sáttmálanum.

Ísland og Noreg bóru tó ótta fyri, at frælsið at seta vinnuvirksemi á stovn fór at hava óhepnar avleiðingar fyri partar av fiskivinnuni. Eitt nú var óttast fyri, at fiskivinnufyritøkur í útjaðaraøkjum fóru at flyta til miðøkini, ella at útlendskar íløgur í skip fóru at gera, at fiskurin fór at verða avreiddur aðrastaðni og sostatt taka grundarlagið undan fiskavirkingini á staðnum.

Fyri at sleppa undan hesum hevur EBS-sáttmálin fleiri týðandi undantøk frá høvuðsregluni um, at kapitalur hevur frítt at fara. Ásetingarnar merkja í stuttum, at Ísland og Noreg í høvuðsheitum kunnu varðveita tað lógarverk, sum avmarkar møguleikarnar hjá útlendingum at gera íløgur í fiskivinnuni.

**10.7 Veiðurættindi**
Longu í byrjanini av EBS-samráðingunum setti ES sum treyt fyri at EFTA-londini skuldu fáa betri handilssømdir á ES-marknaðinum, at EF fekk veiðurættindi í EFTA-sjógvi. Hóast samráðingarnar

um veiðurættindi fóru fram samstundis sum EBS-samráðingarnar, so gjørdust veiðurættindini ikki ein beinleiðis partur av endaliga EBS-sáttmálanum. Tey vóru knýtt at sjálvstøðugu fiskiveiðusáttmálunum millum ES og tey einstøku EFTA-londini. Hesir sáttmálar komu í gildi samstundis sum EBS-sáttmálin. Talan er um fiskiveiðusáttmálar við Noreg, Ísland og Svøríki.

Rammusáttmálin millum Noreg og ES er upprunaliga frá 1980. Sáttmálin er grundaður á somu meginreglur sum okkara fiskiveiðusáttmáli við ES. Í sambandi við EBS-sáttmálan var ásett í fiskiveiðusáttmálanum fyri 1992 millum Noreg og ES, at Noreg skal økja partin hjá ES av norska arktiska toskastovninum frá 2,14% í 1991 til 2,9% frá 1993.

Harafturat skuldi Noreg lata ES eina eyka toskakvotu fyri tíðarskeiðið 1993-1997, sum stigvíst skuldi hækkast úr 6.000 tonsum í 1993 upp í 11.000 tons í 1997. Noreg skuldi eins og frammanundan lata ES eina kongafiskakvotu upp á 1.500 tons. ES viðurkendi sínumegin, at nevndu rættindi skuldu geva Noreg samsvarandi rættindi í ES-sjógvi, og at kvotubýtið skuldi tryggjað javnvág í sínámillum veiðurættindum.

ES-før høvdu ikki havt veiðurættindi í íslendskum sjógvi í nógv ár. Sínámillum sáttmálin millum Ísland og ES var tí heilt nýggjur. Fiskiveiðusáttmálin sigur, at Ísland skal lata ES 3.000 tons av kongafiski, og at íslendsk fiskifør afturfyri fáa 30.000 tons av lodnu í Eystur-Grønlandi.

Í Íslandi var stór mótstøða móti fiskiveiðusáttmálanum, men hann hevur higartil ikki verið stórvegis missur fyri íslendingar, og hann hevur ikki havt óhepnar avleiðingar fyri íslendingar. Eitt nú hevur ES bert fiskað ein ógvuliga lítlan part av sínum kongafiskakvotum í íslendskum sjógvi, meðan íslendingar hava gagnnýtt síni rættindi til fulnar.

Sáttmálin við Svøríki, sum seinni gjørdist limur í ES, var minni í vavi enn hinir báðir. Har varð ásett, at sínámillum veiðurættindini hildu fram á sama stigi, sum í ES-Svøríki sáttmálanum frá 1977.

Samanumtikið er gongdin í EBS-samráðingunum og teir tríggir fiskiveiðusáttmálarnir eitt dømi um politikkin og hugburðin hjá ES mótvegis triðjalondum.

Hesin politikkur er í stuttum, at treytin fyri at fáa betri marknaðarsømdir í ES er, at ES-fiskifør fáa veiðurættindi frá viðkomandi landi. Hesin politikkur er m.a. eitt úrslit av, at tá Spania og Portugal komu upp í ES í 1986, vóru tey í fyrsta umfari hildin uttan fyri felags fiskiveiðupolitikkin hjá ES, og fingu at kalla eingi veiðurættindi í ES-sjógvi. Undir samráðingunum við portugisar og spaniólar um limaskap bant ES seg til at útvega teimum veiðurættindi aðrastaðni, serliga í Afrika og Suður-Amerika.

### 10.8 Samandráttur

EBS-sáttmálin áleggur ikki EFTA-londunum at seta í verk ES-lógarverk á fiskivinnuøkinum. Tað er bert ávís øki, har tað verður kravt, at EFTA-lóggávan skal fylgja meginreglunum í ES-lóggávuni. EBS-sáttmálin hevur tí ikki sum endamál at fáa í lag ein serligan EBS-fiskivinnupolitikk. EBS-sáttmálin fevnir ikki um lóggávu og umsiting av veiðureguleringum, kvotuásetingum og øðrum reglum í veiðustýringini.

Sáttmálin snýr seg í høvuðsheitum um liberalisering av handlinum við fiski og fiskavørum millum ES- og EFTA-londini. Avleiðingarnar av eini slíkari liberalisering eru eitt nú reglur, sum skulu forða fyri kappingaravlaging í sambandi við almennan studning og almenn marknaðarinntriv. Kappingin í EBS skal fara fram undir einsháttaðum treytum. Skipanir, ið eru við til at avlaga kappingina, skulu ikki brúkast.

ES kundi ikki taka undir við fríhandli fyri fisk og fiskavørur. Sjónarmiðini hjá verjuáhugamálunum í ES um, at summar fiskavørur vóru viðbreknar, vunnu frama. ES var tískil ikki sinnað at veita tollsømdir fyri laks, sild, makrel og rækjur. Samráðingarúrslitið var tó samanumtikið ein bati í tolltreytunum, samanborið við støðuna frammanundan.

EBS-sáttmálin tryggjar fiskiførum úr sáttmálalondunum javnbjóðis atgongd til ES- og EFTA-havnir.

Sínámillum veiðurættindi eru sum so ikki partur av EBS-sáttmálanum. Sjálvstøðugar fiskiveiðuavtalur geva ES-fiskiførum rúmari ræsur í íslendskum og norskum sjógvi sum kompensasjón fyri betri marknaðarsømdir í ES.

EBS-sáttmálin hevur eisini ásetingar og serskipanir, sum í rættuliga stóran mun skerja møguleikarnar hjá ES-borgarum at gera íløgur í íslendska og norska fiskivinnu.

# EBS frágreiðingin

## EBS og kolvetnisvinna

### 11.1 Inngangur

Orkumál stóðu ikki frammarliga, tá samráðingarnar vóru um EBS-sáttmálan. Hetta komst serliga av, at ES-londini um tað mundið ikki høvdu lagt stóran dent á at skipa ein felags politikk á økinum. Orkumál høvdu í stóran mun hoyrt til undantøkini í Rómarsáttmálanum, og limalondini í ES hava rikið sín sjálvstøðuga politikk á hesum øki.

Men í sambandi við innmarknaðin setti ES-nevndin sær fyri at royna at fáa hesi undantøk burtur, soleiðis at orkupolitikkur, kolvetni íroknað, kom undir felags reglur og gjørdist ein partur av ES-samstarvinum.

Torført hevur kortini verið at komið á mál við ætlanunum at fáa undantøkini burtur. Høvuðsorsøkin er, at mótstøðan er stór í summum limalondum, serliga teimum sum veita almennan studning til kolavinnu, kjarnorku o.a. ES-nevndin hevur tí í fyrsta umfari lagt seg eftir olju- og gassframleiðsluni. Onnur orsøk er ivaleyst, at í ES-høpi hevur henda vinna nógv minni týdning enn t.d. framleiðslan av el-orku. ES innflytir nærum alla sína nýtslu av kolvetni. Hóast Bretland framleiðir nógv, so fer meginparturin av hesi framleiðslu til egna nýtslu. Annars er tað bert Danmark og Niðurlond, sum hava kolvetnisvirksemi av týdningi.

Ta fyrstu tíðina hevði EBS-sáttmálin lítla beinleiðis ávirkan á orkupolitikkin í londunum í samstarvinum. Kortini var greitt, at royndirnar hjá ES at samansjóða orkupolitikkin, sum ein part av innmarknaðinum og tær broytingar, ið har av stóðust, eisini fóru at fáa týdning fyri EFTA-londini. Høvuðsbroytingin kom við tí sonevnda loyvisdirektivinum - eisini nevnt konsessiónsdirektivið. Hetta direktiv er eitt sonevnt innmarknaðardirektiv, og er tí eisini galdandi fyri EBS.

Niðanfyri verður orkupolitikkurin í ES lýstur. Høvuðsdentur verður lagdur á innihaldið í loyvisdirektivinum og øðrum reglum, sum hava týdning fyri kolvetnisvinnu. Nomið verður eisini heilt stutt við royndir Noregs á hesum øki. At enda verður komið inn á spurningin um, hvørjar avleiðingar EBS-líknandi reglur kunnu hava fyri Føroyar, og hvørjar broytingar og tillagingar eru neyðugar at gera í lógaruppskotinum frá Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins.

### 11.2 Felags orkupolitikkurin hjá ES

Áðrenn innmarknaðurin formliga varð settur í gildi í januar 1993, hevði ES ikki lagt seg eftir at fáa í lag felags orkupolitikk. Umsiting og skipan av innlendis marknaðum, val av orkukeldum, orkuavgjøld og orkuskattir o.t. vóru málsøki, ið einstøku londini ráddu fyri. Orkupolitikkurin hevur tí verið ymiskur í teimum einstøku londunum.

Rómarsáttmálin hevur ikki havt serskildar reglur um orku og orkupolitikk. Grein 3 í Rómarsáttmálanum nevnir tó, at tiltøk á orkupolitiska økinum skulu vera ein partur av virkseminum hjá ES. Men av tí, at olja og gass eisini eru vørur, hava meginreglurnar í Rómarsáttmálanum um, at vørur hava frítt at fara, stovningarreglur, forboð móti almennum studningi og øðrum kappingaravlagandi tiltøkum og reglurnar um mannagongdina í samband við almenn keyp umvegis, havt ávirkan á orkumál.

Samstarvið á orkupolitiska økinum í ES, áðrenn innmarknaðurin varð settur í gildi, snúði seg í høvuðsheitum um at tryggja orkuveitingarnar. Talan hevur serliga verið um at hava tiltøk, sum gjørdu londini betur før fyri at standa ímóti oljuveitingarkreppum í friðartíð. Hesar reglur stava frá oljukreppuni fyrst í 1970-árunum. Somuleiðis hevur ES reglur um tiltøk fyri orkusparing og at leggja um til alternativar orkukeldur. Stevnumiðini í orkupolitikkinum hava somuleiðis verið nær tengd at umhvørvispolitikkinum.

Eitt uppskot um, at Rómarsáttmálin skuldi hava serskildar greinar um orkupolitikk, fekk ikki undirtøku í Maastricht í 1991. Í eini yvirlýsing frá ráðstevnuni verður tó sagt, at limalondini skulu taka hendan spurning uppaftur á Stjórnarráðstevnuni í 1996.

### 11.3 ES-reglur í sambandi við kolvetnisvinnu

Loyvispolitikkurin hjá ES hevur síðani 1995 verið skipaður sambært direktiv 94/22/EF um treytir fyri veiting og brúki av loyvum til forkanningar, leiting og framleiðslu av kolvetnum. ES-ráðið samtykti direktivið 30. mai 1994. Tað kom í gildi 30. juni sama ár og skuldi vera ein partur av

lóggávuni í limalondunum 1. juli 1995. EBS-nevndin avgjørdi á fundi 5. apríl 1995, at direktivið skuldi verða ein partur av EBS-sáttmálanum (Ískoyti IV í EBS-sáttmálanum um orku). Direktivið kom í gildi í EBS 1. september 1995.

Umframt loyvisdirektivið hevur Ráðsdirektiv 93/38/EBF frá 14. juni 1993 um samskipan av mannagongdunum innan vatn- og orkuveiting og flutnings- og fjarskifti, eisini týdning fyri kolvetnisvirksemið. Hetta direktiv snýr seg um sáttmálar um keyp, bygging og tænastuveitingar. Endamálið við direktivinum, sum beinleiðis er knýtt at loyvisdirektivinum, er at tryggja, at sáttmálar um keyp og bygging og tænastuveitingar verða tillutaðir sambært grundreglum, sum ikki gera mismun ella geva forrættindi til útvegarar í landinum.

Í innganginum til loyvisdirektivið verður herðsla løgd á, at ES er bundið av at innflyta kolvetni, og at størri samansjóðing og færri handilsforðingar skulu vera stevnumiðið á orkuøkinum hjá ES. Endamálið er at bøta um trygdina fyri veitingum, minka um kostnaðirnar og at bøta um kappingarførið.

Høvuðsendamálið við loyvisdirektivinum er at tryggja, at tøknilig og handilslig fyrilit skulu stýra útvinningini av kolvetni. Direktivið ásetur felags reglur, sum skulu galda í sambandi við olju og gass á innmarknaðinum í ES.

Útgangsstøðið er, at limalondini gera av, hvørjar leiðir á landleiðini og á landi skulu nýtast til leiting eftir og framleiðslu av olju. Limalondini áseta eisini treytirnar fyri oljuvirkseminum. Slíkar treytir og krøv kunnu m.a. vera um trygdarskipanir, trygd og heilsu, trygd í sambandi við flutning, umhvørvisvernd og vernd av livandi tilfeingi, gripum av listarligum, søguligum ella fornfrøðiligum virði, trygd í sambandi við útbúnað, arbeiðaravernd, og umsiting av oljutilfeinginum.

Hetta merkir, at limalondini í høvuðsheitum varðveita yvirvaldsrættin yvir kolvetnistilfeinginum á sínum økjum.

Men hóast loyvisdirektivið staðfestir yvirvaldsrætt, so kunnu limalondini ikki fara út um tær generellu avmarkingar, sum Rómarsáttmálin ásetir fyri virksemi hjá almennum myndugleikum. Í hesum liggur m.a., at tá myndugleikarnir tilluta feløgum loyvi og áseta treytir, skal hetta fara fram á ein hátt, sum tryggjar øllum feløgum somu viðferð, uttan mun til í hvørjum landi tey hava heimstað.

Sambært ES-reglunum er heldur ikki loyvt at seta sum treyt fyri tilluting av rættindum í sambandi við olju, at nasjónalar vørur og tænastur skulu hava framíhjárætt, ella at leitingar- og borivirksemið skal hava heimstað í ella verða stýrt úr viðkomandi limalandi.

Samanumtikið kann sigast, at í oljudirektivinum verður góðtikið, at almennir myndugleikar í EBS-londunum eru ánarar av oljuríkidøminum. Men oljudirektivið avmarkar leiklutin hjá tí almenna til tvey øki: Staturin skal framvegis hava fíggjarliga ágóðan av tilfeinginum, og staturin hevur í ein ávísan mun heimild at stýra vinnuni eftir serligum treytum.

### 11.4 Ávirkan á norskan kolvetnispolitikk

Oljudirektivið kom í gildi í EBS 1. september 1995, og tað hevði týdning fyri oljulandið Noreg. Norskir myndugleikar høvdu, síðan oljuvinnan tók seg upp í 1960-árunum, havt stóra ávirkan á gongdina. Meginreglan hevur verið, at landið skal stýra og hava eftirlit við vinnuni. Miðað hevur verið eftir at fáa inntøkur av kolvetnisvirkseminum í statskassan.

Samstundis hevur stórur dentur verið lagdur á at bøta um norska førleikan í sambandi við útvinning av olju og gassi, og at styrkja aðrar partar av vinnulívinum á landi við at geva norskum fyritøkum sersømdir í sambandi við veitingar til oljuvinnuna. Vert er eisini at nevna, at í 1976 varð avgjørt, at arbeiðsmegin á norska landgrunninum, sum ikki búði í Noregi, skuldi hava arbeiðsloyvi. Hetta hevði m.a. við sær, at norðmenn sjálvir í størri mun komu at manna vinnuna.

Í orkumálum eru áhugamálini hjá Noreg og ES ymisk. Noreg er nettoútflytari av olju og gassi, og tær stóru íløgurnar í kolvetnisvinnuni gera, at hjá Noregi er tað av alstórum týdningi, at orkuprísirnir eru á einum høgum stigi. ES er hinvegin nettoinnflytari av olju og gassi, og hjá teimum er tað gagnligt, um orkuprísirnir eru lágir.

Loyvisdirektivið førdi kortini ikki við sær, at neyðugt var við munandi broytingum í lógum og forskriftum. Noreg kundi í høvuðsheitum halda fram við sínum kolvetnispolitikki undir direktivinum, og umsitingin av tilfeinginum er enn sum áður ábyrgdarøkið hjá landinum.

Hóast direktivið ikki førdi við sær, at neyðugt var við stórvegis broytingum í lógarkarmunum og mannagongdum, so bar tað samanumtikið í sær skerdar møguleikar hjá norskum myndugleikum

at stýra kolvetnisvirkseminum og at veita norskum áhugamálum framíhjárættindi í sambandi við útvinning og veitingar.

Direktivið ásetir m.a., at tá norskir myndugleikar tilluta útvinningarloyvi og áseta treytir, skal hetta fara fram eftir meginregluni um, at mannamunur ikki skal gerast og undir treytum, sum fremja kapping til frama fyri frægastu gagnnýtslu av tilfeinginum hjá limalondunum.

Treytirnar, sum verða settar, skulu hava týdning fyri tað virksemið, loyvið er galdandi fyri. Kravið um ikki-diskriminering fevnir um øll feløg við heimstaði í einum EBS-landið og er óheft av tjóðskapi og ognarviðurskiftum hjá feløgunum.

Fyri Noreg merkir hetta, at norsku oljufeløgini Statoil, Hydro og Saga, sum áður hava fingið framíhjárættindi, skulu kappast á jøvnum føti við onnur feløg um at fáa lut í leiti- og útvinningsloyvum á norska landgrunninum.

**11.5 Avleiðingar av EBS-luttøku**
Føroyar eru ikki partur av ES ella EBS. Reglurnar hjá hesum felagsskapum hava kortini longu havt og koma ivaleyst at hava stóra ávirkan á føroyskan búskapar- og vinnulívspolitikk.

Í frágreiðing síni um fyrireiking til oljuleiting, hevur Oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins eitt brot um ES-/EBS-reglur um loyvis og útbjóðingarpolitikk. Hóast nevndin ger vart við, at talan ikki er um eina fullfíggjaða frágreiðing um ES-/EBS-reglur ella um møguligar avleiðingar fyri Føroyar av tættari tilknýti til ES, og at fylgjurnar eiga at kannast nærri, so ber longu nú til at staðfesta nakrar broytingar, ið mugu gerast í teirri skipan, sum lógaruppskot nevndarinnar mælir til:

- Stevnumiðið um kolvetnisvirksemið uttan mannamun grundað á tjóðskap fer at krevja broytingar í virksemisskapandi politikkinum, ið er heimilaður í § 10 í lógaruppskotinum. Hendan áseting snýr seg um, at landsstýrinum er heimilað at áseta reglur um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar o.a., umframt hvaðani loyvishavarin rekur virksemi sítt. Í loyvisdirektivinum verður dentur lagdur á, at fyritøkurnar verða stjórnaðar samsvarandi fakligum og handilsligum treytum.
- Viðvíkjandi veiting av loyvum fer landsstýrið at hava skyldu at fylgja ásettum mannagongdum. Hetta fer kortini ikki at gera stórvegis broytingar neyðugar av teimum mannagongdum, ið oljuráðleggingarnevndin skjýtur upp. Loyvisdirektivið fer eitt nú ikki at forða fyri, at eitt landsoljufelag tekur lut í oljuvinnuni.
- Neyðugt verður helst at avmarka skylduna at føra oljuna í land, og at vørur og tænastur skulu um føroyskan bryggjukant, av tí at hetta í EBS-samanhangi kann verða roknað, sum ein skipan, ið hevur handilsavlagandi ávirkan.

Verður avgjørt, at landið skal taka lut í kolvetnisvirkseminum, antin beinleiðis ella um eitt landsoljufelag, fer ikki at vera lógligt endamál við luttøkuni at tryggja føroyskum veitingum o.a. til skaða fyri aðrar útlendingar.

# EBS frágreiðingin

## Heilsufrøðilig viðurskifti

### 12.1 Inngangur

Støðuga altjóðagerðin gevur betri møguleikar fyri handli landanna millum. Hetta er eisini galdandi fyri handil við matvørum. Altjóða og regiónalir sáttmálar seta karmarnar fyri handlinum landanna millum. Íroknað hesum eru ásetingar, sum hava týdning fyri matvørutrygd, heilsu og umhvørvið.

Hjá londum við nógvum uttanríkishandli er tað ein fyrimunir, at greiðar og frammanundan kendar reglur eru fyri handilsligu samvinnuni. Hjá Føroyum, har alt búskaparliga grundarlagið er útflutningur av fiskavørum, er gagnligt, at millumtjóða handil við matvørum er grundaður á altjóða sáttmálar við ásetingum um dygdar- og reinføriskrøv.

Endamálið við slíkum sáttmálum er vanliga ikki bert at vera eitt amboð at nýta í sambandi við eitt nú at minka um smittuvandan, sum kann standast av øktum handli við matvørum. Endamálið er eisini at forða fyri, at handilin ikki verður darvaður av tekniskum krøvum, sum ikki eru grundað á fakligar heilsufrøðiligar metingar og fyrilit.

Í europeiskum handli við fiski og øðrum úrdrátti úr sjónum, eru tað serliga tvær skipanir, sum hava týdning. Hetta eru reglurnar, sum eru galdandi í ES/EBS og í WTO-sáttmálanum.

EBS-sáttmálin ber í stóran mun í sær, at londini í samstarvinum skulu laga lógir og reglur eftir grundreglunum hjá ES. Hetta er eisini galdandi fyri heilsufrøðilig viðurskifti. ES-reglurnar fevna um, hvussu eftirlitið verður skipað, og hvørji krøv verða sett til matvørur og marknaðarføring.

WTO er altjóða karmurin fyri umsiting av handilssamvinnu millum lond. Á heilsufrøðiliga økinum hava WTO-londini bundið seg til at laga lóggávu sína til meginreglurnar í WTO-sáttmálunum. Umframt sjálvan WTO-sáttmálan, eru nógvir aðrir altjóða felagsskapir, sum fyriseta teknisk og heilsufrøðilig mát í sambandi við handil við matvørum. Fyri matvørur hevur serliga Codex Alimentarius týdning. WTO-sáttmálin er grundaður á fyrisett mát, leiðbeiningar og tilmæli frá Codex Alimentarius.

Nevndu skipanir hava alstóran týdning fyri Føroyar sum fiskaútflytara. Føroyar standa formliga uttan fyri EBS og ES, men av tí, at ES-londini eru størstu keyparar av fiski og fiskavørum okkara, hevur gongdin í ES stóra ávirkan á lógarsmíð okkara á økinum. Føroyar eru partur av danska limaskapinum í WTO, og vit hava sostatt skyldu til at halda okkum til meginreglurnar og minstukrøvini hjá WTO í okkara skipanum og reglum viðvíkjandi heilsufrøði og matvørutrygd.

Føroyar eru sostatt - beinleiðis og óbeinleiðis - ein partur av altjóða sáttmálaskipanini viðvíkjandi matvørutrygd og heilsufrøðiligum ásetingum. Hendan skipan er dynamisk og í støðugari broyting. Altjóðagerðin av vinnulívi og lógarverki verður støðugt framd, og sáttmálarnir gerast alsamt meira víðfevndir.

Gongdin í heimshandlinum seinnu árini hevur verið, at tollgarðar verða tiknir niður. Úrslitið av samráðingunum í Uruguay-umfarinum var, at ídnaðarlondini bundu seg til at lækka innflutningstollin við millum 35 og 40%.

WTO-sáttmálarnir fevna eisini um fleiri vinnugreinar og vørusløg, sum ikki vóru við í gomlu GATT-skipanini. Eitt nú hava tey stóru ídnaðarlondini - Japan, USA og ES - bundið seg til munandi tollniðurskurð á innfluttum fiski. ASEAN-londini hava somuleiðis bundið seg til at veita lagaligari marknaðarsømdir fyri innfluttan fisk.

Tí er mangt sum bendir á, at tollur sum frá líður helst fær minni týdning sum forðing í millumtjóða matvøruhandli. Onnur viðurskifti, sum eitt nú heilsufrøðilig krøv, hava longu víst seg at fáa alsamt størri týdning fyri millumtjóða matvøruhandil.

Endamálið við arbeiðinum at fáa altjóða viðurkendar reglur á heilsufrøðiliga økinum er lutvíst at fáa í lag felags heilsu- og reinførisreglur í sambandi við tilvirking og sølu av matvørum. Men av tí, at tílíkar reglur eru ólíkar í ymiskum londum, er hetta ofta ein forðing fyri handli. Fyri at millumtjóða handil við matvørum skal vera smidligari, er neyðugt at samskipa lógir og reglur á hesum øki. Hetta skal tryggja, at handilin við matvørum fer fram eftir einsháttaðum treytum, og at marknaðeftirlitið við matvørum verður sum minst.

Niðanfyri verður komið inn á altjóða ásetingar um matvørutrygd og heilsufrøðilig viðurskifti, sum hava týdning fyri EBS. Høvuðsdentur verður lagdur á at lýsa viðurskifti, sum hava týdning fyri handilin við fiski og fiskavørum. Fyrst verður hugt at heilsufrøðiligum ásetingum í WTO-sáttmálanum. Síðani verður komið inn á ásetingar í EBS. Reglurnar í EBS-sáttmálanum um matvørutrygd fevna fyrst og fremst um tekniskar ásetingar um heilsu, reinføri og vørudygd. EBS-sáttmálin hevði við sær, at EFTA-londini hava at kalla somu reglur, sum ES á matvøruøkinum viðvíkjandi heilsu og reinføri.

**12.2 WTO-sáttmálin**
Heimshandilsfelagskapurin WTO er ein altjóða felagskapur, sum bæði fevnir um vøruhandil, tænastuhandil og upphavsrættindi. WTO-sáttmálin avloysti GATT-sáttmálan og kom í gildi 1. januar 1995. Í WTO eru 130 limalond. Sáttmálin er tí at rokna sum ein alheims sáttmáli við greiðum stevnumiðum fyri altjóða handil.

Føroyar eru partur av danska limaskapinum í WTO. Harvið hava vit bundið okkum til at fylgja meginreglunum í sáttmálunum í lógarsmíði á matvøru- og heilsufrøðiliga økinum.

Umframt almennar reglur fyri vøruhandilin, eru tveir sáttmálar undir WTO, sum hava týdning fyri matvørur og heilsufrøðilig viðurskifti.

Annar sáttmálin hevur heitið "Sanitary and Phytosanitary Measures". Hann snýr seg um atgerðir fyri at verja heilsuna hjá fólki, djórum og plantuvøkstri. Hin sáttmálin hevur heitið "Technical Barriers to Trade", og snýr seg um tekniskar handilsforðingar, sum ikki eru tiknar við í SPS-sáttmálanum. Her er talan um eitt nú ásetingar um merking, góðskureglur og verju av brúkarum.

Endamálið við SPS-sáttmálanum er at tryggja, at handilslig tiltøk og krøv í einstøku londunum á heilsu- og reinførisøkinum eru grundað á fakligar metingar og ikki verða brúkt til at avmarka ella at forða handli millum lond, tá fyrilit eru tikin fyri at verja heilsuna hjá fólki, djórum og plantum í móttakaralandinum.

SPS-sáttmálin hevði við sær, at ikki ber til at seta bann fyri innflutningi, um ávís heilsukrøv eru lúkað. Kravið er, at treytirnar eru greiðar og kendar frammanundan. Tí eiga innflutningstreytirnar greitt at verða ásettar í lógum ella fyriskipanum.

Heilsukrøvini skulu verða ásett við støði í einum nærri ásettum verjustigi. Tá mett verður um heilsuligan vanda, skal hetta verða grundað á vísindaligt tilfar, um hetta er tøkt. Á hesum øki er SPS-sáttmálin grundaður á Codex Alimentarius, Office International des Epizooties (OIE), European and Mediterranean Plant Protection Organization (EPPO) og aðrar altjóða serfrøðingafelagsskapir. Reglurnar vísa til vísindaligar standardir og metingar av vanda.

*Codex Alimentarius*-nevndin er ein stovnur undir alheims matvøru- og landbúnaðarfelagsskapinum FAO og alheims heilsufelagsskapinum WHO. Øll lond, sum eru limir í FAO og/ella WHO kunnu gerast limir. Í løtuni eru eini 150 lond limir í Codex. ES-londini og ES-nevndin taka lut í Codex-arbeiðnum.

Endamálið við Codex er at lætta um og birta upp undir millumtjóða handil við matvørum, samstundis sum neyðugu fyrilitini verða tikin til heilsumál og brúkaravernd. Hetta verður roynt at røkka við at fáa í lag altjóða fyrisett mát og reglur fyri matvørur og framleiðslu av matvørum. Codex-skjøl um reglur fyri handlinum við matvørum verða evnað til í fleiri ymsum fleirtjóða Codex nevndum. Ein av hesum er "Codex Committee on Fish and Fishery Products".

Tvey sløg eru av Codex-nevndum. Í fyrsta lagi er talan um almennar nevndir, sum arbeiða við merking, kontaminantum, útílatingarevni, reinføri, analysuhættum o.t. Í øðrum lagi er talan um vørunevndir, sum taka sær av ávísum vørubólkum sum mjólk, kjøt, fisk, grønmeti o.t. Seinnu tíðina er meira orka brúkt til almennar ásetingar.

Tey fyrisettu mát, sum Codex kemur við, eru ikki bindandi fyri limalondini. Londini verða eggjað til at góðkenna tey og gera tey til partar av egnum lógarverki. Tá WTO-sáttmálin beinleiðis vísir til og styðjar seg at Codex, er skyldan hjá londunum at halda hesar reglur nógv størri. Sostatt hevur Codex Alimentarius fingið nógv størri týdning enn fyrr. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at ES hevur tikið avleiðingar av hesum. ES-nevndin er limur í FAO og hevur ein virknan leiklut í Codex-arbeiðinum.

***Office International des Epizooties*** (OIE) verður ofta nevndur heimsins djóraheilsufelagsskapur. OIE er settur á stovn fyri at forða fyri útbreiðslu av djórasjúkum í sambandi við millumtjóða handli. Felagsskapurin ásetir minstukrøv fyri innflutningi av djórum og

djóravørum. Á tann hátt ger OIE millumtjóða handil smidligari. Atgerðir móti ávísum djórasjúkum í sambandi við handil verða samskipaðar í einstøku londunum. Fyrisettu mátini hjá OIE eru í stóran mun støði undir lógarsmíðið í sambandi við handil við djórum og djóravørum í EBS og WTO.

***European and Mediterranean Plant Protection Organization*** (EPPO) er regiónalur europeiskur felagsskapur, sum er tengdur at samsvarandi altjóða felagsskapi (IPPO). Uppgávan hjá felagsskapinum er at meta um, hvussu forðast kann fyri spjaðing av vandamiklum plantutýnarum og at veita ráð um, hvussu stríðast kann ímóti hesum. EPPO ráðgevir stovnum í ymsum londunum, sum hava ábyrgdina av stríðnum móti plantusjúkum og skaðadýrum.

Einki forðar fyri, at einstøku londini sjálvi seta strangari krøv enn tey, sum eru samtykt í omanfyrinevndu felagsskapum og stovnum. Fyritreytin er, at londini sjálvi kunnu vísa á, at tiltøkini eru neyðug fyri at tryggja egin krøv, ella tí at londini seta strangari krøv, enn altjóða skipanirnar áseta. Hesi mál eiga at vera ikki-diskriminerandi. Ein týdningarmikil fyritreyt fyri egnum meginreglum er, at viðkomandi land skjalaprógvar, at grundarlag er fyri strangari krøvum.

Um eitt land ætlar at seta sítt verjustig hægri enn altjóða markið, liggur próvbyrðan fyri heimildini hjá viðkomandi landi. Í TBT-sáttmálanum eru samsvarandi reglur. Tekniskar forskriftir í einstøku londunum skulu byggja á altjóða meginreglur, um slíkar eru.

Samanumtikið avmarka bæði SPS og TBT-sáttmálin rásarúmið hjá einstøkum londum at seta í verk tiltøk, sum víkja munandi frá tí verjustigi, ið er ásett í altjóða skipanum.

**12.3 EBS-sáttmálin**

EBS-sáttmálin kom í gildi 1. januar 1994. Reglurnar í EBS-sáttmálanum viðvíkjandi matvørutrygd fevna fyrst og fremst um tekniskar ásetingar um heilsu, reinføri, vørudygd o.t. EBS-sáttmálin ber í sær, at EFTA-londini hava at kalla somu reglur, sum ES á matvøruøkinum um heilsu og reinføri. Regluverkið er lutvíst alment og lutvíst útgreinað, har farið verður meira út í æsir við einstøkum vørubólkum sum eitt nú fiski og fiskavørum.

Hóast reglurnar viðvíkjandi matvørum í EBS-sáttmálanum eru meinlíkar ES-reglum, varð regluverkið hjá ES um eftirlit við handlinum, herundir heilsufrøðiliga eftirlitið ES-markið, í fyrsta umfari hildið uttanfyri EBS-sáttmálan.

Í EBS-sáttmálanum eru eisini umhvørvisligar ásetingar, sum bæði beinleiðis og óbeinleiðis hava týdning fyri reglur og lógir um góðsku á matvørum og brúkaratrygd. Sáttmálin hevur almennar ásetingar um, at fyrilitini fyri heilsu, trygd, umhvørvið o.a. skulu vera støði undir lóggávuni í sáttmálalondunum, tá hetta ikki er tilskilað í EBS-sáttmálanum. Í EBS-sáttmálanum er tó reglur, ið liggja á markinum millum umhvørvið og heilsu, og sum hava týdning fyri góðskuna á matvørum. Nevnast kann m.a. reglur um góðkenning av sonevndum "genmodifiseraðum" vørum, reglur um merking av kemikalium og krøv um vatngóðsku.

EBS-sáttmálin ber í sær, at EFTA-londini í høvuðsheitum hava sama lógarverk sum ES viðvíkjandi krøvum til heilsu og reinføri í sambandi við handil við livandi djórum og vørum av animalskum uppruna, fiskur íroknaður.

Í byrjanini fevndu ásetingar í EBS kortini ikki um reglurnar hjá ES um eftirlit við handlinum, eitt nú í sambandi við djóralæknaeftirlit við landamørkini. Djóralæknaeftirlit við landamørkini snýr seg um skjala-, uppruna- og fysiskt eftirlit. ES kundi kanna fisk og fiskavørur úr EFTA-londunum á markinum til ES á sama hátt sum vørur úr øðrum triðjalondum. Somu reglur vóru galdandi fyri útfluttar landbúnaðarvørur.

ES samskipaði og herdi heilsufrøðiliga eftirlitið við landamørkini 1. januar 1997. Hetta bar í sær, at eitt nú Noreg varð roknað sum eitt triðjaland í sambandi við eftirlitið á markinum. Norðmenn og íslendingar hildu, at henda skipanin fór at verða bæði tíðarkrevjandi og kostnaðarmikil, og at hon fór at tarna fiskaútflutninginum.

Farið varð tí undir samráðingar um at endurskoða fylgiskjal I í EBS-sáttmálanum um heilsufrøðilig viðurskifti. Nú vórðu reglurnar um góðskueftirlit við fiski og fiskavørum, tá útflutt verður til ES, tiknar við í sáttmálan.

Broytingarnar í EBS-sáttmálanum lættu munandi um hjá vinnuni í EFTA-londunum. Eitt nú sleppa útflytarar av fiski og landbúnaðarvørum undan teimum praktisku trupulleikunum, ið standast av víðkaða marknaðar-eftirlitinum hjá ES, og sleppa somuleiðis undan kostnaðinum av víðkaða eftirlitinum.

Áðrenn ES gjørdi av at herða marknaðareftirlitið, vórðu millum 3 og 5% av vørunum kannaðar. Varð EBS-sáttmálin ikki endurskoðaður, hevði markið fyri stakroyndir hækkað upp í 20 prosent og fyri ávísar fiskarvørur heilt upp í 50 prosent.

Endurskoðaði EBS-sáttmálin á heilsufrøðiliga økinum bar harumframt í sær, at EFTA-londini og ES fingu felags reglur mótvegis triðjalondum. Hetta hevði m.a. við sær, at Noreg gjørdist partur av markinum hjá ES úteftir. Landið skal sostatt hava eftirlit við vørum, sum koma inn í EBS-økið um Noreg.

**12.4 Gongdin í ES**
Seinnu árini eru brúkarnir í ES og í heiminum sum heild vorðnir meiri atfinningarsamir í støðu síni til vandatættir í sambandi við hagreiðing og tilvirking av matvørum og brúkaratrygd.

Ein høvuðsorsøkin er BSE-málið í Bretlandi. Eftir at hetta mál tók seg upp, hevur ES-nevndin sett í verk fleiri fyriskipanir, og ætlanir eru um at fremja broytingar í lóggávuni.

Vísindaligar nevndir og eftiransingarstovnar hava ligið undir direktoratinum, sum umsitur lóggávuarbeiðið á hesum øki. Hetta er nú broytt. Vísindaligu nevndirnar og eftirlitsstovnarnir eru ella verða flutt til DG XXIV, ið tekur sær av brúkaratrygd. Endamálið við broytingunum er at endurreisa álitið á myndugleikarnar á hesum øki.

ES endurskoðar samstundis lóggávuna í sambandi við matvørur. Hetta fer at bera í sær, at eitt fløkt lógarverk verður gjørt einfaldari, og at galdandi reglur verða gjørdar meiri tíðarhóskandi og nágreiniligar.

**12.5 Støða Føroya**
Sum partur av danska WTO-limaskapinum, eru Føroyar bundnar av at fylgja WTO-reglum um matvørutrygd og heilsufrøðilig viðurskifti. Meginparturin av fiskaútflutningi Føroya fer til marknaðin í ES-londunum. Høvuðsamboðið til at umsita hendan útflutning er sínámillum handilsavtalan frá 1991/96. Hesin sáttmálin snýr seg í høvuðsheitum um tollloft og tollkvotur. Á øðrum økjum, sum eisini hava alstóran týdning fyri handilin, eru vit triðjaland. Vit eru ikki við í altjóða avtalum um heilsufrøðilig viðurskifti. Tí er tað ES og onnur lond, sum áseta heilsufrøðiligu treytirnar.

Hetta staðfesti landsstýrið eisini í frágreiðingini til løgtingið í 1996 um uttanlandsmál. Sagt verður, at landsstýrið ikki metir toll sum einastu hóttanina ella forðingina fyri útflutningi okkara til ES. Týdningurin av tolli sum handilsforðing fer helst at minka, so hvørt sum liberarliseringstilgongdin í kjalarvørrinum av Uruguay-umfarinum í GATT tekur dik á seg. Víðari verður sagt:

*Álvarsligar forðingar mótvegis "traditiónellum" 3. londum, sum vit og Schweiz eru, fara framyvir í størri mun at liggja í m.a. økta heilsufrøðiliga eftirlitinum, sum fer at verða hert mótvegis londum, har felags góðkendar skipanir og mannagongdir ikki eru tryggjaðar í integreraðum samskifti við ES.*

Í frágreiðingini frá landsstýrinum verður eisini upplýst, at Ísland og Noreg longu hava sæð og fyribyrgt hesum vanda við luttøku teirra í EBS, og við endurskoðanini av EBS-sáttmálanum.

Hóast Føroyar ikki formliga eru partur av teimum felagsskapum í Europa, sum samstarva um heilsufrøðilig viðurskifti, hevur altjóða gongdin havt stóra ávirkan á karmarnar fyri fiskavirking og fiskaútflutningi okkara.

Í 1994 fóru føroysk fiskavirkir og verksmiðjuskip undir at byggja upp innaneftirlitsskipanir fyri at tryggja eitt ávíst góðskustig á vørunum. Landsstýrið setti krøvini um innaneftirlit, fyri at fiskiídnaðurin kann lúka altjóða krøv á hesum øki. Skulu Føroyar útflyta matvørur til ES, er neyðugt, at virkini hava góðkendar góðskustýringarskipanir. Líknandi krøv eru eisini sett í verk í USA. Innaneftirlitið krevur, at virki og skip hava eina góðskustýringarskipan, sum tryggjar, at matvørulógin verður hildin. Skipanin byggir á HACCP-aðalreglurnar.

Hóast nógv hevur verið gjørt fyri at lúka heilsufrøðilig krøv frá myndugleikunum í londunum, sum keypa fisk og fiskavørur úr Føroyum, eru framvegis nógv viðurskifti á hesum øki, har ikki er komið fram til nøktandi loysnir. Hesi viðurskifti eru í stóran mun ein forðan fyri gagnligum handilssamskifti við keyparalondini í Europa.

Í 1996 bóðu Føroyar gjøgnum felagsnevndina um samráðingar um eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, og nú er klárt at fara undir hesar samráðingar.

## Føroyar í eini EBS-líknandi skipan og tollsamgongu

### Inngangur

Sambært arbeiðssetninginum skal nevndin lata løgmanni upplegg til samráðingar við ES um eina avtalu, sum er grundað á fyrra tilmælið í Bláa álitinum frá 1995.

Nevndin, ið varð sett í 1995 at kanna gagnligastu marknaðaratgongdina til ES, mælti til eina serskipan, ið varð sett saman av eini EBS-líknandi skipan og tollsamgongu.

Í grundgevingini fyri tilmælinum verður sagt í Bláa álitinum, at vit øðrumegin fáa fyrimunir av tí víða samstarvinum í EBS og hinumegin fáa marknaðaratgongd í eini tollsamgongu. Nevndin helt, at EBS-leisturin í síni heild gevur okkum fyrimunir, og vísti á, at EBS-avtalan fevnir um samvinnu á nógvum týðandi samfelagsøkjum, sum hava stóran týdning fyri menningarmøguleikarnar og kappingarføri okkara.

Nevndin helt samanumtikið, at ein samanseting av eini EBS-avtalu og tollsamgongu er tann loysnin, sum á nøktandi hátt tænir útflutningsvinnuni og føroyskum áhugamálum annars.

Í Bláa álitinum verður víst á, at EBS-avtalan gevur Íslandi og Noregi á leið somu marknaðarsømdir fyri fisk og fiskavørur í ES, sum vit hava í galdandi handilsavtalu. Til tess at fáa gagnligari marknaðaratgongd fyri fisk og fiskavørur mælti nevndin tí til at royna at fáa eina tollsamgongu fyri hesar vørur.

Ein tollsamgonga gevur í útgangsstøðu føroyskum virkjum somu marknaðartreytir viðvíkjandi fiski, sum virkjum í ES. Samstundis loysir ein tollsamgonga trupulleikarnar við triðjalandsfiski á ES-marknaðinum.

Men hinvegin verður í Bláa álitinum ásannað, at tað helst verður torført at koma á mál við einum tílíkum ynski, og ivasamt er, um ES er sinnað at gera slíka avtalu. Sostatt verður talan um truplar samráðingar.

Nevndin vísti á, at ríkisrættarliga støða okkara ger, at samráðingarnar lutvíst koma at snúgva seg um viðurskiftini millum Føroyar/Danmark øðrumegin og ES hinumegin og lutvíst um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.

Víðari vísti nevndin á, at ES hevur ongantíð gjørt tollsamgongu við triðjalond um fisk og fiskavørur, og talan er ikki um eina fasta skipan, har onnur lond hava slóðað fyri, men um eina heilt nýggja serskipan.

Uppgávan hjá hesi nevndini, ið er sett at gera upplegg til samráðingar um hesa loysn, hevur sostatt verið at taka um endan, har Bláa álitið slepti.

Til tess at fáa til vega eitt gott grundarlag til at gera metingar og niðurstøður um uppskotið til eina serskipan, hevur nevndin hugt at gongdini í altjóða handilssligum og búskaparligum samstarvi, at skipanunum í handilssamstarvinum í Vestureuropa og aðrastaðni í heiminum, og hevur útgreinað EBS-skipanina og tollsamgongur.

Í hesum kapitlinum verður spurningurin um Føroyar í eini EBS-líknandi avtalu og tollsamgongu við ES viðgjørdur.

Í fyrsta lagi verður spurningurin um stovnslig og umsitingarlig viðurskifti viðgjørdur. Hetta snýr seg um, hvørjar leiðir kunnu gangast fyri at fáa eina avtalu við ES, sum gevur okkum somu støðu sum EFTA-londini í EBS-sáttmálanum, og hvussu ein møgulig EBS-líknandi avtala við ES kann verða umsitin, herundir hvørjir stovnar og skipanir eru neyðugar, um sáttmálin skal virka eftir ætlan.

Í øðrum lagi verður spurningurin um eina tollsamgongu saman við eini EBS-líknandi skipan viðgjørdur.

Við eini EBS-skipan gerast vit partur av innmarknaðinum hjá ES og mugu í útgangsstøðu halda okkum til meginreglurnar í teimum fýra frælsunum hjá ES.

Í EBS-samstarvinum eru higartil 1239 direktiv. Nevndin hevur sett í verk eina kanning, fyri at fáa eina hylling á, hvørji av hesum direktivum innihaldsliga longu eru sett í verk í Føroyum, hvørji í roynd og veru óbeinleiðis eru galdandi, og hvørji direktiv krevja broytingar í føroyskum viðurskiftum og mannagongdum. Í hesum sambandi hevur nevndin sent fyrispurning til stovnarnar, sum umsita tey ymsu økini í Føroyum. Úrslitið av hesi kanningini er umrøtt í kap. 14.

### 13.2 Stovnslig og umsitingarlig viðurskifti í eini EBS-líknandi skipan

Tá tosað verður um eina EBS-líknandi avtalu, so er hetta fyrst og fremst grundað á, at ríkisrættarliga støða Føroya ger, at Føroyar bert hava møguleika fyri undir einum ella øðrum formi at fáa eina serskipan. Torføri spurningurin er, hvussu Føroyar stovnsliga og umsitingarliga kunnu verða partur av eini EBS-skipan.

Í kap. 9 verður EBS lýst sum ein skipan við tveimum sjálvstøðugum súlum við EFTA-londunum í aðrari og ES í hinari. Í hvørjari súlu og ímillum tær eru skipanir settar í verk, sum skulu tryggja, at sáttmálin virkar eftir ætlan.

Felags stovnar, ið bæði hava ráðgevandi uppgávur og sum taka avgerðir í sambandi við EBS, eru settir at umsita sáttmálan. Her er talan um EBS-ráðið, EBS-nevndina, Tingmannanevndina og Ráðgevandi nevndina fyri EBS.

Eisini eru ásetingar um, hvussu avgerðir skulu takast í EBS. Endamálið er m.a. at forða fyri, at luttakandi londini ganga hvør sína leið í lógarsmíði og at tryggja, at báðir partar eru við longu frá byrjan, tá nýggjar reglur skulu setast í verk. Her kann nevnast, at íslendingar meta júst hetta, at teir eru við í lógarsmíðinum frá byrjan og hava møguleika fyri at ávirka innihaldið, sum eina av størstu fyrimununum við íslendsku EBS-luttøkuni.

Harumframt eru stovnar, sum ansa eftir, at sáttmálin verður hildin. Í ES er tað ES-nevndin sum skal ansa eftir, at limalondini halda skyldurnar, tey hava átikið sær sambært EBS-sáttmálanum. EFTA-londini settu sína egnu eftiransingarskipan í verk fyri at tryggja, at skyldurnar í EBS-sáttmálanum verða fylgdar í EFTA-økinum.

Somuleiðis hava ES-dómstólurin og EFTA-dómstólurin hvør í sínum lagi til uppgávu at gera bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum. Serlig skipan er eisini fyri at loysa trætumál millum partarnar.

Nevndu stovnar og skipanir eru ein fyritreyt fyri, at EBS skal virka eftir ætlan. Skulu viðurskifti okkara við ES skipast í eini EBS-líknandi avtalu, er fyritreytin, at neyðugu umsitingarligu amboðini eru til staðar, um fyrimunirnir av eini EBS-líknandi skipan skulu koma til høldar á ein hátt, sum í longdini gagnar Føroyum og føroyskum áhugamálum.

Áðrenn ein samráðingarleið verður vald, er neyðugt at taka støðu til, hvat slag av tilknýti til EBS vit ynskja. Her eru tveir møguleikar. Annar er, at vit í fullan mun gerast partur av EBS-skipanini og luttaka á øllum stigum í skipanini. Hin er, at vit binda okkum at EBS-skipanini og taka við øllum ella pørtum av ásetingunum í EBS.

Tann fyrri møguleikin fer at seta stór umsitingarlig krøv. EBS er ein stór og fløkt skipan. Skulu Føroyar verða partur av skipanini, má neyðug umsitingarorka setast av til hetta arbeiðið. Um vit hinvegin bert binda okkum at skipanini og taka við ásetingunum, verður luttøkan ikki so orkukrevjandi umsitingarliga.

### 13.3 Bygnaðarmøguleikar í eini EBS-líknandi skipan

Niðurstøðan hjá nevndini er, at tvær leiðir eru møguligar at ganga, til tess at knýta Føroyar upp í verandi EBS-skipan. Onnur er, at Føroyar knýta seg til EBS-skipanina ES-megin, og hin at Føroyar gerast partur av EFTA-súluni í EBS-samstarvinum. Hesir báðir møguleikar seta heilt ymsar fyritreytir í samráðingunum.

Verður farið ES-vegin sær nevndin fyri sær prinsipielt tríggjar bygnaðarmøguleikar, og verður farið EFTA-vegin, eru tveir bygnaðarmøguleikar. Nevndin hevur lýst hesar møguleikar, og mett um fyrimunir og vansar. Endamálið hevur verið at seta upp teir teoretisku møguleikar, sum eru til staðar, fyri á tí grundarlagi at kunna meta um, hvør loysn og samráðingarleið er mest sannlíkt at koma á mál við.

#### 13.3.1. Møguleikar fyri EBS-avtalu við ES.

Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu við ES, metir nevndin, at tríggir teoretiskir møguleikar eru:

- Verandi handilssáttmáli verður víðkaður til eina EBS-líknandi avtalu.

- Serlig umsitingarskipan verður gjørd í eini EBS-líknandi avtalu.
- Danskir myndugleikar umsita eina EBS-líknandi avtalu vegna Føroyar.

**1. Verandi handilssáttmáli verður víðkaður til eina EBS-líknandi avtalu**
Henda skipanin ber í sær, at tær ásetingar og skipanir, sum eru í EBS, verða lagdar afturat verandi sáttmála, og at hetta verður grundarlagið fyri einum nýggjum bilateralum sáttmála millum Føroyar og ES. Verandi handilssáttmáli kundi við hesum verið víðkaður til ein samstarvssáttmála millum Føroyar og ES. Henda skipan er víst í talvu 13.1.

Í eini tílíkari avtalu hevði felagsnevndin hildið fram og verið víðkað til at taka sær av umsitingarliga partinum. Nýggjar ásetingar í EBS verða viðgjørdar í felagsnevndini og síðan lagdar fyri løgtingið til góðkenningar, áðrenn tær koma í gildi.

Nevndin metir, at hetta er tann minst víðgongdi møguleikin, sum mest sannlíkt er at koma á mál við. Danmark er uttan iva sinnað at stuðla einum tílíkum ynski hjá Føroyum, og ES er helst eisini sinnað at fara undir samráðingar um eina tílíka skipan. Ein tílík tilgongd er í roynd og veru byrjað, og skundað kann verða undir gongdina. Hetta kann fara fram, samstundis sum aðrar og kanska meira víðgongdar loysnir verða umhugsaðar.

Størsti vansin við hesi skipanini er, at bygnaðurin er veikur, og at vandi er fyri, at tað fer at taka drúgva tíð at fremja nýggjar ásetingar, tí helst verður langt ímillum fundirnar í felagsnevndini. Royndirnar í verandi felagsnevnd eitt nú í sambandi við ynski hjá Føroyum um at fáa eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, vísa, at viðgerðin í hesi skipan tekur tíð.

Tí er umráðandi, at tað í avtaluni verður fingin ein skipan við eini fastari mannagongd fyri viðgerð og støðutakan til nýggjar ásetingar, so Føroyar á henda hátt verða partur av teimum støðugu broytingunum, sum fara fram í samstarvinum.

Tað er somuleiðis sera umráðandi, at Føroyar greitt boða ES frá, hvat vit miða eftir, so ES kann taka okkara yvirskipaðu ynski við í sínar fyrireikingar.

Ein annar vansi er, at Føroyar ikki luttaka í avgerðartilgongdini. Ísland leggur stóran dent á at vera við frá byrjan í avgerðartilgongdini, tí hetta gevur møguleika fyri at fyrireika lóggávu og vinnulívið til tær broytingar, sum fara at koma. Eisini hava EFTA-londini møguleika fyri at ansa eftir málum, sum kunnu hava óhepnar avleiðingar, og kunnu gera vart við sína støðu á teimum ymsu viðgerðarstigunum.

Tó er tað so, at ES-lóggáva er grundarlagið undir EBS-samstarvinum, og ES tekur stig til nýggjar ásetingar í samstarvinum. Nevndin metir, at í roynd og veru, hava EFTA-londini sera avmarkaða ávirkan á yvirskipaðu gongdina í EBS.

Nevndin heldur, at tað er av týdningi at Føroyar í eini tílíkari skipan hava møguleika fyri at kunna seg heilt frá byrjan, tá stig verða tikið til nýggjar ásetingar í EBS. Ein tílík kunningarskipan eigur at kunna setast í verk gjøgnum danskar myndugleikar.

Henda loysnin treytar, at bilateralar EBS-líknandi avtalur verða gjørdar við grannalondini Ísland og Noreg.

Ein fyrimunur við eini tílíkari skipan kann verða, at Føroyar verða minni bundnar enn í øðrum skipanum.

**2. Serlig umsitingarskipan verður gjørd í eini EBS-líknandi skipan.**
Í talvu 13.2 er víst hvørjar fyritreytirnar eru, um Føroyar høvdu ynskt at fáa eina serliga umsitingarskipan fyri eitt EBS-samstarv við ES, har Føroyar einsamallar eru sáttmálaparturin.

Í tí førinum hevði verið neyðugt við fyrimynd í verandi EBS-bygnaði at bygt eina tví-súlu skipan, har Føroyar og ES eru súlurnar. Tað vil siga, at stovnað verður eitt EBS-líknandi ráð, ein EBS-líknandi nevnd, tingmannanevnd og ráðgevandi nevnd við umboðum fyri báðar partar. Harumframt hevði verið neyðugt at skipa okkara egna eftirlitsstovn, sum skuldi havt eftirlit við, at Føroyar halda ásetingarnar í avtaluni, og neyðugt hevði verið, at Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá ES-dómstólinum.

Nevndin hevur tikið henda møguleika við fyri at vísa, hvønn bygnað ein tílík skipan krevur. Hinvegin heldur nevndin, at hesin møguleikin er meira av teoretiskum slagi.

Ein tílík skipan er bygnaðarliga fløkt og orkukrevjandi, og tí er neyvan heldur sannlíkt, at ES hevði verið sinnað at tingast um eitt tílíkt samstarv.

ES-megin verður bygnaðurin í EBS mettur sum ein tung skipan, og ymiskt er, sum bendir á, at ES ikki er sinnað at gera fleiri líknandi serskipanir.

Víst kann verða á, at eftir at Sveis kortini ikki fór upp í EBS-samstarvið, hevur landið tingast við ES um eina bilaterala samstrarvsavtalu, sum hevur víst seg at verða torfør at fáa í lag. Í hesum samráðingunum hevur gongdin verið, at ES hevur sett saman ein pakka, sum Sveis mátti velja í síni heild at taka við ella at vraka. Í hesum samstarvi er ikki ætlanin at hava ein EBS-líknandi bygnað, men heldur eina vanliga felagsnevnd. Leggjast kann afturat, at Sveis er næststørsti handilspartnarin hjá ES eftir USA.

**3. Danskir myndugleikar umsita eina EBS-líknandi avtaluna vegna Føroyar.**
Í talvu 13.3. er vístur tann møguleiki, at Føroyar fara upp í verandi EBS-samstarv við danskari umboðan ES-megin. Við hesi skipan hevði samskiftið við EBS-skipanina gingið um danskar myndugleikar.

Henda skipanin hevði borið í sær, at danskir ráðharrar umboðaðu Føroyar í EBS-ráðnum og danskir embætismenn umboðaðu Føroyar í EBS-nevndini. Føroyar kundu hinvegin ikki luttikið í tingmannanevndini, men kanska kundu føroyskir fólkatingsmenn luttikið á hesum stigi. Heldur ikki kundu Føroyar luttikið í ráðgevandi nevndini fyri EBS, men hinvegin kundu danskir ella føroyskir serfrøðingar luttikið í serfrøðinganevndunum. Í eini tílíkari skipan hevði Føroyar verið undir eftirlitsstovninum hjá ES, og Føroyar høvdu verið noyddar at givið seg undir avgerðirnar hjá ES-dómstólinum. Trætur høvdu somuleiðis verið loystar eftir skipanini hjá ES.

Viðvíkjandi fráboðanum um broyttar ella nýggjar lógir og reglur, ið hava týdning fyri samstarvið og sum skulu galda í samstarvinum, høvdu eitt nú ES-direktiv verið fráboðað Føroyum umvegis danskar ráðstovur.

Hvussu viðurskiftini og samskiftið millum Føroyar og Danmark kundu verið skipað í eini tílíkari skipan, hevði verið ein samráðingarspurningur millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Fyrimunurin við eini tílíkari skipan hevði verið, at Føroyar luttaka í fullan mun í EBS-samstarvinum. Fyritreytin er, at danskir myndugleikar taka undir við eini tílíkari skipan, og eru sinnaðir at seta av neyðugu umsitingarorkuna. Í øðrum lagi er fyritreytin, at ES er sinnað at tingast um eina tílíka skipan.

Góðtaka Danmark og ES eina tílíka skipan, átti at borið til rímiliga skjótt at komið á mál við henni. Neyðugt er eisini at gera eina sínámillum avtalu við EFTA.

**13.3.2. Møguleikar fyri EBS-avtalu gjøgnum EFTA.**
Hin leiðin at ganga er, at Føroyar fara upp í EBS-samstarvið EFTA-megin. Verður avgjørt at royna at fáa eina EBS-líknandi avtalu gjøgnum EFTA-felagsskapin, metir nevndin, at tveir møguleikar eru:

- Føroyar gerast partur av EFTA við danskari umboðan vegna Føroyar.
- Føroyar gerast partur av EFTA við sjálvstøðugari umboðan.

**1. Føroyar gerast partur av EFTA við danskari umboðan vegna Føroyar.**
Í talvu 13.4 er vístur bygnaðurin í eini loysn, har Danmark gerst partur av EFTA súluni vegna Føroyar. Danskir ráðharrar og embætismenn høvdu umboðað Føroyar í ávikavist EBS-ráðnum og EBS-nevndini. Løgtingslimir høvdu ikki kunnað luttikið í tingmannanevndini, men ein møguleiki hevði kanska verið, at føroysku fólkatingsumboðini luttóku á hesum stigi. Í hesi skipan høvdu Føroyar verið undir eftiransingarstovninum og dómstólunum hjá EFTA, og trætumál høvdu verið loyst eftir skipanini hjá EFTA.

Verður valt at royna hesa skipan, er fyrst neyðugt at fáa Danmark at taka undir við hesi loysn. Í øðrum lagi er neyðugt at fáa EFTA at góðtaka hesa skipan, og síðan kemur ES inn í myndina.

Spurningurin um í hvønn mun føroysk umboð kundi luttikið fyri donsku umboðini, er ein samráðingarspurningur millum Føroyar og Danmark.

Fyrimunurin við eini tílíkari skipan er, at vit á jøvnum føti við eitt nú Noreg og Ísland høvdu luttikið í EBS-samstarvinum. Skipanin hevur virkað í nøkur ár, og ein fyrimunur fyri Føroyar er, at vit kundu brúkt teir ymsu stovnarnar, sum eru í EFTA.

Hinvegin er spurningurin um Danmark kann góðtaka eina tílíka loysn, tí hon er umsitingarliga orkukrevjandi. Prinsipielt er loysnin eisini ivasom. Danmark kemur at sita báðu megin borðið í

EBS, og spurningurin er um samstarvslondini høvdu havat álit á hesi støðuni.

Ein tílík loysn fyrisetur, at bæði EFTA-sáttmálin og EBS-sáttmálin mugu broytast.

**2. Føroyar gerast partur av EFTA við sjálvstøðugari umboðan.**
Ein meira víðgongd skipan er, at Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í EFTA, soleiðis at føroyingar sjálvir eru umboðaðir á øllum stigum í bygnaðinum. Henda skipanin er víst í talvu 13.5.

Henda skipanin fyrisetir, at Danmark í fyrsta lagi góðtekur at royna hesa loysn. Í øðrum lagi skal EFTA góðtaka, at Føroyar gerast limur, hóast vit eru ein partur av danska kongaríkinum. Bert sjálvstøðug lond kunnu vera limur í EFTA. Í triðja lagi krevur ein tílík loysn, at ES-góðkennir hana.

Góðtaka allir partar eina tílíka loysn, eigur tað reint praktiskt ikki at verða trupult at gerast partur av EFTA-síðuni í EBS, men ein tílík skipan fer umsitingarliga at krevja stóra orku.

Ein avleiðing av eini EBS-líknandi skipan gjøgnum EFTA er, at Føroyar tá ikki longur kunnu umvegis Danmark royna at fáa sersømdir frá ES. Vit eru tá bundin at EFTA, og tí sum hesin felagsskapurin megnar í EBS-samstarvinum.

**13.4 EBS-líknandi skipan og tollsamgonga**
Omanfyri eru umrøddir bygnaðarmøguleikarnir í eini EBS-líknandi skipan. Arbeiðssetningur nevndarinnar ásetir, at nevndin skal gera uppskot um eina loysn, har EBS-skipanin er sett saman við eini tollsamgongu.

Í fyrsta lagi er at siga, at verður valt at fara EFTA-vegin í einum EBS-samstarvi, er ikki gjørligt eisini at royna at fáa eina tollsamgongu.

Í kapittul 8 er greitt frá tollsamgongum. Niðurstøðan hjá nevndini er, at tollur hevur fingið minni týdning sum handilsforðing og støðugt fer at fáa minni týdning, eisini tá tað snýr seg um fisk og fiskavørur. Um nøkur ár kann vónandi roknast við, at tollspurningurin á fiski og fiskavørum er loystur. Hinvegin fara heilsufrøðilig og teknisk krøv at verða handilsforðingin í framtíðini.

Nevndin metir, at skulu vit fáa betri tollsømdir á ES-marknaðinum fyri fisk og fiskavørur enn í verandi handilsavtalu við ES, og betri tollsømdir enn Noreg og Ísland hava fingið í EBS-sáttmálanum, noyðast Føroyar at lata ES okkurt afturfyri.

ES fatar marknaðarskipanina fyri fisk sum ein fult samansjóðaðan part av øllum fiskivinnupolitikkinum, og nevndin metir, at serliga hesi viðurskifti verða trupul í samráðingunum um eina tollsamgongu. Føroyar kunnu neyvan koma upp í tollsamgonguna hjá ES, uttan at góðtaka samlaða fiskivinnupolitikkin hjá ES.

Velja Føroyar at biðja um samráðingar um eina tollsamgongu av tí slagnum, sum ES hevur gjørt við triðjalond, er torført at meta um útlitini fyri at røkka á mál, tí hesar tollsamgongur fevna ikki um fisk og fiskavørur. ES hevur ongantíð gjørt eina tollsamgongu um fisk og fiskavørur við triðjalond. Um ES er sinnað at gera eina tílíka tollsamgongu við Føroyar, kann greiða bert fáast á, um hetta verður roynt í samráðingum.

Velja Føroyar at biðja um samráðingar um at sleppa upp í tollsamgonguna í ES, noyðast Føroyar eisini at taka við handilspolitikkinum hjá ES mótvegis triðjalondum. Tollsamgongan er bert ein partur av handilsliga, búskaparliga og politiska samstarvinum í ES, og tí er torført at meta um, hvørjar aðrar politiskar bindingar fara at liggja í eini tílíkari avtalu við ES.

Niðurstøðan hjá nevndini er, at ein EBS-líknandi skipan sett saman við tollsamgongu er tað sama sum limaskapur í tí samstarvinum, sum var áðrenn Maastsricht sáttmálin kom í gildi.

Tí er hetta eitt mál, sum metast má um, tá politisk støða verður tikin til, hvørja skipan miðað verður eftir, tá biðið verður um samráðingar við ES um eina nýggja avtalu.

Talva 13.1. Verandi handilssáttmáli verður víðkaður til eina EBS-líknandi skipan.

| EBS-bygnaður | Uppgávur | Umboðan | | EBS-líknandi bygnaður |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-ráðið** | Ráðið fremur EBS-sáttmálan og setur stevnu-miðini við einmæltum | Stjórnarlimir úr hvørjum einstøkum EFTA landi og limir úr ES-ráðnum ella | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | við einmæltum samtyktum. | ES-nevndini. | | Ein felagsnevnd umsitur sáttmálan.<br>Føroyar taka við øllum EBS-ásetingum, sum eru komnar í gildi. Nýggjar ásetingar skulu eftir viðgerð í felagsnevndini<br>góðkennast í løgtinginum. Føroyar eru ikki við í avgerðartilgongdini. Tað er av stórum týdningi, at ein kunningarskipan verður sett í verk. Somuleiðis er tað av stórum týdningi, at føst skipan verður gjørd fyri viðger av nýggjum ásetingum.<br>Neyðugt við sínamillum EBS-líknandi avtalum við EFTA-londini |
| **EBS-nevndin** | Nevndin hevur dagligu umsitingina og samtykkir nýggjar ásetingar við einmæli. | Embætisfólk úr EFTA-londunum, embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum. | | |
| **Tingmannanevndin** | Ráðgevandi nevnd. | Limir úr Europatinginum og tinglimir úr hvørjum einstøkum EFTA-landi. | | |
| **Ráðgevandi nevndin**<br>**fyri EBS** | Endamálið er at geva vinnulívinum ávirkan á gongdina. | Limir úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í ES. | | |
| **Avgerðartilgongdin** | Mannagongd fyri nýggjar ásetingar og broytingar. | Vanliga tekur ES-nevndin stig til nýggjar ásetingar og broytingar. Sakkunnleiki í EFTA og ES er síðan við í fyrireikingunum, áðrenn endaliga málsviðgerð byrjar í skipanini. | | |
| **Eftiransingarskipanin** | Skipan fyri eftiransing, so londini halda allar sínar skyldur, og at sáttmálin verður umsitin eins. | ES-nevndin umsitir eftiransingina í ES, og óhefta EFTA-eftirlitsnevndin í EFTA-londunum. | | |
| **Dómstólurin** | Skipan, har hvør partur ger bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum. | ES-dómstólurin fyri ES-londini og EFTA-dómstólurin fyri EFTA-londini. | | Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá ES-dómstólurin |
| **Trætumál** | Mannagongdir at loysa ósemjur millum partarnar um tulkingar. | Trætur kunnu loysast í EBS-nevndini, í einum gerðarrætti, ella við einsíðugum tiltøkum | | Trætur verða viðgjørdar eftir somu skipan sum í ES. |

Talva 13.2. Serlig umsitingarskipan verður gjørd í eini EBS-líknandi avtalu.

| EBS-bygnaður | Uppgávur | Umboðan | | EBS-líknandi bygnaður |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-ráðið** | Ráðið fremur EBS-sáttmálan og setur stevnumiðini við einmæltum | Stjórnarlimir úr hvørjum einstøkum EFTA landi og limir úr ES-ráðnum ella ES-nevndini. | | Serligt ráð verður sett á stovn mannað við umboðum fyri ES-ráðið/ES-nevndina og við landsstýrismonnum |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | samtyktum. | | | |
| **EBS-nevndin** | Nevndin hevur dagligu umsitingina og samtykkir nýggjar ásetingar við einmæli. | Embætisfólk úr EFTA-londunum, embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum. | | Serlig nevnd verður skipað, har embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum luttaka saman við føroyskum embætisfólkum |
| **Tingmannanevndin** | Ráðgevandi nevnd. | Limir úr Europatinginum og tinglimir úr hvørjum einstøkum EFTA-landi. | | Serlig nevnd við limum úr Europatinginum og løgtinginum. |
| **Ráðgevandi nevndin fyri EBS** | Endamálið er at geva vinnulívinum ávirkan á gongdina. | Limir úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í ES. | | |
| **Avgerðartilgongdin** | Mannagongd fyri nýggjar ásetingar og broytingar. | Vanliga tekur ES-nevndin stig til nýggjar ásetingar og broytingar. Sakkunnleiki í EFTA og ES er síðan við í fyrireikingunum, áðrenn endaliga málsviðgerð byrjar í skipanini. | | Føroyskir serfrøðingar luttaka í arbeiðinum í serfrøðinganevndunum |
| **Eftiransingarskipanin** | Skipan fyri eftiransing so londini halda allar sínar skyldur, og at sáttmálin verður umsitin eins. | ES-nevndin umsitir eftiransingina í ES, og óhefta EFTA-eftirlitsnevndin í EFTA-londunum. | | Føroyar skipa sítt egna eftirlit. |
| **Dómstólurin** | Skipan, har hvør partur ger bindandi tulk-ingar av EBS-sáttmálanum. | ES-dómstólurin fyri ES-londini og EFTA-dómstólurin fyri EFTA-londini. | | Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá ES-dómstólinum |
| **Trætumál** | Mannagongdir at loysa ósemjur millum partarnar um tulkingar. | Trætur kunnu loysast í EBS-nevndini, í einum gerðarrætti, ella við einsíðugum tiltøkum | | Trætur verða viðgjørdar eftir somu skipan sum í EBS. |

Talva 13.3. Danskir myndugleikar umsita eina EBS-líknandi avtalunu vegna Føroyar.

| EBS-bygnaður | Uppgávur | Umboðan | | EBS-líknandi bygnaður |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-ráðið** | Ráðið fremur EBS-sáttmálan og setur stevnumiðini við einmæltum samtyktum. | Stjórnarlimir úr hvørjum einstøkum EFTA landi og limir úr ES-ráðnum ella ES-nevndini. | | Skiftandi danskir ráðharrar umboða Føroyar ES-megin. Donsku ráðstovurnar kunna landsstýrið. Umboðini fyri Føroyar kunnu ikki hava formansskapin. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-nevndin** | Nevndin hevur dagligu umsitingina og samtykkir nýggjar ásetingar við einmæli. | Embætisfólk úr EFTA-londunum, embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum. | | Embætisfólk frá donskum ráðstovum umboða Føroyar ES-megin á fundum í nevndini. Samskiftið við landsstýrið fer fram eftir ávísari skipan. |
| **Tingmannanevndin** | Ráðgevandi nevnd. | Limir úr Europatinginum og tinglimir úr hvørjum einstøkum EFTA-landi. | | Føroyar kunnu ikki luttaka á hesum stigi. |
| **Ráðgevandi nevndin**<br><br>**fyri EBS** | Endamálið er at geva vinnulívinum ávirkan á gongdina. | Limir úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í ES. | | Føroyar kunnu ikki luttaka á hesum stigi. |
| **Avgerðartilgongdin** | Mannagongd fyri nýggjar ásetingar og broytingar. | Vanliga tekur ES-nevndin stig til nýggjar ásetingar og broytingar. Sakkunnleiki í EFTA og ES er síðan við í fyrireikingunum, áðrenn endaliga málsviðgerð byrjar í skipanini. | | Danskir/føroyskir serfrøðingar luttaka í serfrøðinganevndum. |
| **Eftiransingarskipanin** | Skipan fyri eftiransing so londini halda allar sínar skyldur, og at sáttmálin verður umsitin eins. | ES-nevndin umsitir eftiransingina í ES, og óhefta EFTA-eftirlitsnevndin í EFTA-londunum. | | Føroyar eru undir eftiransingarskipanini hjá ES. |
| **Dómstólurin** | Skipan, har hvør partur ger bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum. | ES-dómstólurin fyri ES-londini og EFTA-dómstólurin fyri EFTA-londini. | | Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá ES-dómstólinum. |
| **Trætumál** | Mannagongdir at oysa ósemjur millum partarnar um tulkingar. | Trætur kunnu loysast í EBS-nevndini, í einum gerðarrætti, ella við einsíðugum tiltøkum | | Trætur verða viðgjørdar á sama hátt sum hjá ES. |

Talva 13.4. Føroyar verða partur av EFTA við danskari umboðan vegna Føroyar

| EBS-bygnaður | Uppgávur | Umboðan | | EBS-líknandi bygnaður |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-ráðið** | Ráðið fremur EBS-sáttmálan og setur stevnumiðini við einmæltum samtyktum. | Stjórnarlimir úr hvørjum einstøkum EFTA landi og limir úr ES-ráðnum ella ES-nevndini. | | Danskir ráðharrar luttaka EFTA-megin vegna Føroyar, og samskifta við avvarandi myndugleika. Føroyar luttaka sum fullur limur, og kunnu hava formansskapin í ráðnum. |
| | Nevndin hevur | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-nevndin** | Nevndin hevur dagligu umsitingina og samtykkir nýggjar ásetingar við einmæli. | Embætisfólk úr EFTA-londunum, embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum. | | Danskir embætismenn luttaka EFTA-megin vegna Føroyar. Samskiftið við føroyska embætisverkið fer fram eftir ávísari skipan. |
| **Tingmannanevndin** | Ráðgevandi nevnd. | Limir úr Europatinginum og tinglimir úr hvørjum einstøkum EFTA-landi. | | Føroyar kunnu ikki luttaka á hesum stigi. Ella: Føroysku fólkatingsumboðini luttaka. |
| **Ráðgevandi nevndin fyri EBS** | Endamálið er at geva vinnulívinum ávirkan á gongdina. | Limir úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í ES. | | Danskir myndugleikar tilnevna donsk/føroysk vinnuumboð í nevndina. |
| **Avgerðartilgongdin** | Mannagongd fyri nýggjar ásetingar og broytingar. | Vanliga tekur ES-nevndin stig til nýggjar ásetingar og broytingar. Sakkunnleiki í EFTA og ES er síðan við í fyrireikingunum, áðrenn endaliga málsviðgerð byrjar í skipanini. | | Danskir/føroyskir serfrøðingar luttaka í arbeiðinum í serfrøðinganevndunum. |
| **Eftiransingarskipanin** | Skipan fyri eftiransing so londini halda allar sínar skyldur, og at sáttmálin verður umsitin eins. | ES-nevndin umsitir eftiransingina í ES, og óhefta EFTA-eftirlitsnevndin í EFTA-londunum. | | EFTA-eftirlitsnevndin hevur eftiransingina um hendi. |
| **Dómstólurin** | Skipan, har hvør partur ger bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum. | ES-dómstólurin fyri ES-londini og EFTA-dómstólurin fyri EFTA-londini. | | Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá EFTA-dómstólinum. |
| **Trætumál** | Mannagongdir at loysa ósemjur millum partarnar um tulkingar. | Trætur kunnu loysast í EBS-nevndini, í einum gerðarrætti, ella við einsíðugum tiltøkum | | Trætur verða viðgjørdar eftir somu skipan sum hjá EFTA |

Talva 13.5. Føroyar verða partur av EFTA við egnari umboðan

| EBS-bygnaður | Uppgávur | Umboðan | | EBS-líknandi bygnaður |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-ráðið** | Ráðið fremur EBS-sáttmálan og setur stevnumiðini við einmæltum samtyktum. | Stjórnarlimir úr hvørjum einstøkum EFTA landi og limir úr ES-ráðnum ella ES-nevndini. | | Landsstýrismenn møta á fundi í ráðnum. Føroyar luttaka sum fullur limur, og kunnu hava formansskapin. |
| | Nevndin hevur dagligu umsit- | Embætisfólk úr EFTA-londunum | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **EBS-nevndin** | ingina og samtykkir nýggjar ásetingar við einmæli. | EFTA-londunum, embætisfólk úr ES-nevndini ella einstøkum limalondum. | | Føroyskir embætismenn møta á fundi í nevndini. |
| **Tingmannanevndin** | Ráðgevandi nevnd. | Limir úr Europatinginum og tinglimir úr hvørjum einstøkum EFTA-landi. | | Løgtingslimir møta á fundi í nevndini |
| **Ráðgevandi nevndin fyri EBS** | Endamálið er at geva vinnulívinum ávirkan á gongdina. | Limir úr ráðgevandi nevndini hjá EFTA og úr ECOSOC í ES. | | Føroysk vinnuumboð møta á fundi í nevndini. |
| **Avgerðartilgongdin** | Mannagongd fyri nýggjar ásetingar og broytingar. | Vanliga tekur ES-nevndin stig til nýggjar ásetingar og broytingar. Sakkunnleiki í EFTA og ES er síðan við í fyrireikingunum, áðrenn endaliga málsviðgerð byrjar í skipanini. | | Føroyskir serfrøðingar luttaka í arbeiðinum í serfrøðinganevndunum. |
| **Eftiransingarskipanin** | Skipan fyri eftiransing so londini halda allar sínar skyldur, og at sáttmálin verður umsitin eins. | ES-nevndin umsitir eftiransingina í ES, og óhefta EFTA-eftirlitsnevndin í EFTA-londunum. | | EFTA-eftirlitsnevndin hevur eftiransingina um hendi. |
| **Dómstólurin** | Skipan, har hvør partur ger bindandi tulkingar av EBS-sáttmálanum. | ES-dómstólurin fyri ES-londini og EFTA-dómstólurin fyri EFTA-londini. | | Føroyar geva seg undir avgerðirnar hjá EFTA-dómstólinum. |
| **Trætumál** | Mannagongdir at loysa ósemjur millum partarnar um tulkingar. | Trætur kunnu loysast í EBS-nevndini, í einum gerðarrætti, ella við einsíðugum tiltøkum | | Trætur verða viðgjørdar eftir somu skipan sum hjá EFTA |

# EBS frágreiðingin

## Tillagingarstigið í føroyskari lóggávu

**14.1. Inngangur**
Fara Føroyar upp í EBS-samstarvið gerast vit partur av innmarknaðinum hjá ES, og mugu í útgangsstøðuni góðtaka meginreglurnar í teimum fýra frælsunum hjá ES.

Ein av grundreglunum í EBS-samstarvinum er, at lógarkarmurin í EBS-økinum skal vera tann sami, og fara Føroyar upp í EBS-samstarvið, er neyðugt, at Føroyar hava sama lógarkarm innan tey øki, sum samstarvs-avtalan fevnir um.

Í EBS-samstarvinum eru nú galdandi tilsamans 1239 direktiv. Føroyar noyðast kortini ikki at seta øll hesi direktiv í verk, tí direktiv um eitt nú kjarnorku, jarnbreytir og onnur øki, hava ikki týdning fyri Føroyar.

Áðrenn EBS-samstarvið gjørdist veruleiki, var í Íslandi og í Noregi stórur ótti fyri hesum rúgvusmikla ES-lógarkarmi, sum skuldi setast í verk. Fleiri óttaðust, at meginparturin av galdandi norsku og íslendsku lóggávuni skuldi broytast til ES-lógir- og kunngerðir.

Kravið frá ES var, at lógarverkið innihaldsliga skuldi vera tað sama sum innihaldið í direktivunum.

Royndirnar vístu tó, at meginparturin av lóggávuni í Íslandi og Noregi innihaldsliga var tað sama. Tað vísti seg, at orðingarnar vóru smidligari, enn roknað varð við frammanundan. Innan ávís øki var tó neyðugt við ymsum tillagingum. ES kravdi eftir norðmanna tykki rættiliga umfatandi tillagingar til meira liberalar karmar innan fiskivinnuøki í Noreg. Ísland hevði longu frammanundan framt stórar liberaliseringar innan fiskivinnuna (sí kapittul 10).

**14.2. Kanningin av føroyska lógarkarminum**
Nevndin hevur roynt at kanna, hvussu støðan er í føroyskari lóggávu.

Innan arbeiðskarmarnar hjá nevndini hevur tó bert verið gjørligt at gera eina breiða kanning, sum kann nýtast sum grundarlag fyri at geva eina rímiliga góða ábending av støðuni, so nevndin á hesum grundarlagi kundi gera eina meting av, hvussu umfatandi tillagingar krevjast í føroyskari lóggávu, um Føroyar gerast partur av innmarknaðinum.

Endamálið hevur í øðrum lagi verið at seta skjøtil á at fáa hesi viðurskifti gjølla kannað. Líkamikið hvørja støðu Føroyar taka í framtíðindi í viðurskiftunum mótvegis ES, er neyðugt at gera eina gjølliga og djúptókna kanning av hesum viðurskiftum, og nevndin mælir til, at neyðug orka, herundir løgfrøðiligur serkunnleiki, verður sett av til at fullføra hesa kanning.

Kanningin er farin fram á tann hátt, at nevndin setti seg í sambandi við 18 útvaldar stovnar og stýri, sum umsita øki av týdningi, og heitt varð á tey um at gera eina meting av, í hvønn mun lógarkarmurin í Føroyum samsvarar við EBS-lóggávuna.

Fyrst varð bræv sent til avvarðandi stovnar og stýri saman við einum yvirliti yvir tey 1239 direktivini í EBS. Stovnarnir fingu síðan í boði at fáa ráðgeving og vegleiðing, herundir hjálp til at útvega tey direktiv og skipanir, sum samsvara við myndugleikaøkið hjá avvarðandi stovni, so tað á hesum grundarlagi kundi gerast ein sammeting av galdandi føroyskari lóggávu og EBS-lógarkarminum.

Sum skjøl er viðlagt skrivið til stovnar og stýri, og avrit av skrivligu svarunum frá stovnunum. Fleiri stovnar hava eisini vent sær munnliga til nevndina og sagt, at innan teirra øki er bert danskur lógarkarmur galdandi (t.d. Flogvøllurin í Vágum). Aðrir stovnar hava vent sær til nevndina og boðað frá, at tann lógarkarmur, ið er í gildi ella sum er í umbúna, samsvarar við EBS-lóggávuna (t.d. SEV og Telefonverk Føroya Løgtings).

Stovnarnir hava sum heild víst stóran áhuga fyri at samstarva, hóast nakrir stovnar ikki hava havt neyðugu umsitingarligu orku til at gera eina gjølliga kanning innan ta stuttu tíðarfreist, teir hava fingið.

Talan er um eitt rúgvusmikið lógartilfar í EBS-samstarvinum, og nevndin leggur áherðslu á, at í endaligu fyrireikingunum til samráðingar er neyðugt at gera eina gjølligari og djúptøkna kanning. Neyðugt er, at aðalstýrini og stovnarnir seta orku av til hetta kanningararbeiði, so ein greið mynd

fæst av, á hvørjum økjum brúk er fyri tillagingartíð ella varandi undantøkum.

Innan karmarnar hjá hesi nevndini hevur ikki verið gjørligt at gjørt eina so djúktøkna kanning. ES-lóggáva er grundarlagið undir EBS-lóggávuni, og tí er neyðugt at fáa eina klárari mynd av hesum viðurskiftum, líkamikið hvat slag av tilknýti vit í framtíðini fáa til europeisku samansjóðingina.

Tó metir nevndin, at tey svar, sum higartil eru komin, geva eina góða ábending av støðuni á hesum øki.

**14.3. Niðurstøða**

Við grundarlagi í teimum svarum, sum nevndin hevur fingið frá stovnum og stýrum, metir nevndin, at føroyski lógarkarmurin sum heild samsvarar við galdandi reglur í EBS-samstarvinum. Innan fleiri øki er donsk lóggáva beinleiðis galdandi, og innan onnur økir er føroysk lóggávan sum heild gjørd við fyrimynd í donskum lógum. Í øðrum førum metir nevndin, at føroyskar lógir innihaldsliga fevna um tað sama økið sum samsvarandi lóg í EBS-samstarvinum.

Tó eru øki, har føroysk lóggáva ikki er tillagað. Nevndin metir, at føroysk lóggáva innan tey landbúnaðøkir, ið eru við í EBS, og innan kolvetnisvinnu ikki samsvarar við EBS-karmarnar.

Lógarkarmurin fyri føroyskan landbúnað er sum heild gamal. Lógirnar kunnu á mangan hátt fatast sum serføroyskar. Lógargrundarlagið er sera avmarkað innan djóralæknaøkið eins og innan gróðrarlóggávu o.t. Innan EBS er eitt sera stórt lógarverk á hesum øki.

Skal eitt føroyskt EBS-samstarv eisini fevna um landbúnaðarøkið krevjast uttan iva sera nógvar tillagingar innan alt hetta økið.

Sum heild má metast, at lógin um kolvetnisvinnu samsvarar við EBS-lógarkarmin. Tó er sera ivasamt, um ávísir partar av lógini um kolvetnisvinnu kunna góðtakast at vera samsvarandi við EBS-lógarkarmin. Í lógini verður í ávísan mun gjørdur mismunur millum føroysk virkir og útlendsk virkir. (Sí kapittul 11).

Uppskotið frá Oljuráðleggingarnevndina bygdi meira á, at myndugleikarnir við kunngerðum kundu áseta krøv um, at vørur og tænastur skuldu um føroyskan keikant. Ein tílík skipan hevði helst verið góðtikin innan karmarnar í EBS-samstarvinum.

Nevndin vil harumframt vísa á, at Føroyar sum limur í WTO hava bundið seg til at fylgja altjóða avtalum um eitt nú handilsforðingar og veitan av almennum stuðuli. Somuleiðis hava Føroyar fríhandilsavtalur við fleiri lond eins og við ES. Í hesum avtalum hava Føroyar somuleiðis bundið seg til ikki at taka føroyska vinnu fram um vinnur í avtalulondunum. Sostatt fer ein EBS-avtala ikki at seta størri krøv um at taka burtur kappingaravlagandi skipanir, enn tær avtalur, vit longu hava gjørt.